*Løgtingsins umboðsmaður*

*Ársfrágreiðingin 2010*

LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# *Ársfrágreiðingin 2010*

Tórshavn 2011

Løgtingsins umboðsmaður
Ársfrágreiðingin 2010
© 2011 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent

ISBN 978-99918-969-9-1

Svanamerktur prentlutur 541 705

# *Innihaldsyvirlit*


| | | |
|---|---|---|
| I. | Um embætið | 8 |
| II. | Gongdin í 2010 | 10 |
| III. | Hagtøl | 12 |
| IV. | Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2010 | 21 |
| | ***11. Innlit*** | 21 |
| | 11.1 Handfaring av innlitsáheitan í samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina | 21 |
| | 11.2 Noktan av innliti frá Fiskimálaráðnum í fráboðanir um bjargingartyrlu | 31 |
| | 11.3 Vantandi innlit frá Kringvarpi Føroya | 42 |
| | 11.4 Handfaring hjá Hvalbiar kommunu av innlitsáheitan | 61 |
| | ***28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*** | ***72*** |
| | 28.1 Skriv viðv. løn í sambandi við viðgerð fyri barnloysi | 72 |
| | 28.2 Handfaring hjá Umhvørvisstovuni og Innlendismálaráðnum av uppsagnarmáli | 77 |
| V. | ***30. Egin kanning*** | 82 |
| | 30.1 Frágreiðing um avgerðir at løggilda grannskoðarar | 82 |
| VI. | Skjøl | 255 |
| | 1. Umboðsmanslógin | 255 |
| | 2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann | 259 |

# *Til Løgtingið*

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2010. Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2011

Frágreiðingin er býtt upp soleiðis:


I. Um embætið
II. Gongdin í 2010
III. Hagtøl
IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2010
V. Egin kanning
VI. Skjøl
1. Umboðsmanslógin
2. Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann


Tórshavn, mai 2011

*Sólja í Ólavsstovu*

# *I. Um embætið*

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5- ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

Tann 8. oktober 2010 endurvaldi Løgtingið meg sum Løgtingsins Umboðsmann fyri tíðarskeiði 1. janaur 2011 til 31. desember 2016. Eg tók við embætinum á fyrsta sinni tann 1. janaur 2006.

Umframt meg sjálva hevur embætið verið mannað við løgfrøðiligu medarbeiðarunum mínum, Jóhannu Arge, ráðgeva og og Lailu Egholm, skrivstovuleiðara.

Í sambandi við at Birita Ludvíksdóttir, ráðgevi fór í farloyvi í august 2010, varð Henrik Weihe Joensen, løgfrøðingur settur í starv sum fulltrúi, til 1. januar 2011. Og frá 15. februar 2011 er Birita Biskopstø sett í starv sum ráðgevi.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, Felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.( § 4, stk. 5 ).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin

møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. ( § 8 ).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann at álvarsligt mistak ella vatnsketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10).

Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá. ( § 12 ).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er Traðagøta 43, Postsmoga 2008, FO-165 Argir, og teldupostadressan er lum@lum.fo.

Heimasíða umboðsmansins eitur www.lum.fo

# *II. Gongdin í 2010*

Í 2010 vórðu upprættaði 73 mál, sum innihildu 87 sjálvstøðugar klagur. Av teimum 87 málunum, sum komu inn í 2010 vóru 73 endaliga avgreiddar innan 31. des. 2010. Harumframt vóru 7 mál avgreidd, sum vóru innkomin (men ikki avgreidd) í 2008 og 2009. Talið av klagum er á hædd við talið undanfarin ár.

Av klagunum, sum eru móttiknar í 2010 vórðu 65 avvístar svarandi til 81%. Hetta tal er væl hægri enn undanfarin ár. Talið av avvístum klagum hevur tó verið skiftandi gjøgnum árini frá 50% til 75%.

Nakað sum hevur eyðkent virksemið í 2010 er, at tað hava verið lutfalsliga nógv innlitsmál, sum klagað hevur verið um, heili 30 % av øllum innkomnu klagunum hava snúð seg um innlit.

Eitt mál, sum tók nógva arbeiðsorku í 2010 var kanningin av einum máli um løggilding av grannskoðarum. Hetta var eitt stórt og umfatandi mál, sum umboðsmaðurin tók upp við heimild í grein 6, stk. 5, í umboðsmanslógini. Málið er endurgivið aftast í hesi ársfrágreiðing.

Í 2010 hevur umboðsmaðurin fingið nýggja heimasíðu. Heimasíðan hevur fingið nýtt snið og er vorðin meira tíðarhóskandi. Fyri at lætta um hjá klagarum ber nú til at taka niður av netinum oyðublað, sum kann nýtast til at senda inn klagu til Umboðsmannin.

Heimasíðan hevur teldutalu, soleiðis at blind, sjón- og lesiveik hava møguleika at hoyra niðurstøðunar hjá umboðsmanninum á telduni. Heimasíðan finst nú eisini á enskum málið og til ber at melda seg til tíðindatænastu hjá Umboðsmanninum.

Í sambandi við heimasíðina fekk stovnurin eitt búmerki. Búmerkið er tað sama sum hjá Føroya Løgtingi og vísir samband millum Løgting og stovnin. Búmerkið fer at verða brúkt í dagliga samskifti stovsins,

t.e. á heimasíðu, brævpappíri og øðrum tilfari, sum Umboðsmaðurin brúkar.

Umboðsmenninir í Noregi, Danmark, Íslandi, Grønlandi og Føroyum koma regluliga saman til fundar eina ella tvær ferðir um árið, har evni av felags áhuga koma til viðgerðar. Í juni skipaði eg fyri einum slíkum fundi í Føroyum, og í desember var ein fundur hildin í Keypmannahavn.

Eisini umboðsmenninir í øllum Norðanlondunum halda fundir umleið annaðhvørt ár. Ein slíkur fundur var í Ilulissat í Grønlandi í august 2010. Eg, Jóhanna Arge, ráðgevi og Laila Egholm skrivstovuleiðari luttóku á hesum fundi.

# *III. Hagtøl*

**Klagur innkomnar í 2010 býttar á myndugleikar**

Í 2010 vórðu upprættaði 73 mál, sum innihildu 87 sjálvstøðugar klagur. Hesar klagurnar vóru býttar soleiðis millum ymsu myndugleikarnar:

(Talva 1)

| ***Myndugleiki:*** | ***Klagur:*** |
|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 1 |
| Uttanríkismálaráðið | 6 |
| Innlendismálaráðið | 3 |
| Fíggjarmálaráðið | 2 |
| Fiskimálaráðið | 2 |
| Mentamálaráðið | 12 |
| Vinnumálaráðið | 2 |
| Almannamálaráðið | 1 |
| TAKS | 4 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 2 |
| Kommunur | 26 |
| Tryggingarfelag Føroya | 1 |
| Almannastovan | 8 |
| Nærverk | 2 |
| Barnaverndarnevnd | 1 |
| Kringvarp Føroya | 3 |
| Landsverk | 2 |
| Kommunulækni | 1 |
| Landssjúkrahúsið | 1 |
| Akstovan | 1 |
| Útskiftingarnevnd | 1 |
| Føroya Stiftsstjórn | 1 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Skipaeftirlitið | 1 |
| Javnstøðunevndin | 2 |
| **Tilsamans** | **87** |

**Innkomnar klagur í 2010 býttar á málsøki og klaguinnihald**
Klagunar, sum komu inn í 2010 kunnu býtast eftir málsøki og innihaldi, sum gjørt er niðanfyri:

(Talva 2)

| *Málsøki:* | *Tal av klagum* | *Klagur um avgerðir* | *Klagur um málsviðgerð* | *Klagur um atburð* |
|---|---|---|---|---|
| Starvsfólkamál | 4 | 3 | 1 | 0 |
| Almannamál | 8 | 4 | 4 | 0 |
| Heilsuverkið | 3 | 0 | 3 | 0 |
| Skattur v.m. | 8 | 5 | 3 | 0 |
| Undirvísing, gransking v.m. | 5 | 0 | 5 | 0 |
| Byggimál, umhvørvi v.m. | 16 | 7 | 8 | 1 |
| Innlit | 24 | 12 | 12 | 0 |
| Persónsmál | 2 | 0 | 2 | 0 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 4 | 2 | 1 | 1 |
| Ymiskt | 6 | 3 | 3 | 0 |
| **Tilsamans** | **80** | **36** | **42** | **2** |

**Klagur endaliga avgreiddar í 2010**

Av teimum 87 klagunum klagunum, sum komu inn í 2010 vóru 73 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2010. Harumframt vóru avgreiddar 7 klagur frá undanfarnu árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

(Talva 3)

| *Myndugleiki:* | *Klagur* | *Avvístar* | *Viðgjørdar* | *Viðgjørdar uttan átalu/ tilmæli* |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | | | | |
| Uttanríkismálaráðið | 6 | 5 | 1 | |
| Innlendismálaráðið | 4 | 3 | 1 | |
| Fíggjarmálaráðið | 1 | 1 | | |
| Fiskimálaráðið | 2 | 1 | 1 | |
| Mentamálaráðið | 10 | 9 | 1 | |
| Vinnumálaráðið | 3 | 3 | | |
| Almannamálaráðið | | | | |
| Kærunevndin í lendismálum | 1 | | 1 | 1 |
| TAKS | 4 | 2 | 2 | |
| Fróðskaparsetur Føroya | | | | |
| Kommunur | 24 | 19 | 5 | |
| Tryggingarfelag Føroya | 1 | 1 | | |
| Almannastovan | 6 | 6 | | |
| Nærverk | 1 | 1 | | |
| Barnaverndarnevndin | 1 | 1 | | |
| Kringvarp Føroya | 5 | 4 | 1 | |
| Landsverk | 2 | 1 | 1 | |
| Kommunulækni | 1 | 1 | | |
| Landssjúkrahúsið | 1 | 1 | | |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 1 | | 1 | |
| Akstovan | 1 | 1 | | |
| Útskiftingarnevnd | 1 | 1 | | |
| Umhvørvisstovan | | | | |
| Føroya Stiftsstjórn | | | | |
| Posteftirlitið | 1 | 1 | | |
| Búnaðarstovan | 1 | 1 | | |
| Skipaeftirlitið | 1 | 1 | | |
| Javnstøðunevndin | 1 | 1 | | |
| **Tilsamans** | **80** | **65** | **15** | **1** |

**Klagur avvístar í 2010**
Í 2009 vóru 65 klagur avvístar av ymiskum orsøkum. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

(Talva 4)

| *Avvísingarorsøk:* | *Klagur* |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 4 |
| Kærumøguleiki ikki troyttur | 10 |
| Ikki grundarlag fyri víðari kanningum | 43 |
| Uttanfyri heimildarøki | 3 |
| Afturkallað | 5 |
| **Tilsamans** | **65** |

**Viðgjørdar klagur í 2010 býttar á málsøki**
Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2009, kunnu býtas upp eftir malsøki á henda hátt:

(Talva 5)

| *Málsøki* | *Klagur* |
|---|---|
| Starvsfólkamál | 4 |
| Almannamál | 8 |
| Heilsuverkið | 3 |
| Skattur v.m. | 8 |
| Undirvísing, gransking v.m. | 5 |
| Byggimál, umhvørvi v.m. | 16 |
| Innlit | 24 |
| Persónsmál | 2 |
| Arbeiðsmarknaðarmál | 4 |
| Ymiskt | 6 |
| **Tilsamans** | **80** |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av viðgjørdum klagum**
Í teimum 15 endaliga viðgjørdu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 6)

| ***Viðgerðatíð í miðal:*** | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring | 2 mðr. 3 dagar |
| Samlað | 5 mðr. 1 dag |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av avvístum klagum:**
Í teimum 65 avvístu klagunum hevur miðal viðgerðartíðin verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 7)

| ***Viðgerðatíð í miðal:*** | |
|---|---|
| Aftaná partshoyring | 13 dagar |
| Samlað | 1 mðr. 5 dagar |

**Málsviðgerðartíðin hjá umboðsmanninum av bæði viðgjørdum og avvístum klagum:**
Fyri allar klagurnar, tvs. bæði avvístar og endaliga viðgjørdar klagur, hevur málsviðgerðartíðin í miðal verið hendan:
(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)

(Talva 8)

| | **Viðgerðartíð aftaná partshoyring** | **Viðgerðartíð tilsamans** |
|---|---|---|
| **Klagur** | | |
| málsviðgerðartíð í miðal: | 26 dagar | 1mðr. 27 dagar |

## Klagur innkomnar í 2010 býttar á myndugleikar



**Klagur innkomnar í 2010 býttar á málsøki**




**Klagur innkomnar í 2010 býttar eftir klaguinnihaldi**



**Klagur endaliga avgreiddar í 2010**




**Klagur avvístar í 2010 býttar eftir avvísingarorsøk**



**Klagur viðgjørdar í 2010 býttar á málsøki**




**Innkomnar klagur**



# *IV. Álit og aðrar niðurstøður hjá umboðsmanninum í málum avgreidd í 2010*

# *11. Innlit*

## 11.1 Handfaring av innlitsáheitan í samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Uttanríkisráðnum av eini umbøn um innlit í samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina.*

*Í fyrstu atløgu fekk klagarin boð um, at umbønin fór ikki at verða viðgjørd fyrr enn 2 vikur seinni, av tí at starvsfólkaleiðarin og aðalstjórin vóru í summarfrí. Hetta helt umboðsmaðurin ikki vera eina rímiliga orsøk at útseta viðgerðina av málinum og vísti á, at Uttanríkisráðið í slíkum føri hevði skyldu at tryggja, at onkur annar kundi taka sær av málinum.*

*Umboðsmaðurin vísti á, at sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini hava myndugleikar eina lógarásetta skyldu at svara innlitsumbønum skjótast gjørligt, og tað var ikki nøktandi, at klagarin noyddist at rykkja eftir málinum, og at ráðið ikki fyrr enn 5 vikur eftir at hava móttikið umbønina, boðaði klagaranum frá, hví umbønin ikki var svarað, og nær ein avgerð kundi væntast.*

*Uttanríkisráðið greiddi umboðsmanninum frá, at viðgerðin dró út, tí ivi var um, hvørt samskiftið við Landsgrannskoðanina var fevnt av rættinum til innlit. Ivi tyktist serliga hava verið um, hvørt innanhýsis skjøl framhaldandi vóru at meta sum innanhýsis, tá tey vóru latin Landsgrannskoðanini. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, hví hesin ivin tók seg upp í viðgerðini av ítøkiliga málinum, tí um hetta mundið vóru eingi innanhýsis skjøl í málinum.*

*Umboðsamaðurin helt tað als ikki vera nøktandi, at Uttanríkisráðið ikki gav klagaranum innlit í málið fyrr enn 1 – 2 vikur eftir, at ráðið fekk svar uppá nevndu ivamálini.*

*Samanumtikið helt umboðsmaðurin tað ikki vera nøktandi, at ráðið nýtti góðar seks vikur at avgreiða innlitumbønina. Umboðsmaðurin gav ráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum.*

*Av tí at klagarin hevði fingið innlit í málið, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.* ***(J. nr. 200900084)***

## Klagan

Við telduposti 16. september 2009 hevur A, blaðmaður á Dimmalætting sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Kæra í sambandi við umbøn um alment innlit**
> Vegna Dimmalætting vil eg við hesum kæra Uttanríkisráðið fyri ikki at hava svarað uppá eina umbøn um alment innlit um samskiftið við Landsgrannskoðanina í sambandi við setan av sendiumboðum, tá tey koma heimaftur til Føroya. …“

Restin av klaguni er burturløgd, og samskiftið millum klagaran og Uttanríkisráðið er endurgivið undir málsgongdini niðanfyri.

## Málsgongd

Við telduposti 3. august 2009 sendi blaðmaðurin Uttanríkisráðnum soljóðandi umbøn um innlit:

> „Við hesum verður biðið um alment innlit í alt samskifti millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisráðið, sum hevur við setaninar av føroysku sendiumboðunum at gera, tá tey venda heimaftur.
>
> Biðið verður um at fáa innlit í øll viðurskifti, sum hava við hetta mál at gera.“

Við teldupostum ávikavist 5. og 11. august 2009 sendi Uttanríkisráðið blaðmanninum soljóðandi móttøkuváttanir:

„Vit takka fyri tygara umbøn.
Málsviðgeri er B, sum er í summarfrí til 17. august 2009“

„**Viðvíkjandi umsókn um alment innlit**
Víst verður til umsókn tygara, dagfest 3. august 2009, um innlit í alt samskifti millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisráðið, sum hevur við setaninar av føroysku sendiumboðunum at gera, tá tey venda heimaftur.

Vísandi til § 16, stk. 2 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broytingum, skal Uttanríkisráðið við hesum boða frá, at vegna summarfrí verður roynt at svara umsóknini skjótast gjørligt aftaná 20. august.“

31. august 2009 rykkir blaðmaðurin Uttanríkisráðið eftir málinum við soljóðandi telduposti:

„Fyri tíð síðan søkti eg vegna Dimmalætting um alment innlit í samskifti millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisráðið í samband við setaninar av deildarstjórum/ starvsfólki í ráðnum.

Eg fekk svar, at tann sum umsat málið var í summarfrí, og at viðkomandi kom aftur tann 20. august, og at málið skuldi svarast tá.

Nú er hálvonnur vika gingin síðan 20. august, og tí vil eg við hesum fegin rykkja eftir svari.“

Uttanríkisráðið svarar rykkjaranum hjá blaðmanninum 8. september við soljóðandi telduposti:

„**Viðvíkjandi umsókn um alment innlit**
Víst verður til umsókn tygara, dagfest 3. august 2009, um innlit í alt samskifti millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisráðið,

sum hevur við setaninar av føroysku sendiumboðunum at gera, tá tey venda heimaftur.

Vísandi til § 16, stk. 2 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broytingum, skal Uttanríkisráðið við hesum boða frá, at nú talan er um samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina, er málið av einum serligum slag. Uttanríkisráðið hevur tískil biðið um eina løgfrøðiliga meting av málinum.

Uttanríkisráðið væntar av avgreiða umsóknina skjótast gjørliga aftaná 14. september 2009.“

9. september 2009 móttekur Uttanríkisráðið eitt upprit frá einum advokati um alment innlit. Uppritið er dagfest 3. september 2009, og í fylgiskrivinum verður upplýst, at uppritið áður er sent ráðnum sum teldupostur. Uppritið viðger serliga spurningin um útflýggjan av innanhýsis skjølum til eftirlitsmyndugleikar og samskifti við hesar. Niðurstøðan er, at innanhýsis skjøl framhaldandi eru at meta sum innanhýsis, hóast tey eru útflýggjað til Landsgrannskoðanina, at samskiftið millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina er fevnt av almennum innliti, og at Uttanríkisráðið hevur skyldu at útflýggja upplýsingarnar.

Í einum uppriti, dagfest 17. september 2009, sum er skrivað í Uttanríkisráðnum, er niðurstøðan, at samskiftið millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisraðið eigur at vera útflýggjað, og at eingi innanhýsis skjøl eru í málinum.

17. september 2009 letur Uttanríkisráðið blaðmanninum innlit í málið við soljóðandi skrivi:

**„Viðvíkjandi umsókn um alment innlit**
Víst verður til umsókn tygara, dagfest 3. august 2009, um innlit í alt samskifti millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisráðið, sum hevur við setaninar av føroysku sendimonnunum at gera, tá teir venda heimaftur.

Uttanríkisráðið hevur viðgjørt málið samsvarandi løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina við seinni broytingum, og verður við hesum latið innlit í skjølini.

Grundað á serlig løgfrøðilig og starvsfólkapolitisk fyrilit, hevur hendan viðgerð tikið rúma tíð.“

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og klagan varð við skrivi, dagfest 17. september 2009, send Uttanríkisráðnum til ummælis við eini freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Uttanríkisráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Í telefonsamrøðu tann 14. oktober 2009 boðaði Uttanríkisráðið umboðsmanninum frá, at viðmerkingar fóru at verða latnar umboðsmanninum skjótast gjørligt.

Við skrivi, dagfest 20. oktober 2009, sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„Løgtingsins Umboðsmaður hevur í brævi dagsett 17. september 2009 viðvíkjandi klagu frá Dimmalætting dagfest 17. september 2009 (*Mín viðmerking:* 16. september) biðið Uttanríkisráðið um at greiða nærri frá hesum máli. Somuleiðis biður umboðsmaðurin Uttanríkisráðið um øll skjøl til láns viðvíkjandi málinum.

Um innlitsmálið er at siga, at Dimmalætting biður Uttanríkisráðið hin 3. august 2009 „… um alment innlit í alt samskifti millum Landsgrannskoðanina og Uttanríkisráðið, sum hevur við setaninar av føroysku sendiumboðunum at gera, tá tey venda heimaftur.“ Uttanríkisráðið svarar aftur hin 5. august 2009 við at takka fyri umbønina og at málsviðgerðin B er í summarfrí til 17. august 2009. Uttanríkisráðið endursvarar umbønini soljóðandi 11. august 2009“ …at vegna summarfrí verður roynt at svara umsóknini skjótast gjørligt aftaná 20. august.“ Lat tað verða sligið fast, at B, deildarstjóri var í summarfrí um hetta mundi og at undirritaði var somuleiðis í summarfrí hendan mánaðin.

Hin 31. august 2009 minnir Dimmalætting á málið. Uttanríkisráðið svarar áminningini aftur hin 8. august 2009 (*Mín viðmerking:* september) við at boða frá „…at nú talan er um samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina, er málið av einum serligum slag. Uttanríkisráðið hevur tískil biðið um eina løgfrøðiliga meting av málinum. Uttanríkisráðið væntar at avgreiða umsóknina skjótast gjørligt aftaná 14. september 2009"

Hin 17. august 2009 avgreiðir Uttanríkisráðið umbønina við at boða frá, at tað „… verður við hesum latið innlit í skjølini. Grundað á serlig løgfrøðilig og starvsfólkapolitisk fyrilit, hevur hendan viðgerð tikið rúma tíð." Dimmalætting víðkar um innlitsumbønina sama dag og fær innlit dagin eftir í hesa seinnu umbøn, ið Uttanríkisráðið ikki metir at vera partur av klaguni.

Øll skjøl viðvíkjandi málinum eru hjáløgd."

Við skrivi, dagfest 30. oktober 2009, vórðu viðmerkingarnar sendar Dimmalætting til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Umboðsmaðurin bað sama dag Uttanríkisráðið við somu freist um at greiða nærri frá tí, sum varð sagt í frágreiðingini um, „at viðgerðin av innlitsumbønini hevði tikið rúma tíð grundað á løgfrøðilig og starvsfólkapolitisk atlit."

Tann 18. november 2009 bað Uttanríkisráðið umboðsmannin um at leingja freistina til 27. november 2009. Hesum játtaði umboðsmaðurin.

Tann 24. november 2009 sendi Uttanríkisráðið umboðsmanninum soljóðandi skriv:

**„Viðvíkjandi klaguni frá Dimmalætting, dagfest 17. september 2009**
Í skrivi frá Løgtingsins umboðsmanni, dagsett hin 30. oktober

> 2009, verður Uttanríkisráðið biðið um at útgreina viðmerkingarnar í innlitsmáli til Dimmalætting, har sagt verður, at viðgerðin av innlitsumbønini hevur tikið rúma tíð grundað á løgfrøðilig og starvsfólkapolitisk atlit.
>
> Uttanríkisráðið skal við hesum greina út viðmerkingarnar.
>
> *Løgfrøðilig atlit*
> Av tí at Uttanríkisráðið ivaðist í, hvussu innlitsumbønin skuldi handfarast, vendi ráðið sær til uttanhúsa løgfrøðing at fáa ráð. Ivin var grundaður á, at málið snúði seg um samskifti við ein stovn, sum ikki kemur undir virksemi hjá almennu fyrisitingini undir heimastýrinum og tískil, sambært grein 1, stk. 1 í lóg um innlit í fyrisitingina, ikki er fevndur av lógini um alment innlit.
>
> *Starvsfólkapolitisk atlit*
> Av tí at summarfrí var og starvsfólkaleiðari og aðalstjóri vóru í summarfrí, var innlitsumbønin ikki avgreidd beinanvegin. Tá ferian var av, og farið var í gongd at avgreiða málið, varð mett, at neyðugt var at fáa uttanhúsa ráðgeving, sí omanfyri, og tí dró málið út.
>
> Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við undirritaðu, um fleiri spurningar eru."

Við skrivi, dagfest 27. november 2009, varð boðað pørtunum frá, at av tí at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá Dimmalætting, fór hetta mál at verða tikið til endaliga viðgerð. Samstundis varð boðað frá, at umboðsmaðurin væntaði ikki at verða liðugur við viðgerðina fyrr enn eftir ársskiftið.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um handfaringina hjá Uttanríkisráðnum av eini umbøn um alment innlit í samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina um setan av sendiumboðum, tá hesi koma aftur til Føroya.*

*Innlitsumbønin var Uttanríkisráðnum í hendi 3. august, og hóast áminning frá klagaranum 31. august 2009, fekk klagarin ikki útflýggjað skjølini fyrr enn 17. september 2009.*

*Av tí at tað oftast er týdningarmikið fyri bæði borgarar og serliga fjølmiðlar at fáa skjalainnlit í eitt mál so skjótt sum gjørligt, er tað í § 16, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) ásett, at ein myndugleiki sum skjótast skal gera av, um ein umbøn um innlit kann verða gingin á møti. Myndugleikarnir hava sostatt eina lógarásetta skyldu at svara innlitsumbønum skjótast gjørligt.*

*Sambært § 16, stk. 2 er ásett, at um ein innlitsumbøn ikki er gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at myndugleikin hevur móttikið hana, so skal myndugleikin boða frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.*

*Klagarin fekk boð um, at innlitsumbønin fór ikki at verða viðgjørd beinanvegin vegna summarfrí, og Uttanríkisráðið hevur greitt frá, at orsøkin til hetta var, starvsfólkaleiðarin og aðalstjórin vóru í summarfrí um hetta mundið.*

*Í serligu viðmerkingunum til § 16 í donsku innlitslógini, sum er fyrimynd fyri føroysku lógini, stendur í Fólkatingstíðindum, 1985/86, tillæg A, sp. 233, soleiðis:*

> *„Bestemmelsen i stk. 2, der er ny, er begrundet i et ønske om at sikre, at behandlingstiden for begæringer om aktindsigt ikke uden rimelig anledning trækker ud. Der er ikke indsat en absolut frist for sagsbehandlingens varighed i aktindsigtssager, men bestemmelsen om, at den begærende skal have en begrundet underretning i tilfælde, hvor aktindsigt ikke kan imødekommes inden for 10 dage, samt oplysning om, hvornår en afgørelse kan forventes at foreligge, må i sig selv forventes at bidrage til, at behandlingstiden ikke unødigt trækker ud.“*

*Eftir mínari meting er tað ikki ein rímilig orsøk at útseta viðgerðina av*

*innlitsumbønini í meira enn 2 vikur vegna summarfrí. Í slíkum førum hevur Uttanríkisráðið skyldu at tryggja, at onkur annar kann taka sær av innlitsmálinum.*

*Tað er heldur ikki nøktandi, at klagarin noyðist at rykkja eftir svari, og at ráðið ikki fyrr enn 5 vikur eftir at hava fingið innlitsumbønina, boðar klagaran frá, hví umbønin ikki var svarað, og nær svar kundi væntast.*

*Uttanríkisráðið segði seg ivast í, hvussu umbønin skuldi viðgerðast, av tí at talan var um samskifti millum Uttanríkisráðið og Landsgrannskoðanina, sum ikki er fevnd av innlitslógini.*

*Sambært § 4 í innlitslógini fevnir ræ3tturin til innlit um skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans. At tann, sum almenni myndugleikin samskiftir við, ikki er fevndur av innlitslógini, ávirkar í sjálvum sær ikki metingina av, um skjøl ella upplýsingar eru fevnd av rættinum til innlit sambært innlitslógini. Tó kunnu skjøl og upplýsingar vera undantiknar rættinum til innlit sbrt. aðrari lóg.*

*Ivi tykist serliga hava verið um, hvørt innanhýsis skjøl framhaldandi eru at meta sum innanhýsis, tá tey eru latin Landsgrannskoðanini. Støða er tikin til hendan spurningin í § 22 í løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m., har ásett er, at skjøl, sum myndugleikar útflýggja Landsgrannskoðanini, og sum sambært innlitslógini eru undantikin rættinum til innlit, framhaldandi eru undantikin rættinum til innlit, eftir at tey eru útflýggjað. Eg dugi tó ikki at síggja, hví hesin ivin tekur seg upp í viðgerðini av ítøkiligu innlitsumbønini, tí millum skjølini, sum eg havi fingið til láns frá ráðnum, eru eingi innanhýsis skjøl í málinum, burtursæð frá einum uppriti, sum er skrivað í Uttanríkisráðnum sama dag innlit verður latið í málið.*

*Uttanríkisráðið fekk frá advokati svar uppá omanfyri nevndu ivamál í døgunum 3. – 9. september, men hóast hetta fær klagarin ikki innlit í málið fyrr enn 17. september. Vísandi til viðmerkingarnar um at*

*myndugleikar hava eina lógarásetta skyldu at svara innlitsumbønum skjótast gjørligt, haldi eg hetta als ikki vera nøktandi.*

*Samanumtikið haldi eg tað ikki vera nøktandi, at Uttanríkisráðið nýtir góðar seks vikur at avgreiða hesa innlitsumbønina, og eg fari at geva Uttanríkisráðnum eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.*

*Av tí at klagarin hevur fingið innlit í umbidnu skjølini, geri eg ikki meira við hetta málið.*

## 11.2 Noktan av innliti frá Fiskimálaráðnum í fráboðanir um bjargingartyrlu

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eitt mál um eina avgerð hjá Fiskimálaráðnum at nokta innlit í fráboðanir frá Atlantic Airways til MRCC um at bjargingartyrlan ikki var tøk. MRCC hevði móttikið fráboðanirnar frá Atlantic Airways umvegis telefon og noterað upplýsingarnar í eina elektroniska dagbók. Fiskimálaráðið noktaði at geva innlit vísandi til, at rætturin til innlit ikki fevnir um skráir ella skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, jbr. § 5, stk. 2 í innlitslógini. Umboðsmaðurin vísti á, at ein myndugleiki kann ikki nokta innliti bert vísandi til, at upplýsingarnar eru førdar inn á edv. Avgerandi fyri um eitt skjal er fevnt av innlitslógini er, um skjalið hevur týdning fyri vanliga fyrisitingarliga virksemi myndugleikans. Umboðsmaðurin metti fráboðaninar frá Atlantic Airways vera upplýsingar, ið høvdu týdning fyri fyrisitingarliga virksemi hjá MRCC, og vóru elektronisku skjølini tí fevnd av rættinum til innlit. Umboðsmaðurin metti at Fiskimálaráðið, við at vísa til § 5, stk. 2 í innlitslógini, hevði noktað innliti á skeivum grundarlagi. Fiskimálaráðið var tí biðið um at taka málið upp til nýggja viðgerð, og lata umboðsmannin frætta, hvat víðari hendi í málinum.* ***(J. nr. 2010000003)***

## Klagan

Við telduposti, dagfestur 8. januar 2010, sendi A, Kringvarpið, soljóðandi klagu til umboðsmannin:

> „Eg vil við hesum kæra avgerðina hjá Fiskimálaráðnum um at nokta mær alment innlit í frágreiðingarnar frá AA um at SAR bjargingartyrlan ikki er tøk. Tað er ein skylda, sum er áløgd AA í sáttmálanum millum Fiskimálaráðið og Atlantic Airways um tyrlutilbúgving (altso at boða frá at tyrlan ikki er tøk). Tað sum ørkymlar meg er at Fiskimálaráðið vil geva mær eitt ár, men ikki hini. Alt samskiftið er í hesum sama telduposti.“

## Málsgongd

Tann 4. desember 2009 sendi klagarin soljóðandi teldupost til MRCC, Tórshavn. Telduposturin varð sendur cc til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum:

„…
Eg vil við hesum biðja um alment innlit í fráboðanirnar frá Atlantic Airways (AA) um at bjargingartyrlan ikki er tøk; sum tað er tilskilað í sáttmálanum um tyrlutilbúgving millum Fiskimálastýrið og Atlantic Airways.

1. Í fyrstu atløgu havi eg áhuga í at fáa innlit í fráboðanirnar frá AA um at SAR tyrlan er ikki tøk síðani 2005, og

2. Í aðru atløgu vil eg fegin hava innlit í allar fráboðanirnar í øllum sáttmálatíðarskeiðnum.

Eg havi verið munnliga í samskifti við B um hetta innlit og hann hevur givið mær noktandi svar. Eg eri av tí áskoðan, at MRCC hevur skyldu at veita alment innlit í hesar upplýsingar og tískil sendi eg umbønina um alment innlit beinleiðis til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum, ….

Eg spurdi fyrru ferð um innlit í nevndu fráboðanir í telefon-samrøðu við B í viku 48 og tískil meti eg at hetta málið nú hevur skund."

Sama dag sendi MRCC klagaranum móttøkuváttan og boðaði frá, at klagarin skuldi fáa svar innanfyri galdandi tíðarfreist.

Sama dag sendi klagarin soljóðandi teldupost til MRCC:

„Hey aftur og takk fyri kvittan.

Eg vóni at svarið fyriliggur mánadagin ella í seinasta lagi týsdagin. Eg spurdi um innlit í farnu viku, og sum eg havi skilt tað, er ein munnlig umbøn at sammeta við eina skrivliga. Tvs. at tíðarfreistin eftir mínum tykki byrjar at telja í viku 48."

Tann 7. desember 2009 sendi Fiskimálaráðið soljóðandi teldupost til klagaran:

„Eg vísi til umbøn tygara um alment innlit í fráboðanir frá Atlantic Ariways um at bjargingartyrlan ikki er tøk.

Fyrst skal eg upplýsa, at MRCC ikki hevur nøkur mál, har hesar fráboðanir verða viðgjørdar.

Fráboðanirnar frá Atlantic Airways eru vanliga komnar inn um telefon. Fráboðanirnar eru tastaðar inn í dagbókina, eins og allar telefonuppringingar til MRCC verða.

Dagbókin er ein edv skráseting av øllum telefonuppringingum.

Sambært § 5, stk. 2 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina fevnur rætturin til skjalainnlit ikki um skráir ella skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv. Og fráboðanir frá Atlantic Airways verða ikki brúktar í fyrisitingarligari viðgerð av einum máli, sum er fevnt av rættinum til innlit.

Tí kann Kringvarpið ikki fáa innlit í fráboðanir frá Atlantic Airways.“

Sama dag sendi klagarin soljóðandi teldupost til Fiskimálaráðið:

„…
MRCC er sum almennur stovnur fevndur av notatskylduni, og notatskyldan fær virknað í somu løtu onkrir upplýsingar skulu brúkast í eini viðgerð. Øll vita at sáttmálin við Atlantic Airways gongur út um eitt ár. Notatskyldan er fevnd av lógini um alment innlit, so um vit skulu fylgja tykkara logikki, so ætlar Fiskimálaráðið ikki at brúka vitanina um hvussu oftani bjargingartyrlan hjá Atlantic Airways hevur verið groundað í viðgerðini at gera ein nýggjan tyrlutilbúgvingarsáttmála.

Harafturat er lógin ein minimumslóg, og tað vil siga, at tit kunnu saktans geva okkum alment innlit (meirinnlit), so leingi tit ikki bróta tagnarskylduna. Við ella uttan extrahering.

…

Eg vóni ikki, at veruliga orsøkin til at tit ikki vilja geva okkum alment innlit einans er, sum B, leiðari á MRCC, segði, at hann fór ikki at leita gjøgnum 1200 síður bara fyri meg.

Við hesum vóni eg at tit viðgera umbønina hjá okkum av nýggjum.“

Tann 9. desember 2009 sendi Fiskimálaráðið soljóðandi teldupost til klagaran:

„Eg vísi til áheitanina um alment innlit í fráboðanir frá Atlantic Airways um at bjargingartyrlan ikki er tøk.

Sum eg havi greitt frá fyrr, so eru hesar fráboðanir komnar um telefon, og MRCC hevur bert hesar upplýsingar í dagbókini. Upplýsingarnar í dagbókini eru ikki skipaðar eftir innihaldi ella tílílkt. Tað er tí sera tíðarkrevjandi at leita hesar upplýsingar fram heilt aftur til 2005. MRCC gevur ikki meirinnlit í hesar upplýsingar.

Fiskimálaráðið hevur fingið upplýst frá MRCC, hvussu nógvar dagar SAR tyrlan SR hevur verið „groundað“ tað síðsta árið. Hesar upplýsingar gevur Fiskimálaráðið innlit í. Sum sæst í uppgerðini niðanfyri, hevur tyrlan verið „groundað“ 130 dagar seinasta árið.

| | | |
|---|---|---|
| Frá 22.11-08 til 16.02-09 = | | 87 dagar |
| 14.05-09 | – 17.05-09 = | 3 - |
| 14.07-09 | – 23.07-09 = | 10 - |
| 25.10-09 | – 24.11-09 = | 30 - |
| | | |
| Samanlagt | | 130 dagar“ |

## Partshoyring

Fyri at umboðsmaðurin kundi taka støðu til, um hetta var eitt mál, sum umboðsmaðurin antin kundi ella átti at taka upp til viðgerðar,

var klagan tann 11. januar 2010 send Fiskimálaráðnum. Fiskimálaráðið var í hesum sambandi biðið um innan 3 vikur at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av málinum og at lata umboðsmanninum skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest tann 29. januar 2010, sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> **„Viðvíkjandi klagu frá A um innlit, dagfest 8. januar 2010**
>
> Víst verður til skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 11. januar 2010, har heitt var á okkum um at greiða frá viðgerðini av málinum og at senda øll skjøl í málinum.
>
> Tann 4. januar 2010 *(4. desember 2009, mín viðm.)* biður A um innlit í allar fráboðanir frá Atlantic Airways um, at SAR tyrlan ikki er tøk síðan 2005. Í aðru atløgu verður biðið um innlit í allar fráboðanir í øllum sáttmálatíðarskeiðnum. Umbønin um innlit varð send við telduposti og var stílað leiðaranum á MRCC Tórshavn, men varð eisini send Fiskimálaráðnum og beinleiðis til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum. Í skrivinum var sagt, at av tí at A var av tí áskoðan, at MRCC hevði skyldu at veita alment innlit í umbidnu upplýsingarnar, so var umbønin send beinleiðis til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum.
>
> Sama dag, tann 4. desember 2009, sendir leiðarin á MRCC Tórshavn A kvittan fyri móttøku og sigur, at svar kemur innanfyri galdandi tíðarfreist.
>
> Fiskimálaráðið og MRCC tosa saman um umbønina um innlit, og avgjørt var, at Fiskimálaráðið skuldi svara umbønini, eisini vegna MRCC. Fiskimálaráðið fekk tá upplýst, at MRCC ikki hevði nakað mál í journal við fráboðanum frá Atlantic Airways, men av tí at upplýsingarnar koma um telefon, so vóru upplýsingarnar tastaðar inn í dagbókina.
>
> 7. desember 2010 fær A svar frá Fiskimálaráðnum uppá umbøn-

ina um innlit. Fiskimálaráðið noktar í fyrstu atløgu umbønini um innlit vísandi til § 5, stk. 2 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Grundin til, at umbønin var noktað var, at Fiskimálaráðið ikki hevði umbidnu upplýsingarnar, og at Fiskimálaráðið ikki metti, at MRCC hevði skyldu at veita innlit í umbidnu upplýsingarnar.

Fráboðanir frá Atlantic Airways, um nær tyrlan ikki er tøk, eru komnar til MRCC um telefon. MRCC hevur sostatt ongi skriv frá Atlantic Airways. MRCC hevur ikki noterað og goymt upplýsingarnar frá Atlantic Airways í máli í journal. MRCC hevur tó tastað upplýsingarnar inn í dagbókina. Dagbókin hjá MRCC er ein elektronisk skipan, har allar telefonuppringingar til MRCC verða skrásettar. Skrásetingin er ikki skipað í mál eftir innihaldi, avsendara ella líknandi. Tí er tað ikki lætt, langt aftur í tíð, at finna serstakar upplýsingar aftur. Endamálið við dagbókini er at lætta um og tryggja, at upplýsingar, sum eru neyðugar í einum bjargingarátaki, eru rættar.

Fiskimálaráðið metti ikki, at MRCC hevði skyldu at leita fram umbidnu upplýsingarnar vísandi til, at rætturin til innlit ikki fevnir um skráir ella skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður EDV sbrt. § 5, stk. 2 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Eftir at svarið var sent A kom fram, at aðalstjórin í Fiskimálaráðnum hevði biðið MRCC upplýsa, hvussu nógvar dagar tyrlan ikki hevði verið tøk seinasta árið.

Ávís tøl vóru longu í Fiskimálaráðnum, men leiðarin á MRCC ynskti at eftirkanna tølini, sum vóru send Fiskimálaráðnum. Tá endaligu tølini komu frá MRCC, tann 9. desember 2009, vóru tey send A.

Fiskimálaráðið hevur ikki upplýsingar um, hvussu nógvar dagar tyrlan ikki hevur verið tøk longur aftur í tíð.

Fiskimálaráðið metir ikki, at MRCC hevur skyldu at leita fram

og geva innlit í upplýsingar um, hvussu nógvar tímar tilsamans tyrlan ikki hevur verið tøk aftur til 2005 ella alt sáttmálatíðarskeiðið. At tað er sera tíðarkrevjandi at leita fram umbidnu upplýsingarnar, metir Fiskimálaráðið er nøktandi grund hjá MRCC til ikki at geva meirlinnlit.

Avrit av skjølunum í málinum eru hjáløgd."

Tann 5. februar 2010 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin hevði tikið avgerð um at taka hetta málið upp til viðgerðar. Av tí at umboðsmaðurin ikki helt tað vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum í málinum, boðaði umboðsmaðurin samstundis frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um avgerðina hjá Fiskimálaráðnum at nokta Kringvarpinum innlit í fráboðanir frá Atlantic Airways til MRCC um at bjargingartyrla ikki var tøk. MRCC (Maritime Rescue Co-ordination Center) hevði móttikið fráboðaninar frá Atlantic Airways umvegis telefon og noteraði upplýsingarnar í eina elektroniska dagbók.*

*Viðvíkjandi § 5 í innlitslógini*
*Sum grundgeving fyri at nokta innliti vísir Fiskimálaráðið á, at rætturin til innlit ikki fevnir um skráir ella skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, jb. § 5, stk. 2 í innlitslógini.*

*Grein 5, stk. 1 og 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) eru soljóðandi:*

*„**§ 5.** Rætturin til skjalainnlit fevnir um:*
1) *øll skjøl, ið viðvíkja málinum herundir makaskjøl av teimum skjølum, sum eru send frá myndugleikanum, tá skrivini mugu haldast at vera komin fram til móttakaran, og*
2) *Innføringar í journalir, skráir og aðrar skrásetingar viðvíkjandi skjølum í avvarðandi máli.*

*Stk. 2. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um skráir ella aðrar*

*skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv, tó burtursæð frá skrásetingum, sum nevndar eru í stk. 1, nr. 2."*

*Høvuðsreglan sambært innlitslógini er sostatt, at øll skjøl í einum máli eru fevnd av rættinum til innlit. Ásetingin í stk. 2 er ein undantaksregla, ið ásetur at rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um skráir ella aðrar skipaðar skrásetingar, har sum nýtt verður edv.*

*Viðvíkjandi skilnaðinum millum eina skrá, ið er fevnd av § 5, stk. 2 og elektronisk skjøl, ið ikki eru fevnd av § 5, stk. 2, sigur John Vogter soleiðis á bls. 146 í „Offentlighedsloven med kommentar, 3. Udgave, 1998":*

> *„Inddateringen af oplysninger i et edb-register vil ofte ske på grundlag af materiale, der samtidig har en anden administrativ funktion, f.eks. tjener som ansøgningsskema. Materiale af denne karakter er underkastet administrativ sagsbehandling og vil derfor være omfattet af offentlighedslovens regler. Materiale, der alene er udarbejdet med henblik på, at oplysninger kan inddateres i registret, og som i øvrigt ikke underkastes nogen administrativ sagsbehandling, som f.eks. hulkort, må anses for en del af edb-registersystemet og er dermed ikke omfattet af offentlighedslovens regler. Det gælder, selv om materialet opbevares af myndigheden, f.eks. til brug ved senere kontrol af registrerede oplysninger."*

*Spurningurin í hesum máli er, um fráboðaninar, sum MRCC móttekur frá Atlantic Airways og noterar í teldutøku dagbók stovnsins, eru at meta sum partur av einari elektroniskari skrá/skráseting sambært § 5, stk. 2 í innlitslógini, ella um fráboðaninar eru elektronisk skjøl, ið eru fevndar av rættinum til innlit.*

*Føroyska innlitslógin er hesum viðvíkjandi einsljóðandi donsku innlitslógini. Í viðmerkingunum til donsku innlitslógina, ið er fyrimyndin fyri føroysku lógini, stendur soleiðis á sp. 212-213, ískoyti A í Fólkatingstíðindi 1985/86 til § 5 í innlitslógini:*

> *„Dokumentbegrebet i offentlighedsloven er i praksis blevet fortolket vidt. Det omfatter således foruden egentlige skriftstykker også*

*andre aktstykker (f.eks. tegninger, kort og fotografier) samt som udgangspunkt andet materiale, der fungerer som surrogat for skrift- og aktstykker, når de indgår i grundlaget for en sags behandling og opbevares sammen med sagens akter. …*
*Formålet med den udvidende fortolkning af lovens dokumentbegreb er at forhindre en begrænsning af lovens anvendelsesområde som følge af den tekniske udvikling.*
*…*
*Retten til aktindsigt gælder, uanset på hvilken måde myndigheden opbevarer dokumenterne. Opbevares den pågældende skrivelse ikke i papirform, men f.eks. alene på mikrofilm eller på edb-datalager, må myndigheden gøre skrivelsen teknisk tilgængelig for den, der har begæret aktindsigten, f.eks. i form af en udskrift eller ved at den pågældende får adgang til et skærmbillede i forbindelse med aktindsigt på stedet.*
*Det er i den forbindelse uden betydning, at meddelslsen aldrig har foreligget som et dokument i sædvanlig forstand, men alene er blevet udfærdiget og modtaget på et elektronisk dataanlæg, når blot meddelelsen rent faktisk opbevares på en måde, så myndigheden har rådighed over den.“*

*Skjalahugtakið skal sambært hesum tulkast vítt, og endamálið við hesum var, at lógarinnar økið ikki skuldi avmarkast av teknisku menningini. Tað ber sostatt ikki til at siga, at allar upplýsingar, ið MRCC noterar í dagbók stovnsins, eru undantiknar innliti sambært § 5, stk. 2, bert tí at upplýsingarnar verða førdar inn á edv.*

*Rætturin til innlit fevnir tó ikki um øll skjøl, ið eru móttikin ella gjørd av einum myndugleika. Treytin fyri at eitt skjal er fevnt av rættinum til innlit er, at skjalið er móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans, jb. § 4, stk. 1 í innlitslógini.*

*Í FOB 95.132 sigur danski umboðsmaðurin m.a. soleiðis um hvat er fevnt av hugtakinum: fyrisitingarligari saksviðgerð:*

*„… der er snævre grænser for hvilke dokumenter, der ikke er omfattet af bestemmelsen, og på baggrund af forarbejderne må det*

> *efter min opfattelse lægges til grund at den nævnte passus i § 4, stk. 1, – om at dokumenterne skal være indgået til myndigheden „som led i administrativ sagsbehandling i forbindelse med dens virksomhed“ – kun udeholder dokumenter som ikke er tillagt eller kan tillægges betydning for myndighedens almindelige løbende administrative virksomhed på området. Det skal med andre ord typisk være dokumenter hvis indhold er myndighedens almindelige løbende administrative virksomhed helt uvedkommende. (mín undirstriking)“*

*Avgerandi er, um skjølini kunnu hava týdning fyri vanliga fyrisitingarliga virksemi myndugleikans. Tað hevur sostatt ikki týdning um ein mynduleiki hevur stovnað eitt fysiskt mál ella journalnummar viðvíkjandi ávísum skjølum.*

*MRCC hevur ábyrgdina av íverksetan og samskipan av leiting og bjarging á føroyskari havleið. Sáttmáli er gjørdur við Atlantic Airways um, at flogfelagið átekur sær at veita tyrluflúgving til leiting og bjarging á sjógvi og landi v.m. Tá ið Atlantic Airways umvegis telefon boðar MRCC frá, at bjargingartyrlan ikki er tøk, eru hetta eftir mínari meting upplýsingar, ið hava týdning fyri fyrisitingarliga virksemi hjá MRCC, og eru elektronisku notatini tí fevnd av rættinum til innlit.*

*Eftir mínari meting hevur Fiskimálaráðið, við at vísa til § 5, stk. 2 í innlitslógini, nokta innliti á skeivum grundarlagi. Eg fari vísandi til hetta at biðja Fiskimálaráðið taka málið upp til nýggja viðgerð, og fari at biðja ráðið lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.*

*Viðvíkjandi spurninginum um meirinnlit*
*Tá ið klagarin í hesum máli bað um meirinnlit, sýtti Fiskimálaráðið fyri hesum við teirri grundgeving, at tað var sera tíðarkrevjandi at leita fram umbidnu upplýsingarnar.*

*Meginreglan um meirinnlit er ásett í § 4, stk. 1, 2. pkt., sum er soljóðandi:*

> *„§ **4.** … Ein myndugleiki kann geva loyvi til skjalainnlit í størri mun, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m.“*

*Við hesari áseting er staðfest, at innlitslógin er ein minimumslóg, og tað vil siga, at myndugleikar hava møguleika til at lata skjalainnlit í størri mun enn teir hava skyldu til sambært innlitslógini.*

*Í hesum málinum er tað ein fjølmiðil, ið biður um innlit. Av tí at alment innlit hevur serligan týdning fyri fjølmiðlarnar, eiga myndugleikarnir, tá ið meting verður gjørd um hvørt meirinnlit skal latast, at taka serlig atlit til møguleikarnar hjá fjølmiðlunum at lýsa evni, ið hava almennan áhuga. Fiskimálaráðið hevur ikki upplýst mær, hvussu langa tíð tað hevði tikið MRCC at leita fram upplýsingarnar, og eg fái tískil ikki tikið støðu til, um Fiskimálaráðið kundi nokta umbønini um innlit vísandi til, at tað var sera tíðarkrevjandi at leita fram umbidnu upplýsingarnar.*

*Burtursæð frá omanfyrinevndu viðmerkingum og áheitanini um at taka málið upp til nýggja viðgerð, geri eg ikki meira við málið í løtuni.*

## 11.3 Vantandi innlit frá Kringvarpi Føroya

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um at Kringvarpið noktaði einum blaðmanni innlit í málið um keyp av nýggjari heimasíðu. Mentamálaráðið staðfesti avgerðina hjá Kringvarpinum. Umboðsmaðurin metti ikki, at málið, sum biðið var um innlit í, snúði seg um programmvirksemi, og tískil kundi Kringvarpið ikki nokta innlit vísandi til § 13, stk. 3 í kringvarpslógini. Av tí at hvørki Kringvarpið ella Mentamálaráðið høvdu gjørt eina ítøkiliga meting av skjølunum ella upplýsingunum í málinum, kundi umboðsmaðurin ikki taka støðu til, um innlit kundi sýtast vísandi til fíggjarlig ella tøknilig áhugamál hjá Kringvarpinum sambært § 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini. Umboðsmaðurin vísti tó á, at avtalaði prísurin fyri heimasíðuna ikki var ein upplýsing, sum kundi undantakst við heimild í hesi ásetingini. Tað kundi ikki útilokast, at upplýsingar um fíggjarlig og tøknilig viðurskifti hjá veitaranum av heimasíðuni kundu undantakast við heimild í § 12, stk. 1, nr. 2. Umboðsmaðurin metti ikki grundgevingarnar hjá Kringvarpinum ella Mentamálaráðnum lúka krøvini í § 23 í fyrisitingarlógini og gav Kringvarpi Føroya og Mentamálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum. Umboðsmaðurin heitti á Kringvarpið um at taka málið uppaftur til viðgerðar og lata seg frætta úrslitið av viðgerðini.* ***(J. nr. 201000006)***

## Klagan

Við skrivi, móttikið 15. januar 2010, hevur A, blaðmaður á Dimmalætting sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> „**Klaga um avslag uppá innlit**
> Eg skal við hesum klaga Mentamálaráðið/Kringvarp Føroya, sum hava givið Dimmalætting avslag upp á innlit í málið um arbeiðið við nýggjari heimasíðu. …“

## Málsgongd

Við telduposti 31. august 2009 sendi A Kringvarpi Føroya soljóðandi áheitan um innlit:

> „Kringvarp Føroya arbeiðir við at menna nýggja heimasíðu. Í hesum sambandi biðja vit um innlit í øll skjøl, sáttmálar og samskifti við veitaran.“

Við soljóðandi telduposti 14. september 2009 sýtti Kringvarp Føroya áheitanini:

> „Víst verður til umbøn um innlit í upplýsingar um heimasíðu Kringvarpsins.
>
> Umsóknin verður ikki gingin á møti.
>
> Talan er um part av programmvirksemi kringvarpsins, sum kringvarpið ikki ynskir at avdúka, fyrr enn tann nýggja heimasíðan verður almenn. Talan er eisini um upplýsingar um handilsviðurskifti, sum viðvíkja programvirkseminum. Hesar upplýsingar eru eins og programvirksemið undantiknar frá rættinum til innlit, smb. § 13, stk. 2 og stk. 3 í løgtingslóg um kringvarp.“

Við telduposti 16. september 2009 sendi A umboðsmanninum eina klagu um avgerð Kringvarpsins. Av tí at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera klaguna, fyrr enn Mentamálaráðið sum kærumyndugleiki hevði tikið avgerð í málinum, sendi umboðsmaðurin tann 23. september 2009 Mentamálaráðnum klaguna at viðgera.

Í skrivi, dagfest 29. september 2009, kunnaði Mentamálaráðið Kringvarp Føroya um kæruna. Ráðið heitti samstundis á Kringvarpið um at lata ráðnum skjølini í málinum, av tí at ráðið ikki kundi meta um skjølini vóru undantikin innliti uttan at hava sæð tey.

Sama dag sendi Kringvarp Føroya Mentamálaráðnum soljóðandi teldupost:

> „… Hetta er eitt arbeiði, ið er í gongd, og er tað rættiliga stór uppgáva at leita alt fram í løtuni.
>
> Tí vil eg bara spyrja um vit skulu seta orku av til hetta, tá ið tað stendur so greitt í kringvarpslógini, at programmvirksemi og handilsviðurskifti í sambandi við programmvirksemi, er

> undantikið fyrisitingarlógini? (*innlitslitslógini*, mín viðmerking)
>
> Um aftursvarið verður, at tað skulu vit, so gera vit sjálvsagt tað.“

Mentamálaráðið svarar teldupostinum sama dag:

> „Vit halda fyribils ikki, at heimasíðan er at javnmeta við programmvirksemi ella sendivirksemi, og tí halda vit, tað er neyðugt at taka støðu til einstøku skjølini.
>
> Kanst tú greiða frá, hví heimasíðan eftir tykkara tykki er tað sama sum programmvirksemi?“

Dagin eftir sendir Kringvarp Føroya Mentamálaráðnum soljóðandi teldupost:

> „… Eg vil hervið heita á tykkum um at vit taka ein fund um málið og fáa eitt kjak í lag um hetta, nær liggur fyri hjá tykkum? …“

Tann 2. oktober 2009 sendi Mentamálaráðið Kringvarpi Føroya soljóðandi skriv við avriti til A:

> **„Viðv. innlitsumbøn frá Dimmalætting v/ A**
> Víst verður til samskifti okkara um innlitsumbønina frá Dimmalætting v/ A. Vit sendu tykkum skriv, dagfest 29. september 2009, har heitt varð á tykkum um at senda Mentamálaráðnum sum kærumyndugleika ávís skjøl fyri at kunna meta, um avgerðin hjá Kringvarpinum at nokta Dimmalætting innlit er røtt.
>
> Í sambandi við áheitanina um at senda Mentamálaráðnum nevndu skjøl hevur ávíst samskifti verið. Mentamálaráðið er samt við Kringvarpið í, at innihaldið á heimasíðuni er programmvirksemi. Hinvegin er tann parturin, ið viðvíkur t.d. veitaranum, ikki programmvirksemi.

Sbrt. kringvarpslógini eru fyrisitingarlig mál fevnd av lógini um innlit í fyrisitingina. Mentamálaráðið metir, at soleiðis sum umbønin um innlit er orðað, er talan um innlit í mál, ið hoyrir til fyrisiting Kringvarpsins. Av tí at tað framgongur av skjølunum, sum Umboðsmaðurin hevur latið Mentamálaráðnum, at málið áður hevur verið viðgjørt í mun til kringvarpslógina, verður í staðin givið Kringvarpi Føroya høvi at viðgera umbønina um innlit í mun til Ll. nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina.

Endaliga avgerð Kringvarpsins kann kærast til Mentamálaráðið. Kærufreistin er 4 vikur eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina, sbr. § 23 í kringvarpslógini.

Avrit av hesum skrivi er sent Dimmalætting."

Eftir at hava viðgjørt málið sambært innlitslógini sýtti Kringvarp Føroya tann 22. oktober 2009 áheitanini um innlit við soljóðandi skrivi:

„**Viðv. innlitsumbøn frá Dimmalætting mál nr.: 70-19101/061727 -/59**
… Sum áður boðað frá, er talan um part av programmvirksemi Kringvarpsins, sum Kringvarpið ikki ynskir at avdúka, fyrr enn tann nýggja heimasíðan verður almenn.

Talan er eisini um upplýsingar um handilsviðurskifti, sum viðvíkja programmvirkseminum. Hesar upplýsingar eru eins og programmvirksemið undantiknar frá rættinum til innlit, smb. § 13, stk. 2 og stk. 3 í løgtingslóg um kringvarp.

Harafturat er talan um fíggjarlig og tøknilig áhugamál hjá Kringvarpi Føroya og veitaranum, sum av kappingarávum ikki kunnu almannakunngerast. Víst verður til § 13, stk. 1, nr. 5 og 6 í løgtingslóg um alment innlit í fyrisitingina.

Vísandi til § 23 í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp,

kann henda avgerð kærast til Mentamálaráðið, Hoyvíksvegur 72, Postboks 3279, 100 Tórshavn. Kærufreistin er 4 vikur eftir at tygum hava móttikið avgerðina."

Við telduposti 12. november 2009 kærdi A avgerðina hjá Kringvarpi Føroya til Mentamálaráðið. Kæran var soljóðandi:

„**Kæra um avslag uppá innlitsumbøn**
Í teldubrævi 22. oktober hevur Kringvarp Føroya enn einaferð noktað innlit í málið um menning av nýggjari heimasíðu. Talan hevur ongantíð verið um eina umbøn um innlit í innihaldið av heimasíðuni, og harvið programmvirksemi hjá Kringvarpinum, men um innlit í fyrisitingina. Tað snýr seg serliga um,

- hvat skipanin hevur kostað higartil
- hvat hon fer at kosta tá avtornar
- nær hon eftir ætlan skuldi verið tikin í nýtslu
- nær hon eftir ætlan verður tikin í nýtslu

Út frá stuttorðaðu umbønini skuldi tað verið innlýsandi, at tað er hetta biðið verður um í upprunaumbønini, har vit bóðu um skjøl, sáttmálar og samskifti við veitaran. Er tað nakað, sum kann tulkast at hoyra heima undir programmvirksemi, ber tað til at taka hesi skjøl burtur úr innlitinum ella, sambært ekstraheringsskylduni, strika út upplýsingar, sum ikki eru umfataðar av innlitinum – og sjálvsagt skal eitt skjalayvirlit fylgja svarinum."

Dagin eftir, 13. november 2009, heitir Mentamálaráðið á Kringvarp Føroya um at útvega ráðnum skjølini í málinum skjótast til ber.

19. november 2009 sendi Kringvarp Føroya Mentamálaráðnum soljóðandi teldupost:

„Eg vil hervið boða frá, at vit gera, hvat vit kunnu fyri at fáa tíð at finna umbidna tilfarið fram, men at tað ikki er gjørligt at

> venda aftur við tilfarinum fyrr enn fríggjadagin í næstu viku, tann 27. november 2009, …“

Tann 14. desember 2009 sendi Kringvarp Føroya soljóðandi teldupost til Mentamálaráðið:

> „Orsaka, at tú enn ikki hevur fingið umbidna tilfarið frá okkum, men nú verður tað. Vit stríðast enn við at finna alt fram, sum tit hava biðið um viðv. nýggju heimasíðuni hjá kringvarpinum. Hetta er ikki sum at siga tað at finna fram, tí tilfarið er so rúgvusmikið, ….
>
> Haraftrat kenna vit ikki grundina til, hví Dimmalætting hevur biðið um alment innlit, og vita ikki, júst hvat Dimmalætting ynskir innlit í, so tað er ógjørligt at vita, hvat er viðkomandi og velja nakað burturúr øllum tilfarinum fram um nakað annað. …“

Tann 21. desember 2009 tók Mentamálaráðið soljóðandi avgerð í málinum:

> „**Viðv. kæru um avslag uppá innlitsumbøn**
> Dimmalætting hevur í telduposti 12. november kært avgerð Kringvarpsins um at nokta innlit í mál um menning av nýggjari heimasíðu.
>
> Í avgerðini upplýsir Kringvarpið, at talan er um part av programmvirksemi Kringvarpsins, sum Kringvarpið ikki ynskir at avdúka, fyrr enn tann nýggja heimasíðan verður almenn. Eisini upplýsir Kringvarpið, at talan er um upplýsingar um handilsviðurskifti og um fíggjarlig og tøknilig áhugamál hjá Kringvarpi Føroya og veitaranum, sum av kappingarávum ikki kunnu almannakunngerast.
>
> Mentamálaráðið hevur eftirkannað skjølini hjá Kringvarpinum. Við hesum verður staðfest, at talan er um skjøl, sum snúgva

seg um viðurskifti, sum víst á í avgerðini hjá Kringvarpinum. Harumframt er partur av málinum fevndur av trúnaðaravtalu.

Vísandi til omanfyri standandi og til, at málið sum heild ikki er eitt vanligt fyrisitingarmál, har Kringvarpið skal taka fyrisitingarliga avgerð í sambandi við virksemi hjá stovninum, hevur Mentamálaráðið gjørt av ikki at lata innlit í skjølini í málinum.

Avgerðin hjá Kringvarpi Føroya verður við hesum staðfest."

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og klagan varð við skrivi, dagfest 15. januar 2010, send Mentamálaráðnum til ummælis við eini freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns, eins og biðið varð um at fáa skjølini í málinum hjá Kringvarpi Føroya til láns.

Tann 22. januar 2010 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

„**Viðv. klagu frá Dimmalætting, A, dagfest 15. januar 2010**
Løgtingsins Umboðsmaður hevur við skrivi, dagfest 15. januar 2010, biðið Mentamálaráðið um frágreiðing um mál, har Kringvarp Føroya hevur sýtt Dimmalætting innlit í mál um heimasíðu.

Kringvarpið sýtir innliti vísandi til, at talan er um part av programmvirksemi Kringvarpsins, sum Kringvarpið ikki ynskir at avdúka, fyrr enn tann nýggja heimasíðan verður almenn. Eisini vísir Kringvarpið á, at málið inniheldur upplýsingar um handilsviðurskifti, sum viðvíkja programmvirkseminum. Hesar upplýsingar eru eins og programmvirksemið undantiknar frá rættinum til innlit, smb. § 13, stk. 2 og 3 í løgtingslóg um kringvarp.

Mentamálaráðið samskifti við serkøn starvsfólk í Kringvarpinum um hugtakið programmvirksemi til tess at kunna staðfesta, hvørt talan í hesum føri er um programmvirksemið, sum er fevnt av regluni í § 13 í løgtingslóg um kringvarp. Mentamálaráðið hevur tikið til eftirtektar niðurstøðuna hjá Kringvarpinum um, at hetta slagið av virksemi kemur undir programmvirksemi sambært kringvarpslógini.

Haraftrat vísti Kringvarpið á, at talan er um fíggjarlig og tøknilig áhugamál hjá Kringvarpi Føroya og veitaranum, sum av kappingarávum ikki kunnu almannakunngerast. Víst verður til § 13, stk. 1, nr. 5 og 6 í løgtingslóg um alment innlit í fyrisitingina.

Av tí at málið ikki er vanligt fyrisitingarmál, heitti Mentamálaráðið á Kringvarpið um at lata Mentamálaráðið eftirhyggja skjølini í málinum. Tá hetta var gjørt, kundi Mentamálaráðið staðfesta, at talan er um mál, sum snýr seg um samskifti við veitara og um fíggjarviðurskiftini í sambandi við møguliga veiting. Mentamálaráðið metir, at Kringvarp Føroya hevði sakliga orsøk og heimild at sýta Dimmalætting innlit í málið.

Tá Mentamálaráðið skrivar, at málið sum heild ikki er eitt vanligt fyrisitingarmál, har Kringvarpið skal taka fyrisitingarliga avgerð í sambandi við virksemi hjá stovninum, verður sipað til málið um heimasíðuna. Málið í síni heild ber brá av samskifti og fyrireiking, har upplýsingarnar eru útkast til møguligar avtalur o.a. Eitt vanligt fyrisitingarmál hevði t.d. verið ein avgerð í sambandi við kringvarpsgjald.

Av tí at skjølini millum Kringvarpið og heimasíðuveitaran einans eru til skjals í Kringvarpinum, hevur Mentamálaráðið heitt á Kringvarpið um at útvega Umboðsmanninum skjølini.

Skjølini í málinum hjá Mentamálaráðnum eru hjáløgd.

Avrit av hesum skrivi og hjáløgdu skjølini verða send Kringvarpi Føroya"

Við skrivi, dagfest 2. februar 2010, heitti umboðsmaðurin á Mentamálaráðið um at minna Kringvarp Føroya á at senda umboðsmanninum umbidnu skjølini skjótast gjørligt.

Tann 5. februar 2010 sendi B, Miðlaleiðari í Kringvarpi Føroya umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar saman við skjølunum í málinum:

„**Viðm. til tilfarið viðv. innlitsumbøn frá A á Dimmalætting**
A bað í umbøn um innlit, dagf. 31. august 2009, um fylgjandi:

„Kringvarp Føroya arbeiðir við at menna nýggja heimasíðu. Í hesum sambandi biða vit um innlit í <u>øll skjøl, sáttmálar og samskifti við veitaran.</u>".

Hetta er ein heldur stuttorðað og ótøkilig umbøn. Ynskið er so breitt, at Kringvarp Føroya kundi ikki ganga ynskinum á møti, uttan bæði at bróta tagnarskyldu, Kringvarpið hevur undirskrivað saman við veitaranum, umframt fleiri lógarásetingar, bæði í Kringvarpslógini og í lógini um alment innlit. (Sí viðløgdu skjøl). Tí noktaði Kringvarpið A innlit.

Ikki fyrr enn hetta verður til eitt kærumál, fær leiðsla Kringvarpsins fleiri mánaðar seinni – umvegis avrit frá Mentamálaráðnum av samskifti millum Mentamálaráðið og A – kunnleika til ítøkiligar spurningar, sum A fegin vil hava svar uppá, sum eru hesir:

Hvat hevur heimasíðuskipanin kostað higartil?
Hvat fer hon at kosta, tá avtornar?
Nær skuldi hon eftir ætlan verið tikin í nýtslu?
Nær verður hon eftir ætlan tikin í nýtslu?

Alt hetta eru spurningar, sum Kringvarpið ongantíð hevur havt

nakað ímóti at svara, men illa ber til at svara spurningum, ein ikki fær.

Hevði A sett hesar ítøkiligu spurningar beinanvegin beinleiðis til Kringvarpsleiðsluna, hevði hann eisini fingið ítøkilig svar beinanvegin. Ístaðin byrjaði A við at biða um innlit í øll skjøl og sáttmálar, umframt í alt samskiftið við veitaran, sum tað ikki ber til hjá Kringvarpinum at handa út, og hevur annars bert samskift umvegis aðrar partar, har hann hevur hildið fast í ynskinum um at fáa innlit, heldur enn bara at seta spurningarnar, hann ynskir svar uppá, beinleiðis til rætta viðkomandi.

A er framvegis vælkomin til at seta leiðslu Kringvarpsins hesar spurningar og at fáa svar uppá teir."

Við skrivi, dagfest 9. februar 2010, vórðu frágreiðingin hjá Mentamálaráðnum og viðmerkingarnar hjá Kringvarpi Føroya sendar klagaranum til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 15. februar 2010 sendi A umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðmerking til innlitsumbøn (heimasíða hiá Kringvarpi Føroya)**
Tað var fyri meira enn hálvum ári síðan, at undirritaði bað um innlit í málið um menning av nýggjari heimasíðuskipan hjá Kringvarpi Føroya, herundir kostnaðin av arbeiðnum. Men hesin almenni kunningarstovnur hevur víst eina ómetaliga arrogansu í málinum, og støðugt noktað innlit í eitt so upplagt mál.

Undirritaði gongur út frá, at ein stovnur sum Kringvarpið er ført fyri at meta um, hví ein journalistur biður um innlit og hvussu hann ætlar at brúka tilfarið. Av tí at hesin førleiki kanska ikki liggur hjá Mentamálaráðnum, varð skitsað upp, hvørja spurningar eitt innlit kundi givið svar upp. Eftir øllum at døma hevur hesin grundleggjandi førleiki tó ikki verið til staðar í Kringvarpi Føroya, tá B, miðlaleiðari, brádliga í viðmerking

heldur hetta vera sera áhugavert, og bara biður undirritaða ringja til Kringvarpið at fáa svar. Kringvarp Føroya burdi, sum almennur miðil, vita, at stovnurin ikki kann diktera hvussu onnur miðlafólk arbeiða við at fáa neyðugt tilfar til vega – ein umbøn um alment innlit kann ikki bara skúgvast burtur við at biðja fólk ringja.

Tá biðið verður um innlit í øll skjøl, sáttmálar og samskfti við veitaran, so eru hetta vanligar orðingar, tá innlit verður biðið í eitt konkret mál – í hesum føri arbeiðnum at menna nýggja heimasíðu. Umbønin er sanniliga ikki breið, tí hon avmarkar seg til heimasíðuna. Heldur Kringvarpið, at eitt innlit gongur ov nær programmvirkseminum, ber væl til at undantaka skjøl og strika yvir upplýsingar. At geva totalt noktandi svar er bara ein roynd at leggja fótonglar fyri journalistiskum virksemi.

Tað er ikki óvanligt hjá almennum myndugleikum at upplýsa, hvat verkætlanir kosta. Vísast kann m.a. til verkætlanina Vitanet, sum Mentamálaráðið stendur fyri. Har hevur Dimmalætting fingið innlit og aðalstjórin hevur upplýst, at Samteld fekk 350.000 krónur at nærlýsa skipanina og 3,2 mió. kr fyri eina tillaging – og henda skipan er ikki avgreidd enn. Dugi ikki rættilga at síggja, hví innlit kann gevast í mál millum MMR og Samteld, men ikki ÚF og danskan veitara.“

Við skrivi, dagfest 22. februar 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Mentamálaráðnum til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 25. februar 2010 sendi Kringvarp Føroya umboðsmanninum soljóðandi skriv:

**„Viðmerkingar til málið um innlitsumbøn frá A á Dimmalætting**
Vísandi til innlitsumbønina hjá A dagf. 31. august 2009, skal hervið verða sagt frá, at Kringvarpið hevur eftirmett mannagongdina í hesum sambandi.

Kringvarpið er komið til ta niðurstøðu, at Kringvarpið kundi, tá ið innlitsumbønin varð móttikin frá Dimmalætting, havt biðið A verið meiri ítøkiligan.

Harvið kundi hugsast, at A møguliga hevði sett Kringvarpinum teir fýra spurningarnar beinleiðis, longu tá.

Kringvarpið ger vart við, at hesir spurningar framvegis ikki eru settir beinleiðis til stovnin, soleiðis sum innlitslóggávan fyriskrivar. Kringvarpið hevur tí bert tann eina fyrispurningin frá A um heimasíðuna, ið ljóðar:

„*Kringvarp Føroya arbeiðir við at menna nýggja heimasíðu. Í hesum sambandi biðja vit um innlit í øll skjøl, sáttmálar og samskifti við veitaran.* "

Kringvarpið hevur rættað hesa mannagongd, og kemur í framtíðini, tá ið biðið verður um alment innlit, at biðja spyrjaran vera meiri ítøkiligan, um spurningurin er ov breiður.

Annars hevur Kringvarpið ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru staðfestar í skrivi frá B til Løgtingsins Umboðsmann dagf. 5. februar 2010."

Við skrivi, dagfest 1. mars 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá Kringvarpi Føroya sendar klagaranum til ummælis við eini freist áljóðandi 14 dagar.

Av tí at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá Mentamálaráðnum ella Dimmalætting, varð við skrivi, dagfest 9. apríl 2010, boðað pørtunum frá, at hetta mál fór at verða tikið til endaliga viðgerð.

Við skrivi, dagfest 26. apríl 2010, spurdi umboðsmaðurin Mentamálaráðið, um ráðið hevði høvi at gjøgnumganga skjølini í málinum hjá Kringvarpi Føroya, áðrenn ráðið sendi Kringvarpinum málið til nýggja viðgerð tann 2. oktober 2009.

Tann 29. apríl 2010 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„… Mentamálaráðið hevði kunnað biðið um skjølini hjá Kringvarpi Føroya, áðrenn tað bað Kringvarpið viðgera málið av nýggjum. Hetta var tó ikki hildið at vera næsta stigið í málsviðgerðini. Mentamálaráðið metti, at Kringvarpið átti at viðgera umbønina um innlit í mun til Ll. nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina og ikki í mun til kringvarpslógina eina.

Tá Dimmalætting síðan kærdi avgerð Kringvarpsins um at nokta innlit, varð mett, at skjølini skuldu fáast til gjøgnumgongdar.“

Umboðsmaðurin helt síðani framm við viðgerðini av málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um, at Kringvarp Føroya hevur noktað klagaranum innlit í eitt mál um keyp av eini heimasíðu.*

*§ 13 í kringvarpslógini*
*Kringvarp Føroya sýtti í fyrsta umfari innlitsáheitanini við teirri grundgeving, at innlitslógin ikki er galdandi fyri programmvirksemi og handilsviðurskifti í hesum sambandi, jbr. § 13 í kringvarpslógini (løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp), sum er soljóðandi:*

> ***„§ 13.** Løgtingslóg um fyrisitingarlóg og løgtingslóg um alment innlit í fyrsitingina eru galdandi fyri fyrisitingina hjá Kringvarpi Føroya.*
> *Stk. 2. Kapitlarnir 4 til 6 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg eru ikki galdandi fyri mál, ið snúgva seg um programmvirksemi og upplýsingar, ið viðvíkja handilsviðurskiftum í sambandi við programmvirksemi.*
> *Stk. 3. Løgtingslóg um alment innlit í fyrisitingina er ikki galdandi fyri mál, ið snúgva seg um programmvirksemi og upplýsingar, ið viðvíkja handilsviðurskiftum í sambandi við programmvirksemi.“*

*Í viðmerkingunum til § 13 (Løgtingsmál 114/2005) stendur m.a. soleiðis:*

> *„Stk. 2. … Heitið programmvirksemi í lógini fevnir um programmlegging, ta redaksjonellu tilgondina, umframt allar avtalur, ið eru gjørdar í tilknýti til hetta virksemið. …*
> *Stk. 3. Tað verður ikki latið alment innlit í mál, ið snúgva seg um programmvirksemi og handilslig viðurskifti í hesum sambandi. Hetta merkir, at t.d. annað fjølmiðlafólk ikki kann fáa innlit í mál, ið snúgva seg um programvirksemi.“*

*Í viðmerkingunum til § 13 verður ikki grundgivið fyri hví innlitslógin ikki skal vera galdandi fyri programmvirksemi, men ásetingin er í sínum innihaldi meinlík samsvarandi ásetingum í undanfarnu kringvarpslógini (§§ 13 og 25 í løgtingslóg nr. 22 frá 20. februar 1998 um kringvarp v.m.). Sambært uppskotinum til hesa lógina (Løgtingstíðindi 1997, bls. 408) høvdu ásetingarnar fyrst og fremst til endamáls at geva Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya møguleika fyri at verja teirra keldur. Víst varð í sama viðfangi til einsljóðandi áseting í danskari lóggávu (Nú: § 86 í Lovbekendtgørelse nr. 827 af 26. august 2009 om radio- og fjernsynsvirksomhed). Tá viðmerkingarnar til § 13 í galdandi lóg ikki leggja upp til at broyta rættarstøðuna, má ásetingin tulkast í samsvari við viðmerkingarnar til undanfarnu lógina.*

*Høvuðsgrundgevingin fyri fyrrnevndu ásetingini í donsku lógini er atlitið til upplýsingar- og talufrælsi, og at ein almennur tíðindastovnur skal hava eina so fría og óhefta støðu sum gjørligt í sambandi við programmvirksemið. Hetta er eisini galdandi fyri tey viðurskifti, sum beinleiðis ella óbeinleiðis hava samband við hetta virksemið. Sum dømi kann m.a. nevnast, at § 13 í kringvarpslógini forðar fyri at innlit fæst í journalistiskt bakgrundstilfar (programmvirksemi), ferðaupplýsingar, sum kunnu avdúka nakað um programmvirksemið stovnsins og avtalur um keyp av sendingum (handilsviðurskifti í sambandi við programvirksemi).*

*Mentamálaráðið sigur seg í skrivi til Kringvarp Føroya tann 2. oktober 2009 vera samt við Kringvarpinum í, at innihaldið á heimasíðuni er*

*programmvirksemi, og í frágreiðing til mín tann 22. januar 2010 sigur ráðið, at tað tók til eftirtektar niðurstøðuna hjá Kringvarpinum um, at hetta slagið av virksemi kemur undir programmvirksemi. Tað er greitt, at ein heimasíða kann nýtast sum liður í programmvirkseminum, eins og innihaldið á eini heimasíðu kann vera fevnt av hugtakinum programmvirksemi í kringvarpslógini. Ítøkiliga málið, sum klagarin hevur biðið um innlit í, snýr seg tó um keyp og menning av eini heimasíðu, sum ikki er tikin í nýtslu, og eftir míni meting kann tað hvørki sigast at snúgva seg um programmlegging, ta redaksjonellu tilgongdina ella handilsviðurskifti í sambandi við programmvirksemi.*

*Kringvarpið kundi tískil ikki sýta innlitsáheitanini við teirri grundgeving, at talan var um programmvirksemi sambært § 13, stk. 3 kringvarpslógini.*

*Fyrra kæruviðgerðin í Mentamálaráðnum*
*Mentamálaráðið skal sum kærumyndugleiki, jbr. § 23 í kringvarpslógini, gera av, um ein fyrisitingarlig avgerð hjá Kringvarpinum er røtt. Í fyrru kæruavgerðini staðfesti Mentamálaráðið avgerðina hjá Kringvarpinum um at sýta innlit í ein part av málinum vísandi til at talan var um programvirksemi sambært § 13, stk. 3 í kringvarpslógini.*

*Fyri at kunna taka støðu til sýtanina av innlitsáheitanini krevst, at Mentamálaráðið hevur um hendi málið og gjøgnumgongur skjølini í málinum. Mentamálaráðið sá ikki skjølini í málinum hjá Kringvarpinum fyrr enn undir seinnu kæruviðgerðini. Tað framgongur tó av málinum, at Kringvarpið og Mentamálaráðið samskiftu um hugtakið programmvirksemi, og at ráðið tók til eftirtektar niðurstøðuna hjá Kringvarpi Føroya. Eftir mínum tykki er tað ikki nøktandi við munnligum samskifti um, hvat málið snýr seg um, og hetta kann ikki koma í staðin fyri eina faktiska gjøgnumgongd av málinum. Eg meti tískil ikki, at Mentamálaráðið hevði nøktandi grundarlag fyri at taka støðu til málið í sambandi við fyrru kæruviðgerðina.*

*§ 13, stk. 1, nr. 5 og 6 í innlitslógini*
*Kringvarpið viðgjørdi í aðru syftu innlitsáheitanina sambært innlitslógini (Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina).*

*Útgangsstøðið sambært hesi lóg er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl, og tað krevst ein lógarheimild fyri at sýta innlit.*

*Kringvarpið sýtti innlit í málið sum heild við teirri grundgeving, at talan var um fíggjarlig og tøknilig áhugamál hjá Kringvarpi Føroya og veitaranum av heimasíðuni, sum av kappingarávum kundu undantakast eftir § 13, stk. 1, nr. 5 og 6 í innlitslógini.*

*§ 13, stk. 1, nr. 5 og 6 og stk. 2 eru soljóðandi:*

> *„**§ 13.** Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi*
> *…*
> *5) fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna, ella*
> *6) privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.*
> *Stk. 2. Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum.“*

*§ 13, stk. 1, nr. 6 er ein undantaksregla, sum einans kann nýtast í heilt serligum førum, og bert um tað er neyðugt av munandi umhugsni fyri privatum ella almennum áhugamálum at dylja málið. Ta treytina meti eg ikki vera til staðar í ítøkiliga málinum.*

*Ein avmarking í rættinum til innlit eftir § 13 hevur ikki við sær, at mál í síni heild kunnu undantakast innliti. Talan er um undantøku av skjølum ella upplýsingum, og í tann mun nevndu áhugamál bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi hava høvi at gera seg kunnigan við restina av skjalinum, jbr. stk. 2. Til tess at undantaka skjøl ella upplýsingar eftir § 13, stk. 1, nr. 5 krevst sostatt ein ítøkilig meting av vandanum fyri, at veitan av innliti kann skaða nevndu áhugamálini, sbr. orðini munandi umhugsni.*

*Kringvarpið vísir generelt til fíggjarlig og tøknilig áhugamál hjá Kringvarpinum og veitaranum av heimasíðuni. Eingin ítøkilig*

*meting er gjørd av skjølunum ella upplýsingunum í málinum, og hetta verður eisini stuðlað av, at Kringvarpið ikki leitaði skjølini í málinum fram, fyrr enn Mentamálaráðið bað um at síggja tey í sambandi við kæruviðgerðina. Av tí at eg ikki veit, hvørji fíggjarlig ella tøknilig áhugamál Kringvarpið metir kunnu grunda, at innlit verður sýtt í ítøkiliga málið, fái eg ikki gjørt meira við hendan spurningin. Tað sama ger seg galdandi fyri á hvørjum grundarlag Mentamálaráðið metir Kringvarpið hava sakliga orsøk og heimild til at sýta klagaranum innlit. Hvat viðvíkur munandi umhugsni fyri fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, sbr. nr. 5, so er t.d. avtalaði prísurin á eini heimasíðu ikki ein upplýsing, sum kann undantakast við heimild í hesi ásetingini.*

*Hvat viðvíkur grundgevingini um fíggjarligar og tøkniligar upplýsingar hjá veitaranum av heimasíðini, kann tað eftir eina gjøgnumgongd av skjølunum ikki útilokast, at upplýsingar í málinum kunnu undantakast við heimild í § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini. Eg skal tó gera vart við, at eg við hesum ikki havi tikið støðu til spurningin. Á sama hátt sum eftir § 13 skal gerast ein ítøkilig meting av vandanum fyri tapi, um innlit verður givið, og kemur bert ein partur av skjalinum undir ásetingina, skal viðkomandi vera kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum, jbr. § 12, stk. 2.*

*§ 4, stk. 1, 1. pkt. í innlitslógini*
*Í kæruavgerðini grundgav Mentamálaráðið í triðja lagi við, at talan var ikki um „eitt vanligt fyrisitingarmál, har Kringvarpið skal taka fyrisitingarliga avgerð í sambandi við virksemi hjá stovninum“. Innlitslógin er ikki, á sama hátt sum fyrisitingarlógin, avmarkað til bert at galda fyri mál, har ein myndugleiki hevur ella fer at taka avgerð, og sambært § 4, stk. 1, 1. pkt. fevnir rætturin til innlit um skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyristingarligari saksviðgerð. Hetta merkir, at eisini skjøl í málum um tænastuvirksemi (faktisk forvaltning) og eginrættarligar gerðir eru fevnd av lógini.*

*Tilskilan sambært § 4, stk. 3 í innlitslógini*
*Í telduposti tann 14. desember 2009 til Mentamálaráðið segði Kringvarpið seg ikki vita, hvat blaðmaðurin ynskti innlit í, tí Kringvarpið*

*kendi ikki grundina til, at biðið var um innlit. Sambært § 4, stk. 1, 1. pkt. kann ein og hvør biðja um innlit, og tað er einki krav um, at viðkomandi skal grundgeva fyri áheitanini. Tó skal tann, sum biður um innlit, vísa til umbidna málið ella skjølini á ein slíkan hátt, at tað er gjørligt hjá myndugleikanum at finna fram til umbidnu málini ella skjølini, jbr. § 4, stk. 3. Klagarin bað um innlit í øll skjøl, sáttmálar og samskifti við veitaran í málinum um nýggja heimasíðu. Eingin ivi kann tí vera um, at umbøn hansara leyk krøvini í § 4, stk. 3. Ivaðist Kringvarpið í, hvat tað var, sum klagarin ynskti at fáa innlit í, hevði Kringvarpið sambært vegleiðingarskylduni í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini skyldu til at venda sær til klagaran fyri at biðja hann útgreina hetta, eins og Kringvarpið í skrivi til mín 25. februar 2010 ásannar, at tað átti at havt gjørt.*

*Grundgeving*
*Sambært § 21 í fyrisitingarlógini (Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) skal ein skrivliga fráboðað avgerð hava eina grundgeving uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti. § 23, stk. 1 og 2 í lógini seta hesi krøv til grundgevingina:*

> *„§ 23. Ein grundgeving fyri eini avgerð, skal hava eina tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin er grundað á. Í tann mun, avgerðin eftir hesum reglum hvílir á eini fyrisitingarligari meting, skal grundgevingin eisini tilskila tey høvuðsfyrilit, ið hava verið avgerandi fyri útinningina av metingini.*
> *Stk. 2. Grundgevingin skal eisini um neyðugt hava eina stutta frágreiðing viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum, sum hava havt stóran týdning fyri avgerðina.“*

*Sambært hesum skal ein fullfíggjað grundgeving vera eina frágreiðing uppá, hví avgerðin fekk ta innihald, hon fekk.*

*Í avgerðini tann 22. oktober 2009 endurgevur Kringvarpið stórt sæð bert ásetingarnar í kringvarpslógini og innlitslógini uttan at greiða nærri frá, hvørji atlit hava verið avgerandi fyri metingina. Eg meti ikki hesa grundgevingina lúka krøvini í § 23. Tað sama er galdandi fyri grundgevingina hjá Mentamálaráðnum, sum uttan at vísa til*

*viðkomandi lógarásetingarnar bert endurgevur grundgevingina hjá Kringvarpinum.*

*Samanumtikið*
*Samanumtikið fari eg at geva Kringvarpi Føroya og Mentamálaráðnum eina átalu fyri viðgerðina av hesum máli.*

*Í skrivi til mín, dagfest 5. februar 2010, ásannar Kringvarpið, at tað í sambandi við seinnu kæruna til Mentamálaráðið í november 2009 fekk kunnleika til útgreiningina av innlitsáheitanini, og at Kringvarpið er sinnað at svara spurningunum. Tað undrar meg tískil, at Kringvarp Føroya ikki longu hevur tikið innlitsáheitanina uppaftur til viðgerðar, og fari eg tí at mæla Kringvarpi Føroya til at gera hetta við útgangsstøði í útgreiningini hjá klagaranum í skrivinum til Mentamálaráðið, dagfest 12. november 2009.*

*Eg fari samstundis at heita á Kringvarp Føroya um at lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð. Burtursæð frá hesum haldi eg ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið í løtuni.*

## 11.4 Handfaring hjá Hvalbiar kommunu av innlitsáheitan

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um vantandi innlit í mál hjá Hvalbiar kommunu. Tá klagað varð til umboðsmannin vóru gingin 2 ár og 6 mánaðir, síðani klagarin sendi kommununi innlitsáheitanina. Um orsøkina til at málið hevði drigið út segði kommunan, at táverandi kommunuskrivarin og borgarstjórin ikki vóru í starvi longur, og at tað var trupult hjá øðrum at leita fram skjøl í skjalaskipanini. Umboðsmaðurin vísti á, at sambært § 20, stk. 1 í kommunustýrislógini er borgarstjórin dagligur leiðari av kommunalu fyrisitingini og hevur ábyrgd av, at umsitingin er virkisfør og at mál ikki taka óneyðuga langa tíð at viðgera. Víst varð somuleiðis á, at skjalaskipanin skal innrættast soleiðis, at hon í sjálvum sær ikki avmarkar rættin til innlit. Grundað á frágreiðingina frá kommununi metti umboðsmaðurin ikki skjalaskipanina hjá kommununi tryggja hesi viðurskifti. Kommunan gav undir umboðsmansviðgerðini klagaranum innlit, men umboðsmaðurin metti ikki at innlit var givið í øll tey umbidnu skjølini og heitti á kommununa um at taka innlitsáheitanina uppaftur til viðgerðar. Umboðsmaðurin vísti samstundis á, at ein avgerð, sum ikki til fulnar gongur partinum á møti sbrt. §§ 21 og 23 í fyrsitingarlógini skal grundgevast. Umboðsmaðurin gav Hvalbiar kommunu eina álvarsliga átalu fyri drúgvu viðgerðartíðina. Av tí at talan var um álvarsom brek við viðgerðini av málinum, boðaði umboðsmaðurin samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í kommunumálum frá niðurstøðu sínari.* ***(J. nr. 201000034)***

## Klagan

Við skrivi, dagfest 27. februar 2010 hevur A sent umboðsmanninum eina klagu um ymisk viðurskifti viðvíkjandi Hvalbiar kommunu. Umboðsmaðurin tók bert tann partin av klaguni til viðgerðar, sum snúði seg um vantandi innlit, og tískil verður bert hesin parturin av klaguni endurgivin.

> „**Kæra viðv. Hvalbiar kommunu.**
> Undirritaði vil hervið kæra … um manglandi innlit í mál, sum hava við kommununa at gera.

Eg eri sjálvur valdur limur í Hvalbiar bygdaráð og havi ferð eftir ferð spurt kommununa um:

1. Hvat umvælingin av nýggja kommunala fyristingarbygninginum hjá kommununi kostaði.
2. Gerð av graslíkisvølli í Sandvík og gerð av vegi til sethúsini hjá B.

Sí hjáløgd skriv til kommununa og svarskriv frá kommununi um nevndu mál. Hóast kommunan sigur seg vilja geva alment innlit í málini, so havi eg enn onki fingið at vita um nevndu mál uttan tað, at eg havi fingið sendandi roknskapirnar hjá kommununi fyri árini har arbeiðini blivu gjørd, men hesar roknskapir hevði eg kunnleika til frammanundan sum limur í bygdarráðnum, og nevndu upplýsingar kunnu ikki lesast úr roknskapunum.

… eg fekk svar frá kommununi tann 14. september 2009, har tey spyrja, hvat eg vil hava innlit í, hetta havi eg greitt frá í áðurnevnda skrivi. Higartil havi eg onki innlit fingið í tilfarið, eg havi biðið um.
…

Skrivini, sum verða umrødd í klaguni, eru endurgivin undir málsgongdini.

## Málsgongd

A sendi tann 8. september 2007 Hvalbiar kommunu soljóðandi innlitsáheitan:

„**Áheitan um innlit í fyrisitingina.**
Vísandi til lógina um innlit í almennu fyrisitingina verður hervið sett framm áheitan um innlit í fylgjandi mál:

1. Keyp og umvæling av nýggja kommunala fyrisitingar- og goymslubygninginum hjá Hvalbiar kommunu (húsini hjá C í …).
2. Gerð av graslíkisvølli í … .

3. Gerð av vegi v.m. til sethúsini hjá B, Hvalba.

Sett verður fram áheitan um:

a. avrit av øllum fundarfrásagnum frá nevndar- og bygdaráðsfundum, har málini 1-3 eru umrødd,
b. avrit av øllum kostnaðarmetingum, útbjóðingartilfari og innkomnum tilboðum í sambandi við einstøku umvælingararbeiðini, sum eru gjørd á kommunala fyrisitingar- og goymslubygningin, umframt avrit av teimum skjølum, sum skjalprógva kostnaðin á einstøku arbeiðunum og sum skjalprógva, til hvønn peningur fyri einstøku arbeiðini er útgoldin
c. avrit av kostnaðarmeting, útbjóðingartilfari og innkomnum tilboðum í sambandi við gerð av graslíkisvøllinum í ….
d. avrit av teimum rokningum, ið eru goldnar fyritøkuni D seinastu 3 árini,
e. avrit av avtalu millum fyritøkuna D og Hvalbiar Kommunu, ið m.a. fevnir um graviarbeiði v.m. í sambandi við nýggja graslíkisvøllin í …"

Hvalbiar kommuna svaraði innlitsáheitanini tann 25. september 2007 við soljóðandi skrivi:

„**Við. áheitan um innlit í fyrisitingina**
Áheitan tygara, dagfest 8. september 2007, viðv. at fáa innlit í niðanfyri nevndu mál:

1. Keyp og umvæling av nýggja kommunala fyrisitingar- og goymslubygninginum hjá Hvalbiar kommunu
2. Gerð av graslíkisvølli í …
3. Gerð av vegi v.m. til sethúsini hjá B

varð viðgjørd á fundi 25.09.07.

Samtykt varð at geva innlit í omanfyri nevndu mál.

Orsakað av at kommunan í løtuni flytur í onnur høli, verða umbidnu skjølini send tygum seinni í heyst.

Hervið verður sagt frá hesum.“

Tann 20. mai 2009 sendi A Hvalbiar kommunu soljóðandi rykkjara í málinum:

„**Viðv. áheitan um alment innlit v.m.**
Víst verður til hjálagda skriv viðv. áheitan um innlit dagfest 8. september 2007.

Nú eru skjótt tvey ár síðan eg sendi kommununi omanfyri nevnda skriv, og enn havi eg onki svar fingið. Eg fari hervið at loyva mær at spyrja, nær svar kann væntast, og kann í hesum sambandi upplýsa, at eg havi tosað við Løgtingsins umboðsmann um málið. Eg vil tó gera enn eina roynd at fáa svar frá kommununi, áðrenn eg sendi umboðsmanninum eina formliga klagu.
…“

Hvalbiar kommuna sendi tann 14. september 2009 A soljóðandi skriv:

„**Viðv. tykkara áheitan um alment innlit.**
Vísandi til skriv tykkara dagfest 8. september 2007 og 20. mai 2009 verður hervið boðað frá, at tú hevur krav uppá alment innlit sambært lóg um alment innlit.

Tá hetta er sagt, mugu vit gera vart við, at skjølini, sum tú ynskir innlit í, eru sera nógv og umfatandi, og við atliti at tí serligu støðu, sum kommunuskrivstovan seinastu tíðina hevur verið í, skulu undirritaðu hervið spyrja, um møguleiki er fyri, at tú kanst greiða gjøllari frá teimum skjølum, sum tú ynskir innlit í, soleiðis at óneyðug tíð ikki verður nýtt uppá at leita eftir skjølum, sum tú kortini ongan áhuga hevur í.

Hetta málið hevur verið trupult, men vón okkara er, at vit nú í semju kunnu finna eina loysn.“

Tann 8. apríl 2010 boðaði Hvalbiar kommuna A frá, at meginparturin av umbidnu skjølunum lógu klár á kommunuskrivstovuni at hyggja ígjøgnum.

Í seinnu helvt av mai var A á kommunuskrivstovuni og fekk at vita, at kommunan var ikki liðug at avrita øll skjølini, men at hann skjótt skuldi fáa tey.

Tann 15. juni 2010 ringdi Hvalbiar kommuna til A og boðaði frá, at umbidnu avritini lógu klár at heinta.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 10. mars 2010, varð klagan send Hvalbiar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Hvalbiar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 31. mars 2010 sendi Hvalbiar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „**Vedr. Deres j.nr. … – klage fra A.**
> Under henvisning til Deres skrivelse af 10. marts 2010 skal kommunen herved meddele, at man som også meddelt A ved skrivelse af 14. september 2009 er indstillet på at imødekomme den fremsatte anmodning om aktindsigt.
>
> Årsagen til, at dette ikke allerede er sket, er nærmere den, at den kommunale administration siden As anmodning om aktindsigt dateret 8. september 2007 er gennemgående udskiftet, idet hverken den nusiddende borgmester eller bygderådssekretær besad poster i kommunen på daværende tidspunkt, hvilket også A som bygderådsmedlem er bekendt med. … Problematikken er den, at der ikke har været anvendt noget elektronisk journaliseringssystem, hvilket selvsagt for andre end netop den pågældende bygderådssekretær gør det vanskeligt at finde konkrete bilag frem. Hensigten med skrivelsen af september

2009 til A var at imødekomme dennes anmodning om aktindsigt men med hjælp til at konkretisere, hvilke bilag der nærmere var tale om for lettere at kunne finde frem til de pågældende bilag. I den forbindelse bemærkes, at der i modsat fald er tale om en ikke ubetydelig mængde af bilag. En skrivelse som A imidlertid ikke siden modtagelsen af de anførte regnskaber har ønsket at reagere på. Det kan således konstateres, at den første officielle reaktion på skrivelsen af september 2009 er fremkomsten af den til Dem indgivne klage.

A har samtidig hermed modtaget skrivelse med oplysning om, at hovedparten af de bilag, hvori han har anmodet om aktindsigt, ligger klar til gennemsyn på kommunekontoret.

Afslutningsvis skal det således anføres, at kommunen har til sinde at imødekomme den fremsatte anmodning om aktindsigt i sin helhed, men at administrationen under henvisning til de ovenfor nævnte forhold har brug for yderligere tid til at finde de resterende bilag frem. Jeg går herefter ud fra, at ombudsmanden ikke længere har nogen interesse i udlån af de pågældende bilag, idet jeg i modsat fald gerne hører fra Dem på ny. "

Við skrivi, dagfest 6. apríl 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá Hvalbiar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 14. apríl 2010 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„Viðv. klagu dagfest 27. februar 2010, j.nr. 201000034/6.
Víst verður til skriv tykkara, dagfest tann 6. apríl 2010 og viðmerkingar frá Hvalbiar Kommunu til klaguna.

Grundgevingin hjá kommununi fyri at eg ikki enn havi fingið alment innlit er tann, at øll umsitingin hjá kommununi er útskift. Henda grundgevingin heldur ikki, tí longu í 2008 á regluligum bygdaráðsfundi spurdi eg táverandi skrivaran eftir málinum og

fekk longu tá at vita, at øll skjølini undantikið tvær rokningar, ið skuldu váttast, vóru tøk. Hetta er longu tvey ár síðan, og umsitingin hjá kommununi kann ikki pástanda, at tað tekur tvey ár at fáa vátta tvær rokningar og vísa til mongdina av skjølum, ið skulu leitast fram, tá tey longu í 2008 vóru tøk.

Tá tað víðari í viðmerkingunum verður sagt, at eg ikki havi gjørt vart við meg fyrrenn í klaguni dagfest 27. februar 2010 til Løgtingsins Umboðsmann, so er hetta heldur ikki rætt, eg havi ferð eftir ferð munnliga spurt eftir skjølunum, og eg havi eisini munnliga boðað borgarstjóranum frá, at um eg ikki fekk innlitið, so fór eg at senda Umboðsmanninum klagu um málið. Sostatt gav henda munnliga fráboðan mín um at eg fór at kæra málið heldur ikki úrslit.

Í skrivi dagfestum 8. apríl 2010 boðar kommunan frá, at „meginparturin“ av skjølunum sum eg havi biðið um innlit í liggja klár, og at eg kann koma at hyggja í tey, tá skrivstovan er opin. Eg má viðganga at sum gongdin í málinum hevur verið, eri eg alt annað enn tryggur við støðuna. Fyri at tryggja at eg veruliga fái innlit í skjølini eg havi biðið um innlit í, fari eg tí at heita á Umboðsmannin um at syrgja fyri, at kommunan sendir Umboðsmanninum øll skjølini í málinum, síðan kunnu skjølini sendast mær. Hetta tryggjar í hvussu so er, at eg veruliga fái innlit í øll skjølini.“

Við skrivi, dagfest 19. apríl 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Hvalbiar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar. Umboðsmaðurin minti samstundis áheitanina kommununa á at senda umboðsmanninum avrit av teimum skjølum, sum A hevði biðið um innlit í. Umboðsmaðurin boðaði sama dag A frá, at umboðsmaðurin einans sendir klagarum frágreiðingar frá myndugleikunum, og at hann mátti venda sær til Hvalbiar kommunu, um hann ynskti at fáa útflýggjað avrit av umbidnu skjølunum.

Tann 3. mai 2010 sendi Hvalbiar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Vedr. Sagsnr. …-A:**
Under henvisning til Deres skrivelse af 19. april 2010 vedlagt kopi af skrivelse af 14. april 2010 fra A, skal det herved meddeles, at det med kendskab til de foreliggende omstændigheder anses for formålsløst at gå ind i en dybere diskussion vedrørende de nærmere omstændigheder omkring udskiftningen af kommunens administration og dermed årsagen til, at anmodningen om aktindsigt ikke tidligere er imødekommet. Der henvises i det hele til vor skrivelse af 31. marts 2010. Tilbage står, at kommunen som også tidligere meddelt er indstillet på at imødekomme As anmodning om aktindsigt så hurtigt, som dette praktisk kan lade sig gøre under hensynstagen til de tidligere nævnte besværligheder med konkret at finde de pågældende bilag.

Som det fremgår af vedlagte kopi af skrivelse af 8. april 2010, er det meddelt A, at hovedparten af de ønskede bilag ligger klar til gennemsyn på kommunekontoret, hvilken mulighed A imidlertid åbenbart ikke ønsker at gøre brug af.

…
Afslutningsvis bemærkes, at kommunen nu tager skridt til at fremsende kopi af de ønskede dokumenter."

Tann 3. mai 2010 vórðu viðmerkingarnar hjá Hvalbiar kommunu sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Í telefonsamrøðu 11. juni 2010 greiddi klagarin umboðsmanninum frá, at hann í seinni helvt av mai hevði verið á kommunuskrivstovuni og fingið at vita, at kommunan ikki var liðug at avrita skjølini. Hann hevði einki frætt aftur frá Hvalbiar kommunu.

Tann 11. juni 2010 minti umboðsmaðurin Hvalbiar kommunu á, at kommunan tann 19. apríl 2010 varð biðin um at lata umboðsmanninum avrit av skjølunum, sum klagarin hevði biðið um innlit í, og at kommunan tann 3. mai hevði boðað frá, at hon fór at taka

stig til at senda umboðsmanninum skjølini. Umboðsmaðurin bað Hvalbiar kommunu um at lata sær skjølini beinanvegin.

Tann 16. juni 2010 bar Hvalbiar kommuna umboðsmanninum avrit av umbidnu skjølunum.

Í telefonsamrøðu 21. juni 2010 boðaði klagarin umboðsmanninum frá, at hann hevði fingið skjølini frá Hvalbiar kommunu. Hann segði seg vera stak misnøgdan við avgreiðsluna av innlitsáheitanini, tí sambært honum var útflýggjaða skjalatilfarið ógvuliga mangulfult í mun til tað, sum hann hevði biðið um.

Tann 22. juni 2010 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## *Niðurstøða*

*Hendan klagan snýr seg um handfaringina hjá Hvalbiar kommunu av eini innlitsáheitan í ymisk mál um keyp og bygging hjá kommununi. Tá klagað varð til mín vóru gingin 2 ár og 6 mánaðir, síðani klagarin sendi kommununi innlitsáheitanina.*

*Góðar tvær vikur eftir at hava móttikið innlitsáheitanina boðar Hvalbiar kommuna klagaranum frá, at avgerð er tikin um at geva innlit, men orsakað av at kommunala fyrisitingin skal flyta í onnur høli, verða skjølini send honum seinni um heystið 2007.*

*Eftir at klagarin í mai 2009 sendi kommununi eina áminning um málið, biður kommunan í september 2009 klagaran um at greiða gjøllari frá teimum skjølum, sum hann ynskti innlit í. Sambært § 4, stk. 3 í innlitslógini skal ein innlitsáheitan skila til tey skjøl ella tað mál, sum klagarin ynskir at fáa innlit í. Hetta fyri at tað skal vera gjørligt hjá myndugleikanum at finna fram til umbidnu skjølini. Ein myndugleiki kann t.d. ikki seta sum krav, at viðkomandi skal vísa til nummur í skjalaskipanini ella dagfesting á skjølum. Eg meti meginpartin av innlitsáheitanini, dagfest 8. september 2007, vera so mikið ítøkiligan og neyvt útgreinaðan, at eingin ivi kann vera um, hvørji skjøl ella mál klagarin bað um at fáa innlit í.*

*Hvalbiar kommunu hevur í frágreiðing til umboðsmannin greitt frá, at orsøkin til at málið dróg út m.a. var, at táverandi kommunuskrivarin og borgarstjórin ikki eru í starvi longur, og at tað er trupult hjá øðrum at leita fram skjøl í skjalaskipanini. Hetta meti eg ikki vera eina haldbara grundgeving. Eg fari í hesum sambandi at vísa á, at sambært § 20, stk. 1 í kommunustýrislógini (løgtinsglóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri) er borgarstjórin dagligur leiðari av kommunalu fyrisitingini. Hetta merkir, at hann hevur ábyrgd av, at umsitingin er virkisfør, og hann skal m.a. syrgja fyri, at arbeiðið er lagt til rættis á hóskandi hátt, og at mál ikki taka óneyðuga langa tíð at viðgera.*

*Hvat viðvíkur trupulleikanum hjá Hvalbiar kommunu at finna fram skjøl ella mál í skjalaskipanini, so eru almennir myndugleikar bundnir av meginregluni um at viðgera eins mál eins. Hetta treytar, at starvsfólkini hava kunnleika til, ella hava møguleika at kunna seg við, hvussu mál av sama slag áður eru viðgørd hjá myndugleikanum. Skjalaskipanin skal somuleiðis innrættast soleiðis, at hon í sjálvum sær ikki avmarkar rættin til innlit. Grundað á frágreiðingina frá kommununi meti eg støðuna viðv. skjalaskipanini hjá Hvalbiar kommunu vera sera óhepna, tí eftir øllum at døma tryggjar skjalaskipanin ikki hesi viðurskifti.*

*Hvalbiar kommuna hevur, eftir at klagað varð til mín, givið klagar-anum innlit. Klagarin hevur í hesum sambandi boðað frá, at hann metir seg ikki hava fingið innlit í øll tey umbidnu skjølini. Eg havi havt høvið at gjøgnumganga skjølini, og samanborið við innlitsáheitanina hevur kommunan einans latið klagaranum innlit í skjøl, sum viðvíkja málinum um fyrisitingarbygningin hjá kommununi. Kommunan sæst ikki at hava givið innlit í skjøl, sum viðvíkja granslíkisvøllinum í Sandvík ella gerð av vegi til eini ávís hús í Hvalba ella umbidnar frásagnir frá nevndar- og bygdaráðsfundum. Hvalbiar kommuna hevur hvørki greitt umboðsmanninum ella klagaranum frá, hvør orsøkin til hetta er.*

*Vísandi til hetta fari eg at heita á Hvalbiar kommunu um at taka innlitsáheitanina uppaftur til viðgerðar og lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð. Eg fari í hesum sambandi at vísa á, at ein skrivlig avgerð um innlit, sum ikki til fulnar gongur partinum á møti, skal grundgevast,*

*jbr. §§ 21 og 23 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg).*

*Samanumtikið meti eg tað vera sera átaluvert, at tað tók Hvalbiar kommuna hálvttriðja ár at avgreiða innlitsáheitanina frá klagaranum, og eg fari at geva kommununi eina álvarsliga átalu fyri drúgvu viðgerðartíðina.*

*Av tí at eg haldi talan vera um álvarsom brek við viðgerðini av málinum, havi eg samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini boðað formansskapinum í Løgtinginum, løgmanni og landsstýrismanninum í kommunumálum frá niðurstøðu mínari.*

# *28. Starvsfólka- og arbeiðsmarknaðarmál v.m.*

## 28.1 Vantandi løn undir sjúku í sambandi við viðgerð fyri barnloysi

*Skriv viðv. klagu um vantandi løn undir sjúku í samband við viðgerð fyri barnloysi (**J. nr. 200900023**)*

*Tygum hava 15. mai 2009 klagað til umboðsmannin um, at tygum ikki hava fingið løn ta tíð, tygum vóru burtur úr arbeiði vegna viðgerð fyri barnloysi.*

*Tað framgongur av málinum, at tygum starvast … í Heimatænastuni, og at tygum sambært sjúkraváttan eitt tíðarskeið í … vóru sjúkraskrivað í … í sambandi við viðgerð á sjúkrahúsi. Sambært upplýsingum frá tygum var talan um viðgerð uttanlands fyri barnloysi (IVF-viðgerð).*

*Nærverk tók 27. apríl 2009 avgerð um, at tygum høvdu ikki rætt til løn nevnda tíðarskeið, tí talan var ikki um sjúku. Almannamálaráðið staðfesti avgerðina við skrivi, dagfest 11. mai 2009, og vísti til tulkingina hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum um, at IVF-viðgerð ikki er at meta sum sjúka í sáttmálahøpi.*

*Eg havi í sambandi við viðgerðina av klaguni fingið skjølini í málinum til láns.*

*Sambært setanarskrivi tygara er sáttmálin millum Fíggjarmálaráðið og Heilsuhjálparafelag Føroya galdandi fyri starvssetan tygara.*

*§ 15, stk. 1 í sáttmálanum ásetir, at løn undir sjúku verður veitt eftir reglunum í løgtingslóg um starvsmenn (løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 2. juni 1970).*

*Í sáttmálanum er ongin áseting, sum viðgerð spurningin um løn undir sjúku í sambandi við kanning ella viðgerð fyri barnloysi.*

*Viðkomandi ásetingin í starvsmannalógini er § 5, stk. 1, sum er soljóðandi:*

> *„§ 5. Verður starvsmaður orsakað av sjúku ikki førur fyri at gera sítt arbeiði, er hansara tænastuvanrøkt at meta sum lógligt forfall, uttan so, at starvsmaður í starvstíðini hevur verið úti eftir sjúkuni við vilja ella grovum ósketni, ella at hann við svik hevur dult, at hann hevur gingið við sjúkuni.“*

*Eins og nevnt er í vegleiðing frá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum um løn undir sjúku (2009-1) 3. pkt. er talan um lógligt forfall, um sjúkan læknaliga kann eyðkennast sum sjúka, og sjálv sjúkan grundar fráveruna. Talan er ikki um lógligt forfall, um sjúkan t.d. er fingin við vilja. Hetta eru t.d. viðgerðir, ið ikki eru læknaliga grundaðar, men bert verða framdar eftir ynski starvsmansins. Sum dømi um hetta verða í vegleiðingini nevnd sterilisering og kosmetiskar skurðviðgerðir.*

*Í skjølunum, sum eg havi fingið til láns frá Almannamálaráðnum, sæst, at aðalráðið hevur viðgjørt mál av hesum slag ymiskt. Í onkrum føri hevur ráðið veitt starvsfólki løn eftir reglunum um løn undir sjúku í sambandi við viðgerð fyri barnloysi, og í øðrum føri hava starvsfólk fingið játtað frí uttan løn.*

*Mær kunnugt eru ongar fordømisskapandi avgerðir ella dómar, sum viðgera um og í so fall undir hvørjum umstøðum viðgerð fyri barnloysi er at meta sum sjúka sambært § 5 í starvsmannalógini, og sum gevur starvsfólki rætt til løn fyri fráveru av hesi orsøk.*

*Í samskiftinum við Lønardeildina um mál tygara hevur Almannamálaráðið víst á, at rættarstøðan í Danmark er hon, at starvsfólk hava rætt til frí við løn í sambandi við IVF-viðgerð. Føroyska lógin um starvsmenn hevur sína fyrimynd í og er meinlík donsku starvsmannalógini á hesum øki (lov om retsforholdet mellem arbejdsgivere og funktionærer). Mær*

*kunnugt er eingin avgerð ella dómur, sum viðgerð hendan spurningin í mun til donsku lógina, og ógreiðan um hendan spurning sæst aftur í løgfrøðiligu bókmentunum, m.a. í Funktionærret, 3. udg., DJØF, har Lars Svenning Andersen skrivar soleiðis á bls. 328:*

> *„… Et andet eksempel på grænsetilfælde er indgreb mod barnløshed. Undersøgelser af årsagen til barnløshed eller en operation, der har til formål at udbedre en unormalitet, vil kunne begrunde en sygemelding. … Man kan rejse det spørgsmål, om en kunstig befrugtning af en kvinde, der ved tidligere undersøgelser har fået konstateret, at intet er unormalt, også vil kunne begrunde en ret til løn under sygdom, … Visse typer operationer, f.eks. sterilisation, som ikke er lægeligt begrundet, og som medfører sygefravær, betragtes som „selvforskyldt sygdom“, jf. … “*

*Tó havi eg skilt, at fleiri starvsbólkar, sum eru fevndir av sáttmála við danska Fíggjarmálaráðið, hava rætt til løn undir sjúku í sambandi við kanning ella viðgerð fyri barnloysi. Hesi rættindi byggja tó ikki á lóg men á avtalu millum avvarðandi sáttmálapartar.*

*Sum nevnt vísti Almannamálaráðið í kæruavgerðini til tulkingina hjá Lønardeildini um at IVF-viðgerð ikki er at meta sum sjúka. Í skrivi til Almannamálaráðið, dagfest 25. februar 2009, vísir Lønardeildin til omanfyri nevndu vegleiðing og viðmerkir í framhaldi av hesum:*

*„Í útgangsstøði er ísáðing tí ikki at meta sum sjúka, tá ið tað verður gjørt bara eftir ynski starvsfólksins. Starvsfólkið hevur tí eftir okkara meting einki krav um frí við løn.“*

*Sambært upplýsingum frá lækna, sum tygum hava latið mær, er staðfest, at tygum vegna sjúku(r) hava „niðursettan fertilitet“. Hóast undirliggjandi læknaligar orsøkir sostatt eru fyri, at tygum fóru undir IVF-viðgerð, skilji eg støðutakanina hjá Lønardeildini soleiðis, at sjálv viðgerðin fyri barnloysi verður ikki mett at vera læknaliga grundað, men bert framd eftir egnum ynski.*

*Til samanberingar kann nevnast at Kærunevndin í almanna- og*

*heilsumálum metir ikki viðgerð fyri barnloysi sum sjúku, sum gevur rætt til løn sambært § 2, stk. 1 í dagpeningalógini, sí málnr. 07-01-153-46, 08-01-153-64 og 08-01-153-68. Í tveimum av nevndu málunum staðfesti kærunevndin avgerðirnar hjá Almannastovuni um at nokta dagpening við teirri grundgeving, at hormonviðgerð ikki verður sæð sum sjúkuviðgerð í dagpeningahøpi. Í tí eina málinum broytti kærunevndin avgerðina hjá Almannastovuni við teirri grundgeving, at kvinnan eisini var sjúkraskrivað fyri at umganga strongd, og at hon av hesi orsøk varð mett ikki at vera før fyri at røkja starv sítt.*

*Sambært § 5 í umboðsmanslógini er tað uppgávan hjá umboðsmanninum at hava eftirlit við, at umsitingin ikki ger mistøk, vanrøkir sínar skyldur ella fremur órætt móti einstaka borgaranum. Av tí at spurningurin um rætt til frí við løn í sambandi við IVF-viðgerð sambært § 5 í starvsmannalógini sum nevnt er óavkláraður, og eg ikki annars havi grundarlag fyri at finnast at tulkingini hjá Lønardeildini, fái eg ikki hjálpt tygum við hesum partinum av klagu tygara.*

*Saman við klaguni lótu tygum mær eisini eina aðra sjúkravváttan. Av henni framgongur, at tygum sum ein (óvæntað) avleiðing av IVF-viðgerðini vórðu løgd inn á sjúkrahús í tveir dagar. Eg dugi ikki at síggja, at Almannamálaráðið sjálvstøðugt hevur viðgjørt, um tygum hava rætt til løn undir sjúku fyri hesar báðar dagarnar. Eg havi tí í dag heitt á Almannamálaráðið um at taka hendan partin av kæru tygara uppaftur til viðgerðar. Eg havi somuleiðis biðið ráðið lata meg frætta úrslitið av hesi viðgerð.*

*Avrit av hesum skrivi er sent Almannamálaráðnum og Lønardeildini.*

*Ein samandráttur av hesum skrivi verður í næstum almannakunngjørdur á heimassíðu umboðsmansins í navnleysum líki.*

Almannamálaráðið hevur tann 17. desember 2009 boðað umboðsmanninum frá, at ráðið tekur spurningin um rætt til løn í samband

við at klagarin sum avleiðing av viðgerðini var innløgd á sjúkrahús uppaftur til viðgerðar.

## 28.2 Handfaring hjá Umhvørvisstovuni og Innlendismálaráðnum av uppsagnarmáli

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um avgerðina at siga einum starvsfólki úr einum vardum starvi. Umhvørvisstovan grundgav uppsøgnina við sjúku í meira enn 120 dagar og áhaldandi óregluligari uppmøting. Í kæruavgerðini staðfesti Innlendismálaráðið uppsøgnina við áhaldandi óregluligari uppmøting sum grundgeving. Ósemja var um arbeiðstíðarviðurskiftini hjá fólki í vardum starvi, men grundað á frágreiðing frá Almannastovuni og starvssetanarsáttmálan metti umboðsmaðurin einki grundarlag vera fyri fatanini um, at starvsfólk í vardum starvi bert hava skyldu at arbeiða teir tímarnar, sum svara til, hvussu nógv arbeiðsgevarin rindar av lønini. Umboðsmaðurin var samdur við Innlendismálaráðið um, at áhaldandi óreglulig uppmøting er brot á almennu setanartreytirnar, og at uppsøgnin av hesi orsøk var saklig og lóglig. Umboðsmaðurin vísti á, at Umhvørvisstovan kundi ikki nýta 120-daga regluna í starvsmannalógini sum grundgeving fyri uppsøgn vegna sjúku, av tí at henda regla ikki var avtalað at galda fyri setanina, og hetta átti Innlendismálaráðið at hava gjørt Umhvøvisstovuna varuga við. Umboðsmaðurin tók ikki støðu til, um grundarlag annars var fyri at siga klagaran úr starvi vegna sjúku. Umboðsmaðurin gav Innlendismálaráðnum eina átalu fyri einki at hava gjørt við málið í eitt heilt ár, eftir at partshoyringin í sambandi við kæruviðgerðina var liðug. Burtursæð frá givni átaluni gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið. (**J. nr. 200900060**).*

Einans niðurstøðan verður almannakunngjørd.

## *Niðurstøða*

*Viðgerð mín av hesari klaguni snýr seg um grundarlagið undir uppsøgnini av einum starvsfólki á Umhvørvisstovuni, sum var í vardum starvi, umframt viðgerðina hjá Innlendismálaráðnum av málinum.*

*Umhvørvisstovan segði klagaranum úr starvi vegna sjúku og áhaldandi óregluliga uppmøting, meðan Innlendismálaráðið staðfesti uppsøgnina við áhaldandi óregluligari uppmøting sum grundgeving.*

*Tað framgongur av málinum, at Umhvørvisstovan og klagarin høvdu ymiskar fatanir av arbeiðstíðarviðurskiftunum hjá fólki í vardum starvi,*

*t.e. hvussu nógvar tímar starvsfólk í vardum starvi hava skyldu at arbeiða. Klagarin metti seg bert hava skyldu at arbeiða 1/3 av avtalaðu arbeiðstíðini, sum svaraði til tann partin av lønini, sum Umhvørvisstovan rindaði. Umhvørvisstovan metti hinvegin útgangsstøðið vera avtalaðu arbeiðstíðina í starvssáttmálanum millum Almannastovuna, klagaran og Umhvørvisstovuna, sum var ásett til 39 tímar.*

*Eg havi í sambandi við viðgerðina av hesari klaguni fingið eina frágreiðing frá Almannastovuni um skipanina við vardum størvum. Almannastovan greiðir m.a. soleiðis frá skipanini:*

> ***„Vart starv***
> *Vart starv er ein fyriskipan, ið skal vera við til at tryggja persónum, sum varandi hava skerdan arbeiðsførleika, luttøku á arbeiðsmarknaðinum. Meginreglan er, at vart starv er tann síðsta fyriskipanin, ið sett verður í gongd. Tað er, at fyrst skal roynast at finna hóskandi arbeiðsuppgávur til persónin, ið hevur skerdan førleika. Um hetta ikki letur seg gera, skal endurbúgving/arbeiðsroynd roynast. Verður mett, at tað er útlitaleyst at royna hesi átøk, skal støða takast til, um grundarlag er fyri vardum starvi. Í slíkum føri skal í fyrstu atløgu metast, um arbeiðsførleikin er varandi skorin, og í aðru atløgu taka støðu til, hvussu nógv arbeiðsførleikin er skerdur við atliti at lønarbýti millum arbeiðsgevaran og Almannastovuna.*
>
> *… Tá ið arbeiðsgevari verður funnin, verður avtala gjørd millum arbeiðsgevaran, viðkomandi og Almannastovuna um arbeiðstíðir, møguligar arbeiðsuppgávur, og um lønarískoytið skal vera 1/3, 1/2 ella 2/3 í mun til arbeiðsførleikan.*
>
> ***Lønar- og setanarviðurskifti***
> *Viðkomandi, ið er settur í vart starv, er settur sambært sáttmála á økinum. Arbeiðsgevarin rindar lønina og fær avtalaða lønarískoytið endurgoldið frá Almannastovuni. At arbeiðsgevarin fær endurrindað ávísan part av lønini ger ikki, at tann, ið er í vardum starvi, ikki er settur undir teimum vanligu treytunum, ið eru galdandi á viðkomandi sáttmálaøki.*

*… Er orsøkin møguliga tann, at uppsøgnin er grundað á, at viðkomandi ikki megnar at arbeiða avtalaðu tíðina, so er møguleiki fyri at hyggja nágreiniligari at, um viðurskiftini kunnu loysast við, at avtala eitt annað lønarbýtið millum arbeiðsgevaran og Almannastovuna; men Almannastovan hevur ikki heimild til at áleggja arbeiðsgevarum at hava fólk í vardum størvum. …“*

*Sambært frágreiðingini frá Almannastovuni verður lønarbýtið sett eftir, hvussu nógv arbeiðsførleikin er skorin. Hetta skilji eg á tann hátt, at arbeiðsgevarin kann ikki vænta at fáa fulla arbeiðsúrtøku frá starvsfólki í vardum starvi í mun til onnur starvsfólk, og at arbeiðsgevarin rindar fyri tað, sum hann kann væntast at fáa burturúr í mun til arbeiðsførleikan hjá viðkomandi. Sambært hesum er lønarbýtið millum arbeiðsgevaran og Almannastovuna ikki avgerandi fyri, hvussu nógvar tímar viðkomandi hevur skyldu at arbeiða.*

*Burtursæð frá lønarbýtinum kemur eitt vart starv undir vanligu treytirnar á viðkomandi sáttmálaøki og arbeiðsplássi, og hetta merkir, at starvsfólk í vardum starvi hevur skyldu at arbeiða avtalaðu arbeiðstíðina. Í ítøkiliga málinum var arbeiðstíðin avtalað at vera 39 tímar um vikuna, og hvørki í sáttmála ella í frágreiðing frá Almannastovuni er nakað, sum bendir á, at hetta ikki eisini skuldi vera veruliga arbeiðstíðin. Eg haldi tí einki grundarlag vera fyri fatanini um, at klagarin bert hevði skyldu at arbeiða 1/3 av avtalaðu arbeiðstíðini.*

*Sambært Leiðbeining um vard størv (dagf. 1. mai 2002) frá Almannamálaráðnum gevur skipanin við vardum størvum fólki møguleika at arbeiða undir tillagaðum viðurskiftum, har tryggjað verður, at varandi niðursetta arbeiðsførið verður fullnýtt. Tað er tískil greitt, at handfaringin av vardum størvum krevur ein størri smidleika enn aðrar starvssetanir, men eins og í øðrum starvssetanum er tað upp til arbeiðsgevaran at gera av, um starvið verður røkt á nøktandi hátt í mun til fortreytir og karmar fyri setanini. Umhvørvisstovan var sinnað at góðtaka eina ávísa óregluliga uppmøting, men metti fráveruna, sum ósemja annars ikki er um, vera so mikið umfatandi, at trupulleikar vóru við at skipa arbeiðið og finna hóskandi uppgávur, sum kundu leggjast til klagaran.*

* Eg eri samd við Innlendismálaráðnum í, at áhaldandi óreglulig uppmøting er brot á almennu setanartreytirnar, og at tað var sakligt og lógligt at siga klagaranum úr starvi av hesi orsøk.*

*Samsvarandi tí sum er nevnt frammanfyri um, at fólk í vardum starvi koma undir vanligu reglurnar, kunnu hesi eisini uppsigast vegna drúgva sjúkufráveru, um treytirnar fyri hesum eru loknar. Og hetta er galdandi óansæð um talan er um somu sjúku, sum av fyrstan tíð hevði við sær, at viðkomandi fór í vart starv, ella aðra sjúku.*

*Í uppsagnarskrivinum vísti Umhvørvisstovan til regluna um uppsøgn vegna sjúku í meira enn 120 dagar, jbr. § 5, stk. 2 í lógini um starvsmenn, sum er soljóðandi: „Tó kann vera fyrisett í skrivligum sáttmála í einstøkum tænastuviðurskiftum, at starvsmaður kann sigast upp við 1 mánað frest til uppathald, tá ein mánaður er úti, tá ið starvsmaður innan fyri eitt tíðarskeið av 12 fylgjandi mánaðum hevur tikið ímóti løn undir sjúku í 120 dagar tilsamans.“*

*Treytin fyri at nýta hesa reglu sum grundarlag fyri uppsøgn er sambært orðaljóðinum, at hon er avtalað at galda fyri einstøku starvssetanina, men sambært setanarsáttmálanum var hetta ikki gjørt í ítøkiliga málinum. Innlendismálaráðið átti tískil at havt gjørt Umhvørvisstovuna varuga við, at henda regla ikki kundi nýtast sum grundarlag fyri uppsøgn av klagaranum vegna sjúku. Grundað á, at eg eri samd við Innlendismálaráðið um, at tað var sakligt og lógligt at siga klagaran úr starvi við áhaldandi óregluligari uppmøting sum grundgeving, havi eg ikki viðgjørt, um Umhvørvisstovan annars hevði grundarlag fyri at siga klagaran úr starvi vegna sjúkufráveru.*

*Málsviðgerðartíðin í Innlendismálaráðnum*
*Endamálið við at ein borgari kann kæra eitt mál til hægri myndugleika er, at borgarin skal fáa eftirmett avgerðina. Av hesi orsøk er tað umráðandi, at ein kærumyndugleiki avgreiðir málið innan rímiliga tíð. Í hesum førinum er talan um kæru av eini uppsøgn, og tað er tí serliga tyngjandi fyri kæraran at bíða eftir eini avgerð.*

*Eftir at advokatur klagarans tann 7. mai 2008 sendi Innlendismála-*

*ráðnum viðmerkingar til frágreiðingina hjá Umhvørvisstovuni, hendi einki í málinum fyrr enn eitt ár seinni, tá Innlendismálaráðið tann 24. apríl 2009 tók avgerð í málinum. Innlendismálaráðið hevur greitt frá, at orsøkirnar til drúgva steðgin í málsviðgerðini vóru „sjúkufrávera hjá málsviðgera, at ongin tók yvir málið í sjúkutíðarskeiðnum, umframt ógreið avtala millum farandi og nýsett starvsfólk um avgreiðslu av hesum máli.“ Innlendismálaráðið hevur sum myndugleiki skyldu at tryggja, at mál verða viðgjørd og avgreidd innan rímiliga tíð, og eg fari at geva ráðnum eina átalu fyri einki at gera við málið í eitt heilt ár, eftir at partshoyringin var liðug.*

*Burtursæð frá givnu átaluni geri eg ikki meira við málið.*

# *V. Egin kanning*

## 30.1 Frágreiðing um avgerðir at løggilda grannskoðarar

*Løgtingsins Umboðsmaður hevur viðgjørt eitt mál um, at sjey umsøkjarar fingu løggilding sum grannskoðarar frá Skráseting Føroya í 2007. Umsøkjararnir fingu løggildingarnar, hóast teir ikki høvdu staðið eina serliga próvtøku, ið var ein av treytunum fyri at fáa løggilding sambært grannskoðaralógini.*

*Umboðsmaðurin tók við heimild í grein 6, stk. 5, í umboðsmanslógini málið upp, eftir at níggju navngivnir persónar høvdu klagað um, at teimum var noktað at fáa løggilding, hóast teir høvdu somu útbúgvingarligu og verksligu royndir sum umsøkjararnir, ið høvdu fingið løggildingar.*

*Frágreiðingin hjá umboðsmanninum fevnir um viðgerðina hjá Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum í málinum.*

*Skráseting Føroya noktaði upprunaliga at løggilda umsøkjararnar við teirri grundgeving, at teir høvdu ikki staðið serligu próvtøkuna. Avgerðirnar vórðu kærdar til Vinnumálaráðið, men orsakað av ógegni flutti løgmaður viðgerðina av kærunum til Innlendismálaráðið.*

*Innlendismálaráðið var í fyrstani samt við Skráseting Føroya um, at løggildingarnar áttu ikki at verða latnar. Seinni broytti ráðið støðu og heitti á Skráseting Føroya um at viðgera málini av nýggjum. Innlendismálaráðið metti Skráseting Føroya gera ósakligan mun á umsøkjarum og grundgav m.a. við, at ein umsøkjari við ríkisgóðkenning úr Noregi frammanundan hevði fingið løggilding uttan at hava staðið eina serliga próvtøku.*

*Umboðsmaðurin metir ikki grundarlag vera fyri niðurstøðuni hjá*

*Innlendismálaráðnum, tí avgerðin at løggilda umsøkjaran við ríkisgóðkenning úr Noregi var tikin á skeivum grundarlag. Hendan avgerðin gav tí ikki øðrum umsøkjarum, sum ikki luku treytina um eina serliga próvtøku, eitt rættarkrav um tilnevning sum løggildir grannaskoðarar. Umboðsmaðurin metir frágreiðingina hjá Innlendismálaráðnum um orsøkina til broyttu støðutakanina til málið vera óskiljandi og heldur ikki grundarlag vera fyri fatanini hjá Innlendismálaráðnum um, at ein vantandi kunngerð um serligu próvtøkuna kundi hava við sær, at lógarásetta treytin um próvtøkuna ikki kundi setast umsøkjarunum.*

*Eftir at Skráseting Føroya á øðrum sinni hevði noktað umsøkjarunum løggilding, vórðu avgerðirnar aftur kærdar til Innlendismálaráðið. Umboðsmaðurin heldur, at aðalstjórin í Innlendismálaráðnum var ógegnigur at viðgera seinnu kærurnar, tí Innlendismálaráðið undir fyrru kæruviðgerðini ítøkiliga tók støðu til umsóknirnar hjá umsøkjarunum. Umboðsmaðurin heldur, at seinnu kæruavgerðirnar tí mugu metast at vera ógildugar.*

*Umboðsmaðurin heldur tað vera óskiljandi, at Innlendismálaráðið hevur hildið seg kunnað viðgjørt málini eftir, hvørji krøv vórðu sett til at gerast løggildur grannskoðari í Noregi, og heldur seinnu kæruviðgerðina vera serstakliga atfinningarsama. Umboðsmaðurin heldur somuleiðis handfaringina hjá ráðnum av eini kæru um stjóran av Skráseting Føroya vera atfinningarsama.*

*Av tí, at viðgerðin av kærumálinum varð flutt úr Vinnumálaráðnum orsakað av ógegni, kundi Vinnumálaráðið ikki á nakran hátt viðgera málið. Umboðsmaðurin heldur talan vera um ósakliga fyrisiting í Vinnumálaráðnum, tí bæði embætisfólk og landsstýrismaðurin í vinnumálum settu seg í fleiri førum í samband við Skráseting Føroya um málið og luttóku á fundi við umsøkjararnar um kærurnar.*

*Umboðsmaðurin heldur, at síggjast kann ikki burtur frá, at gongdin í arbeiðinum at gera eina kunngerð um krøvini til serligu próvtøkuna hevði tilknýti til viðgerðina av ítøkiligu málunum. Umboðsmaðurin metir seg tó ikki hava nøktandi grundarlag fyri at siga, at arbeiðið við*

*kunngerðini tilvitað varð steðgað við tí endamáli, at kravið um serligu próvtøkuna ikki varð sett umsøkjarunum.*

*Av tí, at umboðsmaðurin heldur talan vera um álvarsligar feilir og brek við viðgerðini hjá Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum, hevur umboðsmaðurin, samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini, sent formansskapinum í løgtinginum, løgmanni og landsstýrismonnunum í innlendismálum og vinnumálum frágreiðingina. (**J. nr. 200900041**)*

## Frágreiðing um avgerðir at løggilda grannskoðarar

Formæli

**I. Partur**

1. Lógargrundarlagið
1.1. Løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar
1.1.1. Kravið um eina serliga próvtøku
1.1.2. Kunngerð um serligu próvtøkuna (próvtøkukunngerðin)
1.1.3. Løggilding av grannskoðarum eftir 1. juli 1993
2. Viðgerðin í Innlendismálaráðnum av kæru um avgerðir at sýta 7 umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar
2.1. Kæruavgerðin 12. mars 2007
2.1.1. Broytt fyrisitingarlig siðvenja og kravið um konsekvens í avgerðum
2.1.2. Víðar ræsur viðvíkjandi fyrisitingarligu siðvenjuni
3. Onnur kæruviðgerðin í Innlendismálaráðnum av somu málum
3.1. Ógegni sambært § 3, stk. 1, nr. 4 í fyrisitingarlógini
3.2. Avgerðirnar í seinna kærumálinum
4. Viðgerðin í Vinnumálaráðnum
4.1. Um viðgerðina av ítøkiligu málunum
4.2. Um arbeiðið at tilevna próvtøkukunngerð
5. Samanumtøka

**II. partur**

Málsgongd

**III. partur**

Frágreiðingar frá myndugleikunum v.m

## Formæli

Í juni 2008 klagaðu 9 persónar til umboðsmannin um, at Vinnumálaráðið hevði staðfest avgerðirnar hjá Skráseting Føroya um at sýta teimum tilnevning sum løggildir grannskoðarar. Grundgevingin fyri sýtanini var, at eingin teirra leyk lógarásettu treytina um at hava staðið eina serliga próvtøka, sum var ein av treytunum fyri løggilding sambært grannskoðaralógini.

Í klaguni varð víst á, at seinastu 3 árini vóru 8 umsøkjarar tilnevndir løggildir grannskoðarar, hóast hesir ikki luku treytina um at hava staðið eina serliga próvtøku. Klagararnir mettu, at myndugleikarnir tilvildarliga gjørdu mun á umsøkjarum, sum høvdu sama útbúgvingarliga grundarlag og somu verksligu royndir.

Eftir at hava fingið eina frágreiðing frá Vinnumálaráðnum um viðgerðina av málunum hjá teimum 9 klagarunum, bað eg Skráseting Føroya um at læna mær skjølini í málunum um at løggilda grannskoðarar, sum klagararnir vístu á. Innlendismálaráðið hevði sum kærumyndugleiki viðgjørt 7 av hesum málum, og eg bað tískil eisini Innlendsmálaráðið um at lata mær skjølini hjá ráðnum í hesum málum til láns.

Eftir at hava lisið skjølini metti eg grundarlag vera fyri nærri at kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av málunum, sum klagararnir høvdu víst á.

Heimildin fyri at taka mál upp av egnum ávum er at finna í § 5, § 6, stk. 5 og § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini (løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann), ið eru soljóðandi:

> „**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).
> …
> **§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

**§ 6.** …
*5. stk.* Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
…..
**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
…"

Tann 11. mai 2009 boðaði eg Innlendismálaráðnum, Skráseting Føroya og Vinnumálaráðnum frá, at eg við heimild í § 6, stk. 5 hevði gjørt av at taka viðgerðina hjá nevndu myndugleikum av málunum til viðgerðar. Eg boðaði samstundis klagarunum, sum klagaðu til mín í juni 2008, frá, at eg fór ikki at taka støðu til klagu teirra, fyrr enn hendan viðgerðin var liðug.

Frágreiðingin fevnir um:

- Avgerðina hjá Innlendismálaráðnum, dagfest 12. mars 2007, viðvíkjandi kæru um avgerðirnar hjá Skráseting Føroya at sýta 7 umsøkjarum tilnevning sum løggildir grannskoðarar.
- Avgerðirnar hjá Innlendismálaráðnum, dagfestar 14. juni 2007 og seinni, viðvíkjandi kærum um somu mál, eftir at Skráseting Føroya eftir áheitan frá Innlendismálaráðnum hevði tikið málini uppaftur og fyri aðru ferð sýtt umsøkjarunum løggilding sum grannskoðarar.
- Viðgerðina í Vinnumálaráðnum.

Frágreiðingin er grundað á skjølini, ið eg havi fingið til láns frá Innlendismálaráðnum, Vinnumálaráðnum og Skráseting Føroya, og frágreiðingar frá somu myndugleikum um viðgerðina av málunum.

Av tí, at talan er um eina kanning av egnum ávum, ið fevnir um viðgerðina hjá myndugleikunum, og eg havi fingið øll skjølini í málunum, herundir alt samskiftið við umsøkjararnar, sum avgerðirnar í málunum viðvíktu, hevur orsøk ikki verið til at partshoyra hesar undir umboðsmansviðgerðini.

Í II. parti eru endurgivin skjøl, sum lýsa gongdina í málunum.

Í III. parti eru endurgivnar frágreiðingar frá Innlendismálaráðnum, Vinnumálaráðnum og Skráseting Føroya v.m. til umboðsmannin um viðgerðina av málunum. Frágreiðingin, sum umboðsmaðurin fekk frá Vinnumálaráðnum í sambandi við klaguna frá juni 2008, er somuleiðis endurgivin.

Grundað á niðurstøðurnar í hesi frágreiðing havi eg ikki orsøk til at finnast at avgerðunum hjá Vinnumálaráðnum at sýta klagarunum, sum klagaðu til mín í juni 2008, tilnevning sum løggildir grannskoðarar. Eg havi tí vísandi til § 6, stk. 4 í umboðsmanslógini boðað teimum frá, at eg haldi ikki grundarlag vera fyri at gera meira við klagu teirra.

Á Argjum, tann 2. november 2010

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður

# I. partur

## 1. Lógargrundarlagið

Í øllum lógum, sum hava verið galdandi í Føroyum um løggilding av grannskoðarum, umframt teimum lógum, sum hava verið fyrimyndir fyri føroyskari lóggávu á økinum, hevur verið sett sum treyt fyri at verða tilnevndur løggildur grannskoðari, at viðkomandi m.a. hevur staðið eina serliga próvtøku.

Sambært lógarfyrireikandi arbeiðinum hevur stórur dentur verið lagdur á, at ástøðiligi kunnleikin og yrkisførleikin hjá løggildum grannskoðarum er á einum høgum stigi, og er hetta grundgivið við, at løggildir grannskoðarar hava ein týdningarmiklan samfelagsligan leiklut, hvat fíggjarviðurskiftum viðvíkur, og at hesir eru álitisumboð hjá almenninginum í hesum sambandi.

Í galdandi grannskoðaralóg verður framhaldandi sett sum treyt fyri at gerast løggildur grannskoðari, at umsøkjari hevur staðið eina serliga próvtøku, jbr. § 3, stk. 1, nr. 4 í løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirkir.

### *1.1. Løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar*

Tá avgerðirnar í málunum, sum hendan kanningin fevnir um, vórðu tiknar, var galdandi lóg løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, sum broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 16. mai 2006. Lógin kom í gildi 1. juli 1993 og verður í hesi frágreiðing nevnd *lógin* ella *grannskoðaralógin.*

Viðkomandi ásetingarnar í grannskoðaralógini vóru soljóðandi:

> „**§ 1.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin tilnevnir løggildar grannskoðarar.
> *Stk. 2.* Rætt at verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari hevur tann, sum
> 1) hevur bústað í Føroyum,
> 2) er myndugur og ikki undir verju,
> 3) hevur ikki boðað frá gjaldssteðgi ella hevur egið búgv trotaviðgjørt,
> 4) <u>hevur staðið eina serliga próvtøku, samanber § 4 *(mín undirstriking)*</u>
> 5) í minsta lagi í 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í øllum vanligum grannskoðanararbeiðum á skrivstovu hjá einum løggildum grannskoðara og
> 6) hevur tryggjað ella lagt trygd fyri í minsta lagi kr. 500.000 ímóti fíggjarligari ábyrgd, ið kann gerast galdandi við at útinna arbeiðið, sum løggildur grannskoðari.
>
> *Stk. 3.* Tilnevning kann verða noktað undir umstøðum, sum eru nevndar í borgarligari revsilóg § 78, 2. stk. Herumframt kann tilnevning noktast, um viðkomandi í yrki ella arbeiði sínum hevur sýnt ein slíkan atburð, at orsøk er til at halda, at viðkomandi ikki vil reka grannskoðarayrki á tryggjandi hátt. Tilnevningin kann eisini noktast persóni, ið skyldar tí almenna

eina týðandi upphædd, ið er gjaldkomin. Týðandi upphædd er at rokna kr. 50.000 ella meiri.
*Stk. 4.* Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann geva undantøk frá teim treytum, ið nevndar eru í 2. stk. nr. 5.
…
**§ 2.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann tilnevna persónar, sum kunnu ávísa, at teir uttan fyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við ta útbúgving, ið nevnd er í § 1, 2. stk., nr. 4 og 5, og sum annars lúka treytirnar í § 1, 2. stk. jvb. 3. stk. *(mín undirstriking)*
*Stk. 2.* Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann annars, har serlig viðurskifti gera seg galdandi, loyva ikki-føroyskum grannskoðarum í einstøkum førum at røkja starv, har lóggávan krevur, at tað skal vera ein løggildur grannskoðari.
*Stk. 3.* Tilnevning, ið tann føroyski skrásetingarmyndugleikin hevur latið sum ein undantakstilnevning eftir lógini, kann avmarkast og treytast.
…
**§ 4.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin ásetir nærri reglur fyri ta í § 1, stk. 2, nr. 4 umrøddu próvtøku, herundir treytirnar fyri at fara upp til próvtøku, próvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming. *(mín undirstriking)*
*Stk. 2.* Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann gera avtalu við „Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" um, at tann danska grannskoðaraumboðsnevndin hjálpir tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum við teimum í stk. 1 og 2 nevndu uppgávum. Grannskoðaranevndin fær tá í øllum lutum sama myndugleika sum tann í Danmark galdandi.
*Stk. 3.* Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann, ístaðin fyri at seta grannskoðaraumboðsnevndini eftir 1. stk., gera avtalu við donsku grannskoðaraumboðsnevndina (Revisorkommissionen) hjá danska „Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" um at umsita hetta øki í Føroyum við sama myndugleika sum í Danmark."

Sambært § 1, stk. 2 skal umsøkjari lúka allar treytirnar í nr. 1 – 6, herundir treytina um eina serliga próvtøku, fyri at verða tilnevndur løggildur grannskoðari.

§ 2, stk. 1 heimilar viðkomandi myndugleika at tilnevna umsøkjarar løggildar grannskoðarar, um hesir uttan fyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við krøvini í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5. Tað vil siga, um útbúgvingarliga grundarlagið hjá umsøkjaranum kann javnmetast við treytirnar um at hava staðið eina serliga próvtøku og starvsroyndir hjá løggildum grannskoðara.

§ 4, stk. 1 heimilar skrásetingarmyndugleikanum at áseta nærri reglur fyri serligu próvtøkuna.

Í uppskotinum til grannskoðaralógina (løgtingsmál 163/1992) eru ongar almennar ella serligar viðmerkingar. Í uppskotinum verður víst til viðmerkingarnar í áliti við heitinum „Álit um roknskaparlóg, bókføringslóg og um lóg fyri grannskoðarar". Ein arbeiðsbólkur, sum landsstýrið í 1991 setti at endurskoða og møguliga endurnýggja m.a. grannskoðaralóggávuna, læt nevnda álit úr hondum 15. mars 1993.

Í álitinum skrivar arbeiðsbólkurin m.a. soleiðis:

> **„3. Grannskoðaralóggávan**
> **a. Lóg um løggildugar grannskoðarar**
> Í løtuni er Løgtingslóg nr. 33 frá 9. mai 1964 um virkið hjá løggildum revisorum galdandi fyri statsgóðkendar grannskoðarar. Við hesi lóg eru §§ 65 til 73 í donsku „Næringsloven" frá 28. apríl 1931 settar í gildi í Føroyum. So vítt arbeiðsbólkinum kunnugt, so er bert ein persónur skrásettur eftir hesi lógini í Føroyum, og er viðkomandi fluttur av aftur landinum. Danska lógin er ikki galdandi í Føroyum tí málsøkið er yvirtikið. Tíbetur hevur lógin ikki havt nakra ávirkan í Føroyum, men sum er arbeiða teir persónar, ið eru statsautoriseraðir undir eini lóg sum ikki lýkur tey krøv sum annars eru galdandi fyri tilsvarandi persónar í londunum rundan um okkum. Men í praksis hevur tann danska lógin verið fylgd.
>
> Arbeiðsbólkurin hevur gjøgnumgingið donsku lógina fyri statsautoriseraðar grannskoðarar, og er komin til ta niðurstøðu, at lógin eigur at verða sett í gildi í Føroyum. Tó er tað greitt,

> at teir kærumyndugleikar sum eru í donsku lógini, teir eru 2, ikki kunnu setast í Føroyum, tí tað eru ov fáir persónar, ið hava tað neyðugu útbúgvingina. Harafturat ásetir lógin, at ein grannskoðaraumboðsnevnd (Revisorkommission) verður sett til at áseta nærri reglur fyri øllum viðvíkjandi próvtøku sum ríkisgóðkendur grannskoðari.
>
> …
>
> …, í dag eru bert 5 ríkisgóðkendir grannskoðarar í Føroyum. Harafturat hava allir fingið autorisatiónina frá danska statinum…
>
> …"

Orðingarnar í grannskoðaralógini eru meinlíkar ásetingunum í tágaldandi grannskoðaralógini í Danmark (lov nr. 68 af 15. marts 1967 om statsautoriserede revisorer), og undir viðgerðini av lógaruppskotinum í Løginginum staðfesti Rættarnevndin í áliti sínum, at uppskotið bygdi á hesa lógina. Grundað á, at tað í uppskotinum beinleiðis verður víst til tágaldandi lóg í Danmark sum fyrimynd fyri grannskoðaralógini, og ongar serligar viðmerkingar eru til føroysku lógina, verða viðmerkingarnar til donsku lógina í útgangsstøðinum nýttar sum íkast undir tulkingini av grannskoðaralógini.

### *1.1.1. Kravið um eina serliga próvtøku*

Sambært § 1, stk. 2, nr. 4 verður sett sum treyt, at umsøkjari, fyri at verða tilnevndur løggildur grannskoðari, skal hava staðið eina serliga próvtøku, og sambært § 2, stk. 1 hevur viðkomandi myndugleiki heimild at tilnevna umsøkjarar løggildar grannskoðarar, um hesir hava eina útbúgving, sum m.a. kann javnmetast við kravið um eina serliga próvtøku.

Fyrimyndin fyri grannskoðaralógini, sum varð sett í gildi í 1993, var tágaldandi lóg í Danmark (Lov nr. 68 af 15. marts 1967 om statsautoriserede revisorer við seinni broytingum). Partar av §§ 1, 2 og 4 vóru soljóðandi:

> „**§ 1**. Statsautoriserede revisorer beskikkes af handelsministeren.

> *Stk. 2.* Ret til at få beskikkelse som statsautoriseret revisor har enhver person, der
> …
> 5) Har bestået en særlig eksamen, jfr. § 4,
> 6) I mindst tre år efter det fyldte 18. år på en statsautoriseret revisors kontor har deltaget i udførelsen af de dér almindeligt forekommende revisionsarbejder og
> …
> **§ 2.** Handelsministeren kan beskikke personer, som godtgør i udlandet at have fået en uddannelse, der findes at kunne ligestilles med den i § 1, stk. 2, nr. 5 og 6, omhandlede uddannelse, og som i øvrigt opfylder betingelserne i § 1, stk. 2, jfr. stk. 3.
> …
> **§ 4.** Handelsministeren fastsætter de nærmere bestemmelser om den i § 1, stk. 2, nr. 5, omhandlede eksamen, herunder betingelserne for at indstille sig til eksamen, eksamenskravene, eksamens afholdelse og bedømmelsen. …“

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um donsku grannskoðaralógina stendur m.a. soleiðis í Fólkatingstíðindum A, 1966-67, sp. 1029-1032:

> „… En statsautoriseret revisor er i dag ikke blot en kontrollant, som med praktisk kendskab til bogholderiteknik gennemgår klientens bogføring og attesterer, at regnskabet er rigtigt sammentalt, dokumenteret og opstillet. Hans arbejde omfatter i dag kontrol af, at regnskaberne er opgjort i overensstemmelse med gældende love og forskrifter og ofte også en kritisk gennemgang af klientens forretningsmæssige dispositioner. Herved bliver en statsautoriseret revisor ikke blot i økonomisk, erhvervsmæssig og skattemæssig henseende klientens tillidsmand, men hans arbejde får tillige en samfundsmæssig betydningsfuld funktion i forbindelse med kreditgivningen og tilvejebringelsen af den for erhvervslivets trivsel fornødne kapital.
> …
> Til § 1.

Som hidtil skal enhver, der opfylder de fastsatte betingelser for at blive statsautoriseret revisor, have ret til at få beskikkelse.
De i stk. 2 under nr. 1-6 angivne betingelser svarer til de i næringsloven hidtil fastsatte. Sådanne kvalifikationskrav stilles i de fleste lande.
…
Det foreslås at betegne den hidtidige revisor „prøve" som „eksamen". Den almindeligt brugte betegnelse er da også revisoreksamen.
…
Til § 2.
Bestemmelsen giver handelsministeren bemyndigelse til at beskikke personer, som i udlandet har fået en uddannelse, der kan ligestilles med den danske uddannelse, og som i øvrigt opfylder betingelserne for at få beskikkelse. Det vil være naturligt, at handelsministeren forhandler med Revisorkommissionen om sådanne sager. Som et vilkår for beskikkelse vil det eventuelt kunne stilles, at den pågældende består en prøve i dansk skatteret og erhvervsret. …"

Undan grannskoðaralógini frá 1993 var galdandi løgtingslóg nr. 33 frá 9. mai 1964 um virkið hjá løggildum grannskoðarum. Við lógini vórðu partar av „Næringslógini" settir í gildi (§§ 65 – 73 í Lov nr. 138 af 28. april 1931: Næringslov við seinni broytingum.) §§ 65 og 66 vóru soljóðandi:

„§ 65. Ministeriet for Handel og Industri meddeler paa Begæring Beskikkelse som statsautoriseret Revisor til Personer, der godtgør,
…
6) at have bestaaet den i § 66 omhandlede Prøve.
…
*Revisorprøven*
§ 66. Personer, der ønsker Beskikkelse som statsautoriseret Revisor, maa ved Aflæggelse af Prøve for en af Ministeriet for Handel og Industri nedsat Kommission godtgøre at være i Besiddelse af de til Hvervets Bestridelse fornødne Kundskaber. De

> nærmere Regler for Prøvens Afholdelse og Eksamensgebyrerne fastsættes ved en af Ministeriet udfærdiget Bekendtgørelse. Det kan ikke paalægges Eksaminanderne at dokumentere deres Færdighed ved Indsendelse af Opgaver, fremskaffede af dem selv.
> For at kunne indstille sig til Prøven skal vedkommende, medmindre Ministeriet efter indhentet Erklæring fra Kommissionen gør Undtagelse herfra, hvilket navnlig bør ske, naar den paagældende godtgør at have særlig Uddannelse i Bankvirksomhed, Forsikringsvirksomhed, kommunalt Regnskabsvæsen e. lign., i mindst 3 Aar paa en statsautoriseret Revisors Kontor have deltaget i Udførelsen af de dér almindeligt forefaldende Revisorarbejder.
> Ministeriet for Handel og Industri kan indtil 1. Juni 1933 efter Indstilling fra Komminssionen fritage Personer, der ønsker Beskikkelse som statsautoriseret Revisor, for at aflægge Dele af den i denne Paragrafs 1 ste Stykke omhandlede Prøve, naar de i mindst 4 Aar som Hovederhverv har udført selvstændigt Revisorarbejde og i øvrigt opfylder de i § 65, Nr. 1-5, anførte Betingelser."

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um „Næringslógina" stendur m.a. soleiðis í Ríkisdagstíðindum A, 1929-30, sp. 5867:

> „I § 65 er det foreslaaet, at enhver, der opfylder Betingelserne for at blive statsautoriseret Revisor, skal have Ret til at faa Beskikkelse, saaledes som det f.eks. ifølge Retsplejeloven ogsaa gælder for Sagførere, idet det saavel for Erhvervslivet som Helhed som for Udviklingen af Revisorinstitutionen skønnes heldigt, at enhver Revisor, der er i Besiddelse af de fornødne Kvalifikationer, faar Adgang til at faa dette konstateret ved en offentlig Prøve og Autorisation. …"

Í „Redegørelse fra det af Foreningen af autoriserede Revisorer den 28. November 1924 nedsatte Udvalg", sum varð viðløgd lógaruppskotinum og er endurgivin í Ríkisdagstíðindum A, 1929-30, sp. 5878, verður m.a. sagt soleiðis um útbúgvingarkravið:

„… **III. Om Uddannelse af Medarbejdere**
… Såfremt Revisorstanden i Længden skal kunne hævde sig som en Stand, der kan opfylde Krav, som Samfundet er berettiget til at kræve, maa Udvalget anse det for nødvendigt, at Revisoraspiranterne i højere Grad end hidtil erholder *den nødvendige teoretiske uddannelse.* …“

Kravið um eina serliga próvtøku sæst upprunaliga at verða sett í § 2 í lov nr. 117 fra 14. Maj 1909 om autoriserede Revisorer. Í áliti, dagfest 28. apríl 1909, frá Folketingets Udvalg stendur m.a. soleiðis í Ríkisdagstíðindum B, 1908-09, sp. 2637:

„… Man anser det for magtpaaliggende, at de nye Revisorer blive vel skikkede til deres Gerning i enhver Henseende, saaledes at Institutionen kan opnaa fuld Tillid hos Offentligheden, og det bør derfor ikke alene kræves, at de paagældende have den fornødne teoretiske og praktiske Færdighed samt saadanne almindelige Egenskaber som Fuldmyndighed og Uberygtethed m.v., men de bør tillige besidde andre for deres Stilling nødvendige Egenskaber, Retsind, Troværdighed m.v. Udvalget mener endvidere, i Tilslutning til Lovforslagets § 1, at det maa afgøres ved et Skøn, hvor mange autoriserede Revisorer der bør beskikkes, idet det kan antages at ville medføre usund Konkurrence og skade Revisorinstitutionen, om Antallet af autoriserede Revisorer bliver unødvendig stort.
For at Tilgangen til Revisorhvervet kan blive reguleret paa en hensigtsmæssig Maade under Hensyntagen til de ansøgendes Kvalifikationer og den eventuelt forhaandenværende Trang til Udvidelse af Revisorernes Antal, foreslaar man, at der gives den Kommission, der efter Ændringsforslag nr. 2 skal afholde Prøven for autoriserede Revisorer, Indstillingsret, medens Beskikkelsen af autoriserede Revisorer fritages af Ministeren for Handel og Søfart. …“

Sambært galdandi grannskoðaralóg (løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirkir) verður framhaldandi sett sum treyt fyri at gerast løggildur grannskoðari,

at umsøkjarin hevur staðið eina serliga próvtøku, jbr. § 3, stk. 1, nr. 4.

*1.1.2. Kunngerð um serligu próvtøkuna (próvtøkukunngerðin)*
§ 4, stk. 1 í grannskoðaralógini var soljóðandi:

> „**§ 4.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin ásetir nærri reglur fyri ta í § 1, stk. 2, nr. 4 umrøddu próvtøku, herundir treytirnar fyri at fara upp til próvtøku, próvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming."

Tá ið avgerðirnar vóru tiknar í málunum, vóru ongar reglur ásettar, sum útgreinaðu treytirnar fyri at fara til serligu próvtøkuna ella krøvini til próvtøkuna, og eingin próvtøka hevði verið fyriskipað í Føroyum.

Reglur um próvtøkutreytir og próvtøkukrøv vórðu fyrstu ferð ásettar við kunngerð nr. 1 frá 2. mai 2007 um próvtøku til at gerast løggildur grannskoðari. Skráseting Føroya kunngjørdi kunngerðina í Dimmalætting 3. mai 2007, og hon kom sambært § 11 í gildi dagin eftir, at hon varð kunngjørd.

§§ 1, 5 og 7, stk. 1 og 2 vóru soljóðandi:

> „***Treytir fyri at fara upp til próvtøku***
> **§ 1.** Fyri at sleppa til próvtøku, ið er nevnd í § 1, stk. 2, nr. 4 … krevst:
> 1) At grannskoðarakandidatútbúgving er staðin (sí nærri greining í fylgiskjali 1)
> 2) At umsøkjarin í minsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár hevur luttikið í øllum vanligum grannskoðanar arbeiðum á skrivstovu hjá einum løggildum grannskoðara.
>
> ***Próvtøka***
> **§ 5.** Próvtøkan verður skipað sum skrivlig roynd, har umsøkjarin fullførir eina ítøkiliga grannskoðanaruppgávu (sí nærri greining

í fylgiskjali 2), ella partar av ítøkiligari grannskoðanaruppgávu. Royndin varir í 16 tímar yvir 2 dagar.

**§ 7.** Persónar, sum kunnu ávísa, at teir uttanfyri Føroyar hava fingið løggilding, ið kann javnmetast við lokna próvtøku sambært § 5, skulu til 6 tíma langa skrivliga próvtøku í føroyskum skatta- og vinnurætti.
Stk. 2. Fyri persónar, sum umframt løggilding smb. stk. 1 eisini kunnu skjalprógva kunnleika til føroyskan vinnurætt, kann tann í stk. 1 nevnda próvtøka avmarkast til 4 tíma langa skrivliga próvtøku í føroyskum skattarætti.
*Stk. 2.* Fyri persónar, sum umframt løggilding smb. stk. 1 eisini kunnu skjalprógva kunnleika til føroyskan vinnurætt, kann tann í stk. 1 nevnda próvtøka avmarkast til 4 tíma langa skrivliga próvtøku í føroyskum skattarætti.“

Sambært fylgiskjali 1 var ein grannskoðarakandidatútbúgving t.d. ein cand.merc.aud útbúgving úr Danmark ella Høyere revisorutdanning úr Noregi. Umframt hetta kundi Skráseting Føroya góðkenna útbúgvingar úr øðrum londum, um tær vóru mettar at vera samsvarandi støðinum í nevndu londunum.

Sambært fylgiskjali 2 skuldi skrivliga royndin „sýna neyðugu og viðkomandi ástøðiligu førleikarnar hjá kandidatunum innan tey øki, sum hoyra til virkisøki hjá løggildum grannskoðarum, umframt evni til at nýta hesi í verki“, og nágreinað var, hvørjar lærugreinar próvtøkan skuldi fevna um.

Grannskoðaralógin frá 1993 varð sett úr gildi við løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar, og kunngerð nr. 117 frá 18. desember 2008 um próvtøku til at gerast løggildur ella skrásettur grannskoðari varð sett í gildi 19. desember 2008.

Galdandi lóg, løgtingslóg nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, kom í gildi 1. juli 2009, og sambært § 54, stk. 2 í lógini er kunngerð nr. 117 frá 18. desember 2008 framvegis í gildi.

§§ 2 og 5 í hesi kunngerðini eru soljóðandi:

„**§ 2.** Fyri at sleppa til próvtøku at gerast løggildur grannskoðari krevst:

1) At umsøkjarin frá einum útlendskum handilsháskúla/univeristeti hevur staðið eina útbúgving svarandi til grannskoðarakandidatútbúgving (cand. merc. aud.) frá einum donskum handilsháskúla/universiteti, smbr. skjal 1.
2) Útbúgving í føroyskum skattarætti 1 & 2 á merkonomstigi.
3) At umsøkjarin í minsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í grannskoðaraarbeiðum, sum viðvíkja grannskoðan av ársrapportum ella tilsvarandi roknskaparrapporteringum í einum løggildum grannskoðaravirki og soleiðis, at minst 2 ár av arbeiðinum er framt, eftir at grannskoðarakandidatútbúgving er staðin.

**§ 5.** Próvtøkunevndin avger, um settar verða ein ella fleiri skrivligar uppgávur til tær skrivligu próvtøkurnar at gerast ávíkavist løggildur ella skrásettur grannskoðari. Endamálið við próvtøkuni er at staðfesta, at umsøkjarin (kandidaturin) í verki megnar at loysa tær arbeiðsuppgávur, ið vanliga koma fyri hjá ávíkavist einum løggildum og einum skrásettum grannskoðara. Tað eru økini at góðtaka umbidna arbeiðið, at leggja arbeiðið til rættis og at útinna tað, orða átekningar og frágreiðingar, meta um roknskaparskipanir og váðastýringar, samtøkuroknskapir, greina roknskapir, fyritøkur í kreppu, ættarliðskifti, roknskaparráðgeving og -hjálp, skattaráðgeving og -hjálp, fíggingarviðurskiftir, virðismetingar, keypa og selja fyritøkur, greina rentingarførið (rentabilitetin) og kanningar í sambandi við at rationalisera fyritøkur og fyrisitingarliga bygnaðin.“

### *1.1.3 Løggilding av grannskoðarum eftir 1. juli 1993*

Fram til viðgerðina av málunum, sum hendan frágreiðingin fevnir um, hevði Vinnumálaráðið sum ábyrgdarhavandi myndugleiki av málsøkinum, síðani grannskoðaralógin varð sett í gildi 1. juli

1993, tilnevnt 5 umsøkjarar løggildar grannskoðarar. Hesir vóru allir frammanundan tilnevndir *statsautoriseret revisor* í Danmark og høvdu í hesum sambandi staðið ta í Danmark lógarkravdu serligu próvtøkuna. Í september 2005 tilnevndi Skráseting Føroya ein umsøkjara løggildan grannskoðara, sum frammanundan var tilnevndur *statsautorisert revisor* í Noregi. Umsøkjarin hevði ikki staðið eina serliga próvtøku, og um hetta mundið varð ikki sett sum krav fyri tilnevning sum *statsautorisert revisor* í Noregi, at umsøkjari hevði staðið eina serliga próvtøku.

## 2. Viðgerðin í Innlendismálaráðnum av kæru um avgerðir at sýta 7 umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar

Í apríl 2005 søktu 6 umsøkjarar Skráseting Føroya um at verða tilnevndir løggildir grannskoðarar. Ein umsøkjari aftrat søkti í oktober 2005. Útbúgvingarliga og yrkisliga grundarlagið hjá umsøkjarunum var ein cand.merc.aud. útbúgving og starvsroyndir hjá løggildum grannskoðara. Umsøkjararnir høvdu ikki staðið eina serliga próvtøku, jbr. § 1, stk. 2, nr. 4 í lógini.

Sambært umsóknunum og samskiftinum undir viðgerðini av málinum vóru umsøkjararnir av teirri fatan, at tað ikki longur kravdist ein serlig próvtøka til tess at gerast løggildur grannskoðari. Sum grundarlag fyri hesum sjónarmiði varð víst á, at Skráseting Føroya hevði broytt fyrisitingarligu siðvenjuna á økinum við í mars 2005 at geva einum umsøkjara, ið var ríkisgóðkendur grannskoðari í Noregi, men sum ikki hevði staðið eina serliga próvtøku, tilsøgn um at verða tilnevndur løggildur grannskoðari. Víst varð á, at útbúgvingarliga grundarlagið hjá hesum umsøkjaranum eins og hjá teimum 7 umsøkjarunum var ein cand.merc.aud útbúgving úr Danmark, og at umsøkjarin umframt hetta hevði tikið lærugreinarnar norskur vinnu- og skattarættur á norsku grannskoðaraútbúgvingini, sum umsøkjararnir ikki mettu vera viðkomandi í viðgerðini. Umsøkjararnir mettu seg hava eitt rættarkrav uppá at verða løggildir.

Tann 27. januar 2006 sýtti Skráseting Føroya umsóknunum við

teirri grundgeving, at umsøkjararnir ikki høvdu staðið eina serliga próvtøku, og at teir ikki kundu vísa á, at teir uttan fyri Føroyar høvdu eina útbúgving, sum gav rætt til løggilding sambært § 2, stk. 1, tað vil siga høvdu eina útbúgving, sum kundi javnmetast við m.a. treytina um eina serliga próvtøku. Skráseting Føroya vísti harumframt í avgerðunum á, at higartil vóru bert umsøkjarar løggildir, ið frammanundan høvdu ríkisgóðkenning sum grannskoðarar.

Avgerðirnar hjá Skráseting Føroya vórðu 10. februar 2006 kærdar til Vinnumálaráðið. Í kæruni, ið fevndi um avgerðirnar viðvíkjandi øllum umsøkjarunum, varð víst á, at grannskoðarin við norskari ríkisgóðkenning hevði ikki staðið eina serliga próvtøku, og at avgerðin hjá Skráseting Føroya var brot á líkaregluna.

Av tí, at aðalstjórin í Vinnumálaráðnum var ógegnigur at viðgera kæruna, gjørdi løgmaður av, at landsstýrismaðurin í innlendismálum (Innlendismálaráðið) skuldi viðgera kærurnar.

Tann 20. juni 2006 sendi Innlendismálaráðið kærarunum eitt uppskot til kæruavgerð til viðmerkingar. Ætlanin var at staðfesta avgerðirnar við grundgevingunum hjá Skráseting Føroya.

- Innlendismálaráðið metti, at fyri at broyta lógarásett krøv (t.e. treytina um eina serliga próvtøku) kravdist, at Løgtingið broytti lógina.
- Innlendismálaráðið metti ikki avgerðina hjá Skráseting Føroya at tilnevna umsøkjaran við norskari ríkisgóðkenning løggildan grannskoðara vera eina broyting í fyrisitingarligu siðvenjuni.
- Innlendismálaráðið metti ikki Skráseting Føroya hava brotið líkaregluna, tí umstøðurnar í málunum vóru ikki eins.

Eftir at kærararnir høvdu gjørt viðmerkingar til uppskotið til kæruavgerð, og Innlendismálaráðið hevði viðgjørt málið av nýggjum, sendi Innlendismálaráðið tann 21. desember 2006 kærarunum og Skráseting Føroya eitt nýtt uppskot til kæruavgerð til viðmerkingar. Ætlanin var nú at biðja Skráseting Føroya taka umsóknirnar uppaftur til viðgerðar.

- Innlendismálaráðið var nú av teirri fatan, at Skráseting Føroya hevði víðar ræsur at gera av, hvørja praksis stovnurin valdi at fylgja, og at tað talaði fyri hesum, at heimildin í § 4 í lógini til í kunngerð at nágreina og áseta krøvini til serligu próvtøkuna ongantíð var nýtt.
- Innlendismálaráðið metti, at Skráseting Føroya við avgerðini at løggilda umsøkjaran við ríkisgóðkenning úr Noregi tilvitað, ógrundað og uttan sakliga orsøk hevði broytt fyrisitingarligu siðvenjuna á økinum og gjørt mun á umsøkjarum, alt eftir um teir høvdu útbúgving úr Danmark ella Noregi.

Í hoyringsskrivi, dagfest 31. januar 2007, vísti Skráseting Føroya á, at niðurstøðan um, at munur var gjørdur á umsøkjarunum í mun til, um teir høvdu útbúgving úr Noregi ella Danmark, var ikki røtt og bygdi á eina misskiljing, tí umsóknirnar vóru ikki viðgjørdar við støði í, hvaðani umsøkjararnir høvdu útbúgving, men við støði í, um umsøkjararnir høvdu ríkisgóðkenning sum grannskoðarar.

***2.1. Kæruavgerðin 12. mars 2007***

Tann 12. mars 2007 tók Innlendismálaráðið avgerð í málinum. Niðurstøðan hjá Innlendismálaráðnum var, at avgerðirnar hjá Skráseting Føroya at sýta kærarunum løggilding sum grannskoðarar vóru ósakligar, og at Skráseting Føroya gjørdi ósakligan mun á umsøkjarum í mun til, um teir høvdu útbúgving úr Danmark ella Noregi. Innlendismálaráðið grundaði avgerðina á, at Skráseting Føroya frammanundan hevði tilnevnt ein umsøkjara løggildan grannskoðara, ið ikki hevði staðið eina serliga próvtøku.

Partur av avgerðini hjá Innlendismálaráðnum var soljóðandi:

> „… Innlendismálaráðið staðfestir, at ongar reglur eru gjørdar um ta í § 1, stk. 2 nr. 4 nevndu próvtøku í lógini um løggildar grannskoðarar, soleiðis sum ásett er í lógini § 4, at gerast skulu.
> …
> Umsitingin hjá Skráseting Føroya av hesum málum er tí grundað á fyrisitingarliga praksis. Í hesum sambandi er Skráseting Føroya bundin av teimum fyrisitingarligu grundreglunum.

Hetta merkir, at Skráseting Føroya í málsviðgerðini m.a. má gera eina ítøkiliga meting sambært objektivum kriterium í hvørjum einstøkum føri, hvørt umsøkjari lýkur treytirnar fyri at verða løggildur.

Tað er t.d ikki nóg mikið, at ein persónur verður løggildur, bert tí viðkomandi í útlandinum hevur eina útbúgving, sum í viðkomandi útlandi gevur rætt til at verða løggildur.

Innlendismálaráðið metir, at tá fimm av seks løggildingum hesi seinastu 13 árini eru givin persónum við danskari statsautorisatión, og ein er givin persóni, sum hevur norska statsautorisatión, so er ein ávís siðvenja á økinum.

Skráseting Føroya hevur víðar ræsur, tá ið gerast skal av hvørja praksis, stovnurin velur at fylgja á hesum øki.

Stovnurin kann eisini velja at broyta praksis, treytað av at sakligar grundgevingar eru fyri hesum. Í so fall eigur hetta eisini at verða fráboðað alment.

Rættargrundarsetningurin um líkheit hevur sum fyritreyt krav um konsekvens í avgerðunum hjá fyrisitingarmyndugleikanum.

Hetta merkir, at ein fyrisitingarmyndugleiki ikki kann gera einstøk ógrundað frávík frá eini siðvenju, ið hevur verið fylgd. Í so máta er ein fyrisitingarligur myndugleiki bundin av sínari egnu siðvenju.

Sum nevnt er tann eini av umsøkjarunum, ið vóru til viðgerð um somu tíð, løggildur uttan av hava verið til serliga próvtøku. Grundgevingin fyri hesum er, at kravið um tílíka roynd, sum nevnd í lógini um løggildar grannskoðarar §4, var ikki í Noreg, tá umsóknin varð viðgjørd.
…
Innlendismálaráðið metir tí, at Skráseting Føroya, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga

orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg.

Innlendismálaráðið metir tí, at avgerðin hjá Skráseting Føroya, um at nokta kærarunum góðkenning sum løggildir grannskoðarar við tí grundgeving, at teir ikki hava staðið serliga roynd smb. § 1 stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, og at teir ikki kunnu ávísa uttanfyri Føroyar at hava eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. § 2, stk. 1, er ósaklig.

Skráseting Føroya er tí vísandi til tað, ið er ført fram, biðin um at viðgera málið av nýggjum."

Í 2.1.1. verður viðgjørt, um avgerðin hjá Skráseting Føroya at løggilda ein umsøkjara við ríkisgóðkenning sum grannskoðari úr Noregi var ein broyting í fyrisitingarligu siðvenjuni, og um hendan avgerðin, grundað á fyrisitingarararættarligu meginregluna um at viðgera eins viðurskifti eins, gav kærarunum eitt rættarkrav um at verða tilnevndir løggildir grannskoðarar.

Í 2.1.2. verður viðgjørt sjónarmiðið um, at Skráseting Føroya hevði víðar ræsur at gera av, hvør fyrisitingarliga siðvenjan skuldi vera.

### *2.1.1. Broytt fyrisitingarlig siðvenja og kravið um konsekvens í avgerðunum*

Sambært avgerðini hjá Innlendismálaráðnum gjørdi Skráseting Føroya uttan sakliga orsøk mun á umsøkjarum í mun til, um teir høvdu útbúgving úr Danmark ella Noregi, og grundað á avgerðina at tilnevna umsøkjaran við norskari ríkisgóðkenning løggildan grannskoðara metti Innlendismálaráðið avgerðirnar hjá Skráseting Føroya at sýta at løggilda kærararnar vera ósakligar og heitti á Skráseting Føroya um at viðgera umsóknir teirra av nýggjum.

Niðurstøðan hjá Innlendismálaráðnum hesum viðvíkjandi var soljóðandi:

> „Sum nevnt er tann eini av umsøkjarunum, ið vóru til viðgerð um somu tíð, løggildur uttan av hava verið til serliga próvtøku. Grundgevingin fyri hesum er, at kravið um tílíka roynd, sum nevnd í lógini um løggildar grannskoðarar § 4, var ikki í Noreg, tá umsóknin varð viðgjørd.
>
> …
>
> Innlendismálaráðið metir tí, at Skráseting Føroya, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg.“

Um avleiðingarnar av hesum segði Innlendismálaráðið soleiðis í avgerðini:

> „Rættargrundsetningurin um líkheit hevur sum fyritreyt krav um konsekvens í avgerðunum hjá fyrisitingarmyndugleikanum.
>
> Hetta merkir, at ein fyrisitingarmyndugleiki ikki kann gera einstøk ógrundað frávik frá eini siðvenju, ið hevur verið fylgd. Í so máta er ein fyrisitingarmyndugleiki bundin av sínari egnu siðvenju.“

Niðurstøðan hjá Innlendismálaráðnum byggir á, at Skráseting Føroya hevði brotið fyristingarrættarliga meginregluna um at viðgera eins viðurskifti eins (líkaregluna). Í Forvaltningsret, 2. udgave eftir m.a. Hans Gammeltoft-Hansen stendur m.a. soleiðis um líkaregluna:

> „Kravet om „lighed“ stikker dybt i retsbevidstheden og har fundet udtryk i flere bestemmelser i grundloven … Alligevel har idealet om lighed spillet en mindre fremtrædende rolle ved afgrænsningen af hvilke kriterier der er lovlige, end bl.a. formålsbetragtninger og retsbeskyttelsessynspunkter. Dette beror på at forestillingen om ensartet behandling og konkret retsanvendelse er svære at forene idet den konkrete afgørelse netop består i at foretage en udvælgelse af nogle bestemte forhold som grundlag for en særskilt retlig behandling af det pågældende tilfælde.

…
Den generelle lighedsgrundsætning forbyder i alt væsentligt at ens sager bliver behandlet forskelligt. Problemet er imidlertid at få afklaret om der er tale om ens sager.
Udskillelse af ulovlige kriterier ved hjælp af lighedsbetragtninger forudsætter at der foretages en sammenligning mellem sager eller forskellige krav i samme sag.
…“ (Bls. 340 – 341)

„Når myndighederne følger en administrativ praksis får lighedssynspunkter en særlig funktion. For det første må den etablerede praksis ikke støtte sig på kriterier, der indikerer at der foreligger usaglig forskelsbehandling. For det andet kan praksisdannelsen være i strid med hjemmelsgrundlaget, bl.a. fordi den indsnævrer det skøn loven forudsætter udøvet. For det tredje – og nok så betydningsfuldt – får praksis en vis normerende virkning således at fravigelsen af praksis i konkrete tilfælde kan blive anset for forskelsbehandling.“ (Bls. 346)

„Kravet om ligelig behandling styrer i en vis udstrækning skønsafvejningen. Typisk vil lighedsbetragtninger få størst praktisk gennemslagskraft hvor der lovligt er opstillet en intern regel. Ugrundede fravigelser af en sådan regel vil ofte blive betragtet som ulovlig forskelsbehandling. (Bls. 366)

„Idealet om lighed kan endvidere føre til at en konkret anvendelse af et kriterium bevirker at det samme kriterium i en beslægtet situation må anvendes med tilsvarende vægt. Det må dog kræves at der er tale om situationer med i alt væsentligt ensartet faktum, at kun få kriterier er relevante, og at disse kriterier i alt væsentligt er identiske.
Det er imidlertid vanskeligt at beskrive under hvilke omstændigheder den blotte sammenligning af to sager medfører at afvejningen i sag nummer to skal foregå på samme måde som i den første.“ (Bls. 367)

Ein fyrisitingarlig siðvenja er í útgangsstøðinum ikki bindandi fyri myndugleikarnar og kann verða broytt, um sakligar grundgevingar eru fyri tí. Er fyrisitingarliga siðvenjan óbroytt, kann ein myndugleiki

hinvegin ikki gera einstøk ógrundað frávik frá henni. Hetta verður vanliga annaðhvørt grundað á, at fyrisitingarliga siðvenjan er vorðin ein innanhýsis regla, ella at líkareglan krevur, at viðurskifti, sum í høvuðsheitum eru eins, verða viðgjørd eins.

Er talan um, at ein myndugleiki hevur gjørt einstøk ógrundað frávik frá eini fyrisitingarligari siðvenju, hevur kravið um eins viðgerð tó ikki við sær, at onnur av hesi orsøk hava eitt rættarkrav uppá, at myndugleikin tekur somu avgerð í einum øðrum máli. Hetta er m.a. galdandi, um fyrisitingarliga siðvenjan, sum frammanundan hevur verið fylgd, er í samsvari við lógargrundarlagið.

Spurningurin er viðgjørdur av Hægstarætti, sum í einum máli, endurgivið í Ugeskrift for Retsvæsen 2000, bls. 1509 ff, kom til hesa niðurstøðu:

> „… Den omstændighed, at andre skatteydere som følge af S's manglende indgriben med urette måtte have opnået fradrag under omstændigheder som i A's sag, kunne ikke ud fra en lighedsgrundsætning begrunde fradrag for A."

Vísast kann eisini á mál, viðgjørt av Fólkatingsins Umboðsmanni, sum í ársfrágreiðingini 1992, bls. 222 ff sigur m.a. soleiðis:

> „Det forhold, at der i et antal tilfælde er sket tilsidesættelser af den af ministeriet fastlagt godkendelsespraksis, kan imidlertid ikke give tilstrækkeligt holdepunkt for at kritisere ministeriets afslag på at godkende (B) i henhold til § 8 A. Jeg skal herved henvise til, at der som anført foran ikke på et retligt grundlag kan rettes indvendinger imod indholdet af den af ministeriet anlagte praksis. … "

Viðkomandi spurningurin at viðgera er tískil, um Skráseting Føroya við avgerðini at løggilda umsøkjaran við norskari ríkisgóðkenning broytti fyrisitingarliga siðvenju, og um hendan avgerðin gav kærarunum eitt rættarkrav uppá at verða løggildir, hóast teir ikki luku treytina um at hava staðið eina serliga próvtøku.

Eftir at Skráseting Føroya í mars 2005 gav umsøkjaranum við norskari ríkisgóðkenning tilsøgn um tilnevning, tilnevndi Skráseting Føroya tann 9. september 2005 umsøkjaran løggildan grannskoðara. Umsøkjarin var frammanundan ríkisgóðkendur grannskoðari í Noregi (*statsautorisert revisor*), og í aðramáta var útbúgvingarliga grundarlag hansara ein cand.merc.aud. útbúgving úr Danmark og lærugreinarnar *skatterett* og *retslære* á „Høyere revisoreksamen" (HRE) í Noregi. Umsøkjarin hevði harumframt starvsroyndir hjá løggildum grannskoðara samsvarandi kravinum í § 1, stk. 2, nr. 5.

Sambært frágreiðing frá Skráseting Føroya til umboðsmannin legði Skráseting Føroya í viðgerðini av umsóknini avgerandi dent á, at umsøkjarin hevði eina ríkisgóðkenning sum grannskoðari, og at umsøkjarin av hesi orsøk varð mettur at hava eina útbúgving, sum kundi javnmetast við krøvini í lógini, jbr. § 2, stk.1.

§ 2, stk. 1 hevði sambært viðmerkingunum sum endamál at heimila viðkomandi myndugleika at tilnevna persónar løggildar grannskoðarar, sum hava nomið sær útbúgving úr øðrum landi. Ásetingin treytaði, at myndugleikin gjørdi eina ítøkiliga meting av, um ástøðiligu førleikarnir og yrkisførleikarnir hjá umsøkjaranum kundu javnmetast við lógarásettu treytirnar um eina serligu próvtøku og starvsroyndir, jbr. § 1, stk. 2, nr. 4 og 5. Tað var ikki sett sum treyt fyri løggilding sambært § 2, stk. 1, at umsøkjarin hevur staðið eina serliga próvtøku, men gerast skuldi ein ítøkilig meting av, um útbúgving og førleikar umsøkjarans kundu javnmetast við nevndu treytir.

Um viðgerðina hjá Skráseting Føroya er at siga, at ein løggilding ella ríkisgóðkenning sum grannskoðari er ein góðkenning frá málføra myndugleikanum í einum landi um, at viðkomandi lýkur treytirnar í viðkomandi landi.

*Eg dugi ikki at síggja, at ein ríkisgóðkenning í sjálvum sær, uttan eina ítøkiliga meting av grundarlagnum fyri hesari, kann verða løgd til grund fyri, at umsøkjarin lýkur treytirnar fyri at verða tilnevndur løggildur grannskoðari sambært grannskoðaralógini. Tað skal í hesum sambandi viðmerkjast, at føroyskir myndugleikar høvdu ikki sambært avtalum*

*við onnur lond skyldu at góðkenna útbúgvingar ella ríkisgóðkenningar grannskoðarum viðvíkjandi.*

Tað framgongur av skjølunum, herundir einum uppriti, dagfest 9. september 2005, at Skráseting Føroya undir viðgerðini av umsóknini serliga viðgjørdi spurningin um eina dugnaskapsroynd (da: egnethedsprøve, *mín viðm.*). Sambært serligu viðmerkingunum til § 2, stk. 1 kundi setast sum treyt fyri tilnevning sum grannskoðari, at viðkomandi, um hann hevði eina útbúgving, sum kundi javnmetast við krøvini í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5, herumframt prógvaði sín kunnleika til (føroyskan) skatta- og vinnulívsrætt. Spurningurin um eina dugnaskapsroynd er eftir míni meting ikki viðkomandi fyri viðgerðina av ítøkiliga málinum ella málunum hjá kærarunum.

*Eg dugi ikki at síggja, at Skráseting Føroya hevur gjørt eina ítøkiliga meting av, um útbúgvingarligu førleikarnir hjá hesum umsøkjaranum kundu javnmetast við krøvini í lógini (§ 1, stk. 2, nr. 4 og 5), og grundað á upplýsingarnar um útbúgvingarliga grundarlagið hjá umsøkjaranum samanborið við fyrisitingarligu siðvenjuna meti eg avgerðina í hesum máli at tilnevna umsøkjaran løggildan grannskoðara vera tikna á einum skeivum grundarlag.*

*Av hesi orsøk kann avgerðin ikki sigast at vera ein broyting í fyrisitingarligu siðvenjuni, og avgerðin gevur ikki øðrum umsøkjarum, sum ikki lúka lógarásettu treytina um eina serliga próvtøku, við grundarlag í líkaregluni eitt krav upp somu rættarstøðu, tað vil siga eitt rættarkrav um tilnevning sum løggildir grannskoðarar. Grundarlag er tískil ikki fyri niðurstøðuni hjá Innlendismálaráðnum um, at tað grundað á fyrisitingarrættarligu meginregluna um at viðgera eins viðurskifti eins varð gjørdur ósakligur munur á umsøkjarum.*

Innlendismálaráðið var sambært uppskotinum til kæruavgerð 20. juni 2006 av somu fatan, tað vil siga, at avgerðin at løggilda umsøkjaran við ríkisgóðkenning úr Noregi ikki var ein broyting í fyrisitingarligu siðvenjuni, og upplýsingin um, at umsøkjarin ikki hevði verið til eina serliga próvtøku, hevði ikki avgerandi týdning fyri viðgerðina av málunum. Innlendismálaráðið var somuleiðis, sambært avgerðini,

dagfest 12. mars 2007, av teirri fatan, at ein umsøkjari kundi ikki verða tilnevdur løggildur grannskoðari við teirri grundgeving, at „(bert tí) viðkomandi í útlandinum hevur eina útbúgving, sum í viðkomandi útlandi gevur rætt til at verða løggildur.“ Hóast hesi sjónarmið broytti Innlendismálaráðið grundleggjandi niðurstøðu í málinum í avgerðini 12. mars 2007 í mun til fyrra uppskotið til kæruavgerð.

Tað sæst ikki av skjølunum í málinum, hvør osøkin til hesa broyting var, t.d. um málsgrundarlagið var ófullfíggjað, ella um ivi var um tulking av lógargrundarlagnum ella um fyrisitingarligu siðvenjuna. Uppá fyrispurning um hetta hevur Innlendismálaráðið í skrivi 11. mars 2009 greitt umboðsmanninum frá, at orsøkin til, at ráðið broytti støðu, var, at tað í tíðarskeiðnum millum uppskotini til kæruavgerðirnar (20. juni 2006 til 21. desember 2006) kom fram, at umsøkjarin við ríkisgóðkenning úr Noregi ikki hevði verið til eina serliga próvtøku. Í fleiri skjølum í málinum sæst hendan upplýsingin at hava verið partur av málsgrundarlagnum hjá Innlendismálaráðnum frá byrjan av. Hetta framgongur m.a. av kæruni, dagfest 10. februar 2006, skrivi frá Skráseting Føroya til Innlendismálaráðið, dagfest 4. mai 2006, umframt at Innlendismálaráðið tvær ferðir í uppskotinum til kæruavgerð 20. juni 2006 vísti á, at viðkomandi umsøkjarin ikki hevði verið til eina serliga próvtøku.

*Eg haldi tað tí vera óskiljandi, at Innlendismálaráðið í frágreiðing til mín sigur, at hendan upplýsingin var orsøkin til, at Innlendismálaráðið grundleggjandi broytti støðu til viðgerðina av kærunum.*

***2.1.2. Víðar ræsur viðvíkjandi fyrisitingarligu siðvenjuni***

Innlendismálaráðið staðfesti í avgerðini, at eingin kunngerð var gjørd, sum nágreinaði krøvini til serligu próvtøkuna, og at tilnevning av løggildum grannskoðarum bygdi á eina fyrisitingarliga siðvenju. Innlendismálaráðið viðmerkti í hesum sambandi, at Skráseting Føroya hevði víðar ræsur at gera av, hvør siðvenjan á økinum skuldi vera.

Av tí, at útbúgvingarliga grundarlagið hjá kærarunum var ein cand.merc.aud útbúgving, og eingin teirra hevði ríkisgóðkenning sum grannskoðari úr øðrum landi ella hevði staðið eina serliga

próvtøku, er spurningurin, um Innlendismálaráðið var av teirri fatan, at vantandi kunngerðin hevði við sær, at lógarásetta treytin um eina serliga próvtøku ikki kundi setast kærarunum í viðgerðini av umsóknum teirra.

Í sambandi við klaguna, sum umboðsmaðurin fekk í juni 2008 um avgerðirnar hjá Vinnumálaráðnum at sýta 9 persónum løggilding við teirri grundgeving, at hesir ikki høvdu staðið eina serliga próvtøku, bað umboðsmaðurin Vinnumálaráðið greiða frá rættarstøðuni og fyrisitingarligu siðvenjuni um tað mundið, tá umsóknirnar hjá teimum 7 kærarunum vórðu viðgjørdar.

Sambært frágreiðing frá Vinnumálaráðnum til umboðsmannin, dagfest 28. august 2008, kundi kravið um eina serliga próvtøku, sambært kæruavgerðini hjá Innlendismálaráðnum 12. mars 2007, ikki setast umsøkjarum við eini cand.merc.aud útbúgving úr Danmark. Grundgevingarnar fyri hesum vóru, at krøvini til serligu próvtøkuna ikki vóru nágreinaði í kunngerð, og at Skráseting Føroya hevði tilnevnt ein umsøkjara løggildan grannskoðara, ið ikki hevði staðið serligu próvtøkuna.

Frágreiðingin hjá Vinnumálaráðnum er m.a. soljóðandi:

> „**2. Frágreiðing**
> **2.1. Niðurstøðan í málinum viðvíkjandi kæru til Vinnumálaráðið um avgerð hjá Skráseting Føroya viðvíkjandi umsókn um at gerast løggildur grannskoðari** (málini, sum vóru klagað til umboðsmannin í juni 2008, *mín viðm.*)
> …
> Ad. a
> Við kunngerðini var tann ivi avkláraður, sum hevði verið frammanundan, um kravið um eina serliga próvtøku kundi setast, uttan at Skráseting Føroya hevði gjørt og kunngjørt reglur um tað, og varð við kunngerðini fyri øll mál í framtíðini (eftir at kunngerðin varð kunngjørd í Dimmalætting 3. mai 2008 (2007, *mín viðm.*) útvegað tann heimild, sum eftir kæruavgerðini hjá Innlendismálaráðnum, dagfest 12. mars 2007, manglaði.

Kravið um eina serliga próvtøku hevur greiða heimild í § 1, stk. 2, nr. 4, og er sakliga væl grundað, og hetta kravið verður sett við heimild í tilsvarandi donsku lógini, sum varð nýtt sum fyrimynd fyri grannskoðaralógina …

Eisini áðrenn próvtøkukunngerðin var kunngjørd kundu klientarnir hjá N ikki vera í iva um, at kravið um eina serliga próvtøku kundi setast eftir § 1, stk. 2, nr. 4, smbr. § 4, stk. 1 í lógini. Tað, at tað so vísti seg eftir kæruavgerð, at nakrir persónar, orsakað av ófullfíggjaðum rættargrundarlagi, tá teir lótu inn umsóknir teirra (manglandi kunngerð) og orsakað av eini løggilding í 2006 (2005, *mín viðm.*), hóast greiðu heimildina í lógini at seta krav um eina serliga próvtøku, sum ta í próvtøkukunngerðini ásettu, eftir kæruavgerð vórðu tilnevndir løggildir grannskoðarar, uttan at hava staðið eina tílíka serliga próvtøku, kann ikki geva øðrum persónum sum søktu, eftir at kunngerðin varð kunngjørd, krav upp á somu fyrimunarligu støðu, vísandi til, at rættarstøðan áðrenn kunngerðina var ógreið.
…

**2.2. Rættarstøða og siðvenja undan próvtøkukunngerðini** (t.e., tá málini hjá kærarunum vórðu viðgjørd, *mín viðm.*)
…
Sum nevnt skuldi tað eftir lógini verið ásettar reglur um próvtøku, herundir treytirnar fyri at fara upp til próvtøku, próvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming soleiðis sum tað er ásett í § 4, stk. 1, og soleiðis sum hesar reglur nú eru ásettar í próvtøkukunngerðini. Eftir kæruavgerðini hjá Innlendismálaráðnum var rættarstøðan tann, at av tí at hesar reglur ikki vóru ásettar, og við tað, at tað við avgerð hjá Skrásetingini í 2006, varð givin ein løggilding til grannskoðara við norskari løggilding, sum ikki hevði staðið eina serliga próvtøku svarandi til tað, sum í Danmark krevst at vera løggildur har, kundi kravið um eina serliga útbúgving umframt cand.merc.aud útbúgving frá Danmark ikki setast persónum vid cand.merc.aud útbúgving frá Danmark, og sum høvdu søkt um

> løggilding um somu tíð, sum umsóknin hjá persóninum vid norsku løggildingini var til viðgerðar. …“

Umboðsmaðurin hevur biðið Innlendismálaráðið um at greiða frá avgerðini 12. mars 2007, herundir greiða frá, hví Innlendismálaráðið metti tað kunna síggjast burtur frá lógarásettu treytini um eina serliga próvtøku. Innlendismálaráðið hevur í skrivi tann 11. mars 2009 greitt frá, at ráðið metti tað ikki kunna síggjast kundi burtur frá treytini um eina serliga próvtøku.

Í frágreiðingini til umboðsmannin um avgerðina viðmerkti Innlendismálaráðið í framhaldi av hesum, at Skráseting Føroya hevði víðar ræsur at gera av, hvørja praksis stovnurin fylgdi, og vísti á § 2, stk. 1 í lógini.

§ 2, stk. 1 var soljóðandi:

> „**§ 2.** Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann tilnevna persónar, sum kunnu ávísa, at teir uttan fyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við ta útbúgving, ið nevnd er í § 1, 2. stk., nr. 4 og 5, og sum annars lúka treytirnar í § 1, 2. stk. jvb. 3. stk.“

Ásetingin heimilaði Skráseting Føroya at tilnevna umsøkjarar løggildar grannskoðarar, um hesir uttan fyri Føroyar høvdu fingið eina útbúgving, sum kundi javnmetast við m.a. treytina um eina serliga próvtøku. Tað var ikki sett sum treyt sambært § 2, stk. 1, at umsøkjarin hevði staðið eina serliga próvtøku, men útbúgvingarliga grundarlagið hjá umsøkjaranum skuldi kunna javnmetast við krøvini um eina serliga próvtøku og starvsroyndir, jbr. § 1, stk. 2, nr. 4 og 5.

Granskoðaralógin var, sum greitt frá undir pkt. 1, meinlík tágaldandi donsku grannskoðaralógini. Ongar serligar viðmerkingar vóru til einstøku ásetingarnar í lógaruppskotinum, og sum grundarlag fyri lógaruppskotinum var undir almennu viðmerkingunum víst til álitið hjá einum arbeiðsbólki. Sambært hesum áliti varð mælt til at seta í

gildi lóg við sama innihaldi sum teirri, sum var galdandi í Danmark um hetta mundið, og í áliti sínum undir viðgerðini í Løgtinginum staðfesti Rættarnevndin, at lógaruppskotið bygdi á hesa lóg.

Sum umrøtt undir pkt. 1.1.3 vóru síðani 1. juli 1993, tá grannskoðaralógin kom í gildi, tilnevndir 6 løggildir grannskoðarar, sum allir frammanundan høvdu ríkisgóðkenning sum grannskoðarar úr øðrum landi. Hvat viðvíkur tilnevningunum av umsøkjarunum, ið frammanundan vóru tilnevndir *statsautoriseret revisor* í Danmark, og høvdu staðið eina serliga próvtøku, má leggjast til grund, at hendan serliga próvtøkan samsvaraði lógarkravinum í § 1, stk. 2, nr. 4, og at hon fór fram eftir sama lógargrundarlag sum tí føroyska. Fyrisitingarliga siðvenjan má tískil sigast at hava bygt á, at innihaldið í serligu próvtøkuni sambært grannskoðaralógini var ætlað at samsvara innihaldinum í serligu próvtøkuni sambært donsku grannskoðaralógini.

Tað má sambært skjølunum í málunum hjá kærarunum leggjast til grund, at kærararnir høvdu ikki aðra útbúgving enn cand.merc. aud útbúgving, og teir høvdu ikki staðið eina serliga próvtøku. Innlendismálaráðið hevur ikki undir viðgerðini av kærunum ella í frágreiðing til mín kunnað víst á, at kærararnir høvdu eina útbúgving, sum kundi grunda eina niðurstøðu um, at útbúgvingarliga grundarlag teirra kundi javnmetast við m.a. kravið um eina serliga próvtøku. Tað er tí ógreitt við hvørjum endamáli Innlendismálaráðið í viðgerðini av ítøkiligu kærunum vísir til § 2, stk. 1 sum grundarlag fyri sjónarmiðnum um, at Skráseting Føroya hevði víðar ræsur at gera av, hvør fyrisitingarliga siðvenjan skuldi vera.

*Vísandi til, at úrslitið av avgerðini hjá Innlendismálaráðnum 12. mars 2007 og seinnu kæruavgerðunum (sí undir pkt. 3.) var, at kærararnir fingu tilnevning sum løggildir grannskoðarar uttan at lúka treytina um at hava staðið eina serliga próvtøku, kann eg ikki koma til aðra niðurstøðu enn, at Innlendismálaráðið var av teirri fatan, at treytin um serligu próvtøkuna ikki kundi setast kærarunum, og at vantandi kunngerðin møguliga var ein av orsøkunum til hesa fatan. Hesum er ikki grundarlag fyri. Kravið um eina serliga próvtøku var greitt ásett*

*í lógini sum treyt fyri at gerast løggildur grannskoðari, og vísandi til fyrisitingarligu siðvenjuna kundi vantandi áseting í kunngerð ikki hava við sær, at myndugleikarnir ikki kundu treyta løggilding av, at umsøkjararnir høvdu staðið serligu próvtøkuna.*

## 3. Onnur kæruviðgerðin í Innlendismálaráðnum av somu málum

Eftir at Innlendismálaráðið 12. mars 2007 hevði heitt á Skráseting Føroya um at taka umsóknirnar hjá kærarunum uppaftur til viðgerðar, og málini vóru viðgjørd av nýggjum, sýtti Skráseting Føroya tann 31. mai 2007 kærarunum á øðrum sinni tilnevning sum løggildir grannskoðarar. Grundgevingin var, at kærararnir ikki kundu vísa á at hava eina útbúgving, sum kundi javnmetast við útbúgvingina í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 í lógini.

Dagin eftir, tann 1. juni 2007, vórðu avgerðirnar kærdar til Innlendismálaráðið, sum tann 14. juni 2007 í fysta umfari tók avgerð í trimum av málunum. Innlendismálaráðið metti viðgerðina hjá Skráseting Føroya vera ósakliga og tók ikki undir við grundgevingunum fyri at sýta kærarunum løggilding. Innlendismálaráðið tók einsljóðandi avgerðir í øllum 7 kærumálunum og bað Skráseting Føroya um at viðgera málini á triðja sinni.

### *3.1. Ógegni sambært § 3, stk. 1, nr. 4 í fyrisitingarlógini*

Í sambandi við, at avgerðirnar hjá Skráseting Føroya á øðrum sinni vórðu kærdar til Innlendismálaráðið, verður fyrst viðgjørdur spurningurin, um aðalstjórin í Innlendismálaráðnum var gegnigur at viðgera enn eina kæru um somu mál.

§ 3, stk. 1, nr. 4, stk. 2 og 3 og § 6, stk. 1 í fyrisitingarlógini (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg) eru soljóðandi:

> „**§ 3.** Persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, er ógegnigur um so er, at
> …
> 1) Málið viðvíkur kæru um ella innan av eftiransingar- ella eftirlitsvirksemi mótvegis einum øðrum almennum

myndugleika, og viðkomandi hevur verið við í tí avgerðini ella til at fremja ta atgerð, sum málið viðvíkur, …

*Stk. 2.* Persónur er tó ikki ógegnigur, um tað má metast, at áhugamál hansara eru soleiðis háttað ella so veik, ella at málið ella virksemi hansara í samband við viðgerðina av málinum, er soleiðis háttað, at eingin vandi má metast at vera fyri, at avgerðin í málinum kann fara at verða ávirkað av óviðkomandi fyriliti.

*Stk. 3.* Hann, sum er ógegnigur í einum máli, má ikki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum.

**§ 6.** Hann, sum er kunnigur við, at tað fyri hann eru viðurskifti, sum eru nevnd í § 3, stk. 1, skal sum skjótast boða yvirmanni sínum innan myndugleikan frá hesum, um ikki tað er eyðsæð, at hesi viðurskifti eru uttan týdning. Limir í einum kollegialum fyrisitingarmyndugleika skulu fráboða til myndugleikan."

Reglurnar um ógegni byggja á eitt grundleggjandi krav um, at almennir myndugleikar fyrisita sakligt, og reglurnar skulu tryggja, at almenningurin kann líta á, at myndugleikar einans taka saklig atlit. Til tess at sleppa undan illgruna um, at myndugleikapersónar lata seg ávirka av óviðkomandi áhugamálum, er í § 3, stk. 3 ásett, at persónar, sum eru ógegnigir, kunnu ikki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum.

Sambært § 3, stk. 1, nr. 4 er ein persónur hjá einum yvirskipaðum myndugleika ógegnigur, um hesin áður hevur verið við til at taka avgerð í einum máli, sum verður kært til yvirskipaðan myndugleikan. Hetta er grundað á, at endamálið við rættinum at kæra er at tryggja, at eitt mál veruliga fær tvær viðgerðir. Ógegni sambært ásetingini er treytað av, at talan er um tveir myndugleikar, og t.d. forðar ásetingin ikki fyri, at ein myndugleiki tekur uppaftur viðgerðina av einum máli. Ásetingin forðar heldur ikki, at ein yvirskipaður myndugleiki vegleiðir einum undirskipaðum myndugleika undir viðgerðini av einum máli, ið kann kærast til yvirskipaða myndugleikan. Umstøðurnar í málinum ella innihaldið í samskiftinum millum starvsfólk hjá myndugleikunum kann tó vera soleiðis háttað, at

starvsfólk hjá kærumyndugleikanum verður ógegnugt at viðgera eina kæru um málið.

Í viðmerkingunum til § 3, stk. 1, nr. 4 í donsku fyrisitingarlógini, ið er fyrimynd fyri føroysku fyrisitingarlógini, stendur m.a. soleiðis í Fólkatingstíðindum A, 1985/86, sp. 121:

> „Det forekommer undertiden, at en underordnet forvaltningsmyndighed i forbindelse med behandlingen af en konkret sag søger vejledning om lovfortolkningsspørgsmål eller lignende – f.eks. telefonisk – hos den overordnede myndighed, der tillige er klageinstans vedrørende den pågældende sag. Er rådgivningen givet i en sådan form, at medarbejderen hos den overordnede myndighed ikke har givet udtryk for sin endelige opfattelse med hensyn til den konkrete sags udfald, men blot ydet rådgivning med hensyn til fortolkningen af retsgrundlaget for afgørelsen og/eller har vejledt om den overordnede myndigheds praksis, vil bestemmelsen i nr. 4 ikke medføre, at den pågældende medarbejder vil være inhabil i forhold til den pågældende sag, hvis afgørelsen bliver påklaget til den overordnede myndighed. Den pågældende vil i så fald ikke have „medvirket ved den afgørelse“, som den underordnede myndighed har truffet.“

Spurningurin verður eisini viðgjørdur í Forvaltningsret, 2. útgáva eftir Hans Gammeltoft-Hansen v.fl., har tað á bls. 263 stendur m.a. soleiðis í framhaldi av omanfyri standandi:

> „… Tilkendegiver den pågældende medarbejder derimod en forholdsvis præcis og endelig opfattelse vedrørende den konkrete sags udfald, vil der foreligge toinstansinhabilitet i forhold til en senere klagesag.“

Tey viðurskifti, ið hava týdning fyri viðgerðina av spurninginum um aðalstjórin var ógegnigur, eru avgerðin frá 12. mars 2007 og samskiftið millum Innlendismálaráðið og Skráseting Føroya, eftir at Innlendismálaráðið hevði heitt á Skráseting Føroya um at viðgera málini av nýggjum.

Eftir at hava móttikið avgerðina vendi Skráseting Føroya sær til Innlendismálaráðið við fyrispurningi um, hvussu avgerðin skuldi skiljast. Innlendismálaráðið ynskti ikki at útgreina niðurstøðuna, men sambært eini fundarfrágreiðing, dagfest 30. mars 2007, skrivað av stjóranum á Skráseting Føroya verður aðalstjórin í Innlendismálaráðnum m.a. endurgivin soleiðis:

> „L mælti til, at vit (Skrásetingin):
> 1) …
> 2) Avgreiðir málið við teimum 7. Ósakligt, at hesir donsku umsøkjararnir ikki hava fingið høvi at vísa á, um teir hava nakað eyka afturat einari CMA-útbúgving (cand.merc.aud.; *mín viðm.)*. Vit skulu senda teimum skriv, so teir fáa høvi at koma við fleiri upplýsingum."

Eftir at Skráseting Føroya samsvarandi hesum hevði givið kærarunum møguleika at koma við fleiri upplýsingum um útbúgvingarliga grundarlag teirra, kærdi advokaturin hjá kærarunum stjóran á Skráseting Føroya fyri grovt tænastubrot. Innlendismálaráðið viðgjørdi ongantíð kæruna, men í svari til advokatin tann 13. apríl 2007, sum í avriti varð sent til Skráseting Føroya, skrivar Innlendismálaráðið m.a. soleiðis:

> „Innlendismálaráðið skal boða frá, at klientar tygara hava fingið freist til 19. apríl 2007 at koma við upplýsingum í málinum til Skráseting Føroya. Innlendismálaráðið fer tí ikki, sum støðan er í løtuni, at taka málið úr hondunum á Skráseting Føroya; men fer at heita á stovnin at seta seg í samband við Innlendismálaráðið, áðrenn avgerð verður tikin í málinum."

Í einum uppriti, dagfest 30. mai 2007, sum stjórin á Skráseting Føroya skrivaði eftir eina telefonsamrøðu við aðalstjóran í Innlendismálaráðnum, verður aðalstjórin m.a. soleiðis endurgivin:

> „… L metir tað best, at Skrásetingin tekur avgerð skjótt, … … er byrjaður at fyrireika seg til eina kærumálsviðgerð."

„… L greiðir frá, at kærarnir hava verið í IMR (Innlendismálaráðnum; *mín viðm.*) saman við advokati, har teir hava boðað frá, at teir undir øllum umstøðum fara at kæra avgerðina frá Skráseting Føroya.“

„… L sigur, at landsstýrismaðurin í Innlendismálum sum so onga meining hevur um, hvussu málið skal avgreiðast, men at hann er vitandi um, at Vinnumálaráðið ynskir at liberalisera marknaðin fyri grannskoðan og at innføra EU-reglur, og at Vinnumálaráðið ynskir, at umsøkjararnir uttan „serliga roynd“ smb. grannskoðaralógini fáa løggilding.“

Uppá fyrispurning frá umboðsmanninum um Innlendismálaráðið hevði viðmerkingar til frágreiðingina og uppritini, sum eru endurgivin omanfyri, hevur Innlendismálaráðið í skrivi, dagfest 15. januar 2010, greitt frá, at Innlendismálaráðið legði dent á, at ráðið ikki kundi vegleiða Skráseting Føroya, tí ráðið var kærumyndugleiki í málinum.

Eg skilji hetta skriv sum, at Innlendismálaráðið ikki metti aðalstjóran vera ógegnigan at viðgera seinnu kærurnar.

*Hóast tað ikki í avgerðini 12. mars 2007 greitt sæst, hvussu Innlendismálaráðið kemur til sína niðurstøðu, vóru hvørki kærarar ella Skráseting Føroya í iva um, hvørja støðu Innlendismálaráðið hevði til umsóknirnar hjá kærarunum. Tað er eisini mín fatan av avgerðini, at Innlendismálaráðið, umframt at viðgera málsviðgerðina hjá Skráseting Føroya, ítøkiliga viðgjørdi umsóknirnar hjá kærarunum og tók støðu til, hvør avgerðin í málunum átti at verða, tað vil siga, at kærararnir áttu at verið tilnevndir løggildir grannskoðarar. Eg meti tað tískil ikki kunna síggjast burtur frá vandanum fyri, at aðalstjórin, í sambandi við at somu mál vórðu kærd á øðrum sinni, var bundin av støðutakan síni til málini undir fyrru kæruviðgerðini.*

*Innihaldið í samskiftinum í millum aðalstjóran og stjóran á Skráseting Føroya, eftir at málini vóru víst Skráseting Føroya til nýggja viðgerð, undirbyggir hetta sjónarmiðið. Í hesum sambandi skal eg serliga vísa á,*

*at aðalstjórin greiddi Skráseting Føroya frá, at Vinnumálaráðið ynskti, at kærararnir fingu løggilding sum grannskoðarar, at Innlendismálaráðið, uttan at greiða nærri frá orsøkini, kunnaði Skráseting Føroya um, at málið kundi verða tikið frá stovninum, og at ráðið bað Skráseting Føroya seta seg í samband við Innlendismálaráðið, áðrenn avgerð varð tikin í málinum. Í metingina inngongur somuleiðis lutfalsliga stutta viðgerðartíðin í Innlendismálaráðnum av seinnu kærunum, sum í trimum teimum fyrstu málunum var 9 arbeiðsdagar.*

*Vísandi til hetta meti eg, at aðalstjórin í Innlendismálaráðnum, sum sambært skjølunum í málinum hevði um hendi viðgerðina av kærunum, eftir at fyrra uppskotið til kæruavgerð varð sent kærarunum, var ógegnigur at viðgera kærurnar frá 1. juni 2007.*

Reglurnar um persónligt ógegni skulu tryggja, at ein avgerð er lóglig og røtt, og talan er tí um eitt týðandi feil í málsviðgerðini, um ein ógegnigur persónur hevur luttikið í viðgerðini. Sum meginregla er útgangsstøðið tískil, at um ógegni hevur havt ávirkan á eina avgerð, er avgerðin at meta sum ógildug. Tað kunnu tó vera viðurskifti, sum tala fyri, at tað í serligum førum og eftir eini ítøkiligari meting verður vikið frá hesum útgangsstøði. Hetta kann t.d. vera, um ógegni ikki verður mett at hava havt ítøkiliga ávirkan á innihaldið í avgerðini, um viðkomandi, sum avgerðin er stílað til, ikki hevur havt kunnleika til ógegni, og um viðkomandi – møguliga gjøgnum longri tíð – hevur lagað sítt virksemi í áliti til, at avgerðin var røtt. Er sjálv avgerðin í málinum ikki at meta sum innihaldsliga skeiv, kann tað haraftrat út frá einum sjónarmiði um rímiligheit mótvegis borgaranum tala fyri, at avgerðin stendur við.

*Hvat viðvíkur ítøkiliga málinum, hevði aðalstjórin undir fyrru kæruviðgerðini ítøkiliga tikið støðu til málið, og hetta hevur eftir míni meting við sær, at kærurnar um seinnu avgerðirnar hjá Skráseting Føroya ikki kunnu sigast at hava fingið eina veruliga viðgerð, og at rættarverjan um at fáa eitt mál viðgjørt tvær ferðir er sett til viks. Av hesi orsøk og vísandi til meting mína av innihaldinum í seinnu kæruavgerðunum hjá Innlendismálaráðnum (sí undir pkt. 3.2.), umframt at eg ikki dugi at síggja, at kærararnir ikki kunnu hava verið vitandi um, at aðalstjórin*

*var ógegnigur, helli eg mest til tað sjónarmið, at talan er um eitt so mikið týðandi brek í málsviðgerðini, at seinnu kæruavgerðirnar mugu metast at vera ógildugar.*

### *3.2. Avgerðirnar í seinnu kærumálunum*

Úrslitið av viðgerðini hjá Innlendismálaráðnum av seinnu kærunum var, at Skráseting Føroya varð biðin um at viðgera øll málini av nýggjum. Í avgerðunum, sum vóru áleið einsljóðandi, segði Innlendismálaráðið m.a. soleiðis:

> „… Skráseting Føroya hevur løggilt grannskoðaran við norskari løggilding uttan at hesin hevur verið til serliga próvtøku. Grundgevingin fyri hesum er, at kravið um próvtøku var ikki galdandi í Noregi, tá ið hesin varð løggildur har.
>
> Harafturímóti vil Skráseting Føroya ikki løggilda … (navn, *mín viðm.*), tí hann ikki hevur staðið serligu royndina, sum verður kravd fyri at gerast løggildur grannskoðari í Danmark.
> …
> Innlendismálaráðið metir tí (heldur) ikki, at Skráseting Føroya kann nokta (…) at verða løggildur grannskoðari, bert tí hann ikki hevur staðið eina serliga roynd smb. grein 1, stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar.
> ….“

Hetta eru somu sjónarmið og grundgevingar sum í kæruavgerðini 12. mars 2007. Um hetta verður víst til viðgerðina undir pkt. 2.

Við støði í niðurstøðuni í avgerðini 12. mars 2007 um, at Skráseting Føroya gjørdi ósakligan mun á umsøkjarum í mun til, um umsøkjararnir høvdu útbúgving úr Danmark ella Noregi, metti Skráseting Føroya undir nýggju viðgerðini av málunum um førleikarnar hjá kærarunum í mun til krøvini, ið um tað mundið vóru sett fyri at gerast ríkisgóðkendur grannskoðari í Noregi. Við støði í hesi meting kom Skráseting Føroya til ta niðurstøðu, at kærararnir kundu ikki vísa á, at teir høvdu eina útbúgving, sum kundi javnmetast við krøvini í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5.

Í kæruavgerðini 14. juni 2007 staðfesti Innlendismálaráðið, at javnmetingin hjá Skráseting Føroya var ikki saklig m.a. orsakað av, at dentur var lagdur á, at kærararnir sambært cand.merc.aud prógvunum høvdu lægri próvtøl, enn tað kravdist í Noregi fyri at gerast løggildur grannskoðari. Innlendismálaráðið staðfesti somuleiðis, at avgerandi fyri, um kærararnir kundu fáa løggilding, var, um teir við førleikum teirra kundu sigast at hava eina útbúgving, sum kundi javnmetast við krøvini í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5.

Í framhaldi av hesum segði Innlendismálaráðið soleiðis í avgerðunum:

> „… Í javnmetingini av førleikanum hjá (…) staðfestir Skráseting Føroya, at kravið fyri at verða løggildur grannskoðari í Noregi er at viðkomandi hevur staðið eina praktiska roynd í viðkomandi lóggávu, fyriskipanum og rundskrivum. …
>
> Hinvegin, so er endamálið við norsku royndini, sum er ein praktisk roynd: „at dokumentere at kandidaten er egnet til å påtage seg revisionsoppdrag.“
>
> Av skjalatilfarinum sæst, at (…) m.a. hevur starvast hjá løggildum grannskoðara í 13 ár aftaná at hann hevur staðið cand. merc. aud. útbúgvingina. Hann hevur sostatt drúgvar praktiskar royndir í grannskoðarayrkinum.
>
> Innlendismálaráðið er tí ikki samt við Skráseting Føroya í nevndu grundgevingum fyri at nokta … at verða løggildur sum grannskoðari.“

Vísandi til hetta bað Innlendismálaráðið Skráseting Føroya um at viðgera málini av nýggjum og avgreiða tey skjótast gjørligt.

Eg dugi ikki at síggja, at seinnu kæruavgerðirnar hjá Innlendismálaráðnum kunnu skiljast á annan hátt enn, at Innlendismálaráðið ítøkiliga hevur mett um førleikarnar hjá kærarunum í mun til krøvini at gerast ríkisgóðkendur grannskoðari í Noregi og á hesum grundarlag kom

til ta niðurstøðu, at kærararnir sambært § 2, stk. 1 í grannskoðaralógini luku treytirnar fyri at gerast løggildir grannskoðarar.

Hetta verður eisini staðfest í frágreiðing frá Innlendismálaráðnum til umboðsmannin, dagfest 11. mars 2009, har Innlendismálaráðið endurtók, at tað metti grundgevingarnar hjá Skráseting Føroya vera ósakligar, „tí norska royndin er ein roynd í „praktisk revisions-oppdrag“ f.v.s. at fáa eina hilling av um viðkomandi dugir at arbeiða sum grannskoðari í praksis. Allir hinir umsøkjararnir (kærararnir; *mín viðm.*) hava drúgvar royndir í grannskoðaraarbeiði í praksis.“

*Sambært hesum hevur Innlendismálaráðið hildið seg kunnað viðgjørt kærurnar í mun til, hvørji krøv verða sett til at gerast løggildur grannskoðari í Noregi. Hetta haldi eg vera óskiljandi. Í grannskoðaralógini var greitt ásett, at ein av treytunum fyri at gerast løggildur grannskoðari var, at umsøkjarin hevði staðið eina serliga próvtøku. Hesum hevur Innlendismálaráðið sambært seinnu kæruavgerðunum sæð burtur frá í viðgerðini, og hetta meti eg vera serstakliga atfinningarsamt.*

Hvat viðvíkur viðgerðini hjá Skráseting Føroya eftir fyrru kæru-viðgerðina, framgongur tað av skjølunum, at Skráseting Føroya *undan* avgerðini 12. mars 2007 vísti Innlendismálaráðnum á, at tað gav ikki meining at vísa málunum til nýggja viðgerð við teirri grundgeving, at munur var gjørdur á umsøkjarunum í mun til um teir høvdu útbúgving úr Noregi ella Danmark, og at Skráseting Føroya *eftir* kæruavgerðina gjørdi vart við, at stovnurin metti niðurstøðuna vera skeiva og byggja á eina misskiljing. Skráseting Føroya heitti í hesum sambandi á Innlendismálaráðið um at greiða frá, um ráðið metti førleikarnar hjá umsøkjarunum vera eins, men Innlendismálaráðið ynskti ikki at útgreina avgerðina.

*Eftir umstøðunum í málinum havi eg ikki orsøk til at finnast at Skráseting Føroya fyri viðgerðina av málunum eftir kæruavgerðina hjá Innlendismálaráðnum 12. mars 2007.*

Eftir at Skráseting Føroya sambært avgerðini hjá Innlendismála-ráðnum 12. mars 2007 hevði tikið málini uppaftur til viðgerðar, kærdi

advokaturin hjá kærarunum stjóran á Skráseting Føroya fyri grovt tænastubrot fyri ikki beinanvegin, samsvarandi avgerðini hjá Innlendismálaráðnum, at tilnevna kærararnar løggildar grannskoðarar. Innlendismálaráðið tók ikki stig til at viðgera kæruna, men kunnaði Skráseting Føroya um, at Innlendismálaráðið ikki, sum støðan var, fór at „taka málið úr hondunum" á Skráseting Føroya.

*Tað má hava verið Innlendismálaráðnum greitt, at hendan kunningin, saman við boðunum um, at Skráseting Føroya skuldi seta seg í samband við ráðið, áðrenn nøkur avgerð varð tikin, kundi fatast sum ein støðutakan til, at stjórin gjørdi ímóti boðum frá einum yvirskipaðum myndugleika, og at hetta kundi ávirka viðgerðina hjá Skráseting Føroya av ítøkiligu málunum. Eg haldi handfaringina hjá Innlendismálaráðnum av kæruni um stjóran á Skráseting Føroya vera atfinningarsama.*

So hvørt sum Innlendismálaráðið tók avgerð í einstøku málunum hja kærarunum, tók Skráseting Føroya málini uppaftur og tilnevndi kærararnar løggildar grannskoðarar sambært avgerðunum hjá Innlendismálaráðnum.

Sambært skjølum, ið eg havi fingið til láns frá Skráseting Føroya, tilnevndi Skráseting Føroya í august, september og oktober 2007 umframt kærararnar tríggjar aðrar umsøkjarar løggildar grannskoðarar. Hesir umsøkjararnir lótu umsóknir sínar inn undir undir seinnu kæruviðgerðini í Innlendismálaráðnum, og Skráseting Føroya tilnevndi umsøkjararnar løggildar grannskoðarar við grundarlag í seinnu kæruavgerðunum hjá Innlendismálaráðnum.

## 4. Viðgerðin í Vinnumálaráðnum

Avgerðirnar hjá Skráseting Føroya 27. januar 2006 um at sýta kærarunum løggilding sum grannskoðarar vóru upprunaliga kærdar til Vinnumálaráðið, sum umsitur málsøkið grannskoðarar. Av tí, at sonur aðalstjóran í Vinnumálaráðnum var ein av kærarunum, boðaði Vinnumálaráðið løgmanni frá, at aðalstjórin var ógegnigur at viðgera málið, og løgmaður gjørdi tann 13. mars 2006 av at flyta viðgerðina av kæruni til landsstýrismannin í innlendismálum.

§ 3, stk. 1, nr. 2 og 5 og stk. 3 í fyrisitingarlógini eru soljóðandi:

> „§ 3. Persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, er ógegnigur um so er, at
> …
> 2) hjúnarfelagin hjá viðkomandi, skyld ella svágd í stígandi ella fallandi linju ella síðulinjuni so nær sum børn hjá systkjum, ella onnur nærskyld hava ein serstakan persónligan ella fíggjarligan áhuga í úrslitinum av málinum ella umboðar onkran, ið hevur ein slíkan áhuga,
> …
> 5) tað annars eru viðurskifti, sum kunnu hugsast at vekja iva um, at viðkomandi heldur við einum av pørtunum.
> …
> Stk. 3. Hann, sum er ógegnigur í einum máli, má ikki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum.“

Reglurnar um ógegni byggja á eitt grundleggjandi krav um, at almennir myndugleikar fyrisita sakligt, og reglurnar skulu tryggja, at almenningurin kann líta á, at myndugleikar einans taka saklig atlit.

Sambært § 3, stk. 1, nr. 2 er persónur, sum virkar innan almennu fyrisitingina, ógegnigur, um so er, at t.d. børn hjá viðkomandi hava ein serstakan persónligan ella fíggjarligan áhuga í úrslitinum av málinum. Til tess at sleppa undan illgruna um, at myndugleikapersónar lata seg ávirka av persónligum ella øðrum óviðkomandi áhugamálum, er í § 3, stk. 3 ásett, at persónar, sum kunnu hugsast at hava serstøk áhugamál í málinum, kunnu ikki taka avgerð, vera við til at taka avgerð ella á annan hátt vera við í viðgerðini av málinum.

Hvat viðvíkur embætisfólkunum í Vinnumálaráðnum, so vóru hesi sambært § 3, stk. 1, nr. 5 ógegnig og kundu ikki á nakran hátt luttaka í viðgerðini av kærunum. Hetta byggir á, at viðurskiftini ímillum ein stjóra og undirskipað starvsfólk eru soleiðis háttað, at er stjórin ógegnigur at viðgera eitt mál, er vandi fyri, at áhugamálini, sum

gera stjóran ógegnigan, kunnu ávirka starvsfólkini undir viðgerðini av málinum.

### *4.1. Um viðgerðina av ítøkiligu málunum*

Tað framgongur av skjølum, sum umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá myndugleikunum, at umboð fyri Vinnumálaráðið m.a. í fleiri førum vendu sær beinleiðis til stjóran á Skráseting Føroya um viðgerðina av málunum. Hetta hóast embætisfólkini í Vinnumálaráðnum vóru ógegnig og málið ikki longur var fevnt av málsræðinum hjá landsstýrismanninum í vinnumálum, Hetta fór fram bæði áðrenn Innlendismálaráðið tók fyrstu kæruavgerðina 12. mars 2007 og eftir, at Innlendismálaráðið hevði víst Skráseting Føroya málunum til nýggja viðgerð.

*Fyrispurningur um at taka umsóknirnar uppaftur til viðgerðar*

Sambært fundarfrágreiðing hjá Vinnumálaráðnum, dagfest 14. november 2006, frá fundi millum millum Skráseting Føroya og Vinnumálaráðið sama dag um dagføring av grannskoðaralógini, spurdi Vinnumálaráðið Skráseting Føroya, um tað ikki var møguligt at taka umsóknirnar hjá kærarunum upp av nýggjum.

*Fundur við kærararnar*

Tveir dagar eftir, tann 16. november 2006, var fundur hildin í Vinnumálaráðnum millum 3 av kærarunum og landsstýrismannin í vinnumálum. Tvær frágreiðingar eru skrivaðar frá fundinum, ið eru í andsøgn við hvørja aðra um, hvat fór fram á fundinum, og eingin frágreiðing frá fundinum er til skjals í Vinnumálaráðnum.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin hevur upplýst umboðsmanninum, at fulltrúin, sum luttók á fundinum, skrivaði eina frágreiðing frá fundinum í notatbók sína. Sambært eini endurgeving av hesi frágreiðing høvdu kærararnir biðið um fundin fyri at kunna landsstýrismannin um kæru teirra um avgerðirnar hjá Skráseting Føroya og um útbúgving av grannskoðarum í øðrum londum, og landsstýrismaðurin kunnaði kærararnar um, at Vinnumálaráðið vegna ógegni einki hevði við kærurnar at gera.

Í skrivi, dagfest 19. november 2006, frá 2 av kærarunum til Innlendismálaráðið varð m.a. greitt soleiðis frá fundinum:

> „… Annars vilja vit kunna teg um, at vit hava havt ein fund við K, landsstýrismann og P, fulltrúa, um okkara kæru.
> …
> Vit halda, at tað er óheppið, at kæran ikki verður viðgjørd í Vinnumálaráðnum, og man Vinnumálaráðið vera samt í hesum, tí at Vinnumálaráðið heldur, at Skráseting Føroya/M átti at tikið okkara umsóknir upp til nýggja viðgerð. Men M hevur boðað Vinnumálaráðnum frá, at hann einki ger við málið, fyrr enn hann hevur hoyrt niðurstøðuna frá Innlendismálaráðnum.
> …
> Nýggir upplýsingar, og at arbeiðið við kunngerðini er steðgað, ger, at Vinnumálaráðið heldur, at okkara umsóknir um løggilding beinanvegin eiga at verða gingnar á møti. Vit fingu at vita frá Vinnumálaráðnum, at tey vildu boða Innlendismálaráðnum frá teirra tilmæli. … Vinnumálaráðið dugdi ikki at síggja, at okkara mál var øðrvísi (enn málið at løggilda grannskoðaran við norskari ríkisgóðkenning, *mín viðm.*), og hetta skuldi Vinnumálaráðið somuleiðis boða Innlendismálaráðnum frá.“

Fyrrverandi landsstýrismaðurin hevur havt høvi at gera viðmerkingar til skrivið frá kærarunum, og sambært skrivi til umboðsmannin, dagfest 14. januar 2010, minnist hann fundin sum endurgivið av fulltrúanum og upplýsir, at tosað varð generelt og annars lurtað eftir sjónarmiðunum. Fulltrúin, sum luttók á fundinum, hevur ongar viðmerkingar til skrivið frá kærarunum.

Innlendismálaráðið hevur í skrivi, dagfest 15. januar 2010, uppá fyrispurning frá umboðsmanninum upplýst, at Innlendismálaráðið ikki samskifti við Vinnumálaráðið um innihaldið í ítøkiliga kærumálinum um løggilding av grannskoðarum.

*Telefonsamrøða við deildarstjóra í Vinnumálaráðnum*
Sambært telefonnotati, dagfest 12. mai 2007, sum stjórin á Skráseting

Føroya hevur skrivað eftir eina telefonsamrøðu við ein deildarstjóra í Vinnumálaráðnum, hevði Vinnumálaráðið ikki „forstáðilsi fyri“ avgerðini at nokta løggilding og var av teirri fatan, at Skráseting Føroya átti at tilnevnt øllum ella nøkrum av umsøkjarunum løggilding. Sambært notatinum varð spurnartekn sett við heimildina at nýta karakterkravið sum metingarstøði undir ætlaðu avgerðini, sum Skráseting Føroya hevði sent kærarunum 4 dagar frammanundan.

Umboðsmaðurin hevur sent Vinnumálaráðnum telefonnotatið til viðmerkingar, sum í skrivi, dagfest 21. januar 2010, sigur, at deildarstjórin ikki minnist seg hava sagt nakað av tí, sum er endurgivið í telefonnotatinum.

*Telefonsamrøður við landsstýrismannin í vinnumálum*
Sambært øðrum notatum, sum stjórin á Skráseting Føroya hevur skrivað, vendi landsstýrismaðurin í vinnumálum sær í mai 2007 tríggjar ferðir til stjóran um málið. Hetta er í tíðarskeiðnum eftir, at Innlendismálaráðið heitti á Skráseting Føroya um at taka málini uppaftur til viðgerðar, og eftir at Skráseting Føroya hevði sent kærarunum uppskot til avgerð um á øðrum sinni at sýta teimum løggilding sum grannskoðarar.

Brot úr telefonnotati, dagfest 10. mai 2007:

> „… Umsøkjararnir hava bíðað leingi og hava krav uppá eina løggilding. … Hann segði, at teir (kærararnir, mín viðm.) vóru minst líka væl kvalificeraðir sum A (umsøkjarin, sum var tilnevndur løggildur grannskoðari í september 2005, *mín viðm.*)“

Brot úr telefonnotati, dagfest 16. mai 2007:

> „Sigur at málið er um at gerast politiskt og at sambandsflokkurin krevur málið flutt frá Skrásetingini.“

Brot úr telefonnotati, dagfest 30. mai 2007:

> „… Ringir viðvíkjandi grannskoðaramálinum, hann sum landsstýrismaður og eg (M) sum stjóri kann fáa trupulleikar, um málið ikki verður avgreitt, tí umsøkjararnir leggja press á landsstýrismannin og tað stundar til val, tí kann hann sum landsstýrismaður ikki liva við, at málið ikki verður avgreitt og umsøkjararnir fáa løggilding.
> …
> Biður meg avgreiða málið sum skjótast, so at teir (kærararnir, *mín viðm.*) fáa løggilding, tí málið kann av løgmanni verða tikið frá stovninum og so havi eg stórar trupulleikar sum stjóri.
> …
> Kunnaði hann víðari um notatið frá O. Hann spurdi hví vit høvdu leitað okkum ráðgeving frá O, tað er óneyðugt at vevja ein fyrrverandi dómara uppí hetta málið, tað snýr seg ikki bara um at fáa rætt, men tað snýr seg um at avgreiða málið, so umsøkjararnir fáa løggilding. …“

Umboðsmaðurin hevur sent táverandi landsstýrismanninum omanfyri nevndu telefonnotat til viðmerkingar. Fyrrverandi landsstýrismaðurin sigur í skrivi, dagfest 14. januar 2010, at hann minnist ikki nakað til telefonsamrøðurnar 10., 16. og 30. mai 2007, hóast hann minnist at hava spurt stjóran á Skráseting Føroya eftir málinum. Fyrrverandi landsstýrismaðurin sigur seg vera rættiliga vísan í ikki at hava málborið seg soleiðis, sum ført verður fram í telefonnotatunum.

*Málsviðgerðin av kæruni varð av løgmanni flutt úr Vinnumálaráðnum til landsstýrismannin í innlendismálum orsakað av, at aðalstjórin í Vinnumálaráðnum var ógegnigur, og embætisfólkini í Vinnumálaráðnum vóru av hesi orsøk somuleiðis ógegnig og kundu ikki á nakran hátt luttaka í viðgerðini av málinum. Talan er tí um ósakliga fyrisiting, tá umboð fyri Vinnumálaráðið luttaka á fundi við kærararnar um kæruna og venda sær til stjóran á Skráseting Føroya um ítøkiligu málsviðgerðina av málunum hjá kærarunum.*

*Hvat viðvíkur fundinum millum landsstýrismannin og kærararnar tann 16. november 2006, átti Vinnumálaráðið at havt vegleitt kærarunum um at venda sær til landsstýrismannin í innlendismálum við ynski teirra um fund um málið.*

*Hvat viðvíkur viðgerðini hjá umboðsmanninum, so fer hendan fram á einum skrivligum grundarlag. Av tí, at tvær frágreiðingar eru frá fundinum, sum eru í andsøgn við hvørja aðra, og fyrrverandi landsstýrismaðurin sigur seg bert kennast við innihaldið í frágreiðingini hjá fulltrúanum, og fulltrúin, sum luttók á fundinum, onga viðmerking hevur til frágreiðingina hjá kærarunum, er tað ikki gjørligt hjá mær at staðfesta, hvat varð sagt ella fór fram á umrødda fundinum. Eg fái tískil ikki gjørt meira við hendan spurningin. Eg haldi tað tó vera átaluvert, at eingin frágreiðing frá fundinum er til skjals í Vinnumálaráðnum.*

*Vísandi til, at fyrrverandi landsstýrismaðurin sigur seg ikki minnist nakað til telefonsamrøðurnar við stjóran á Skráseting Føroya tann 10., 16. og 30. mai 2007, og tað ikki er møguligt hjá mær at gera av, hvat varð sagt í telefonsamrøðum millum landsstýrismannin og stjóran, fái eg ikki gjørt meira við hendan spurningin.*

*Av tí, at deildarstjórin í Vinnumálaráðnum ikki minnist seg at hava sagt nakað av tí, sum stjórin á Skráseting Føroya hevur endurgivið deildarstjóran fyri at siga í telefonsamrøðuni 12. mai 2007, fái eg av somu orsøk heldur ikki gjørt meira við hendan spurningin.*

### *4.2. Um arbeiðið at tilevna próvtøkukunngerðina*

Grundað á skjølini í málunum og frágreiðingarnar frá myndugleikunum havi eg mett tað neyðugt at viðgera, um gongdin í málinum viðvíkjandi arbeiðinum at tilevna próvtøkukunngerðina hevði tilknýti til viðgerðina av ítøkiliga kærunum, tað vil siga, um arbeiðið við próvtøkukunngerðini tilvitað varð steðgað við tí endamáli, at kravið um eina serliga próvtøku ikki varð sett kærarunum undir viðgerðini av umsóknum teirra um løggilding sum grannskoðarar.

§ 4 í grannskoðaralógini heimilaði skrásetingarmyndugleikanum at áseta nærri reglur um serligu próvtøkuna í § 1, stk. 2, nr. 4, og

sambært frágreiðing frá Skráseting Føroya varð farið undir arbeiðið at tilevna hesa kunngerð, eftir Skráseting Føroya varð flutt undir Fjarskiftiseftirlitið sum sjálvstøðugur stovnur í 2005.

Tá Skráseting Føroya tann 27. januar 2006 á fyrsta sinni sýtti kærarunum løggilding sum grannskoðarar, kunnaði Skráseting Føroya kærararnar um, at teir seinni á árinum fingu høvi at fara til serligu próvtøkuna. Uppskot til kunngerð vórðu send ymsum pørtum til hoyringar í januar, apríl og august 2006.

Á fundi 14. november 2006 millum Skráseting Føroya og Vinnumálaráðið boðaði Vinnumálaráðið frá, at tað var ikki ynskiligt, at Skráseting Føroya arbeiddi víðari við uppskotinum til kunngerð við tí innihaldi, sum uppskotið hevði. Sambært fundarfrágreiðing hjá Vinnumálaráðnum, dagfest sama dag, var ætlanin innan 1. mars 2007 at leggja uppskot um nýggja grannskoðararlóg fyri tingið, og serliga próvtøkan skuldi vera „í tráð við altjóða standardin á økinum (lagaligari próvtøka men góðsku eftirlit)."

Tann 15. mars 2007, t.e. 3 dagar eftir, at Innlendismálaráðið tók fyrru kæruavgerðina, heitti Vinnumálaráðið á Skráseting Føroya um at mæla Vinnumálaráðnum til, hvussu farast skuldi fram viðvíkjandi reglunum um serligu próvtøkuna. Spurningurin var serliga, um tørvur var á at gera broytingar í verandi skipan, til nýggj grannskoðaralóg var samtykt og komin í gildi.

Próvtøkukunngerðin varð kunngjørd 3. mai og kom í gildi 4. mai 2007. Sambært frágreiðing frá Skráseting Føroya var innihaldið í kunngerðini tað sama sum í uppskotinum til kunngerð, tá Vinnumálaráðið í november 2006 ynskti, at Skráseting Føroya steðgaði við arbeiðinum at gera próvtøkukunngerðina.

Uppskot til grannskoðaralóg varð 2. november 2007 lagt fyri Løgtingið (løgtingsmál 64/2007), sum samtykti lógaruppskotið 5. desember 2007 (løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar grannskoðarar og skrásettar grannskoðarar). Sambært viðmerkingunum var danska grannskoðaralógin frá 2003 fyrimynd

fyri lógaruppskotinum, og innihaldið í lógaruppskotinum var neyvt tað sama sum danska lógin.

§ 9, stk. 8 í uppskotinum var soljóðandi:

> „Stk. 8. Landsstýrismaðurin setur nærri reglur um próvtøkuna herundir treytirnar fyri at fara upp til próvtøku, próvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming."

Ásetingin var einsljóðandi kunngerðarheimildini í § 4 í grannskoðaralógini frá 1993, og endamálið var sambært viðmerkingunum: „m.a. at tryggja, at kvalifikasjónirnar hjá føroyskum løggildum og skrásettum grannskoðarum ikki eru minni enn tær í grannalondunum, og at teirra útbúgvingar verða viðurkendar í grannalondunum. Hetta gerst m.a. við at tryggja at okkara lóggáva lýkur tey krøv, sum eru sett í 8. ES-direktivinum um grannskoðan av ársroknskapum og konsernroknskapum. Donsku reglurnar verða mettar at lúka hesi krøv og meira enn tað.".

Í serligu viðmerkingunum til § 9, stk. 8 varð samstundis víst á, at reglur um serligu próvtøkuna vóru ásettar í próvtøkukunngerðini, sum kom í gildi 4. mai 2007, og at serliga próvtøkan fór fram sum ein skrivlig roynd og fevndi um fakini samsvarandi „8. ES-direktivinum".

Samsvarandi fráboðanini frá Vinnumálaráðnum á fundinum 14. november 2006 vórðu ásettar reglur um góðskueftirlit, men eingin broyting varð gjørd serligu próvtøkuni viðvíkjandi uttan tann, at landsstýrismaðurin fekk heimildina at áseta reglur um serligu próvtøkuna, í mun til at undanfarna lógin heimilaði skrásetingarmyndugleikanum at áseta hesar reglur.

Einasta broytingin, sum varð gjørd, var eftir tilmæli frá Vinnunevndini, sum í áliti sínum undir viðgerðini í Løgtinginum, dagfest 26. november 2007, í samsvari við ætlanirnar sambært viðmerkingunum skeyt upp at seta aftrat, at krøvini til próvtøkuna skuldu tryggja, at útbúgving fyri løggilding grannskoðarar leyk neyðug krøv til at

kunna verða góðkend í einum ES- ella EBS-landi. Hetta fyri at tryggja fortreytirnar fyri sínámillum góðkenning av útbúgvingum, um ein avtala um hetta fekst í lag.

Sambært einum skrivi frá Vinnumálaráðnum, dagfest 8. oktober 2008, sum umboðsmaðurin móttók í sambandi við klaguna frá juni 2008, var tað ikki ætlanin at gera broytingar serligu próvtøkuni viðvíkjandi. Vinnumálaráðið sigur soleiðis í nevnda skrivi:

> „At tað ikki hevur verið ætlanin við nýggju lógini (løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007, mín viðm.) at broyta rættarstøðuna viðvíkjandi kravinum um eina serliga praktiska roynd, gongur fram av nýggju lógini, har tað, sum nevnt í skrivinum frá Vinnumálaráðnum frá 28. august 2008, er ásett sama krav um eina serliga próvtøku, og sama heimild at áseta reglur um próvtøku, og hetta gongur eisini fram av viðmerkingunum til lógaruppskotið.“

*Av tí, at ongar broytingar vórðu gjørdar serligu próvtøkuni viðvíkjandi, og hetta sambært Vinnumálaráðnum ikki hevði verið ætlanin, samanhildið við avgerðirnar hjá Innlendismálaráðnum, haldi eg tað ikki kunna síggjast burtur frá, at gongdin í arbeiðinum við kunngerðini hevði tilknýti til viðgerðina av ítøkiligu kærunum.*

*Eg meti tað stuðla míni fatan, at Vinnumálaráðið á sama fundi, sum tað boðaði Skráseting Føroya frá, at tað ikki var ynskiligt, at arbeitt varð víðari við uppskotinum til kunngerðina, spurdi, um tað ikki var møguligt at taka málini hjá kærarunum upp av nýggjum, og at tveir av kærarunum í skrivi til Innlendismálaráðið 19. november 2006 endurgóvu Vinnumálaráðið fyri tveir dagar eftir fundin við Skráseting Føroya at hava havt ta støðu, at umsóknirnar hjá kærarunum áttu at verið gingnar á møti m.a. av teirri orsøk, at arbeiðið við kunngerðini var steðgað.*

*Eg meti meg tó ikki hava nøktandi grundarlag fyri at siga, at arbeiðið við próvtøkukunngerðini tilvitað varð steðgað við tí endamáli, at kravið um eina serliga próvtøku ikki varð sett kærarunum undir viðgerðini av umsóknum teirra um løggilding sum grannskoðarar.*

## 5. Samanumtøka

Hetta mál snýr seg um, at sjey umsøkjarar fingu løggilding sum granskoðarar frá Skráseting Føroya í 2007, hóast hesir ikki høvdu staðið eina serliga próvtøka, sum er ein av treytunum fyri løggilding sambært grannskoðaralógini.

Eg gjørdi av at taka hetta málið upp til viðgerðar við heimild í grein 6, stk. 5 í umboðsmanslógini, eftir at níggju persónar høvdu klagað um, at teimum var noktað at fáa løggilding, hóast teir høvdu somu útbúgvingarligu og verksligu royndir sum teir sjey umsøkjararnir, ið høvdu fingið løggilding sum grannskoðarar.

Skráseting Føroya noktaði upprunaliga at veita teimum sjey umsøkjarunum løggilding við m.a. teirri grundgeving, at umsøkjararnir ikki høvdu staðið eina serliga próvtøku. Avgerðirnar vórðu kærdar til Vinnumálaráðið, men orsakað av ógegni flutti løgmaður viðgerðina av kæruni til Innlendismálaráðið.

Viðgerð mín fevnir um:

- Avgerðina hjá Innlendismálaráðnum, dagfest 12. mars 2007, viðvíkjandi kæru um avgerðirnar hjá Skráseting Føroya at sýta 7 umsøkjarum tilnevning sum løggildir grannskoðarar.
- Avgerðirnar hjá Innlendismálaráðnum, dagfestar 14. juni 2007 og seinni, viðvíkjandi kærum um somu mál, eftir at Skráseting Føroya eftir áheitan frá Innlendismálaráðnum hevði tikið málini uppaftur og fyri aðru ferð sýtt umsøkjarunum løggilding sum grannskoðarar.
- Viðgerðina í Vinnumálaráðnum.

Samanumtikið kann staðfestast:

- Í øllum lógum, sum hava verið galdandi í Føroyum um løggilding av grannskoðarum, umframt teimum lógum, sum hava verið fyrimyndir fyri føroyskari lóggávu á økinum, hevur verið sett sum treyt fyri at verða tilnevndur løggildur grannskoðari, at viðkomandi m.a. hevur staðið eina serliga próvtøku.
- Tað var ikki í kunngerð nærri útgreinað, hvørji krøvini til lógarásettu serligu próvtøkuna vóru, og eingin serlig próvtøka

hevði verið fyriskipað í Føroyum. Myndugleikarnir tilnevndu sambært fyrisitingarligari siðvenju umsøkjarar løggildar grannskoðarar, ið frammanundan vóru tilnevndir statsautoriseret revisor í Danmark, og sum í hesum sambandi høvdu staðið eina serliga próvtøku. Henda próvtøka fór fram eftir lógargrundarlagnum, sum føroyska grannskoðaralógin hevði sum fyrimynd.

Samanumtikið eru niðurstøður mínar av viðgerðini:

- Avgerðin hjá Skráseting Føroya at tilnevna ein umsøkjara við norskari løggilding løggildan grannskoðara er tikin á einum skeivum grundarlag. Hendan avgerðin var tí ikki ein broyting í fyrisitingarligu siðvenjuni, og avgerðin gevur ikki øðrum umsøkjarum, sum ikki lúka lógarásettu treytina um eina serliga próvtøku, eitt rættarkrav um tilnevning sum løggildir grannskoðarar. Grundarlag er tískil ikki fyri niðurstøðuni hjá Innlendismálaráðnum um, at ósakligur munur varð gjørdur á umsøkjarunum.
- Undir fyrru kæruviðgerðini ætlaði Innlendismálaráðið at staðfesta avgerðirnar hjá Skráseting Føroya at nokta umsøkjarunum løggilding, og hóast ongar nýggjar upplýsingar vóru í málinum, broytti Innlendismálaráðið grundleggjandi støðu til málið og metti grundgevingarnar hjá Skráseting Føroya vera ósakligar. Eg haldi frágreiðingina hjá Innlendismálaráðnum um orsøkina til, at ráðið broytti støðu, vera óskiljandi.
- Grundarlag er ikki fyri fatanini hjá Innlendismálaráðnum um, at vantandi áseting í kunngerð av krøvunum til serliga próvtøkuna, kundi hava við sær, at kravið um eina serliga próvtøku ikki kundi setast kærarunum.
- Hvat viðvíkur seinnu kæruviðgerðini, var aðalstjórin í Innlendismálaráðnum eftir míni fatan ógegnigur at viðgera seinna kærumálið. Hetta grundi eg m.a. á, at Innlendismálaráðið undir fyrru kæruviðgerðini ítøkiliga tók støðu til, at kærararnir áttu at verið tilnevndir løggildir grannskoðarar, og tað kundi tískil ikki síggjast burtur frá vandanum fyri, at aðalstjórin, í sambandi við at somu mál á øðrum sinni vórðu kærd, var bundin av støðutakan síni til málini undir fyrru kæruviðgerðini.

- Av tí, at rættarverjan um at fáa eitt mál viðgjørt tvær ferðir er sett til viks, og Innlendismálaráðið undir seinnu kæruviðgerðini sá burtur frá treytini í grannskoðaralógini um eina serliga próvtøku, helli eg mest til tað sjónarmið, at talan var um eitt so mikið týðandi brek í málsviðgerðini, at seinnu kæruavgerðirnar mugu metast at vera ógildugar.
- Hvat viðvíkur seinnu kæruavgerðunum hjá Innlendismálaráðnum, er tað óskiljandi, at Innlendismálaráðið hevur hildið seg kunnað viðgjørt kærurnar í mun til, hvørji krøv verða sett til at gerast løggildur grannskoðari í Noregi. Tað var í grannskoðaralógini greitt ásett, at ein av treytunum fyri at gerast løggildur grannskoðari var, at umsøkjarin hevði staðið eina serliga próvtøku. Hesum sá Innlendismálaráðið sambært seinnu kæruavgerðunum burtur frá í viðgerðini, og hetta meti eg vera serstakliga atfinningarsamt.
- Handfaringin hjá Innlendismálaráðnum av kæruni um stjóran á Skráseting Føroya er atfinningarsom, tí tað mátti vera Innlendismálaráðnum greitt, at boðini frá ráðnum um, at stjórin skuldi seta seg í samband við ráðið, áðrenn nøkur avgerð varð tikin, kundi fatast sum ein støðutakan til, at stjórin gjørdi ímóti boðum frá einum yvirskipaðum myndugleika, og at hetta kundi ávirka viðgerðina hjá Skráseting Føroya av ítøkiligu málunum.
- Málsviðgerðin av kæruni varð av løgmanni flutt úr Vinnumálaráðnum til landsstýrismannin í innlendismálum orsakað av, at aðalstjórin í Vinnumálaráðnum var ógegnigur. Embætisfólkini í Vinnumálaráðnum vóru av hesi orsøk somuleiðis ógegnug og kundu ikki á nakran hátt luttaka í viðgerðini av málinum. Talan er tí um ósakliga fyrisiting, tá umboð fyri Vinnumálaráðið luttaka á fundi við kærararnar um kæruna og venda sær til stjóran á Skráseting Føroya um ítøkiligu málsviðgerðina av málunum hjá kærarunum.
- Viðgerðin hjá umboðsmanninum fer fram á einum skrivligum grundarlag, og av hesi orsøk havi eg ikki møguleika at gera meira við fleiri spurningar viðvíkjandi viðgerðini í Vinnumálaráðnum. Hetta ger seg m.a. galdandi fyri ein fund millum landsstýrismannin og nakrar av kærarunum 16. november 2006, telefonsamrøður millum stjóran á Skráseting

Føroya og landsstýrismannin í vinnumálum tann 10., 16. og 30. mai 2007, og eina telefonsamrøðu millum ein deildarstjóra í Vinnumálaráðnum og stjóran á Skráseting Føroya 12. mai 2007. Frágreiðingarnar frá umrødda fundinum eru í andsøgn við hvørja aðra. Landsstýrismaðurin sigur seg ikki minnast nakað til umrøddu telefonsamrøðurnar, og deildarstjórin minnist seg ikki hava sagt nakað av tí, sum er endurgivið. Tað er tí ikki gjørligt hjá mær at staðfesta, hvat er sagt ella farið fram, og eg fái tí ikki gjørt meira við hesar spurningar.

- Eftir at hava viðgjørt gongdina í arbeiðinum at gera kunngerðina um krøvini til serligu próvtøkuna, haldi eg tað ikki kunna síggjast burtur frá, at gongdin í hesum arbeiði hevði tilknýti til viðgerðina av ítøkiligu kærunum. Eg meti meg tó ikki hava nøktandi grundarlag fyri at siga, at arbeiðið við próvtøkukunngerðini tilvitað varð steðgað við tí endamáli, at kravið um eina serliga próvtøku ikki varð sett kærarunum undir viðgerðini av umsóknum teirra um løggilding sum grannskoðarar.

Sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini skal umboðsmaðurin, um komið verður til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av myndugleikunum, boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum.

Av tí, at eg haldi, at talan hevur verið um so álvarsligar feilir og brek við viðgerðini hjá Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum, havi eg avgjørt at senda frágreiðingina samsvarandi § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini til formansskapin í Løgtinginum, løgmann, landsstýrismannin í innlendismálum og landsstýrismannin í vinnumálum.

# II. partur

Skjølini, sum eru umrødd og endurgivin undir málsgongdini, eru skjøl, sum umboðsmaðurin hevur fingið til láns frá Skráseting Føroya, Vinnumálaráðnum og Innlendismálaráðnum.

## Málsgongd

Tann 20. januar 2005 søkti ein grannskoðari Vinnumálaráðið um at verða tilnevndur løggildur grannskoðari. Hjálagt umsóknini var m.a. váttan um ríkisgóðkenning sum grannskoðari frá Kredittilsynet í Noregi. Vinnumálaráðið sendi Skráseting Føroya, sum umsat málsøkið, umsóknina at viðgera. Tann 9. mars 2005 boðaði Skráseting Føroya umsøkjaranum frá, at Skráseting Føroya hevði gjørt av at tilnevna hann løggildan grannskoðara.

Millum skjølini hjá Skráseting Føroya í sambandi við viðgerðina av umsóknini er m.a. soljóðandi upprit, dagfest 9. september 2005:

> „Grundgevingar í smb. við løggilding av A, grannskoðara við heimild í ll. nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar (LGL), § 2, stk. 1.
>
> 1. Verðandi løggildir grannskoðarar í Føroyum eru allir løggildaðir í Føroyum við heimild í LGL § 2, stk. 1 vísandi til, at teir hava danska statsautorisatión, tó uttan at teir hava verið til eina serliga dugnaskapsroynd í føroyskum viðurskiftum hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum. Verkligu royndirnar í Føroyum hava í sjálvum sær verið mettar at verða neyðuga innlitið í serstøk føroysk viðurskifti, sum ein løggildur grannskoðari eftir føroyskum viðurskiftum eigur at hava.
>
>    A hevur danskt CMA-prógv, norska højere revisoreksamen og hevur hin 13. januar 2005 frá Kredittilsynet í Noregi fingið góðkenning sum norskur „statsautoriseret revisor". Hann lýkur treytirnar í LGL § 1, stk. 2 ad. 5 um 3 ára luttøku í vanligum grannskoðaraarbeiði á skrivstovu hjá løggildum grannskoðara í 3 ár. A hevur verið til sam-

røðu hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum, herundir serstøk og almen viðurskifti á skattaøkinum í Føroyum.

Hansara verkligu royndir í Føroyum annars gera, at føroyski skrásetingarmyndugleikin ikki ivast í, at hann hevur fullgott innlit í serstøk føroysk viðurskifti, herundir føroysk skatta- og rættarviðurskifti.

Hann lýkur krøvini annars, sum verða sett í LGL § 1, stk. 3.

2. Krøvini til statsautorisatión í Noregi eru síðani herd, tó uttan, at tað merkir, at verðandi norskir statsauroriseraðir grannskoðarar skulu upp til nýggja roynd. Í og við, at A hevur norska statsautorisatión líkur hann tískil framhaldandi norsku krøvini.
3. …“

Við støði í frammanfyristandandi, er eingin ivi um, at A líkur krøvini, sum LGL krevur, til tess at fáa løggilding í Føroyum.“

Tann 15. apríl 2005 sendu B, D, E, F, G og H Skráseting Føroya umsókn um at verða tilnevnd løggildir grannskoðarar. Tann 18. apríl 2005 søkti I um hetta sama og 12. oktober 2005 J. G tók umsóknina aftur, eftir at hann varð tilnevndur *statsautoriseret revisor* í Danmark og løggildur grannskoðari í Føroyum. Umsóknirnar vóru nærum einsljóðandi, og niðanfyri verður ein teirra endurgivin (tilvildarliga vald).

„**Umsókn um løggilding**
Vísandi til løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993, §1, stk. 2, vísandi til §4, vil undirritaði við hesum loyva sær at søkja um at gerast løggildur grannskoðari í Føroyum.

Undirritaði hevur lokið útbúgvingina cand.merc.aud. í Danmark og havi samstundis meira enn 3 ára starvsroyndir hjá løggildum grannskoðara í Føroyum og lúki annars krøvini sum sett verða í §1, stk. 2.

Sambært omanfyri nevndu lóg, ásetur skrásetingarmyndugleikin

nærri reglur fyri ta í §1, stk. 2, nr. 4 umrøddu próvtøku, herundir treytirnar fyri at fara upp til próvtøku, prøvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming.

Hesar reglur eru óbeinleiðis ella beinleiðis ásettar nú, tí sum skilst hevur Skráseting Føroya góðtikið, at føroyingar, sum eru vorðnir statsautoriserst revisor í Noregi lúka treytirnar og kunnu gerast løggildir grannskoðarar í Føroyum.

Í Noregi ber til at gerast statsautorisert revisor, um tú hevur lokið cand. merc. aud. í Noregi. Sí hjálagda skriv frá Kredit Tilsynet í Noregi. Sambært hesum eru mínir møguleikar fyri at gerast cand.merc.aud. í Noregi, at eg taki norskan vinnulívsrætt og skattarætt. Í aðra máta verða tær 6 lærugreinirnar í norsku cand. merc.aud, útbúgvingini góðskrivaðar mær, tí eg havi cand.merc. aud. prógv frá Danmark. Orsøkin til, at eg skal taka vinnulívsrætt og skattarætt – sum eg annars longu havi tikið í Danmark – er, at norskur skatta- og vinnulívsrættur er eitt sindur øðrvísi enn tann danski.

Føroyskur vinnulívs- og skattarættur er hinvegin aftur øðrvísi frá bæði norskum og donskum vinnulívs- og skattarætti – tó uttan at, hædd er tikið fyri hesum, við tilnevningina av verandi løggildum grannskoðum.

Samanumtikið er tað mín greiða fatan, at við verandi rættarstøðu og siðvenju, lýkur undirritaði kompetensu- og útbúgvingarkrøvini til at gerast løggildur grannskoðari.

Eru spurningar ella ivamál, vinarliga setið tykkum í samband við undirritaða."

Tann 28. oktober 2005 sendi Skráseting Føroya umsøkjarunum uppskot til avgerð til ummælis. Uppskotini eru áleið einsljóðandi, og tí verður bert tað eina skrivið endurgivið:

„Uppskot til avgerð til hoyringar

**Viðvíkjandi umsókn um tilnevning sum løggildur grannskoðari**
Víst verður til omanfyrinevndu umsókn tygara dagfest …

Í § 1, stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar stendur, at „rætt at vera tilnevndur sum løggildur grannskoðari hevur tann, sum hevur staðið eina serliga próvtøku, samanber § 4.“

Hendan próvtøkan, sum helst hevur verið ætlað sum ein føroysk útbúgving serliga lagað til føroysk viðurskifti, er tó ongantíð sett í verk.

Í § 2 stk, 1 verður sagt, at persónur við útbúgving, sum er tikin uttanfyri Føroyar, og sum kann javnmetast við ta útbúgving sum annars gevur rætt til tilnevning sum løggildur grannskoðari, kann, av føroyska skrásetingarmyndugleikanum, verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari.

Higartil hava øll tey sum eru tilnevnd løggildir grannskoðarar í Føroyum, staðið eina roynd, sum gevur rætt til at verða tilnevndur sum ’statsautoriseret revisor’ í Danmark, umframt ein umsøkjari sum er tilnevndur løggildur grannskoðari og sum hevur staðið roynd, sum gevur rætt til at verða tilnevndur „statsautoriseret revisor“ í Noregi.

Í tygara føri er **ikki** talan um útbúgving, sum er viðurkend av øðrum landi, at virka sum løggildur grannskoðari.

Grundað á hetta, kann Skráseting Føroya ikki ganga umbøn tygara um tilnevning sum løggildur grannskoðari á møti, við tað at vit meta, at tygara útbúgving sum er, ikki kann javnmetast við ta útbúgving ið krevst í § 1, stk. 2.

Hinvegin er Skráseting Føroya sinnað, at skipa fyri serligari

próvtøku, sum lagt er upp til í § 1, stk. 2, nr. 4, jvb. § 4 í lóg um løggildar grannskoðarar, og sum tygum fáa høvi at taka, tá formligu krøvini í samband við innstillan til slíka próvtøku eru lokin.

Í hesum sambandi hevur Skrásetingin sent Mentamálaráðnum skriv tann 28. september 2005, og hevur rykt eftir svari hin 6. oktober 2005. Q, aðalstjóri í Mentamálaráðnum, hevur hin 6. oktober boðað Skrásetingini frá, at málið er undir avgreiðslu."

Tann 14. november 2005 sendi R, adv., Skráseting Føroya soljóðandi skriv:

„**Málið um tilnevning sum løggildur grannskoðari**
E, B, F, D, I og H hava vent sær til mín í sambandi við uppskot tykkara til avgerð frá 28. okt. 2005, har boðað verður frá, at Skráseting Føroya ikki ætlar at ganga umsóknum um løggilding á møti.

Eg havi sum kunnugt biðið um alment innlit í málið og havi fingið skjølini í málinum frá tykkum við skrivi, dagfest 7. nov. 2005.

Av skjølunum í málinum framgongur, at Skráseting Føroya tann 9. sept 2005 hevur løggilt A sum løggildan grannskoðara, við tilvísing til § 1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar.

Klientar mínir kunnu staðfesta, at Skráseting Føroya hevur tikið avgerð við tilvísing til §1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21 mai 1993 um løggildar grannskoðarar og krevja sjálvandi at verða viðgjørdir á sama hátt sum viðkomandi umsøkjari.

Samsvarandi vanligum fyrisitingarligum rættarreglum hava klientar mínir krav uppá somu viðgerð, sum tann umsøkjari, sum nú hevur fingið sína løggilding í lagi.

Klientar mínir hava fyri tað fyrsta allir staðið kandidatútbúgving

í grannskoðan í Danmark, og allir hava teir praktiskar royndir eftir lokna kandidatútbúgving.

Í donsku kunngerðini um kandidatútbúgvingar verður sagt um cand.merc.aud. útbúgvingina soleiðis:

*§ 34. Kandidatuddannelsen i revision har til formål at kvalificere den studerende teoretisk til at udøve revision af private og offentlige virksomheder og institutioner. Uddannelsen er det afsluttende led i den teoretiske del af uddannelsen til statsautoriseret revisor. Stk 2. Kandidatuddannelsen indeholder moduler inden for fagene revision, regnskab, skatteret og erhvervsret. Fagenes nærmere indhold fastlægges med henblik på at opfylde kravene til EU-bestemmelser om autorisation af revisorer…* “

Samsvarandi hesum sæst, at útbúgvingin cand. merc.aud í einum og øllum er løgd soleiðis til rættis, at kandidaturin skal uppfylla krøvini til at gerast løggildur grannskoðari.

Grundarlagið fyri donsku kunngerðini um cand.merc.aud. útbúgvingina tekur støði í og fylgir krøvunum í 8. direktivi hjá ES og er útbúgvingin soleiðis viðurkend í øllum ES londum fyri at fáa løggilding.

Danmark setur strangari krøv enn onnur lond í ES, nevniliga at umsøkjarin skal upp til eina eyka roynd til tess at fáa løggilding. Hertil er at viðmerkja, at fleiri lond í ES hava ikki hetta krav, m.a. Holland og Bretland.

Sum dømi um eitt land uttanfyri ES, sum ikki setir slíkt krav, kann nevnast, at Noreg heldur ikki hevur havt nakað krav um eina eyka roynd fyri at gerast løggildur grannskoðari.

Harafturímóti seta øll limalondini í ES krav um arbeiðsroyndir aftaná lokna kandidatútbúgving og eisini hetta krav verður sett sambært norskari lóggávu.

Føroyska lógin um løggildar grannskoðarar varð sett í gildi við løgtingslóg frá 21. mai 1993. Lógin ásetur, hvør kann gerast løggildur grannskoðari. Talan er um eitt yvirtikið málsøki, so tann føroyski skrásetingarmyndugleikin hevur fult málsræði innan hetta øki og kann innanfyri karmarnar í lógini gera av, hvørjar treytir skulu setast fyri at kunna gerast løggildur grannskoðari.

Sambært nevndu løgtingslóg kann ein persónur gerast løggildur grannskoðari antin eftir § 1 ella § 2.

Sambært § 1 eru treytinar fyri at gerast løggildur grannskoðari, at viðkomandi hevur bústað í Føroyum, at viðkomandi er myndugur og ikki undir verju, at viðkomandi hevur ikki boðað frá gjaldssteðgi ella hevur egið búgv trotaviðgjørt, at viðkomandi hevur staðið eina serliga próvtøku, at viðkomandi í mínsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í øllum vanligum grannskoðaraarbeiði á skrivstovu hjá einum løggildum grannskoðara, og at viðkomandi hevur veitt eina ávísa trygd.

Sambært § 2 kann føroyski skrásetingarmyndugleikin eisini løggilda persónar sum kunnu ávísa, at teir uttanfyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við ta útbúgving, ið nevnd er í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5. Viðkomandi persónur skal annars lúka somu treytir, sum nevndar verða í § 1, stk. 2 og stk. 3.

Hóast hesar ásetingar eru ongar nærri reglur ásettar um hvussu ein persónur kann fáa løggilding sum løggildur grannskoðari.

Orsøkin til hetta er, at føroysku myndugleikarnir ongantíð hava ásett nærri reglur fyri ta í § 1, stk. 2, nr. 4, nevndu útbúgving. Heimildin til at áseta nærri reglur um hetta er at finna í § 4 í lógini, men landsstýrið hevur ongantíð brúkt henda møguleika.

Sostatt eru ongar ítøkiligar reglur galdandi fyri, hvørja próvtøku

talan skal verða um, hvørji próvtøkukrøv eru galdandi, hvussu próvtøkan skal fara fram, og hvør skal vera próvdómari.

Hinvegin er eingin ivi um, at føroyska løgtingslógin byggir á donsku lógina um statsautoriseraðar grannskoðarar. Hetta er eisini orsøkin til, at viðmerkingar til føroysku lógina beinleiðis vísa til viðmerkingarnar til donsku lógina.
…
Í skrivi tykkara verður víst á, at krøvini til at fáa løggilding í Føroyum eru sambært § 1, at viðkomandi umsøkjari skal hava staðið eina serliga roynd, sbr. eisini § 4.

Tað tykist sum at Skráseting Føroya er av teirri áskoðan, at føroysku reglunar sum fyritreyt fyri at kunna løggilda ein persón áseta, at hesin skal hava staðið eina serliga roynd.

Sum nevnt frammanfyri, er tað áskoðanin hjá klientum mínum, at slíkar reglur ongantíð eru ásettar í Føroyum.

Avgerðin hjá Skráseting Føroya um at løggilda ein persón, sum ikki hevur verið til nakra roynd yvirhøvur, má eftir míni metan merkja, at Skráseting Føroya hevur broytt støðu, og í veruleikanum má sigast at vera gingin burtur frá kravinum um eina serliga roynd.

At Skráseting Føroya í hesum sambandi vísir til § 2, stk. 1 sum heimild, kann ikki verða rætt, tí § 2, stk. 1 hevur eina beinleiðis tilvísing til § 1, stk. 2, nr. 4).

Til og við 2004 hevur Skráseting Føroya okkum vitandi bert løggilt persónar, sum hava staðið eina grannskoðarakandidatútbúgving í Danmark. Hesir persónar hava allar eina danska kandidatútbúgving og í minsta lagi 2 ára royndir hjá løggildum grannskoðara eftir lokna kandidatútbúgving. Harnæst hava hesir staðið eina serliga roynd, sum krevst í Danmark.

Á vári í 2005 frættu klientar mínir, at ein umsøkjari, sum hevði

eina norska kandidatútbúgving, hevði latið inn eina umsókn um løggilding í Føroyum. Frammanundan hevur hesin umsøkjari eina danska cand. merc.aud. útbúgving. Fyri at gerast norskur cand. merc. aud., kravdist yvirskipaður kunnleiki til norskan skattarætt og vinnulívsrætt.

Samstundis sum viðkomandi persónur lat inn umsókn til Skráseting Føroya, lótu klientar mínir eisini umsókn til tykkum við sama innihaldi.

Sum nevnt frammanfyri eru krøvini til løggilding í Noregi linari enn krøvini, sum verða sett í Danmark, við tað at eingin serlig roynd krevst. Klientar mínir eru vitandi um, at umsøkjarin, sum hevur fingið løggilding, ikki hevur staðið nakra serliga roynd enn ta norsku kandidatútbúgvingina.

Viðvíkjandi tí praktisku útbúgvingini, eru klientar mínir vitandi um, at hesin umsøkjari ikki hevur starvast hjá løggildum grannskoðara aftaná loknað kandidatútbúgving, soleiðis sum direktivið og harvið eisini grundarlagið undir føroysku lógini leggur upp til.

Tá klientar mínir frættu um avgerðina at løggilda viðkomandi persón, gingu teir beinanvegin út frá, at teirra umsókn eisini fór at verða gingin á møti.

Klientar mínir gjørdust tí sera kløkkir tá teir fingu ætlanarskriv tykkara, har boðað verður frá, at Skráseting Føroyar ikki ætlar at ganga umsóknunum á møti.

Veruleikin er tann, at klientar mínir mugu sigast at vera betri kvalificeraðir til at fáa løggilding enn tann persónur, sum nú hevur fingið løggilding frá tykkum.

Klientar mínir hava allir staðið útbúgving á kandidatstøði við tilvísing til 8. direktiv hjá ES og til § 32 í útbúgvingarkunngerðini.

Eisini hava allir starvast í meir enn 3 ár hjá løggildum grannskoðara, eftir at hava tikið kandidatútbúgving.

Klientar mínir uppfylla sostatt øll krøv, sum verða sett í øðrum londum í ES; burtursæð frá t.d. Danmark. Klientar mínir uppfylla eisini somu krøv, sum verða sett í Noregi.

Við tilluting av løggilding til ein norskan kandidat, hevur føroyski skrásetingarmyndugleikin fyri fyrstu ferð givið løggilding til aðrar umsøkjarar enn teir, sum hava donsku útbúgvingina.

Henda løggilding er enntá givin, samstundis sum klientar mínir hava havt eina umsókn liggjandi inni hjá tykkum.

Við at hava løggilda ein persón á øðrum grundarlagi má staðfestast, at føroyski skrásetingarmyndugleikin hevur broytt praksis.

Samsvarandi vanligum fyrisitingarligum rættarreglum um at øll eru líka fyri lógini, hava klientar mínir eitt rættarkrav uppá eisini at fáa somu løggilding.

Skráseting Føroya kann á ongan hátt koma sær undan at geva játtandi tilsøgn við at vísa á, at tann persónur, sum nú hevur fingið løggilding, hevði eina útbúgving, sum er tikin uttanfyri Føroyar og sum kann javnmetast við ta útbúgving, sum annars gevur rætt til tilnevning sum løggildur grannskoðari í Føroyum.

Við hesi avgerð hevur føroyski skrásetingarmyndugleikin í veruleikanum tikið avgerð um, at ein cand. merc. aud. útbúgving í sjálvum sær er nóg mikið til at blíva løggildur grannskoðari í Føroyum. Tá havt verður í huga, at klientar mínir í allar mátar uppfylla krøvini til praktiskar royndir, hava teir sostatt eitt rættarligt krav uppá at blíva løggildir.

Eg fari tí at biðja Skráseting Føroya at avgreiða umsóknirnar hjá klientum mínum beinanvegin við at ganga umsókn teirra

á møti, soleiðis at klientar mínir fáa somu viðgerð sum nevndi umsøkjari.

Eg vænti at frætta aftur skjótast gjørligt."

Tann 28. november 2005 sendu umsøkjararnir soljóðandi skriv til Skráseting Føroya:

**„Ískoyti viðv. málinum um tilnevning sum løggildur grannskoðari**

Vegna umsøkjararnar (vit/okkum/okkara) E, B, F, D, I, H og J verður sent niðanfyri standandi ískoyti til skriv dagfest 14. november 2005 sent av okkara advokati.

Føroyska lógin um løggildar grannskoðarar varð sett í gildi við løgtingslóg frá 21. mai 1993. Lógin ásetur, hvør kann gerast løggildur grannskoðari. Talan er um eitt yvirtikið málsøki, so tann føroyski skrásetingarmyndugleikin hevur fult málsræði innan hetta øki og kann innanfyri karmarnar í lógini gera av, hvørjar treytir umsøkjari skal lúka fyri at kunna gerast løggildur grannskoðari.

Vit meta, at tað má vera greitt, at Skráseting Føroya ikki í meting sínari er bundið av tí siðvenju, sum danskir myndugleikar hava fylgt á hesum øki. Vit meta til dømis ikki, at heimild er í lógini fyri at seta sum einvíst krav fyri løggilding, at umsøkjarar skulu lúka somu krøv sum umsøkjarar í Danmark.

Tá føroyskir myndugleikar hava sett eina lóg í gildi, ið byggir á donsku lógina, og sum aftur hevur sín uppruna í ES-reglum, kann ikki komast til aðra niðurstøðu enn at ikki bara danska lóggávan, men eisini ES-lóggáva, og siðvenja í ymsu ES-limalondunum, kann og eigur at verða nýtt í sambandi við tulkingina av føroysku lóggávuni.

Her eigur eisini at vera havt í huga, at føroyskir myndugleikar hava

valt ikki at seta í gildi samsvarandi reglur um eyka útbúgving sum tær, ið eru í gildi í Danmark, og hava vit tí ilt við at koma til aðra niðurstøðu enn at hetta má merkja, at føroyskir myndugleikar hava valt at síggja burtur frá einum kravi um eyka útbúgving. Hetta er ivaleyst eisini tað, sum er meginorsøkin til, at Skráseting Føroya nú hevur valt at løggilda ein grannskoðara eftir § 1 í lógini, hóast hesin ikki hevur hesa eyka útbúgvingina.

Samsvarandi vanligum fyrisitingarligum rættarreglum um at øll eru líka fyri lógini, halda vit okkum hava eitt rættarkrav uppá eisini at fáa somu løggilding.

Skráseting Føroya kann á ongan hátt koma sær undir at geva játtandi tilsøgn við at vísa á, at tann persónur, sum nú hevur fingið løggilding, hevði eina útbúgving, sum er tikin uttanfyri Føroyar og sum kann javnmetast við ta útbúgving, sum annars gevur rætt til tilnevning sum løggildur grannskoðari í Føroyum.

Við hesi avgerð hevur føroyski skrásetingarmynduleikin í veruleikanum tikið avgerð um, at ein cand.merc.aud. útbúgving í sjálvum sær er nóg mikið til at blíva løggildur í Føroyum. Tá havt verður í huga, at vit øll hava hesa útbúgving og í allar mátar uppfylla krøvini til praktiskar royndir, hava vit eitt rættarligt krav uppá at verða løggild sum grannskoðarar."

Tann 27. januar 2006 sendi Skráseting Føroya umsøkjarunum avgerð í málinum. Avgerðirnar eru áleið einsljóðandi. Ein teirra verður endurgivin niðanfyri.

„**Viðvíkjandi umsókn um tilnevning sum løggildur grannskoðari**

Víst verður til omanfyrinevndu umsókn tygara dagfest …

Tann 28. oktober 2005, sendu vit eitt uppskot til avgerð um omanfyrinevndu umsókn til hoyringar hjá tygum og hinum umsøkjarunum.

Skráseting Føroya fekk felags svar frá flestu umsøkjarunum tann 15. november, 28. november og eitt ískoyti 6. desember 2005.

Eftir at hava umhugsað málið av nýggjum, eru vit komin til, at svar tykkara ikki gevur orsøk til at broyta upprunaliga ætlaðu avgerð okkara, um ikki at lata tygum løggilding sum nú er.

Grundgevingarnar eru tær somu sum í nevnda skrivi frá 28. oktober 2005, nevniliga

- at tygum ikki hava staðið serliga roynd smb. § 1 stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar.

- At tygum ikki kunnu ávísa at tygum uttan fyri Føroyar hava eina útbúgving sum gevur rætt til løggilding smb. § 2. stk. 1.

Sambært hesi áseting kann persónur við útbúgving, sum er tikin uttanfyri Føroyar, og sum kann javnmetast við ta útbúgving sum annars gevur rætt til tilnevning sum løggildur grannskoðari, av føroyska skrásetingarmyndugleikanum, verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari.

Higartil hava øll tey sum eru tilnevnd løggildir grannskoðarar í Føroyum, staðið eina roynd, sum gevur rætt til at verða tilnevndur sum „statsautoriseret revisor“ í Danmark, umframt ein umsøkjari sum er tilnevndur løggildur grannskoðari og sum hevur staðið roynd, sum gevur rætt til at verða tilnevndur „statsautoriseret revisor“ í Noregi.

Í tygara føri er ikki talan um útbúgving, sum er viðurkend av øðrum landi, at virka sum løggildur grannskoðari.

Grundað á hetta, kann Skráseting Føroya ikki ganga umbøn tygara um tilnevning sum løggildur grannskoðari á møti.

> Ætlanin er at skipa fyri serligari próvtøku í summar, sum lagt er upp til í § 1, stk. 2, nr. 4, jvb. § 4 í lóg um løggildar grannskoðarar, og sum tygum fáa høvi at taka, tá formligu krøvini í samband við innstillan til slíka próvtøku eru lokin. …“

Avgerðirnar hjá Skráseting Føroya vórðu tann 10. februar 2006 kærdar til Vinnumálaráðið við soljóðandi skrivi:

> **„Kæra um avgerð frá Skráseting Føroya viðvíkjandi tilnevning av løggildugum grannskoðarum**
>
> Sum advokatur fyri E, B, F, D, I, H og J skal eg við hesum kæra avgerðina hjá Skráseting Føroya frá 27. januar 2006, har tað stendur, at Skráseting Føroya ikki hevur gingið eini umbøn frá klientum mínum á møti um at verða tilnevndir sum løggildur grannskoðarar.
>
> Um málið er at siga, at klientar mínir í fjør søktu um at gerast løggildur grannskoðarar.
>
> Skráseting Føroya sendi út hoyringsskriv tann 28. oktober 2005, har boðað varð frá, at ætlanin var ikki at ganga umsóknum teirra á møti.
>
> Undirritaði sendi Skráseting Føroya viðmerkingar hesum viðvíkjandi við skrivi dagfest 14. november 2005, sum eg leggi við í avriti.
>
> Viðmerkjast skal, at grundgevingarnar fyri kæruni eru tær somu sum í skrivi mínum dagfest 14. november 2005, sum tí ikki verður neyðugt at endurgeva her.
>
> Klientar mínir sendu eisini sjálvir eitt ískoytisskriv dagfest 28. novembur 2005, sum eg eisini leggi við í avriti.
>
> Eg kann ikki góðtaka avgerðina frá Skráseting Føroya frá

27. januar 2006, sum eg meti vera skeiva. Eisini meti eg, at grundgevingarnar hjá Skráseting Føroya eru beinleiðis skeivar.

Tá Skráseting Føroya ber fram í avgerð síni, at øll tey, sum eru tilnevnd sum løggildur grannskoðarar í Føroyum, hava staðið eina serliga roynd, er hetta als ikki rætt.

Klientar mínir hava víst á eina avgerð viðvíkjandi øðrum umsøkjara, sum hevði útbúgving úr Noregi.

Viðkomandi stóð onga serliga roynd fyri at fáa rætt til at gerast ríkisgóðkendur grannskoðari.

Tað tykist heilt løgið, at Skráseting Føroya ber hetta sjónarmið fram, hóast eg í skrivinum frá 14. november 2005 rættiliga gjølla havi greitt frá útbúgvingini í Danmark og samanhildið hana við útbúgvingina í Noregi.

Tað er serstakliga at viðmerkja, at útbúgvingin í Noregi ikki gevur rætt til at blíva skrásettur sum grannskoðari í Danmark.

Eg kann heldur ikki góðtaka, at Skráseting Føroya eftir øllum at døma bert góðkennir norsku cand.merk.aut. útbúgvingina sum grundarlag fyri eini løggilding, meðan hetta ikki tykist so við donsku útbúgvingini.

Eg kann heldur ikki góðtaka grundgevingina hjá Skráseting Føroya fyri at løggilda viðkomandi persón, at hesin hevur fingið autorisatión frá einum landi uttanfyri Danmark.

Annars skal eg vísa á tey sjónarmið, sum eru borin fram, og at avgerðin í avgerandi mun er í stríð við vanligar fyrisitingarligar reglur um, at øll eru eins fyri lógini.

Málið er sera álvarsamt, og fari eg tí at biðja um ein fund við Vinnumálaráðið, har eg saman við klientum mínum fái høvi

til at greiða ráðnum frá teimum sjónarmiðum, sum klientar mínir hava.

Eg vænti at frætta aftur skjótast gjørligt."

Tann 10. mars 2006 boðaði Vinnumálaráðið Løgmansskrivstovuni frá, at ein av kærarunum var sonur aðalstjóran í Vinnumálaráðnum og heitti á Løgmansskrivstovuna um at flyta viðgerðina av kæruni í annað aðalráð.

Við skrivi, dagfest tann 13. mars 2006, gjørdi løgmaður av at flyta viðgerðina av málinum til landsstýrismannin í Innlendismálum, jbr. § 9, stk. 1 í tágaldandi fráboðan nr. 12 frá 1. apríl 2004 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenn.

Við skrivi, dagfest tann 7. apríl 2006, sendi Innlendismálaráðið Skráseting Føroya soljóðandi skriv:

„**Fyrispurningar í sambandi við kæruviðgerð av máli, har Skráseting Føroya sýtti at geva grannskoðarum løggilding**
Tykkum kunnugt hevur løgmaður í brævi dagfest 13. mars avgjørt at flyta kærumálsviðgerðina av málinum, har Skráseting Føroya hevur sýtt nøkrum grannskoðarum løggilding, til Innlendismálaráðið, av tí at tað møguliga eru gegnistrupulleikar í Vinnumálaráðnum.

Í sambandi við kærumálsviðgerðina og grundað á avgerð tykkara í nevnda máli, er Innlendismálaráðið komið eftir, at ynskligt er at fáa upplýst málið betur, áðrenn kærumálið verður avgjørt.

Innlendismálaráðið vil fegin, at Skráseting Føroyar svarar hesar spurningar:

1. Á leið hvussu nógvar løggildingar eru veittar grannskoðarum síðani lógin kom í gildi í 1993?
2. Hvussu nógvar løggildingar eru á leið veittar við heimild í § 1 í lógini?

3. Hvussu nógvar løggildingar eru á leið veittar við heimild í § 2 í lógini?
4. Hvussu nógvar løggildingar eru á leið veittar við treytum sambært § 2, stk. 3 í lógini?
5. Hvørji kriterii brúkar Skráseting Føroya, tá mett verður um umsøkjarar lúka kravið í § 1, stk. 2, nr. 4, sbr. § 4 í lógini um „har bestået en særlig eksamen“?
6. Hví er ongin kunngerð ásett við heimild í § 4, stk 1? Er ætlanin at lýsa slíka kunngerð?
7. Er nøkur avtala gjørd við Erhvervs- og Selskabsstyrelsen sambært § 4, stk. 1 ella stk. 2? Um so er, hvat er innihaldið í henni?
8. Hvørjar útbúgvingar eru ella kunnu verða viðurkendar av Skráseting Føroya sum grundarlag fyri at fáa løggilding í Føroyum?
9. Hvat slag av „særlig eksamen“ viðurkennir Skráseting Føroya sum grundarlag fyri at fáa løggilding í Føroyum?
10. Í avgerð tykkara er upplýst, at ætlanin er at skipa fyri „serligari próvtøku“ í summar. Hvussu nógvar slíkar „serligar próvtøkur“ eru hildnar síðani 1993?
11. Hvussu og hvar kunnar Skráseting Føroya borgaran um krøvini og treytirnar fyri at fáa løggilding?

Hóast spurningarnir eru nógvir í tali heita vit á tykkum um at geva Innlendismálaráðnum svar í seinasta lagi týsdagin 2. mai. Hevur Skráseting Føroya aðrar viðmerkingar til málið eru tær eisini vælkomnar.

Legg til merkis, hetta bræv er bara sent sum t-postur.“

Tann 4. mai 2006 sendi Skráseting Føroya Innlendismálaráðnum soljóðandi svar:

**„Viðv. fyrispurningum í sambandi við kæruviðgerð av máli, um løggilding av grannskoðarum.**
Vísandi til fyrispurningar tínar í skrivi dagfest 7. apríl 2006, skal Skráseting Føroya hervið svara hesum.

Ad. 1. 6 løggildingar eru givnar síðani 1993.

Ad. 2. & 3. Í sjálvari løggildingini sum allir hesir 6 grannskoðararnir hava fingið, stendur at løggildingin er givin „… sambært § 1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mei 1993 um løggildar grannskoðarar.“

Ad. 4 Ongin løggilding er veitt við treytum sambært § 2, stk. 3 í lógini

Ad. 5. 5 av teimum 6 løggildu grannskoðarunum, hava fingið løggildingina vísandi til prógv um at vera statsautoriseraðir revisorar í Danmark, meðan ein hevur fingið løggilding vísandi til at hava fingið prógv sum „statsautorisert revisor“ í Noregi.
Hendan mannagongd – við at tilnevna løggilding eftir danskari statsautorisatión – er rættiliga gomul. Og hevur í øllum førum verið brúkt síðani 1993, tá lógin kom í gildi – og helst fyri tað eisini.

Ad. 6. Umsitingin av grannskoðaraøkinum hevur síðani lógin kom í gildi, verið hjá nógvum ymiskum persónum og økjum, og tað ber ikki til at siga hví ongin reglugerð sambært § 4 er ásett enn.
Ein reglugerð er nú gjørd og hevur verið til hoyringar hjá áhugaðum pørtum, og ætlast at vera lýst og sett í gildi sum skjótast. Helst í hesum mánaðinum.

Ad. 7. Ongin avtala er gjørd við Erhvervs- og Selskabsstyrelsen sambært § 4, stk. 1 ella stk. 2.
Men umhugsað verður í løtuni at gera eina slíka avtalu um samstarv.

Ad. 8. Víst verður til ætlaðu reglugerðina, sum verður hjáløgd. Í Danmark krevst ein cand.merc.aud. utbúgving umframt sjálv próvtøkan fyri at gerast statsautoriseraður revisor. Í Noregi krevst HRE (Høyere revisor eksamen), umframt ein próvtøka fyri at gerast statsautorisert revisor (henda próvtøka kom í 2005).

Ad. 9. Sí svar til sp. 5. og 8. Eftir at reglugerðin er sett í gildi krevst ein føroysk próvtøka.

Ad. 10. Ongin – víst verður til svarið til sp 6.

Ad. 11. Sum er verður bert kunnað eftir fyrispurningi. Tó er ætlanin at gera eina heimasíðu við upplýsingum um hetta.

Um tað annars eru spurningar, eru tit vælkomin at venda aftur."

Tann 20. juni 2006 sendi Innlendismálaráðið Skráseting Føroya og kærarunum soljóðandi uppskot til avgerð í kærumálinum til viðmerkingar:

„**Uppskot til kæruavgerð í máli, har Skráseting Føroya hevur sýtt umsøkjarum, sum eru tygara klientar, løggilding sum grannskoðarar**
Sagt verður frá, at Innlendismálaráðið ætlar at staðfesta avgerðina og grundgevingarnar hjá Skráseting Føroya um at sýta klientum tygara løggilding sum grannskoðarar.

**Formlig viðurskifti**
Sum kunnugt hevur løgmaður latið Innlendismálaráðnum upp í hendi at viðgera og avgera nevnda kærumál, hóast Skráseting Føroya vísir til Vinnumálaráðið. Avgerð løgmans er grundað á møguligar gegnistrupulleikar í Vinnumálaráðnum viðvíkjandi ítøkiliga málinum.

Innlendismálaráðið staðfestir, at Skráseting Føroya hin 27. januar 2006 hevur avgjørt ikki at lata umsøkjarunum, B v.fl., løggilding sum grannskoðari. Tað framgongur av málinum, at Skráseting Føroya hevur hildið seg frá formiligu hoyringsfreistina av pørtunum eftir fyrisitingarlógini, áðrenn avgerðin varð tikin, og hevur Innlendismálaráðið tí onki at viðmerkja hvat tí viðvíkur.

Innlendismálaráðið staðfestir, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er kærd 19 dagar eftir at avgerðin varð tikin. Ráðið staðfestir eisini, at Skráseting Føroya í sínari avgerð ikki hevur upplýst móttakaranum um kærumøguleika ella kærufreist, men bara kunnað um § 15a í lógini, sum gevur landsstýrinum heimild at áseta reglur um kæru. Hóast ongar slíkar reglur eru ásettar, fylgir tað av vanligu fyrisitingarligu reglunum, og sambært myndugleikahierarkinum, at avgerðin hjá Skráseting Føroya kann kærast til landsstýrismannin og má kæran eisini metast at verða innkomin rættstundis og skal hon tí viðgerast av kærumyndugleikanum, sum í hesum føri er fluttur til Innlendismálaráðið.

**Kærda avgerðin**

Í avgerð síni frá 27. januar 2006 hevur Skráseting Føroya sýtt at veita klientum tygara løggilding við tí grundgeving, at klientar tygara hvørki lúka krøvini í § 1 ella § 2 í lógini um løggildar grannskoðarar.

Avgerðin um at sýta løggilding eftir § 1 er grundað á, at tygara klientar ikki lúka kravið um serliga prógvtøku eftir § 1, stk. 2, nr. 4, og avgerðin um at sýta løggilding eftir § 2 er m.a. grundgivin við, at tygara klientar ikki kunnu vísa á – uttanfyri Føroyar – at hava eina útbúgving, sum kann javnmetast við tað í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu, t.e. serlig prógvtøka og 3 ára praktiskar royndir hjá løggildum grannskoðara.

**Grundgevingar fyri kæruni**

Sum advokatur fyri kæraran hava tygum ført fram, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er skeiv og at grundgevingarnar eru beinleiðis skeivar. Tygum vísa á, at

- fordømi er um, at ikki øll hava staðið eina serliga roynd fyri at blíva tilnevnd løggildur grannskoðari í Føroyum,
- tað ikki kann góðtakast at ein norsk cand.merk.aud útbugving og autotisatión kann viðurkennast sum grundarlag fyri føroyskari løggilding, meðan ein tilsvarandi donsk útbúgving sum cand.merc.aud. ikki kann góðtakast,

- norska útbúgvingin ikki gevur rætt til at blíva skrásettur sum grannskoðari í Danmark
- ein autorisatión, frá øðrum landi enn Danmark, ikki eigur at geva rætt til løggilding í Føroyum
- øll eiga at vera eins fyri lógini
- klientar tínir eiga at verða løggildir sambært § 1 í lógini (sama sum ein persónur við norskari útbúgving hevur fingið í 2005)
- klientar tínir hava staðið danska kandidatútbúgving í grannskoðan í Danmark, og at allir hava praktiskar royndir síðani hjá løggildum grannskoðara
- tygara klientar uppfylla øll krøv, sum verða sett í øðrum londum í ES, buttursæð frá t.d. Danmark
- Danmark setur strangari krøv enn onnur lond við tað at sett verður sum krav, at umsøkjarin skal upp til eina eyka roynd fyri at fáa løggilding
- felags fyri øll ES-lond – og Noreg – er, at krav er um arbeiðsroyndir eftir loknað kandidatútbúgving
- føroyska lógin byggir á donsku lógina
- danska lógin hevur ES-reglur sum grundarlag
- landsstýrið ongantíð hevur brúkt heimildina í § 4 í lógini at áseta nærri reglur fyri serligu próvtøkuna, sum ásett í § 1, stk. 2, nr. 4, og at reglan um serliga roynd tí ongantíð er ásett í Føroyum
- fordømi um at løggilda ein persón, sum ikki hevur staðið nakra roynd, hevur við sær, at gingið er burtur frá kravinum um eina serliga roynd
- praksis hjá skrásetingarmyndugleikanum er broytt
- tygara klientar hava eitt rættarkrav uppá at fáa somu løggilding, sum ein, ið hevur norska útbúgving uttan at hava staðið serliga roynd.

**Lógarkarmur**

Innlendismálaráðið staðfestir, at mál um føroyska løggilding av grannskoðarum, sum ætla at virka í Føroyum, skal viðgerast og avgerast eftir føroyskari lóggávu. Tað er løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, sum innihaldsliga

og lógliga er karmur um slík mál. Staðfest verður eisini, at einasta kunngerð, sum er lýst við heimild í lógini, fevnir um grannskoðaraátekning á roknskapum.

Ráðið ásannar, at føroyska lógin er meinlík donsku lógini um „statsautoriserede og registrede revisorer“, hóast tann danska lógin er endurskoðað seinast í 2003, tíggju ár eftir, at tann føroyska lógin kom í gildi. Tað framgongur av donsku reglunum, at krøvini um „særlig eksamen“ sambært § 3, stk. 1, nr. 3, sbr. § 9, stk. 5 í Lov nr. 302 af 30/04/2003 eru ítøkiliggjørd í kunngerðum, sbr. bekg. nr. 186 af 22/03/2004 og bekg. nr. 743 af 21 /08/2003, meðan ongin kunngerð et lýst í Føroyum, sum ítøkiliggerð ella fremur § 1, stk. 2, nr. 4, sbr. § 4, stk. 1 í føroysku lógini, hóast heimildirnar til ávikavist Skráseting Føroya og „Erhvervs- og Selskabsstyrelsen“ eisini eru meinlíkar.

Sambært lógini kann skrásetingarmyndugleikin tilnevna løggildar grannskoðarar sambært § 1 ella § 2. Løggilding sambært § 1 er eftir lógini treytaleys, meðan løggilding eftir § 2 kann verða veitt við treytum.

§ 1, stk. 2 í lógini ásetur, at persónur hevur rætt til at verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari, um viðkomandi lýkur seks uppreksað lógarkrøv. Tað, at tað áðrenn sætta kravið stendur „og“ merkir, at aðalreglan er, at øll seks krøvini skulu verða lokin fyri at ein persónur skal hava rætt til at verða tilnevndur løggildur grannskoðari eftir hesi reglu.

Lógin ásetur eisini rættiliga ítøkiliga í § 1, stk. 3 undir hvørjum umstøðum sýtt kann verða fyri at geva løggilding, hóast viðkomandi formliga lýkur øll seks krøv, sum eru ásett í § 1, stk. 2.

§ 2 í lógini ásetur, at skrásetingarmyndugleikin eisini kann veita løggilding til persónar, sum uttanfyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við tær í § 1, stk. 2, nr. 4 og

5 nevndu útbúgvingar, t.e. serlig próvtøka og 3 ára praktiskar royndir hjá løggildum grannskoðara.

Staðfestast kann, at ongin kunngerð er, sum ásetur, hvat neyvari liggur í lógarkravinum um serliga próvtøku, sbr. í § 1, stk. 2, nr. 4 og § 4, ella hvørjar útbúgvingar kunnu javnmetast við tær í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu.

**Kæruviðgerðin**

Sum advokatur fyri kærarnar hava tygum ført fram, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er skeiv og at grundgevingarnar eru beinleiðis skeivar. Tygum vísa m.a. á, at fordømi er um, at ikki øll hava staðið eina serliga roynd fyri at blíva tilnevnd løggildur grannskoðari í Føroyum.

Uppá fyrispurning hevur Skráseting Føroya upplýst Innlendismálaráðnum, at síðani lógin um løggildar grannskoðarar kom í 1993 eru 6 løggildingar veittar. Allar seks løggildingar eru veittar sambært § 1 í lógini og eru tær veittar við tilvísing til, at viðkomandi persónar hava havt prógv sum „statsautoriseret" revisor í ávikavist Danmark (fimm løggildingar) ella Noregi (ein løggilding). Skráseting Føroya vísir harumframt á, at tað er gomul siðvenja at veita løggilding til persónar við danskari statsautorisatión. Innlendismálaráðið metir, at tá fimm av seks løggildingum hesi seinastu 13 árini eru givin persónum við danskari statsautorisatión og allar seks eru givnar persónum, sum frammanundan hava fingið danska ella norska statsautorisatión, so er ein siðvenja skapað, sum ikki kann síggjast burtur frá.

Vegna kærarnar hava tygum eisini ført fram, at tað ikki kann góðtakast, at ein norsk cand.merk.aud. útbúgving og autorisatión kann viðurkennast sum grundarlag fyri føroyskari løggilding, meðan ein tilsvarandi donsk útbúgving sum cand.merc.aud. ikki kann góðtakast, m.a. tí at norska útbúgvingin ikki gevir rætt til danska løggilding. Eisini vísa tygum á, at ein autorisatión, frá

øðrum landi enn Danmark, ikki eigur at geva rætt til løggilding í Føroyum.

Uttan at fara í smálutir viðvíkjandi muninum millum eina danska, norska ella aðra útlendska „statsautorisatión“ verður víst á, at siðvenjan higartil í Føroyum má sigast at hava havt ein útfyllandi rættarskapandi virknað, sum ikki er uttan týdning fyri rættarstøðuna og avgerðina í tygara kærumáli, sbr. viðgerðina niðanfyri.

Tygum rógva eisini framundir, at fordømið um at løggilda ein persón, sum ikki hevur staðið nakra serliga roynd, hóast viðkomandi hevur fingið eina „statsautorisatión“, hevur við sær, at gingið er burtur frá kravinum um serliga próvtøku. Tygum vísa eisini á, at tað, at landsstýrið ongantíð hevur brúkt heimildina í § 4 í lógini um at áseta nærri reglur fyri serligu próvtøkuna, sum ásett í § 1, stk. 2, nr. 4, hevur við sær, at reglan um serliga roynd ongantíð er ásett í Føroyum.

Sum nevnt omanfyri, so er ein siðvenja skapað, hvat viðvíkur løggilding av persónum við danskari „statsautorisatión“. Tað, at ein norsk statsautorisatión, sum ikki hevði sum fortreyt nakra serliga próvtøku, er løgd til grund fyri eina føroyska løggilding, kann ikki í sjálvum sær føra til ta niðurstøðu, at gingið er burtur frá kravinum í lógini um serliga próvtøku. Til tað er eitt fordømi, og í veruleikanum eitt eindømi, ov veikt til í sær sjálvum at broyta eina annars fasta fyrisitingarliga siðvenju.

Spurningurin um, hví heimildin í lógini ikki er brúkt til at áseta reglur um serliga próvtøku stendur ósvaraður. Hinvegin er tað púra greitt, at lóggevararnir í løgtinginum hava samtykt, at ein av fleiri treytum fyri at fáa løggilding eftir § 1 er, at umsøkjarin hevur staðið eina serliga próvtøku sambært § 1, stk. 2, nr. 4.

At útinnandi valdið ikki letur generellar reglur gera kann elva til óhepna óvissu um rættarstøðuna, bæði fyri hin einstaka borgaran og fyri fyrisitingarliga myndugleikan. Hinvegin kann

tað staðfestast, at fyrisitingarligi myndugleikin higartil hevur umsitið mál um løggilding eftir sama leisti, við tað at løggilding – við einum undantaki – bert er veitt persónum, sum frammanundan hava kvalifiserað seg til eina danska statsautorisatión. Skal henda rættarstøða broytast er tað helst neyðugt antin at broyta lógina ella at áseta kunngerðareglur, sum positivt áseta eina aðra rættarstøðu innanfyri verandi lógarkarmar.

Tygum vísa eisini á, at øll lond hava ikki somu reglur fyri løggilding og at Danmark er eitt av strangastu londunum í ES, hvørs lóggávu føroyska lógin byggir á, við tað at sett verður sum krav, at umsøkjarin skal upp til eina eyka roynd fyri at fáa løggilding. Tygum vísa í hesum sambandi á, at tygara klientar lúka øll krøv fyri løggilding, bæði útbúgvingarliga og við arbeiðsroyndum, sum verða sett í øðrum londum í ES, burtursæð frá Danmark, og at tygara klientar av hesi orsøk eiga at fáa løggilding sambært § 1 í lógini.

Sum nevnt omanfyri, so er tað føroyska lóggávan, sum er karmur um viðgerðina av tygara klientum og ikki útlendsk lóggáva ella siðvenja. Sum kunnugt er tað upp til fyrisitingarliga myndugleikan at útfylla lógina tá óvissa ræður. Tað, at ein siðvenja hevur tikið seg upp, soleiðis at Skráseting Føroya bert veitir løggilding til persónar, sum hava danska ella møguliga eisini eina norska statsautorisatión ger, at aðalreglan fyri at fáa løggilding eftir § 1 í lógini framvegis er, at øll seks krøv skulu lúkast fyri at hava <u>rætt</u> til løggilding og í øðrum lagi, at ein donsk statsautorisatión, sambært siðvenju, gevur sama rætt til løggilding, sum tað at lúka krøvini ásett í §1, stk. 2, nr. 1-6.

At enda vísa tygum á, at øll eiga at vera eins fyri lógini. Hetta tekur ráðið treytaleyst undir við. Øll mál, har fakta eru eins, eiga at fáa somu viðgerð og avgerð eftir lógini ella sambært siðvenju. Tygara klientar, sum eftir tí upplýsta lúka øll krøv uttan eitt, tað um serliga próvtøku ella í øðrum lagi, at teir ikki hava eina danska statsautorisatión, kunnu ikki metast at lúka tey krøv,

sum sambært lóg og siðvenju skulu vera lokin fyri at Skráseting Føroya skal veita løggilding sambært § 1.

Afturat omanfyri nevndu atlit sum eitt nú fyrisitingarliga siðvenjan, sum hevur tikið seg upp, eru onnur lóglig atlit at taka í málum sum hesum. Skilligt er, at endamálið við løggilding, og endamálið við at seta krav um serliga próvtøku, m.a. er at tryggja, at bert grannskoðarar við skjalprógvaðum kunnleika til viðurskifti av týdningi fyri útinnan av starvinum, skulu fáa løggilding. Fyri borgaran og onnur er ein løggilding eitt slag av góðskumerking, sum ein løggildur grannskoðari hevur framum ein skrásettan grannskoðara og hevur „løggildings-instituttið“ tí eisini samfelagsligan týdning.

At broyta lógásett krøv, sum rættiliga tømandi áseta allar tær treytir, sum skulu verða loknar fyri at fáa slíka løggilding krevur sum aðalreglu, at løgtingið broytir lógina. At ein siðvenja hevur tikið seg upp, sum hevur havt við sær, at bert persónar við danskari statsautorisatión – og sum hava staðið eina serliga próvtøku – hava fingið løggilding í Føroyum við einum einstakum undantaki, ger, at kravið um serliga próvtøku sambært § 1, stk. 2, nr. 4 stendur við.

**Uppskot til kæruavgerð**
Innlendismálaráðið ætlar at staðfesta avgerðina og grundgevingarnar hjá Skráseting Føroya um at sýta klientum tygara løggilding sum grannskoðarar.

**Tilmæli til Skráseting Føroya**
Innlendismálaráðið ætlar at mæla Skráseting Føroya til at gera tað, sum skal til, fyri at ítøkiliggera krøvini í lógini, soleiðis at ein og hvør óvissa um rættarstøðuna kann ruddast burtur fyri framtíðina, annaðhvørt søkt verður um løggilding eftir § 1 ella § 2.
…“

Skráseting Føroya boðaði dagin eftir frá, at Skráseting Føroya ongar viðmerkingar hevði til ætlaðu avgerðina.

Sambært fundarfrásøgn hjá Innlendismálaráðnum, sum er dagfest 10. november 2006, varð uppskotið til kæruavgerð umrøtt á fundi tann 16. august 2006 millum U, landsstýrismann í innlendismálum og nakrar av kærarunum saman við advokati teirra.

Tann 22. august 2006 gjørdi advokaturin hjá kærarunum soljóðandi viðmerkingar til ætlaðu avgerðina hjá Innlendismálaráðnum, dagfest 20. juni 2006:

> „**Viðv. løggilding**
> Vísandi til uppskot til kæruavgerð frá Innlendismálaráðnum dagfest 20. juni 2006 og okkara fund tann 16. august 2006 loyvi eg mær vegna mínar klientar at knýta hesar skrivligu viðmerkingarnar til málið:
>
> Málið er einfalt hóast tað hevur tikið rúma tíð at avgreiða.
>
> Mínir klientar søktu um at gerast løggildir grannskoðarar (í Føroyum) í apríl 2005. Frammanundan lá ein umsókn um løggilding hjá Skráseting Føroya. Sostatt lógu 8 umsóknir til viðgerðar um somu tíð.
>
> Setningurin í uppskoti til kæruavgerð
>
> ***„at ein norsk statsautorisatión, sum ikki hevði til fortreyt nakra serliga próvtøku, er løgd til grund fyri eina føroyska løggilding, kann ikki í sjálvum sær føra til ta niðurstøðu, at gingið verður burtur frá kravinum í lógini um serliga próvtøku. Til tað er eitt fordømi, og í veruleikanum eitt eindømi, ov veikt til í sær sjálvum at broyta eina annars fasta fyrisitingarliga siðvenju“***
>
> er tí ein so mikið grundleggjandi misskiljing, at uppskot til kæruavgerð átti at verið tikið aftur. Felags fyri allar umsøkjarar

var, at teir allir høvdu staðið kandidatútbúgvingina cand.merc. aud./aut. Sostatt hevði eingin av umsøkjarunum staðið serligu próvtøkuna, sum er krav fyri at gerast statsautoriseret revisor í Danmark.

Hetta krav um serliga próvtøku hevur t.d. ikki verið praktiserað í Noreg, har tann eini av umsøkjarunum er tilnevndur statsautorisert revisor. Í Føroyum eru heldur ongar reglur settar í gildi fyri serliga próvtøku. Sostatt er Skráseting Føroya rættiliga fríttstillað viðvíkjandi ítøkiliga kravinum um útbúgving, tá umsøkjarar søkja um løggilding. Eftir míni bestu sannføring má tilnevningin av tí eina umsøkjaranum merkja, at Skráseting Føroya hevur góðtikið, at ein cand. merc. aut. útbúgving í sjálvum sær er nóg mikið fyri at kunna blíva løggildur.

Aftaná hesar umsóknir høvdu ligið til viðgerðar í tíðarskeiðnum apríl 2005 til september 2005 velur Skráseting Føroya at løggilda ein umsøkjara. Viðkomandi varð tilnevndur eftir § 1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar eins og allir aðrir løggildir grannskoðarar higartil eru.

Munurin millum hesa tilnevning og aðrar er, at viðkomandi bert hevði staðið norsku cand. merc. aut. útbúgvingina og onga aðra serliga próvtøku. Ein statsautorisatión er ikki eitt prógv/próvtøka, og er hetta eisini ein misskiljing í uppskoti til kæruavgerð.

Sum nevnt frammanfyri, so hevur Skráseting Føroya tikið hesa støðu aftaná rúma tíð og drúgva viðgerð. Henda viðgerð hevur m.a. fevnt um fyrispurningar hjá FSR (Foreningen af Statsautoriserede Revisorer í Danmark) og Felagið fyri Løggildar Grannskoðarar í Føroyum.

Hesir áhugabólkar mæltu frá at løggilda hesum umsøkjara, tí at hann ikki hevði staðið nakra serliga próvtøku, og eisini tí at hann ongar royndir hevði frá arbeiði hjá løggildum grannskoðara aftaná lokna kandidatútbúgving. Alt hetta hevur verið við í

viðgerðini hjá Skráseting Føroya og løggildingin av persóni við støðið í norsku cand.merc.aut. útbúgvingini er øllum vitandi ein ógvuliga tilvitað avgerð. Við hesi avgerð hevur Skráseting Føroya staðfest, at „serliga próvtøkan“ sambært galdandi praksis er cand. merc. aud. útbúgving.

Hóast mínir klientar lúka øll tey føroysku lógarkrøvini fyri at gerast løggildir grannskoðarar, so leggur uppskot til kæruavgerð upp til, at avgerðin hjá Skráseting Føroya at bert løggilda tann eina umsøkjarin var røtt. Sostatt tykist umsitingin at stuðla avgerðini hjá Skráseting Føroya, og harvið ganga burtur frá grundleggjandi kravinum um eins viðgerð.

Tað er hettar sum er kjarnin í málinum. Tann eini, sum varð tikin úr stakkinum, hevur ikki „havt prógv sum statsaut. revisor í Noreg“. Viðkomandi persónur hevði eina cand.merc.aut. og so einki meir, uttan sjálvandi tað, at hann við støði í hesum hevur fingið eina autorisation í Noreg. Tað kann undir øllum umstøðum ikki verða rætt at taka eina norska cand.merc.aut. útbúgving fram um eina føroyska/danska.

Eisini havi eg víst á, at føroyska lógin hevur fyrimynd í donsku lógini, sum aftur hevur fyrimynd í EU-rætti. EU rættur setur ikki nakað krav um „eina serliga próvtøku“. Tá føroyskir myndugleikar, hóast føroyska lógin hevur verið galdandi í mong ár, ikki hava gjørt serligar reglur innan hetta økið, má hetta – tá galdandi praksis verður havt í huga – merkja, at føroyski myndugleikin við vilja ikki hevur sett fram krav um eina „serliga útbúgving“ meir enn eina cand.merc.aud. útbúgving, sum annars er nóg mikið í fleiri EU londum sjálvsagt saman við kravinum um praktiskar royndir.

Eisini haldi eg, at tykkara niðurstøða ikki tykist byggja á tann veruleika, at umsóknin hjá viðkomandi persóni við norskari útbúgving bleiv viðgjørd samstundis sum umsóknirnar hjá mínum klientum vóru viðgjørdar.

Tað er eftir míni metan fullkomuliga burturvið at royna at burturforklára avgerðina viðvíkjandi tí persóninum, sum fekk løggilding við, at hesin hevði eitt ella annað serligt framum mínar klientar. Veruleikin er, at viðkomandi persónur fekk løggilding sambært § 1 einans við eini cand.merc.aud. útbúgving, og uttan at viðkomandi hevði staðið nakra serliga roynd.

Eisini er tað ein sannroynd, at mínir klientar í veruleikanum hava betri kvalifikatiónir, tí teir hava betri praktiskar royndir (Royndir hjá løggildum grannskoðara aftaná loknað kandidatútbúgving). At avgerðin um at geva viðkomandi persóni løggilding er rættarskapandi er heilt eyðsæð.

Tað ber tí ikki til hjá einum almennum myndugleika at frávíkja kravið um „serliga útbúgving“ hjá einum persóni fyri samstundis at seta sama krav, enntá eftir somu lógargrein, mótvegis nøkrum øðrum persónum.“

Meðan málið um løggilding av grannskoðarum fór fram, arbeiddi Skráseting Føroya við tilevnan av kunngerð um próvtøku til at gerast løggildur grannskoðari. Soljóðandi frásøgn er skrivað av Vinnumálaráðnum frá fundi tann 14. november 2006 millum Vinnumálaráðið og Skráseting Føroya:

„Fundurin var hildin í FSE (Fjarskiftiseftirlitinum, *mín viðm.*) tann 14. november kl. 13.30

Við á fundinum vóru: M, S, T (umboðandi Skráseting Føroya, *mín viðm.*) og P (umboðandi Vinnumálaráðið, *mín viðm.*)

P byrjaði fundin við at greiða frá arbeiðinum at dagføra vinnulóggávuna. Í hesum sambandi ætlar VMR at seta nýggju altjóða grannskoðaralógina í gildi í Føroyum. Altjóða lóggávan skal umsetast til føroyskt og skal niðan í Tingið saman við vinnulóggávuni, sum skal niðan í Tingið áðrenn 1. mars 2006. Í hesum sambandi fer VMR at senda danska útkastið til hoyringar í næstum.

P boðaði frá at í sambandi við nýggja altjóða grannskoðaralóg verður próvtøkan eisini í trá við altjóða standardin á økinum (lagaligari próvtøku men góðsku eftirlit). P boðaði frá, at tað er ikki ynskiligt at Skrásetingin arbeiðir víðari við uppskotinum, sum liggur á borðinum í løtuni. Vit ynskja altjóða reglur á hesum økinum eins og vit ynskja altjóða reglur fyri alla vinnulóggávuna.

P boðaði frá at VMR fer at gera avtalu við danir um góðsku eftirlit á grannskoðaraøkinum.

Viðvíkjandi umsóknunum frá hinum 7 grannskoðaranum so spurdi P um tað ikki er møguligt, at taka málið upp av nýggjum. M boðaði frá, at tey enn bíða eftir úrskurðinum frá Innlendismálaráðnum og at einki verður gjørt við málið áðrenn svar er fingið hagani.

Avtalað varð:
Nýggja altjóða grannskoðaralógin fer niðan í Tingið saman við vinnulóggávuni.
Próvtøkan verður gjørd sambært altjóða reglunum á økinum.
Skrásetingin steðgar arbeiðinum við próvtøku kunngerðini, sum liggur á borðinum í løtuni.
VMR ger avtalu við danir um góðsku eftirlit av føroyskum grannskoðarum. …“

Tann 16. november 2006 var fundur í Vinnumálaráðnum við luttøku av landsstýrismanninum í vinnumálum, einum fulltrúa úr Vinnumálaráðnum og trimum av kærarunum. Tvær frágreiðingar eru frá hesum fundi. Onnur frágreiðingin er endurgivin í einum skrivi frá fyrrverandi landsstýrismanninum í vinnumálum til umboðsmannin, dagfest 14. januar 2010, sí undir III. parti.

Tann 19. november 2006 sendu tveir av kærarunum, B og E, soljóðandi skriv Innlendismálaráðið um m.a. fundin í Vinnumálaráðnum 3 dagar frammanundan:

**„Viðvíkjandi umsókn um løggilding**
U, landsstýrismaður (í innlendismálum, *mín viðm.*), hevur kunnað okkum, at okkara kæra er flutt frá V (deildarstjóri í Innlendismálaráðnum, *mín viðm.*) til tín. Orsøkin til hetta er, at vit skjótt skulu fáa eitt svar uppá okkara kæru. Hetta fegnast vit um.

Annars vilja vit kunna teg um, at vit hava havt ein fund við K, landsstýrismann, og P, fulltrúa, um okkara kæru.

Sum kunnugt er Skráseting Føroya stovnur undir Vinnumálaráðnum. Orsakað av ógegni er okkara kæra flutt til Innlendismálaráðið.

Vit halda, at tað er óheppið, at kæran ikki verður viðgjørd í Vinnumálaráðnum, og man Vinnumálaráðið vera samt í hesum, tí at Vinnumálaráðið heldur, at Skráseting Føroya/M átti at tikið okkara umsóknir upp til nýggja viðgerð. Men M hevur boðað Vinnumálaráðnum frá, at hann einki ger við málið, fyrr enn hann hevur hoyrt niðurstøðuna frá Innlendismálaráðnum.

M hevur arbeitt við eini kunngerð, sum skal seta karmarnar fyri serligari roynd, sum skal standast, áðrenn umsøkjarar kunnu gerast løggildir grannskoðarar í Føroyum. Sum kunnugt er grannskoðaraøkið yvirtikið málsøki. Ongar reglur hava higartil verið fyri tí serligu royndini, sum verður umrødd í lógini fyri løggildar grannskoðarar. Tað sama ger seg galdandi í øðrum londum, og har hevur cand.merc.aud. verið mett sum tann serliga royndin tá umsøkjarar skulu løggildast.

Vinnumálaráðið kunnaði okkum um, at Vinnumálaráðið hevur boðað M frá, at hansara arbeiði við kunngerðini skal steðgast. Í staðin verður próvtøkukunngerð sett í gildi saman við dagførdu grannskoðara lógini. Henda próvtøkukunngerð er meinlík kunngerðini, sum danir ætla at seta í gildi, og fylgir hon ES-reglum. Við hesum reglum verður størri dentur lagdur á eftirlit við grannskoðaravinnuni og minni dentur á serligu royndina.

Nýggir upplýsingar, og at arbeiðið við kunngerðini er steðgað, ger, at Vinnumálaráðið heldur, at okkara umsóknir um løggilding beinanvegin eiga at verða gingnar á møti. Vit fingu at vita frá Vinnumálaráðnum, at tey vildu boða Innlendismálaráðnum frá teirra tilmæli. K hevði uppá fyrispurning frá M svarað, at M ikki fekk trupulleikar frá hansara síðu um A fekk løggildingina. Vinnumálaráðið dugdi ikki at síggja, at okkara mál var øðrvísi, og hetta skuldi Vinnumálaráðið somuleiðis boða Innlendismálaráðnum frá.

Tað hevði nú verið betur, um tú luttók á fundi okkara við U og V, soleiðis at tú fekk høvi at hoyra okkara síðu. Serliga tað at vit søktu samstundis sum A og hava sama lógarkrav sum hann at gerast løggildir grannskoðarar. Somuleiðis er tað umráðandi, at tú hevur í huga, at her er talan um løggilding í Føroyum, at ongar reglur eru fyri serligu próvtøkuna, og at Skráseting Føroya tilvitað hevur avgjørt, at cand.merc.aud. gevur rætt til løggilding og skal fatast sum tann serliga próvtøkan. Tað er púra skeivt, tá W (deildarstjóri í Innlendismálaráðnum, *mín viðm.*) í telefonsamrøðu hevur kallað avgerðina um A ein svipsara og ikki skilti, at vit søktu samstundis sum A. Vinnumálaráðið veit tó, at vit søktu samstundis, tí tá Skráseting Føroya bleiv flutt sum ein stovnur undir M, blivu okkara umsóknir og A'sa fluttar saman til Skráseting Føroya. Okkara umsóknir og A'sa lógu saman til viðgerðar hjá Skráseting Føroya í tíðarskeiðnum apríl til septembur 2005.

Somuleiðis vilja vit boða frá, at vit halda at arbeiðið hjá Skráseting Føroya við próvtøkukunngerðini fyri serligu próvtøkuna hevur verið merkt av drál og skiftandi niðurstøðum. Vit taka fult undir við avgerðini hjá Vinnumálaráðnum um at fylgja ES-reglum viðvíkjandi serligu próvtøkukunngerðini, og tað arbeiði ið verður gjørt í sjálvum Vinnumálaráðnum.

Vit hava loyvt okkum at leggja nøkur skjøl við hesum skrivi, sum lýsa málið nærri

Vinarliga

(Nøvnini á øllum kærarunum, *mín viðm.*)

Avrit av hesum skrivi er somuleiðis sent til Vinnumálaráðið."

Tann 20. november 2006 sendi Innlendismálaráðið Skráseting Føroya skrivið frá R, adv., dagfest 22. august 2006, til ummælis. Innlendismálaráðið var serliga áhugað í at fáa upplýst, um A var løggildur í Føroyum einans vísandi til eina cand.merc.aud. útbúgving og uttan at hava staðið eina serliga próvtøku. Biðið varð samstundis um øll skjølini í málinum.

Tann 30. november 2006 sendi Skráseting Føroya soljóðandi skriv til Innlendismálaráðið:

„**Viðv. viðmerkingum í sambandi við mál um løggilding av grannskoðarum.**
Vísandi til skriv frá Innlendismálaráðnum dagf. 20. november 2006, hevur Skráseting Føroya hesar viðmerkingar.

Í skrivi til IMR (Innlendismálaráðið, *mín viðm.)* frá R, vegna klientar sínar, verður víst á, at umsóknirnar frá klientum hansara lógu inni samstundis sum tann eina, sum fekk løggilding. Hetta er ikki heilt rætt. Tann umsøkjarin sum fekk løggilding, søkti í januar 2005, og fekk í mars tilsøgn um at fáa løggilding. At sjálv løggildingin ikki var skrivað fyrr enn í september, var orsakað av at nøkur formlig viðurskifti ikki vóru komin í rættlag.

Men hinir umsøkjararnir søktu ikki fyrr enn í apríl – eftir at teir høvdu frætt at hin fyrsti umsøkjarin hevði fingið tilsøgn í mars.

Í skrivinum frá R verður síðani víst á, at tann eini sum fekk løggilding, onki hevði framum hinar umsøkjararnar. Allir høvdu eina cand.merc.aud. útbúgving.

Í § 1, stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, stendur at „rætt at vera tilnevndur sum løggildur grannskoðari hevur tann, sum hevur staðið eina serliga próvtøku, samanber § 4.“

Útbúgvingin sum verður nevnd í § 4, hevur helst verið ætlað sum ein føroysk útbúgving, serliga lagað til føroysk viðurskifti, men hon er tó ongantíð sett í verk.

Tí eru allir løggildir grannskoðarar, ið eru tilnevndir í Føroyum higartil, fyrst góðkendir sum 'statsautoriseret revisor' í Danmark. Løggildingin er farin fram sambært § 1, stk. 2, nr. 4, jvb. § 2 stk. 1, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar. Teir flestu við danskari 'statsautorisatión' hava staðið eina (danska) roynd/próvtøku, sum gevur rætt til 'statsautorisatión'.

Í § 2, stk. 1 verður sagt, at persónur við útbúgving, sum er tikin uttanfyri Føroyar, og sum kann javnmetast við ta útbúgving sum annars gevur rætt til tilnevning sum løggildur grannskoðari, kann verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari.

Av tí at bert umsøkjarar við „statsautorisatión“ úr Danmark, fram til 2005, hava søkt um løggilding, og teir eru tilnevndir eftir undantaksregluni í § 2, stk. 1, er hendan soleiðis vorðin høvuðsreglan.

Men Skráseting Føroya hevur mett, at tað ikki bert eru umsøkjarar við danskari statsautorisatión, ið kunnu fáa løggilding eftir undantaksregluni í § 2. Eisini verður hildið, at útbúgvingar úr øðrum londum, eiga at kunna góðkennast.

Í reglugerðini, sum er í gerð, men sum enn ikki er sett í gildi, er gjørt eitt yvirlit við londum, har útbúgvingarnar eru mettar at vera á einum støði, at tær kunna geva løggilding í Føroyum.

Harumframt kann føroyski skrásetingarmyndugleikin, eftir

umsókn, góðkenna útbúgvingar úr øðrum londum, treytað av, at tær verða mettar at verða samsvarandi støðinum í teimum á yvirlitinum nevndu londum.
…
A hevði eina ’statsautorisatión’ úr Noregi, og grundað á hesa fekk hann løggilding.
Í Noregi krevst ein H.R.E. útbúgving (høyere revisor eksamen) og ein próvtøka fyri at fáa ’statsautorisatión’.
Hendan próvtøkan fer fram eftir ’Forskrift om gjennomføring av praktisk prøve for revisorer’ nr. 433 frá 24.04.2001, og er hon í tráð við 8. direktiv hjá ES.

Men hendan endaliga próvtøka var sett í gildi í november í 2005, og tá A fekk sína ’statsautorisatión’ – í januar í 2005 – var onki krav um nakra próvtøku.

Tí ber ikki til at siga, at við tað at hann ikki var til nakra próvtøku – sum kravt í § 1 – at hann onki hevði ’framum’ hinar. Tí tað var ikki krav – ella møguleiki – í Noregi, tá hann fekk sína ’statsautorisatión’.

Eisini skal vísast á, at á sama hátt, eru nakrir løggildir grannskoðarar í Føroyum, ið hava danska ’statsautorisatión’, hóast teir ikki hava verið til nakra próvtøku.
Orsøkin til at teir fingu ’statsautorisatión’ í Danmark, er, at teir fingu sína ’statsautorisatión’ áðrenn kravið um próvtøku var sett í gildi har.
Tá kravið um próvtøku kom í Danmark, merkti tað ikki, at hesir sum høvdu fingið ’statsautorisatión’ uttan próvtøku, mistu hana.

Um onnur nú ætla sær at fáa norska ’statsautorisatión’, so krevst ein próvtøka eftir núgaldandi norsku reglunum.

Eru annars spurningar, eru tit vælkomin at venda aftur.
Hjáløgd eru skjøl í málinum um løggilding av A.“

Tann 4. desember 2006 sendi Innlendismálaráðið advokatinum hjá kærarunum skrivið frá Skráseting Føroya til ummælis, sum tann 8. desember 2006 gjørdi soljóðandi viðmerkingar:

„Løggilding, tykkara j.nr. …
Eg havi móttikið viðmerkingar frá Skráseting Føroya dagf. 30. novembur 2006.

Viðmerkingarnar frá Skráseting Føroya geva ikki høvi til at broyta okkara sjónarmið, sum í einum og øllum verða fasthildin.

Heilt stutt skal eg tó gera hesar viðmerkingar:

1. Serlig roynd
Allir føroyskir løggildir grannskoðarar eru tilnevndir eftir § 1 í lógini. Sambært § 1 krevst ein serlig roynd, men føroyska lóggávan sigur einki um, hvørji krøv setast til hesa roynd. Tað er mín áskoðan, at hetta má hava við sær, at útbúgvingin hjá klientum mínum í sjálvum sær er nóg mikið, og hettar svarar eisini til galdandi praksis í dag, sí niðanfyri.

Skráseting Føroya staðfestir í skrivinum, at A ikki hevur staðið nakra serliga roynd, sum klientar mínir ikki hava staðið, hvat tilnevning til løggildan grannskoðara viðvíkur.

Skráseting Føroya hevur soleiðis valt at tulka cand.merc.aud. sum ta serligu royndina, nevnda í § 1 eins og t.d. Noreg gjørdi, áðrenn serligar reglur vórðu settar í gildi.

Í hesum samanhangi kann eg viðmerkja, at styttingin sum skrásetingin nýtir fyri norskan cand.merc.aud. er H.R.E., sum beinleiðis svarar til donsku revisorkandidatútbúgvingina cand. merc.aud.

Annars kann eg upplýsa, at tilnevning eftir § 2 eisini krevur eina serliga roynd. Ein løggilding í Noregi, við tí innihaldi hon í hesum konkreta føri hevur, er eftir míni metan als ikki ein

relevant grundgeving fyri at løggilda ein føroying, sum annars við somu løggilding ætlar sær at arbeiða í Føroyum burturav.

2. Vóru umsóknirnar viðgjørdar samstundis
Skráseting Føroya sigur, at „tað ikki er heilt rætt, at umsóknirnar frá klientum mínum lógu inni samstundis, sum umsóknin hjá A.

Hvat Skráseting Føroya meinar við „heilt rætt", skilji eg ikki.

Skráseting Føroya staðfestir, at A søkti í januar 2005 og fekk tilnevning í septembur 2005, samstundis sum skrásetingin staðfestir, at mínir klientar søktu í apríl 2005.

A varð, sum áður nevnt, tilnevndur í septembur 2005 av Skráseting Føroya, sum tá var sjálvstøðugur stovnur undir Vinnumálaráðnum (VMR), við M sum stjóra.

Skráseting Føroya gjørdist sjálvstøðugur stovnur í august 2005.

Áðrenn A varð tilnevndur, spurdi M seg fyri hjá VMR. VMR boðaði frá, at Skráseting Føroya fór ikki at fáa trupulleikar, um A varð tilnevndur.

Útsøgnin um, „at umsóknirnar hjá klientum mínum, sum vórðu latnar inn í apríl 2005, ikki lógu til viðgerðar samstundis, sum tann hjá A", kann tí ikki takast fyri fult.

Eg vóni, at hetta mál nú verður avgreitt skjótast gjørligt."

Tann 21. desember 2006 sendi Innlendismálaráðið Skráseting Føroya og advokatinum hjá kærarunum soljóðandi uppskot til avgerð:

**„Avgerð í kærumáli, har Skráseting Føroya hevur sýtt umsøkjarum, sum eru tygara klientar, løggilding sum grannskoðarar**

Løgmaður hevur latið Innlendismálaráðnum upp í hendi at taka avgerð í einum kærumáli, har Skráseting Føroya hevur noktað tygara klientum B, H, D, I, F, J, og E løggilding sum grannskoðarar.

Innlendismálaráðið staðfestir, at Skráseting Føroya hin 27. januar 2006 hevur avgjørt ikki at geva nevndu umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar. Tað framgongur av málinum, at Skráseting Føroya hevur hildið seg til formligu hoyringsfreistina av pørtunum eftir fyrisitingarlógini, áðrenn avgerðin varð tikin, og hevur Innlendismálaráðið tí onki at viðmerkja hvat tí viðvíkur.

Innlendismálaráðið staðfestir, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er kærd 19 dagar eftir, at avgerðin varð tikin. Ráðið staðfestir eisini, at Skráseting Føroya í síni avgerð ikki hevur upplýst móttakaran um kærumøguleika ella kærufreist, men bara kunnað um § 15a í lógini, sum gevur landsstýrinum heimild at áseta reglur um kæru. Hóast ongar slíkar reglur eru ásettar, fylgir tað av vanligu fyrisitingarligu reglunum, at avgerðin hjá Skráseting Føroya kann kærast til landsstýrismannin, og má kæran eisini metast at verða innkomin rættstundis, og skal hon tí viðgerast av Innlendismálaráðnum.

Innlendismálaráðið staðfestir at mál um føroyska løggilding av grannskoðarum, sum ætla at virka í Føroyum, skal viðgerast og avgerast eftir føroyskari lóggávu. Tað er løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, sum innihaldsliga og lógliga er karmur um slík mál. Staðfest verður eisini, at einasta kunngerð, sum er lýst við heimild í lógini, fevnir um grannskoðaraátekning á roknskapum.

Ráðið ásannar, at føroyska lógin er meinlík donsku lógini um „statsautoriserede og registrerede revisorer“, hóast tann danska lógin er endurskoðað seinast í 2003, tíggju ár eftir, at tann føroyska lógin kom í gildi. Tað framgongur av donsku reglunum, at krøvini um „særlig eksamen“ sambært § 3, stk. 1, nr. 3, sbr. § 9,

stk. 5 í Lov nr. 302 af 30/04/2003 eru ítøkiliggjørd í kunngerðum, sbr. bekg. nr. 186 af 22/03/2004 og bekg. nr. 743 af 21/08/2003, meðan ongin kunngerð er lýst í Føroyum, sum ítøkiligger ella fremur § 1, stk. 2, nr. 4, sbr. § 4, stk. 1 í føroysku lógini, hóast heimildirnar til ávikavist Skráseting Føroya og „Erhvervs- og Selskabsstyrelsen" eisini eru meinlíkar.

Sambært lógini kann skrásetingarmyndugleikin tilnevna løggildar grannskoðarar sambært § 1 ella § 2. Løggilding sambært § 1 er eftir lógini treytaleys, meðan løggilding eftir § 2 kann verða veitt við treytum.

§ 1, stk. 2 í lógini ásetur, at persónur hevur rætt til at verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari, um viðkomandi lýkur seks uppreksað lógarkrøv.

Lógin ásetur eisini rættiliga ítøkiliga í § 1, stk. 3 undir hvørjum umstøðum sýtt kann verða fyri at geva løggilding, hóast viðkomandi formliga lýkur øll seks krøv, sum eru ásett í § 1, stk. 2.

§ 2 í lógini ásetur, at skrásetingarmyndugleikin eisini kann vera løggilding til persónar, sum uttanfyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við tær í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu útbúgvingar, t.e. serlig próvtøka og 3 ára praktiskar royndir hjá løggildum grannskoðara.

Staðfestast kann, at ongin kunngerð er, sum ásetur, hvat neyvari liggur í lógarkravinum um serliga próvtøku, sbr. í § 1, stk. 2, nr. 4 og § 4, ella hvørjar útbúgvingar kunnu javnmetast við tær í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu.

Í avgerð síni frá 27. januar 2006 hevur Skráseting Føroya sýtt at veita klientum tygara løggilding við tí grundgeving, at klientar tygara hvørki lúka krøvini í § 1 ella § 2 í lógini um løggildar grannskoðarar.

Avgerðin um at sýta løggilding eftir § 1 er grundað á, at tygara klientar ikki lúka kravið um serliga próvtøku eftir § 1, stk. 2, nr. 4, og avgerðin um at sýta løggilding eftir § 2 er m.a. grundgivin við, at tygara klientar ikki kunnu vísa á — uttanfyri Føroyar – at hava eina útbúgving, sum kann javntnetast við tað í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu, t.e. serlig próvtøka og 3 ára praktiskar royndir hjá løggildum grannskoðara.

Sum advokatur fyri kærarnar hava tygum ført fram, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er skeiv, og at grundgevingarnar eru beinleiðis skeivar. Tygum vísa á, at

- fordømi er um, at ikki øll hava staðið eina serliga roynd fyri at blíva tilnevnd løggildur grannskoðari í Føroyum,
- tað ikki kann góðtakast, at ein norsk cand.merk.aud útbúgving og autorisatión kann viðurkennast sum grundarlag fyri føroyskari løggilding, meðan ein tilsvarandi donsk útbúgving sum cand.merc.aud. ikki kann góðtakast,
- norska útbúgvingin ikki gevur rætt til at blíva skrásettur sum grannskoðari í Danmark,
- ein autorisatión frá øðrum landi enn Danmark ikki eigur at geva rætt til løggilding í Føroyum,
- øll eiga av vera eins fyri lógini,
- klientar tínir eiga at verða løggildir sambært § 1 í lógini (sama sum ein persónur við norskari útbúgving hevur fingið í 2005)
- klientar tínir hava staðið danska kandidatútbúgving í grannskoðan í Danmark, og at allir hava praktiskar royndir síðani hjá løggildum grannskoðara,
- tygara klientar uppfylla øll krøv, sum verða sett í øðrum londum í ES, burtursæð frá t.d. Danmark,
- Danmark setur strangari krøv enn onnur lond við tað, at sett verður sum krav, at umsøkjarin skal upp til eina eyka roynd fyri at fáa løggilding,
- felags fyri øll ES-lond – og Noreg – er, at krav er um arbeiðsroyndir eftir loknað kandidatútbúgving,
- føroyska lógin byggir á donsku lógina,
- danska lógin hevur ES-reglur sum grundarlag,

- landsstýrið ongantíð hevur brúkt heimildina í § 4 í lógini at áseta nærri reglur fyri serligu próvtøkuna, sum ásett í § 1, stk. 2, nr. 4, og at reglan um serliga roynd tí ongantíð er ásett í Føroyum,
- fordømi um at løggilda ein persón, sum ikki hevur staðið nakra roynd, hevur við sær, at gingið er burtur frá kravinum um eina serliga roynd,
- praksis hjá skrásetingarmyndugleikanum er broytt, og
- tygara klientar hava eitt rættarkrav uppá at fáa somu løggilding, sum ein, ið hevur norska útbúgving uttan at hava staðið serliga roynd.

Málið hevur verið til hoyringar hjá Skráseting Føroya sum hevur ført fram, at tað er rætt, at ein grannskoðari við „statsautorisatión" úr Noreg hevur fingið løggilding í september 2005, uttan at hann hevur staðið nakra serliga próvtøku; men er hetta orsakað av, at tá var einki krav um slíka próvtøku í Noreg. Í dag krevst serlig próvtøka í Noreg, og tí eru reglurnar í dag broyttar soleiðis, at um onnur ætla sær at fáa norska statsautorisatión, so krevst próvtøka eftir galdandi reglum.

Skráseting Føroya førir eisini fram, at tað ikki er heilt rætt, at umsóknirnar frá kærarunum lógu inni samstundis sum tann, ið fekk løggildingina í september 2005, tí at hesin longu í mars 2005 munnliga varð kunnaður um, at hann fór at verða løggildur. Kærararnir søktu um løggilding í apríl 2005.

Upp á fyrispurning hevur Skráseting Føroya upplýst Innlendismálaráðnum, at síðani lógin um løggildar grannskoðarar kom í 1993 eru 6 løggildingar veittar. Allar seks løggildingar eru veittar sambært § 1 í lógini, og eru tær veittar við tilvísing til, at viðkomandi persónar hava havt prógv sum „statsautoriseret" revisor í ávikavist Danmark (fimm løggildingar) ella Noregi (ein løggilding). Skráseting Føroya vísir harumframt á, at tað er gomul siðvenja at veita løggilding til persónar við danskari statsautorisatión.

Innlendismálaráðið metir, at tá fimm av seks løggildingum hesi seinastu 13 árini eru givin persónum við danskari statsautorisatión og ein er givin persóni, sum hevur norska statsautorisatión, so er ein ávís siðvenja á økinum.

Ongar reglur um serliga próvtøku eru ásettar við heimild í § 4 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993, um løggildar grannskoðarar, hóast lógin hevur verið galdandi í 13 ár.

Hetta talar fyri, at Skráseting Føroya hevur víðar ræsur, tá ið stovnurin skal gera av, hvørja siðvenju stovnurin velur at fylgja á hesum øki.

Stovnurin kann eisini velja at broyta siðvenju innan fyri lógarinnar karmar, treytað av at sakligar grundgevingar eru fyri hesum.

Rættargrundarsetningurin um líkheit hevur sum fyritreyt krav um konsekvens í avgerðunum hjá stovninum.

Hetta merkir, at ein stovnur ikki kann gera einstøk ógrundað frávík frá eini siðvenju, ið hevur verið fylgd. Í so máta er ein fyrisitingarligur myndugleiki bundin av sínari egnu siðvenju.

Sum nevnt, er tann eini av umsøkjarunum, ið vóru til viðgerðar um somu tíð, løggildur uttan av hava verið til serliga próvtøku. Grundgevingin fyri hesum er, at kravið um tílíka roynd sum nevnd í lógini um løggildar grannskoðarar §4, var ikki í Noreg, tá umsóknin varð viðgjørd.

Av upplýsingum í málinum sæst, at Skráseting Føroya í sambandi við málsviðgerðina hevur viðgjørt spurningin um serliga próvtøku hjá umsøkjaranum við norskari útbúgving, sera nágreiniliga.

Innlendismálaráðið metir tí, at Skráseting Føroya, við at geva tí eina umsøkjaranum løggilding í september 2005, tá tilvitað,

ógrundað og uttan sakliga orsøk hevur gjørt av at broyta siðvenjuna á økinum og gera mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg.

Innlendismálaráðið dugir ikki at síggja nakra sakliga orsøk til at gera mun á umsøkjarunum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Noreg ella úr Danmark, og metir tí, at avgerðin hjá Skráseting Føroya, um at nokta kærarunum góðkenning sum løggildir grannskoðarar við tí grundgeving, at teir ikki hava staðið serliga roynd smb. §1 stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, og at teir ikki kunnu ávísa uttan fyri Føroyar at hava eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. § 2, stk. 1, er ósaklig. …"

Tann 31. januar 2007 sendi Skráseting Føroya Innlendismálaráðnum soljóðandi viðmerkingar til uppskotið til kæruavgerð:

**„Hoyringssvar til uppskot til avgerð í kærumáli, har Skráseting Føroya (SF) hevur sýtt umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar.**
…
*Viðmerkingar til núverandi ætlanarskriv hjá Innlendismála-ráðnum*
Víst verður til løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar (LLG).

IMR (Innlendismálaráðið, *mín viðm.*) vísir til rættargrund-setningin um líkheit og at IMR metir, at SF við at geva tí eina umsøkjaranum løggilding í september 2005, tá tilvitað, ógrundað og uttan sakliga orsøk hevur gjørt av at broyta siðvenjuna á økinum og gera mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noregi.

Til hetta er at siga, at sjálvsagt er avgerðin tilvitað. Sum almennur myndugleiki er SF pliktað at taka tilvitaðar avgerðir. Men harumframt metir SF, at avgerðin bæði er vælgrundað og saklig.

Tá ið ført verður fram, at SF hevur *„gjørt av at broyta siðvenjuna á økinum og gera mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noregi“*, er hetta ikki rætt, og tá vit hava málslýsingina í huga, er hendan niðurstøðan ikki røtt.

SF metir, at IMR blandar ymisk hugtøk saman. SF hevur ikki viðgjørt málið ella tikið avgerð við støði í, úr hvørjum landi persónarnir hava kandidatútbúgving, men útfrá um persónarnir hava eina „statsautorisatión“ ella ei. Hvaðani persónarnir hava útbúgving, t.e. cand. merc. aud. kanditatútbúgving, er eitt objektivt metingarstøði í hesum máli.
LLG fevnir um løggildar grannskoðarar, har § 1, stk. 2 nevnir nøkur krøv, sum geva rætt til løggilding; eitt av krøvunum í § 1 stk. 2, nr. 4 er ein serlig próvtøka, samanber § 4. Henda serliga próvtøka kann á ongan hátt tulkast at verða cand. merc. aud. kandidatpróvtøkan ella -prógv.
Ein cand. merc. aud. útbúgving er grundarlag fyri at gerast skrásettur grannskoðari, sambært lóg nr. 119 frá 21. mai 1993 um skrásettar grannskoðarar.
LLG § 2, stk. 1 heimilar skrásetingarmyndugleikanum at tilnevna persónar, sum uttan fyri Føroyar hava fingið útbúgving, ið kann javnmetast við ta útbúgving, sum er nevnd í § 1, stk. 2; t.e. uppfyllir treytir, ið kunnu javnmetast við treytirnar sum geva rætt til føroyska løggilding.
Av tí at nærri reglur fyri eini føroyskari próvtøku enn ikki eru ásettar, hevur ongin av verandi løggildu grannskoðaranum í Føroyum fingið løggilding sambært § 1, stk, 2, men bert sambært § 2, stk. 1 við útlendskari „statsautorsatión“. Teir sjey, sum í hesum málið hava fingið noktað føroyska løggilding og síðani hava kært málið, hava danska cand. merc. aud. útbúgving, men onga „statsautorisatión“, t.e. uppfylla ikki krøvini í § 2, meðan tann eini, ið hevur fingið føroyska løggilding, umframt danska cand. merc. aud. útbúgving eisini hevur eina norska „statsautorisatión“. Tann grundleggjandi munurin er, at hesin persónur við síni norsku „statsautorisatión“ verður mettur at lúka krøvini í LLG § 2, stk. 1, og tískil hevur hann fingið føroyska løggilding.

Í málsviðgerðini í umsóknini hjá persóninum við norskari „statsautorisatión" setti Skráseting Føroya seg eisini í samband við Erhvervs- og Selskabsstyrelsen í Danmark, fyri at kanna teirra fatan, um ein persónur við norskari „statsautorisatión" søkti um „statsautorisatión" í Danmark. Her varð upplýst, at ES/EBS-londini hava eina avtalu um góðkenning av útbúgving hjá hvørjum øðrum, men at viðkomandi hevði skulað upp til ein „egnethedsprøve", ið skuldi vísa kunnleika hjá viðkomandi til donsk viðurskifti.

Verandi løggildu grannskoðarar í Føroyum hava allir uttan tann eini fingið løggilding í Føroyum sambært § 2, vísandi til at teir hava danska „statsautorisatión", tó uttan at teir hava verið til nakra serliga dugnaskapsroynd í føroyskum viðurskiftum hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum. Tað eru ikki ásetingar í verandi lóggávu hesum viðvíkjandi. Verkligu royndirnar í Føroyum hava í sjálvum sær verið mettar at vera neyðuga innlitið í serstøk føroysk viðurskifti, sum ein løggildur grannskoðari eftir føroyskum viðurskiftum eigur at hava.

Tann eini persónurin hevur danskt cand. merc. aud. prógv, norska „høyere revisoreksamen" og hevur í januar 2005 frá Kredittilsynet í Noregi fingið góðkenning sum norskur „statsautorisert revisor". Hansara verkligu royndir í Føroyum gera, eins og hjá øðrum føroyingum við danskari statsautorisatión, at føroyski skrásetingarmyndugleikin metir, at hann hevur neyðuga innlitið í serstøk føroysk viðurskifti. Harumframt hevur viðkomandi verið til samrøðu hjá føroyska skrásetingarmyndugleikanum tann 9. september 2005, har serstøk og almenn viðurskifti á m.a. skattaøkinum í Føroyum vórðu umrødd.

Krøvini til statsautorisatión í Noregi eru síðani broytt, við tað at innførd er ein praktisk roynd við gildi frá 15. januar 1999, tó uttan at tað merkir, at verandi norskir „statsautoriseraðir" grannskoðarar skulu upp til nýggja eykaroynd. Fyrsta praktiska royndin var tó ikki hildin fyrr enn á heystið 2005. Í og við at tann ítøkiligi persónurin var tilmeldaður til 'høyere revisorstudium' 15.

januar 1999 og fullførdi útbúgvingina, leyk hann 13. januar 2005 norsku krøvini fyri at fáa tilnevning sum norskur statsautoriseret revisor, tó uttan at skula til serligu royndina. Fleiri av verandi løggildu grannskoðarum í Føroyum hava eisini fingið føroyska løggilding, uttan at hava verið til „revisoreksamen"; hetta tí, at teir hava fingið danska „statsautorisatión" áðrenn núgaldandi reglur vórðu settar í gildi.

Talan er sostatt ikki um, sum framført í ætlanarskrivinum til avgerð, at SF hevur broytt siðvenjuna á økinum ella ikki uppfylt rættargrundsetningin um líkheit. Teir, sum frammanundan høvdu eina føroyska løggilding, hava frammanundan eina danska „statsautorisatión", og so hesin eini, eina norska. Hetta er fyrsta dømi um umsøkjara, ið ikki hevur danska „statsautorisatión", og sjálvsagt skal SF viðgera slíka umsókn.

LLG § 2 nevnir *„útbúgving, ið kann javnmetast við útbúgving, sum er nevnd í § 1, stk. 2…* " At javnmeta nakað er ikki at siga, at tað skal vera akkurát tað sama. Tá ið SF metir um, um ein útbúgving ("statsautorisatión") kann javnmetast er neyðugt at síggja § 1, stk. 2 undir einum, ella gevur metingin sambært § 2 onga meining. Um treytirnar skulu takast ein fyri ein, so eigur tað eisini í § 2 at standa, júst somu „útbúgving" (statsautorisatión) sum § 1, stk. 2.

Staðfestast kann, at føroyska lóggávan byggir á ta táverandi donsku lógina. Um føroyska lógin skal tulkast á tann hátt, sum lagt verður upp til, at SF átti at havt gjørt, er tað í veruleikanum bert „statsautorisatión" sambært tágaldandi reglum í Danmark, ið kunnu javnmetast sambært § 2, t.e. at enn ikki danskar „statsautorisatiónir" sambært núgaldandi reglum kunnu javnmetast, tí núgaldandi reglur eru ikki júst tær somu sum í 1993. Tað gevur onga meining at tulka eina lóg á slíkan hátt.

Í næstseinasta broti í uppskotinum kemur IMR til ta niðurstøðu, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er ósaklig. Hetta byggir IMR í høvuðsheitinum á, at munur verður gjørdur á umsøkjarum, ið

hava útbúgving ávikavist úr Noregi og Danmark. Hetta byggir eftir okkara meting á eina misskiljing, sum lýst frammanfyri. Munurin er um umsøkjarin hevur eina „statsautorisatión“ úr øðrum landi ella ei. Tí gevur tað eftir okkara sannføring onga meining, við hesi grundgeving at vísa málið til nýggja viðgerð hjá Skráseting Føroya.

Til kunnleika kann nevnast at SF í eini 2 ár hevur arbeitt við at tilevna og seta í gildi eina reglugerð um próvtøku, sambært § 4 jvb. § 1, stk. 4. Reglugerðin var næstan klár, tá Vinnumálaráðið í november 2006 heitti á SF um at steðga við hesum arbeiði, tí at nýggj føroysk grannskoðaralóggáva, ið samsvarar við EBS/ES-lóggávu, skal gerast, og at reglugerðin um krøv fyri at gerast løggildur grannskoðari tí skuldi vera í samsvari við EU/EBS-reglur.

IMR reksar upp nógvar grundgevingar frá advokatinum, uttan at taka støðu til, um tær verða tiknar til eftirtektar ella ei. SF metir, at onki hald er í flestu grundgevingunum, og at nakrar eru beinleiðis mótsigandi, t.d. at ein autorisatión úr øðrum landi enn DK ikki eigur at geva rætt til løggilding í Føroyum, og hinvegin at klientar hansara uppfylla øll krøv fyri at gerast løggildir í øðrum ES londum, burtursæð frá t.d. Danmark.

Fyri SF sýnist tað sum um málið ikki er nóg væl lýst fyri kærumyndugleikanum, og at tað sýnist sum ymiskar misskiljingar eru. Fyri at tryggja at kærumyndugleikin fer at taka avgerð á røttum grundarlagi, vil SF heita á IMR um fund um málið áðrenn avgerð verður tikin. Kanska saman við advokatinum hjá teimum seks kærarunum.

Eisini verður víst á, at í tilnevningarskjalinum til løggilding verður víst til § 1 í lógini. Hetta er sjálvsagt ein formellur feilur, tí tilvísing skal verða til § 2, stk. 1 sbr. § 1, stk. 2. Ein tílíkur formellur feilur kann á ongan hátt hava ávirkan á avgerðina í hesum málinum.“

Harumframt sendi Skráseting Føroya Innlendismálaráðnum m.a. eitt yvirlit, har prógv v.m. hjá umsøkjaranum við norskari ríkisgóðkenning vórðu samanborin við prógvini v.m. hjá kærarunum. Innlendismálaráðið sendi skrivið til ummælis hjá advokatinum hjá kærarunum, sum tann 16. februar 2007 sendi Innlendismálaráðinum soljóðandi skriv:

„**Løggilding av grannskoðarum – tykkara …**

Vísandi til hoyringsskriv frá Skráseting Føroya dagfest 31. januar 2007, skulu hesar viðmerkingar gerast til málið.

Skrivið frá Skráseting Føroya er ein staðfesting av teirra støðu í málinum, og tískil kemur einki nýtt fram í málinum viðvíkjandi umsóknunum hjá klientum mínum um løggilding í Føroyum. Viðmerkingarnar frá Skráseting Føroya geva tískil ikki høvi til at broyta míni sjónarmið, sum í einum og øllum verða fasthildin.

Heilt stutt skal eg tó viðmerkja, at tað er ein sannroynd, at allir løggildir grannskoðarar eru tilnevndir eftir § 1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, síðani hon kom í gildi, og øll, undantikið tann eini, hava staðið eina serliga próvtøku.

Sum kunnugt eru ongar reglur fyri serligu próvtøkuna umrøddar í § 1 í lógini. Tað er tí framvegis mín áskoðan, at Skráseting Føroya hevur víðar ræsur, tá stovnurin skal gera av, hvørja siðvenju stovnurin velur at fylgja á hesum øki.

At løggilda A, uttan at viðkomandi hevur staðið nakra serliga próvtøku, er eyðsæð at broyta siðvenjuna á økinum. Skráseting Føroya ger í sínum skrivi greitt, at hetta er ein tilvitað avgerð, og harnæst ásannar Skráseting Føroya eisini, at A ikki hevur staðið nakra serliga próvtøku, sum klientar mínir ikki hava staðið. Sum

kunnugt er ein autorisatión ikki ein serlig próvtøka, men bert ein tilnevning í einum øðrum landi.

Annars skal eg bert endurtaka, at tilnevning eftir § 2 eisini krevur serliga próvtøku. Hetta sæst eisini av samskiftinum, sum Skráseting Føroya hevur havt við Erhvervs- og Selskabsstyrelsen. Ein autorisatión í Noregi og við tí innihaldi hon í hesum konkreta føri hevur, er eftir míni metan als eingin relevant grundgeving fyri at løggilda ein føroying, sum annars við somu løggilding ætlar sær at arbeiða í Føroyum burturav. Í síni málsviðgerð og í tí samskifti sum Skráseting Føroya hevur havt við Erhvervs- og Selskabsstyrelsen verður staðfest, at tað gevur onga meining at royna útlendingum í øðrum reglum enn tí landi viðkomandi skal virka í.

„Høyere revisoreksamen“ er framvegis ikki annað enn norska cand.merc.aud, útbúgvingin, sum er meinlík donsku cand. merc.aud. útbúgvingini. Eg má tí enn einaferð gera vart við, at Skráseting Føroya ger seg sekan í at gera mun á umsøkjarum, alt eftir hvaðani teir hava sína útbúgving.

Hinvegin er tað at frøðast um, at Skráseting Føroya loksins viðurkennir, at umsóknirnar hjá klientum mínum lógu til viðgerðar um somu tíð sum umsóknin hjá A.

Í uppskoti til endaligt hoyringsskriv viðvíkjandi kæruni er greiða niðurstøðan hjá Innlendismálaráðnum, at avgerðin hjá Skráseting Føroya at nokta klientum mínum løggilding er bæði ógrundað og ósaklig.

Tað er mín áskoðan, at málið er nóg væl upplýst. Skráseting Føroya hevur havt málið til drúgva umrøðu, og sjónarmiðini hjá øllum pørtum eru lýst út í æsir.

Eg haldi tí onga orsøk vera fyri at halda ein fund um málið. Tað tykist sum Skráseting Føroya roynir at seta seg ímóti teirri avgerð, sum Innlendismálaráðið hevur tikið.

Í hesum sambandi skal eg viðmerkja, at ein undirskipaður myndugleiki hevur skyldu til at fylgja avgerðum hjá einum yvirskipaðum myndugleika. Undirskipaði myndugleikin, í hesum føri Skráseting Føroya, hevur ongan rætt til at seta seg útyvir tað avgerð, sum yvirskipaði myndugleikin hevur tikið, herundir at royna at mótarbeiða málinum.

Eg havi eina fatan av, at umbøn um fund v.m. bert er ein roynd at draga málið út.

Eg skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað nú eru 1 ár og 10 mánaðir síðani, at klientar mínir søktu um løggilding, og enn fyriliggur eingin avgerð í málinum.

Eisini undrar tað meg, at Skráseting Føroya nú sigur seg hava nýggjar upplýsingar í málinum, hóast málið hevur verið til viðgerðar í nærum 2 ár.

Eg fari við hesum at heita á Innlendismálaráðið um at taka endaliga støðu í málinum skjótast gjørligt."

Tann 12. mars 2007 tók Innlendismálaráðið soljóðandi avgerð í kærumálinum:

„**Avgerð í kærumáli, har Skráseting Føroya hevur sýtt umsøkjarum, sum eru tygara klientar, løggilding sum grannskoðarar.**
Løgmaður hevur latið Innlendismálaráðnum upp í hendi at taka avgerð í einum kærumáli, har Skráseting Føroya hevur noktað tygara klientum B, H, D, I, F, J, og E, løggilding sum grannskoðarar.

Innlendismálaráðið staðfestir, at Skráseting Føroya hin 27. januar 2006 hevur avgjørt ikki at geva nevndu umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar. Tað framgongur av málinum, at Skráseting Føroya hevur hildið seg til formligu hoyringsfreistina av pørtunum eftir áðrenn avgerðin varð tikin, og hevur Innlendismálaráðið tí onki at viðmerkja hvat tí viðvíkur.

Innlendismálaráðið staðfestir, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er kærd 19 dagar eftir, at avgerðin varð tikin. Ráðið staðfestir eisini, at Skráseting Føroya í sínari avgerð ikki hevur upplýst móttakaranum um kærumøguleika ella kærufreist, men bara kunnað um § 15a í lógini, sum gevur landsstýrinum heimild at áseta reglur um kæru. Hóast ongar slíkar reglur eru ásettar, fylgir tað av vanligu fyrisitingarligu reglunum, at avgerðin hjá Skráseting Føroya kann kærast til landsstýrismannin, og má kæran eisini metast at vera innkomin rættstundis, og skal hon tí viðgerast av Innlendimálaráðnum.

Innlendismálaráðið staðfestir, at mál um føroyska løggilding av grannskoðarum, sum ætla at virka í Føroyum, skal viðgerast og avgerast sambært løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar.

Ráðið ásannar, at føroyska lógin er meinlík donsku lógini um „statsautoriserede og registrerede revisorer“, hóast tann danska lógin er endurskoðað seinast í 2003, tíggju ár eftir, at tann førøyska lógin kom í gildi. Tað framgongur av donsku reglunum, at krøvini um „særlig eksamen“ sambært § 3, stk. 1, nr. 3, sbr. § 9, stk. 5 í Lov nr. 302 af 30/04/2003 eru ítøkiliggjørd í kunngerðum, sbt. bekg. nr. 186 af 22/03/2004 og bekg. nr. 743 af 21/08/2003, meðan ongin kunngerð er lýst í Føroyum, sum ítøkiliggerð ella fremur § 1, stk. 2, nr. 4, sbr. § 4, stk. 1 í føroysku lógini, hóast heimildirnar til ávikavist Skráseting Føroya og „Erhvervs- og Selskabsstyrelsen“ eisini eru meinlíkar.

Sambært lógini kann skrásetingarmyndugleikin tilnevna løggildar grannskoðarar sambært § 1 ella § 2. Løggilding sambært § 1 er eftir lógini treytaleys, meðan løggilding eftir § 2 kann verða veitt við treytum.

§ 1, stk. 2 í lógini ásetur, at persónur hevur rætt til at verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari, um viðkomandi lýkur seks uppreksað lógarkrøv.

Lógin ásetur eisini rættiliga ítøkiliga í § 1, stk. 3 undir hvørjum umstøðum sýtt kann verða fyri at geva løggilding, hóast viðkomandi formliga lýkur øll seks krøv, sum eru ásett í § 1, stk. 2.

§ 2 í lógini ásetur, at skrásetingarmyndugleikin eisini kann veita løggilding til persónar, sum uttanfyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við tær í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu útbúgvingar, t.e. serlig próvtøka og 3 ára praktiskar royndir hjá løggildum grannskoðara.

Í avgerð síni frá 27. januar 2006 hevur Skráseting Føroya sýtt at veita klientum tygara løggilding við tí grundgeving, at klientar tygara hvørki lúka krøvini í § 1 ella § 2 í lógini um løggildar grannskoðarar.

Avgerðin um at sýta løggilding eftir § 1 er grundað á, at tygara klientar ikki lúka kravið um serliga próvtøku eftir § 1, stk. 2, nr. 4, og avgerðin um at sýta løggilding eftir § 2 er m.a. grundgivin við, at tygara klientar ikki kunnu vísa á — uttanfyri Føroyar – at hava eina útbúgving, sum kann javnmetast við tað í § 1, stk. 2, nr. 4 og 5 nevndu, t.e. serlig próvtøka og 3 ára prakriskar royndir hjá løggildum grannskoðara.

Sum advokatur fyri kærarnar hava tygum ført fram, at avgerðin hjá Skráseting Føroya er skeiv, og at grundgevingarnar eru beinleiðis skeivar. Tygum vísa á, at:

- fordømi er um, at ikki øll hava staðið eina serliga roynd fyri at bliva tilnevnd løggildur grannskoðari í Føroyum,
- tað ikki kann góðtakast, at ein norsk cand.merk.aut útbúgving og autorisatión kann viðurkennast sum grundarlag fyri føroyskari løggilding, meðan ein tilsvarandi donsk útbúgving sum cand.merc.aud. ikki kann góðtakast,
- norska útbúgvingin ikki gevur rætt til at blíva skrásettur sum grannskoðari í Danmark,

- ein autorisatión, frá øðrum landi enn Danmark, ikki eigur at geva rætt til løggilding í Føroyum,
- øll eiga av vera eins fyri lógini,
- klientar tínir eiga at verða løggildir sambært § 1 í lógini (sama sum ein persónur við norskari útbúgving hevur fingið í 2005)
- klientar tínir hava staðið danska kandidatútbúgving í grannskoðan í Danmark, og at allir hava praktiskar royndir síðani hjá løggildum grannskoðara,
- tygara klientar uppfylla øll krøv, sum verða sett í øðrum londum í ES, burtursæð frá t.d. Danmark,
- Danmark setur strangari krøv enn onnur lond við tað, at sett verður sum krav, at umsøkjarin skal upp til eina eyka roynd fyri af fáa løggilding,
- felags fyri øll ES-lond – og Noreg – er, at krav er um arbeiðsroyndir eftir loknað kandidatútbúgving,
- føroyska lógin byggir á donsku lógina,
- danska lógin hevur ES-reglur sum grundarlag,
- landsstýrið ongantíð hevur brúkt heimildina í § 4 í lógini at áseta nærri reglur fyri serligu próvtøkuna, sum ásett í § 1, stk. 2, nr. 4, og at reglan um serliga roynd tí ongantíð er ásett í Føroyum,
- fordømi um at løggilda ein persón, sum ikki hevur staðið nakra roynd, hevur við sær, at gingið er burtur frá kravinum um eina serliga roynd,
- praksis hjá skrásetingarmyndugleikanum er broytt, og
- tygara klientar hava eitt rættarkrav uppá at fáa somu løggilding, sum ein, ið hevur norska útbúgving uttan af hava staðið serliga roynd.

Málið hevur verið til hoyringar hjá Skráseting Føroya sum hevur ført fram, at tað et rætt, at ein grannskoðari við „statsautorisatión“ úr Noreg hevur fingið løggilding i september 2005, uttan at hann hevur staðið nakra serliga próvtøku; men er hetta orsakað av, at tá var einki krav um slíka próvtøku í Noreg. Í dag krevst serlig próvtøka í Noreg, og tí eru reglurnar í dag broyttar soleiðis, at

um onnur ætla sær at fáa norska statsautotisatión, so krevst próvtøka eftir galdandi reglum.

Skráseting Føroya førir eisini fram, at tað ikki er heilt rætt, at umsóknirnar frá kærarunum lógu inni samstundis sum tann, ið fekk løggildingina, í september 2005, tí at hesin longu í mars 2005 munnliga varð kunnaður um, at hann fór at verða løggildur. Kærararnir søktu um løggilding í apríl 2005.

Uppá fyrispurning hevur Skráseting Føroya upplýst Innlendismálaráðnum, at síðani lógin um løggildar grannskoðarar varð sett í gildi í 1993, eru 6 løggildingar veittar. Allar seks løggildingar eru veittar sambært § 1 í lógini, og eru tær veittar við tilvísing til, at viðkomandi persónar hava havt prógv sum „statsautoriseret“ revisor í ávikavist Danmark (fimm løggildingar) ella Noregi (ein løggilding). Skráseting Føroya vísir harumframt á, at tað er gomul siðvenja at veita løggilding til persónar við danskari statsautorisatión.

Innlendismálaráðið staðfestir, at ongar reglur eru gjørdar um ta í § 1, stk. 2 nr. 4 nevndu próvtøku í lógini um løggildar grannskoðarar, soleiðis sum ásett er í lógini § 4, at gerast skulu.

Skráseting Føroya hevur hóast hetta valt at løggilda grannskoðarar.
Umsitingin hjá Skráseting Føroya av hesum málum er tí grundað á fyrisitingarliga praksis. Í hesum sambandi er Skráseting Føroya bundin av teimum fyrisitingarligu grundreglunum.

Hetta merkir, at Skráseting Føroya í málsviðgerðini m.a. má gera eina ítøkiliga meting sambært objektivum kriterium í hvørjum einstøkum føri, hvørt umsøkjari lýkur treytirnar fyri at verða løggildur.

Tað er t.d ikki nóg mikið, at ein persónur verður løggildur,

bert tí viðkomandi í útlandinum hevur eina útbúgving, sum í viðkomandi útlandi gevur rætt til at verða løggildur.

Innlendismálaráðið metir, at tá fimm av seks løggildingum hesi seinastu 13 árini eru givin persónum við danskari statsautorisatión, og ein er givin persóni, sum hevur norska statsautorisatión, so er ein ávís siðvenja á økinum.

Skráseting Føroya hevur víðar ræsur, tá ið gerast skal av hvørja praksis, stovnurin velur at fylgja á hesum øki.

Stovnurin kann eisini velja at broyta praksis, treytað av at sakligar grundgevingar eru fyri hesum. Í so fall eigur hetta eisini at verða fráboðað alment.

Rættargrundarsetningurin um líkheit hevur sum fyritreyt krav um konsekvens í avgerðunum hjá fyrisitingarmyndugleikanum.

Hetta merkir, at ein fyrisitingarmyndugleiki ikki kann gera einstøk ógrundað frávík frá eini siðvenju, ið hevur verið fylgd. Í so máta er ein fyrisitingarligur myndugleiki bundin av sínari egnu siðvenju.

Sum nevnt er tann eini av umsøkjarunum, ið vóru til viðgerð um somu tíð, løggildur uttan av hava verið til serliga próvtøku. Grundgevingin fyri hesum er, at kravið um tílíka roynd, sum nevnd í lógini um løggildar grannskoðarar §4, var ikki í Noreg, tá umsóknin varð viðgjørd.

Av upplýsingum í málinum sæst, at Skráseting Føroya í sambandi við málsviðgerðina hevur viðgjørt spurningin um serligu próvtøkuna sera nágreiniliga.

Innlendismálaráðið metir tí, at Skráseting Føroya, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg.

Innlendismálaráðið metir tí, at avgerðin hjá Skráseting Føroya, um at nokta kærarunum góðkenning sum løggildir grannskoðarar við tí grundgeving, at teir ikki hava staðið serliga roynd smb. § 1 stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, og at teir ikki kunnu ávísa uttanfyri Føroyar at hava eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. § 2, stk. 1 er ósaklig.

Skráseting Føroya er tí vísandi til tað, ið er ført fram, biðin um at viðgera málið av nýggjum."

Tann 15. mars 2007 sendi ein deildarstjóri í Vinnumálaráðnum soljóðandi teldubræv til stjóran á Skráseting Føroya:

„… 1. Eg vísi til kæruavgerð hjá Innlendismálaráðnum viðv. løggilding av grannskoðarunum. Sum vit tosaðu um í gjár, eigur Skráseting Føroya at taka nýggja avgerð uttan drál.

2. Eg vil heita á Skráseting Føroya um at gera eitt tilmæli um, hvussu vit eiga at fara fram viðv. próvtøkureglunum framyvir. VMR og Skráseting Føroya hava verið samd um, at vit eiga at nærkast einari skipan, sum ta í ES, har minni dentur verður lagdur á sjálva próvtøkuna og meira á eftirlit við og eftirútbúgving av løggildu grannskoðarunum. VMR hevur eisini givið Skráseting Føroya boð um, at ráðið ikki ynskir eina skipan, sum er meinlík tí verandi donsku skipanini.

Nýggja ES-líknandi skipanin krevur tó broytingar í grannskoðaralóggávuni, og hevur VMR heitt á Skráseting Føroya um at gera lógaruppskot, sum kann leggjast fram fyrst í komandi tingsetu. Tað er eisini neyðugt at dagføra grannskoðaralóggavuna sum eina avleiðing av nýggju vinnulógunum (ársroknskaparlóg v.m.), sum eru lagdar fyri Løgtingið.

Spurningurin er so, um tað er tørvur á at gera nakrar broytingar í verandi skipan, til nýggja skipanin kann koma í gildi?

3. Kann Skráseting Føroya meta um, hvat umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar eru av at nærkast einari ES-líknandi skipan, sum meira byggir á eftirlit enn á sjálva próvtøkuna?

Ring endiliga um okkurt er ógreitt, ella um tørvur er á at kjakast um ávís viðurskifti.“

Tann 16. mars 2007 sendi stjórin á Skráseting Føroya soljóðandi teldubræv til deildarstjóran:

„… Víst verður til teldupost tygara.

Eg fari at biða um ein fund við Vinnumálaráðið at umrøða 2 mál:

1. Próvtøkureglur í samb við løggildan av grannskoðarum í Føroyum, viðgerð av uppskoti til próvtøkukunngerð.
2. Tillagan av verandi lóg um løggilding av grannskoðarum í Føroyum.

Viðvíkjandi pkt. 1, so ætla vit at hava eitt tillagað uppskot til prøvtøkureglugerð við til fundin.

Tú kanst skjóta upp eina hóskandi tíð, td. í næstu viku.“

Sama dag sendi deildarstjórin soljóðandi teldupost til stjóran á Skráseting Føroya:

„… Eg fari at biðja teg um at ummæla niðanfyri standandi teldupost, sum er komin VMR í hendi í morgun. Serliga hugsi eg um tað, sum snýr seg um, at stovnurin skal hava uppfordrað 3. mann til at biðja um innlit í avgerðina.“

Hjálagt teldupostinum var eitt teldubræv frá 16. mars 2007 frá E til K, landsstýrismann í Vinnumálum, ið var soljóðandi:

„… Haldi tað vera rætt, at kunna tygum um niðanfyri-standandi.

Sum kunnugt hevur Innlendismálaráðið givið umsøkjarunum viðhald – fult og heilt – í málinum um løggilding. Avgerðin fyrilá longu mikudagin í telduposti og hósdagin í brævi.

Vit hava sjálvsagt heitt á Skráseting Føroya um at avgreiða hetta málið beinanvegin. Vanliga tekur tað ikki meir enn 1 dag at avgreiða formalia í hesum sambandi.

Svarið vit fingu var, at „tað kundi taka eina viku ella so“. Hetta er óskiljandi. Vit vóru framvið í gjár og tá var svarið, ja men, vit hava akkurát fingið avgerðina, so nú er at geva tol.

Skelkandi er tað tó, at áðrenn tíðspunktið, tá tey „júst hava fingið avgerðina“, hevur stjórin á Skráseting Føroya uppfordrað 3.mann um at biðja um innlit, fyri síðani at senda avgerðina „út í býin“ í gjáramorgunin. Upplýsingarnar hava vit frá álítandi keldum. Sí annars samskifti viðheft.

Hetta er óhoyrt og endamálið kann ivaleyst aleina vera, at skapa rumbul. Ikki minst at undirgrava avgerðina hjá IMR.

Yvirordnaði myndugleikin hevur talað og viðgerðin er somueiðis komin á mál og nú er talan aleina um ein avgreiðsluspurning.

Vit gera enn eina roynd í dag, at fáa málið endaliga avgreitt frá Skráseting Føroya. Og sjálvsagt væntað vit at so verður.“

Seinni sama dag sendi stjórin á Skráseting Føroya soljóðandi teldu-bræv til sama deildarstjóra í Vinnumálaráðnum:

„…

1) Sambært skrivi frá IMR 7. apríl 2006 hevur løgmaður í brævi dagfest 13. mars 2006 avgjørt at flyta kærumálviðgerðina

av málinum, har SF hevur sýtt nøkrum grannskoðarum løggilding, til IMR, av tí at tað møguliga eru gegnistrupulleikar í VMR.

SF vil við hesum spyrja VMR, um VMR, nú aftaná at IMR hevur tikið avgerð í málinum, metir at VMR ikki longur møguliga hevur gegnistrupulleikar í hesum málið. Um VMR ikki longur metir seg møguliga hava gegnistrupulleikar í málinum, vil SF heita á VMR um at grundgeva fyri hesum.

2) Annars kann eg upplýsa viðvíkjandi, „at stovnurin skal hava uppfordra 3. mann til at biðja um innlit í avgerðina". Eg havi sjálvsagt ikki uppfordra 3. mann til at biðja um innlit í avgerðina.

Yvirordnað, eisini vísandi til e-post frá tær í gjár, um at viðgera málið uttan drál, metir SF, at SF sum myndugleiki kann treyta sær og eigur at seta tíð av til at viðgera málið á nøktandi hátt. SF hevur kanska nøkur ivamál um innihaldið í kæruavgerðini og er í løtuni í innanhýsis samskifti við løgfrøðiligan ráðgeva um málið."

Deildarstjórin svaraði teldubrævinum frá stjóranum á Skráseting Føroya sama dag:

„… Vinnumálaráðið staðfestir, at nú fyriliggur ein kæruavgerð frá Innlendismálaráðnum. Vinnumálaráðið hevur ikki, og ætlar sær heldur ikki, at viðgera innihaldið í hesum ítøkiliga máli. Hinvegin er Skráseting Føroya framvegis stovnur undir Vinnumálaráðnum, og Vinnumálaráðið er tí ikki ógegnigt tá tað snýr seg um mál, sum verða reist av borgarunum, hvørt stovnurin fremur góðan fyrisitingarsið ella ikki. Her hugsi eg um ákærurnar í teldupostinum um, at stovnurin skal hava heitt á triðja mann um at biðja um alment innlit í málið, og at stovnurin drálar við at avgera málið."

Tann 20. mars 2007 sendi Skráseting Føroya Innlendismálaráðnum soljóðandi teldubræv:

„… Skráseting Føroyar heitir á IMR at neyvlýsa niðanfyri standandi fyrispurningar:

IMR vísir á, at „at Skráseting Føroya, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg.“

1. Í mun til rættargrundsetningin um líkheit, sum víst verður til í avgerðini, verður spurt um IMR metir, at ein donsk cand. merc. aud. útbúgving, íroknað norska statsautorisatión, fingin sambært norskum reglum galdandi til 1. august 1999, er líka „útbúgving“ sum ein donsk cand. merc. aud. útbúgving, uttan norska statsautorsatión sambært norskum reglum galdandi fram til 1999.

2. Heitt verður á IMR um at neyvlýsa, hvat IMR skilir við „útbúgving“ úr ávíkavist Noreg og Danmark.

Av avgerðini av kærumáli, har Skráseting Føroya hevur sýtt umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar frá IMR, framgongur ikki, um IMR hevur móttikið svarskriv til uppskot til avgerð frá Skráseting Føroya, ið var sent IMR 31. januar 2007.

Heitt verður tískil á IMR at upplýsa um svarskrivið dagfest 31. januar 2007 frá Skráseting Føroya til uppskot til avgerð í kærumáli, har Skráseting Føroya (SF) hevur sýtt umsøkjarum løggilding sum grannskoðarar, er tikið við í viðgerðina av omanfyri nevndu avgerð frá IMR.
…“

Tann 22. mars 2007 sendi B soljóðandi teldupost til Z, deildarstjóra í Vinnumálaráðnum:

„… Eg bað Skráseting Føroya um alment innlit í skrivið frá O.

S frá skrásetingini svaraði mær, at vit fingu ikki innlit vísandi til §12, stk 1, nr. 1 í lógini um almenna fyrisiting (Løgtingslógini um fyrisitingarlóg).

Hetta tykist (sum eisini nevnt í telefonsamrøðu við teg) løgið.

Sum nevnt í viðmerkingunum til hesa grein sæst, at ásetingin bert umfatar skjøl sum eru „framleidd" innan nevndu umsiting. Víðari stendur at „…sagkyndige udtalelser….der af en myndighed indhentes fra….private rådgivende virksomheder -advokater…. vil derimod normalt ikke kunne anses som internt arbejdsmateriale."

Vit vilja hava at tit í VMR taka støðu til avgerðina hjá skrásetingini, um at nokta okkum innlit. Vit vóna soleiðis at vit fáa innlit skjótast møguligt.

Tað er ikki fordrandi fyri eina málsviðgerð at nokta okkum innlit."

Sama dag sendi deildarstjórin í Vinnumálaráðnum soljóðandi teldubræv til Skráseting Føroya:

„Hervið verður kæra um avgerð hjá Skráseting Føroya um at nokta innlit í skjal, sum uttanhýsis løgfrøðiligur ráðgevi hevur gjørt, send Skráseting Føroya til ummælis. Sambært kæraranum hevur Skráseting Føroya undantikið skjalið við heimild í § 12, stk. 1, nr. 1 í fyrisitingarlógini og er hetta váttað i telefonsamrøðu við stjóran á Skráseting Føroya í dag. Biðið verður um, at Skráseting Føroya serliga ummælir viðmerkingarnar frá kæraranum, har m.a. verður víst til brot úr „Forvaltningsloven med kommentarer" (s. 311 í 3. útgávu)."

Tann 26. mars 2007 sendi Innlendismálaráðið soljóðandi skriv til Skráseting Føroya:

> „Í skrivi, dagfest tann 20. mars 2007, hevur Skráseting Føroya sett Innlendismálaráðnum ymsar spurningar og biðið um innlit í kærumál, har Skráseting Føroya hevur sýtt umsøkjaranum løggilding sum grannskoðarar.
>
> Innlendismálaráðið metir, at avgerðin í kærumálinum, sum er endalig, er nøktandi grundgeving, og at tað sum meginregla er skeivt at gera skrivligar útgreiningar av niðurstøðum í kærumálum, sum ráðið hevur tikið avgerð í, tí hetta ofta vísir seg at føra til fleiri misskiljingar í málinum.
>
> Innlendismálaráðið hevur tikið við í avgerðina skrivið frá Skrásetingini, sum var sent Innlendismálaráðnum tann 31. januar 2007.
>
> Viðvíkjandi spurninginum um innlit í málið, so hevur Skráseting Føroya áður fingið innlit í málið.
>
> Fyri at tryggja, at einki er komið skeivt fyri í hesum sambandi, so kann Skráseting Føroya venda sær til journalin í Innlendismálaráðnum og har gjøgnumganga málið.
>
> Avrit av hesum skrivi er sent advokatinum hjá kærarunum.“

Tann 27. mars 2007 heitti Vinnumálaráðið í teldubrævi á Løgmansskrivstovuna um at flyta viðgerðina av øllum spurningum kærumálinum viðvíkjandi til Innlendismálaráðið, herundir spurningin um viðgerðartíðina, eftir at kæruavgerðin hjá Innlendismálaráðnum fyrilá.

Í teldubrævi 30. mars 2007 boðaði Løgmansskrivstovan Vinnumálaráðnum frá, at Løgmansskrivstovan metti hesa viðgerð vera flutta Innlendismálaráðnum av somu ógegnisgrundum sum í upprunamálinum.

Tann 30. mars 2007 skrivaði stjórin á Skráseting Føroya, eftir ein fund við aðalstjóran í Innlendismálaráðnum, soljóðandi notat:

„L mælti til, at vit (Skrásetingin):

1) Lýsir kunngerðina,
2) Avgreiðir málið við teimum 7. Ongar reglur – internar reglur ca. sum EBS reglur. Avgerðin hjá Skrásetingini er ósaklig, ikki ógildug. Munur er gjørdur á donskum og einum norskum umsøkjara. Hesin norski hevur fyrst CMA (cand.merc. aud, *mín viðm.*) og síðani HRE (høyere revisor eksamen, *mín viðm.*), sum er nakað eyka í mun til CMA. Ósakligt, at hesir donsku umsøkjararnir ikki hava fingið høvi at vísa á, um teir hava nakað eyka afturat einari CMA-útbúgving. Vit skulu senda teimum skriv, so teir fáa høvi at koma við fleiri upplýsingum.“

Tann 30. mars 2007 sendi advokaturin hjá kærarunum soljóðandi skriv til stjóran á Skráseting Føroya:

„**Viðv. umsókn um tilnevning sum løggildur grannskoðari**
Eg skal við hesum vátta samrøðu okkara millum tann 29. mars 2007 har tygum upplýstu, at Skráseting Føroya tekur avgerð í málinum áðrenn páskir.

Samstundis skal eg viðmerkja, at um Skráseting Føroya ikki gongur umsóknini hjá klientum mínum á møti, ætli eg mær at kæra tygara embætisførðslu, tí fyri mær er eingin ivi um, at Skráseting Føroya samsvarandi avgerð frá Innlendismálaráðnun hevur eina beinleiðis skyldu til at løggilda klientar mínar.

Ein yvirordnaður myndugleiki hevur í veruleikanum tikið avgerð í málinum, og Skráseting Føroya hevur sjálvsagt sum undirornaður myndugleiki skyldu at fylgja teimum avgerðum, sum ein yvirordnaður myndugleiki hevur tikið.“

Tann 3. apríl 2007 spurdi Skráseting Føroya kærararnar, vísandi til avgerðina hjá Innlendismálaráðnum og líkaregluna, um teir,

umframt danska cand.merc.aud. útbúgving og starvsroyndir v.m., høvdu aðra útbúgving ella kundu vísa á onnur prógv, sum møguliga kundu javnmetast við krøv, ið vóru sett til at fáa góðkenning sum ríkisgóðkendur grannskoðari í Noregi.

Tann 9. apríl 2007 sendi Z, deildarstjóri í Vinnumálaráðnum, soljóðandi teldubræv til stjóran á Skráseting Føroya:

> „… Løgmansskrivstovan hevur nú boðað frá, at øll viðurskifti skulu viðgerast av IMR, og tú verður tí biðin um at síggja burtur frá teimum fyrispurningum, sum tú hevur fingið frá VMR, herundir eisini kæruna um alment innlit í skjalið frá O."

Tann 10. apríl 2007 sendi R, adv., Innlendismálaráðnum soljóðandi kæru:

> **„Kæra viðvíkjandi skrivligu niðurstøðuni hjá Skráseting Føroya (SF) dagfest 3. apríl 2007.**
> Tann 12. mars 2007 tók Innlendismálaráðið eina greiða endaliga avgerð í málinum um løggilding av mínum klientum.
>
> Hóast hesa greiðu niðurstøðu ger Skráseting Føroya alt fyri at sýta at avgreiða málið samsvarandi tykkara avgerð.
>
> Fyrst fekk eg upplýst, at Skráseting Føroya eftir avgerð tykkara setti seg í samband við advokat við fyrispurningi um tulking av tykkara avgerð.
>
> Tann 26. mars 2007 svaraði Innlendismálaráðið uppklárandi spurningum frá Skráseting Føroya.
>
> Í svarinum staðfestir Innlendismálaráðið enn einaferð sína greiðu niðurstøðu.
>
> Hóast hetta ger Skráseting Føroya framvegis alt fyri at forða fyri, at tykkara avgerð verður førd út í lívið.

Tann 3. apríl 2007 sendur Skráseting Føroya eitt skriv til mín, sum gongur ímóti avgerðini hjá tykkum.

Skráseting Føroya noktar klientum mínum løggilding og enntá við akkurát somu kendu grundgevingum, sum Innlendismálaráðið hevur sagt vera ósakligar í málsviðgerðini hjá stovninum.

Niðurstøðan hjá Skráseting Føroya er:

„Áðrenn umsókn tygara verður nærri viðgjørd og vísandi til rættargrundsætningin um líkheit vil Skráseting Føroya, geva tygum høvi at vísa á, um tygum, umframt danska cand.merc. aud. útbúgving og praktiskar royndir vm. hava staðið aðra útbúgving ella kunnu vísa á onnur prógv sum møguliga kunnu javnmetast við krøv, ið verða sett til at fáa góðkenning sum norskur statsautoriseraður revisor.“

Hetta er beinleiðis í stríð við greiðu endaligu avgerðina hjá Innlendismálaráðnum, sum er:
„IMR metir tí, at SF, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg.

IMR metir tí, at avgerðin hjá SF, um at nokta kærarunum góðkenning sum løggildir grannskoðarar við tí grundgeving, at teir ikki hava staðið serliga roynd smb. § 1 stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, og at teir ikki kunnu ávísa uttanfyri Føroyar at hava eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. § 2, stk. 1 er ósaklig.“

Við hesum verða somu ósakligu grundgevingar hjá Skráseting Føroya nú nýttar til at krevja klientum mínum eftir fleiri óviðkomandi upplýsingum. Upplýsingar, sum Skráseting Føroya frammanundan er vitandi um, tí stovnurin er frammanundan vitandi um øll viðurskifti viðvíkjandi klientum mínum. Skráseting Føroya er eisini vitandi um, at klientar mínir ikki

hava aðra útbúgving ella royndir enn tær, sum longu er upplýst fyri Skráseting Føroya.

Eg havi trupult við at taka Skráseting Føroya fyri fult, tá stovnurin nú vil „geva klientum mínum høvi“ til at vísa á, um teir umframt donsku útbúgvingina hava staðið aðra útbúgving ella aðrar royndir.

Skráseting Føroya ger seg nú eftir míni metan sekan í grovum embætismisbrúki og skal eg við hesum formliga klaga leiðaran fyri Skráseting Føroya fyri at misbrúka sítt starv og vald til tess at forða fyri, at málið verður avgreitt samsvarandi greiðari avgerð hjá einum øðrum hægri fyrisitingarligum myndugleika.

Eftir míni metan er talan um so grovt tænastubrot at hetta eigur at fáa avleiðingar fyri viðkomandi beinanvegin.

Eg havi áður kunnað Skráseting Føroya um:

- at fyri mær er eingin ivi um, at Skráseting Føroya samsvarandi avgerð frá Innlendismálaráðnum hevur eina beinleiðis skyldu til at løggilda klientar mínar
- at ein yvirordnaður myndugleiki hevur í veruleikanum tikið avgerð í málinum, og Skráseting Føroya hevur sjálvsagt sum undirornaður myndugleiki skyldu at fylgja teimum avgerðum, sum ein yvirordnaður myndugleiki hevur tikið.

Við atliti til, at Skráseting Føroya heilt tilætlað og nú á ein ólógligan hátt drálar viðgerðina av hesum máli, og harvið løggildingina av mínum klientum, og heilt greitt setur seg upp í móti Innlendismálaráðnum, vil eg vinarliga heita á Innlendismálaráðið um at taka neyðugu stigini til at løggilda mínar klientar skjótast gjørligt.“

Tann 13. apríl 2007 Innlendismálaráðið soljóðandi svar til R, adv.:

„Í skrivi, dagfest tann 11. apríl 2007, hava tygum heitt á Innlendismálaráðið um at taka avgerð í málinum um løggilding av grannskoðarum, sum er til viðgerðar hjá Skráseting Føroya.

> Innlendismálaráðið skal boða frá, at klientar tygara hava fingið freist til 19. apríl 2007 at koma við upplýsingum í málinum til Skráseting Føroya.
>
> Innlendismálaráðið fer tí ikki, sum støðan er í løtuni, at taka málið úr hondunum á Skráseting Føroya; men fer at heita á stovnin at seta seg í samband við Innlendismálaráðið, áðrenn avgerð verður tikin í málinum."

Avrit av skrivinum varð sama dag sent Skráseting Føroya til kunningar. Í skrivinum varð samstundis heitt á Skráseting Føroya um at seta seg í samband við Innlendismálaráðið, áðrenn avgerð varð tikin í málinum.

Sambært telefonnotati, sum stjórin á Skráseting Føroya hevur skrivað, og sum varð sent Innlendismálaráðnum 7. mai 2007, spurdi M tann 3. mai 2007 aðalstjóran í Innlendismálaráðnum, um Innlendismálaráðið skuldi hava uppskotið til avgerð til ummælis, áðrenn hetta varð sent kærarunum. Skráseting Føroya vísti í hesum sambandi til skrivið frá Innlendismálaráðnum tann 13. apríl 2007, har heitt varð á Skráseting Føroya um at seta seg í samband við Innlendismálaráðið, áðrenn avgerð varð tikin. Sambært telefonnotatinum svaraði aðalstjórin, at skrivið skuldi skiljast soleiðis, at Skráseting Føroya fyrst skuldi senda eitt ætlanarskriv við freist at gera viðmerkingar. Sama dag boðaði Innlendismálaráðið í teldubrævi frá, at ráðið ikki hevði sagt, at Skráseting Føroya skuldi senda eitt ætlanarskriv, men at mælt varð Skráseting Føroya til at senda eitt ætlanarskriv.

Tann 8. mai 2007 sendi Skráseting Føroya grannskoðarunum ætlanarskriv. Skrivini vóru nærum einsljóðandi, og tí verður bert tað eina endurgivið niðanfyri:

> **„Viðvíkjandi umsókn um tilnevning sum løggildur grannskoðari**
>
> **Bakgrund**

Víst verður til umsókn tygara, dagfest 15. apríl 2005, har tygum søkja um at gerast løggildur grannskoðari.

Tann 28. oktober 2005 sendi Skráseting Føroya avgerð um tilnevning sum løggildur grannskoðari til hoyringar. Skráseting Føroya móttók hoyringsskriv, dagfest 14. november 2005 frá adv. R og felags hoyringsskriv frá 7 umsøkjarum, dagfest 28. november 2005. Í skrivi dagfest 27. januar 2006 sendi Skráseting Føroya endaliga avgerð. Avgjørt var ikki at ganga umsókn tygara um tilnevning sum løggildur grannskoðari á møti.

Tann 10. februar 2006 kærdi adv. R avgerðina hjá Skráseting Føroya til Vinnumálaráðið. Henda kærumálsviðgerð var seinni flutt til Innlendismálaráðið til avgerðar.

Í skrivi dagfest 12. mars 2007 tók Innlendismálaráðið avgerð í kærumálinum. Avgerðin var m.a. soljóðandi:

*„Innlendismálaráðið metir tí, at Skráseting Føroya, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg."*

*Skráseting Føroya er tí vísandi til tað, ið er ført fram, biðin um at viðgera málið av nýggjum."*

Skráseting Føroya hevði ymisk ivamál um innihaldið í avgerðini og sendi tískil í skrivi, dagfest 20. mars 2007 útgreinandi fyrispurningar til Innlendismálaráðið. Tann 28. mars 2007 fekk Skráseting Føroya svarskriv frá Innlendismálaráðnum. Innihaldið í svarskrivinum var m.a. soljóðandi:

*„Innlendismálaráðið metir, at avgerðin í kærumálinum sum er endalig, er nøktandi grundgivin, og at tað sum meginregla er skeivt at gera skrivligar útgreiningar av niðurstøðum í kærumálum, sum ráðið hevur tikið avgerð í, tí hetta ofta vísir seg at føra til fleiri misskiljingar í málinum."*

Skráseting Føroya viðger tískil málið av nýggjum á tann hátt sum Skráseting Føroya skilir avgerðina frá Innlendismálaráðnum. Her serliga, at Skráseting Føroya skilir avgerðina soleiðis at gerast skal ein ítøkulig javnmeting millum eina umsókn um løggilding frá umsøkjara sum hevur eina norska statsautorisatión at vísa á og tygara umsókn um løggilding.

Sum Skráseting Føroya skilti umsókn tygara av fyrstan tíð, var tað sum eina umsókn um løggilding við støði í rættargrundsetninginum um líkheit og samanbering við ein umsøkjara sum hevði norska útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari at vísa á, hetta uttan ítøkuligar individuellar upplýsingar um próvtøkur vm.

**Nýggj viðgerð av málinum**

Eins og fyrr upplýst hava 6 persónar fingið løggilding vísandi til § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildargrannskoðarar. Grein 2, stk. 1 er soljóðandi:

*„§ 2. Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin kann tilnevna persónar, sum kunnu ávísa, at teir uttan fyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við ta útbúgving, ið nevnd er í § 1, 2, stk., nr. 4 og 5, og sum annars lúka treytirnar í § 1, 2. stk, jvb. 3. stk.* “
Og § 1, stk. 2 er soljóðandi:

*„§ 1. Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin tilnevnir løggildar grannskoðarar. Stk. 2. Rætt at verða tilnevndur sum løggildur grannskoðari hevur tann, sum*

1. *hevur bústað í Føroyum,*
2. *er myndugur og ikki undir verju,*
3. *hevur ikki boðað frá gjaldssteðgi ella hevur egið búgv trotaviðgjørt.*
4. *hevur staðið eina serliga próvtøku, samanber § 4,*
5. *í minsta lagi í 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í*

*øllum vanligum grannskoðanararbeiðum á skrivstovu hjá einum løggildum grannskoðara og*

6. *hevur tryggjað ella lagt trygd fyri í minsta lagi kr. 500.000 ímóti fíggjarligari ábyrgd, ið kann gerast galdandi við at útinna arbeiðið, sum løggildur grannskoðari*"

Fimm persónar hava fingið løggilding við á vísa á, at tey hava lokið útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari í Danmark og tann eini við at vísa á, at hava lokið útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari í Noreg.

Sambært viðmerkingunum til lógina, byggir føroyska lógin um løggildar grannskoðarar á tað tá galdandi donsku og víst er áður á, at gomul siðvenja hevur verið at veita løggilding til persónar við danskari statsautorisatión.

Í upprunaliga avgerðini av tygara umsókn dagfest 27. januar 2006 vísti m.a. á, at í tygara føri var ikki talan um eina útbúgving, sum er viðurkend í øðrum landi, at virka sum løggildur grannskoðari og Skráseting Føroya gekk ikki umsókn tygara á møti við grundgevingum um, at tygum ikki hava staðið serliga roynd smb. § 1, stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar og at tygum ikki kunnu ávísa at tygum uttan fyri Føroyar hava staðið eina útbúgving sum gevur rætt til løggilding smb. § 2, stk.1 í lógini.

Advokatur tygara hevur upplýst í kæruskrivi, dagfest 28. november 2005, at tygum uppfylla øll krøv, sum sett eru í øðrum londum í ES, burtursæð frá t.d. Danmark. Í samband við nýggja viðgerð av málinum leggur Skráseting Føroya tískil til grundar, at tygum ikki uppfylla treytirnar fyri at verða tilnevndur løggilding sambært § 2, stk. 1 við at kunna vísa á eina danska útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari, ella kunnu vísa á at tygum hava lokið útbúgving, ið kann javnmetast við ta donsku.

Eins og upplýst, hevur ein persónur fingið tilnevning sum løggildur grannskoðari sambært lógini § 2, stk. 1, við at vísa

á eina norska útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari. Hesin persónur hevur fyri norska *Kreditilsynet „godtgjordt å fylle vilkårene i lov 15. januar 1999 nr. 2 om revisjon og revisorer § 3-1, første ledd, godkjenning som statsautorisert revisor*".

Fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari í Noreg krevst at viðkomandi uppfyllir treytir, ið eru ásettar í § 3-1 í „*lov nr. 2 frá 15. januar 1999 om revisjon og revisorer*". Sí avrit, fylgiskjal 1.

M.a. við heimild í „*lov av 15. januar 1999 nr. 2 om revisjon og revisorer (revisorhven) § 3-2 fjerde ledd, § 3-3 fjerde ledd annet punktum, § 3-3 syvende ledd, § 3-6 første ledd nr. 1*", eru nærri ásetingar ásettar í „*Forskrift FOR-1999-06-25-712 om om revisjon og revisorer.*" (Fylgiskjal 2, Avrit av viðkomandi upplýsingum).

Sambært føroysku lógini § 1, stk. 2, nr. 4 verður víst til serliga próvtøku. Staðfest er tó, at ongar reglur hava verið gjørdar um tað í § 1, stk. 2 nr. 4 nevndu próvtøku, soleiðis sum ásett er í lógini § 4, at gerast skal. Ongin hevur tískil fingið løggilding sambært § 1, stk. 2, men einans sambært § 2, stk. 1, vísandi til § 1, stk. 2.

Skráseting Føroya hevur í longri tíð arbeitt við at áseta nærri reglur um próvtøku og tann 3. mai 2007 var í Dimmalætting lýst kunngerð nr. 1 frá 3. mai 2007 um próvtøku at gerast løggildur grannskoðari. Gildiskoma er dagin eftir, at kunngerðin er kunngjørd.

Persónurin sum er tilnevndur løggilding vísandi til norska útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari, er tilnevndur løggilding uttan at hava verið til serliga próvtøku ella roynd. Grundgevingin fyri hesum er, at persónurin, sambært skiftisreglum í norsku revisorlógini, varð undantikin kravinum um serliga roynd „praksisprøve", men at hesin hevur fingið góðkenning sum statsautoriseraður grannskoðari í Noregi sambært galdandi reglum. Harímillum er krav um eina roynd

„praksisprøve“, vísandi til § 1-3 Í FORSKRIFT-1999-06-25-712, fylgiskjal 2.

Til kunnleika kann upplýsast, at um ein persónur í einum EU/EØS-landið hevur lokið útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari, ið kann javnmetast við ta útbúgving sum krevst í viðkomandi EU/EØS-landi, hevur viðkomandi land skyldu at bjóða „egnethedsprøve“, um hesin statsautoriseraði grannskoðari ynskir at virka sum statsautoriseraður grannskoðari í viðkomandi landi. Hetta merkir t.d. at um ein persónur ynskir at virka sum statsautoriseraður grannskoðari í Danmark og hevur eina útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari í Noreg at vísa á, ikki skal upp til danska „revisoreksamen“, men kann noyðast við at fara til og standa ein „egnethedsprøve”; hetta sambært „*Revisorkommissions vejledning om egnethedsprøver i forbindelse med gensidig anerkendelse af eksamensbeviser*“.

Upplýsast kann, at Skráseting Føroya, í samband við viðgerð av umsøkjara, sum hevði norska útbúgving sum statsautoriseraður grannskoðari at vísa á, skipaði fyri samrøðu í skattarætti millum Skráseting Føroya og umsøkjaran. Endamálið við samrøðuni var, at umsøkjarin skuldi vísa sín kunnleika til føroyskan skattarætt.

Tann 3. apríl 2007 sendi Skráseting Føroya út skriv, har upplýst var, at áðrenn umsókn tygara varð nærri viðgjørd og vísandi til rættargrundsætningin um líkheit vildi Skráseting Føroya, geva tygum høvi at vísa á, um tygum, umframt danska cand. merc. aud. útbúgving og praktiskar royndir vm., hava staðið aðra útbúgving ella kunnu vísa á onnur prógv, sum møguliga kunnu javnmetast við krøv, ið verða sett til at fáa góðkenning sum norskur statsautoriserður graunskoðari. Freist at senda inn avrit av týðandi skjalfestum prógvum tygum kundu vísa á var ásett til innan 19. apríl 2007.

Skráseting Føroya hevur frá tygum móttikið skriv við frágreiðing um tygara prógv og royndir.

Skráseting Føroya er nú liðug við sína viðgerð av umsókn tygara.

**Avgerð og grundgevingar**
Aftaná nýggja viðgerð hevur Skráseting Føroya tikið avgerð um, at halda fast við upprunaligu avgerðina um ikki at ganga umsókn tygara um løggilding á møti.

Við at javnmeta við tey krøv, ið eru sett fyri at fáa góðkenning sum norskur statsautoriseraður grannskoðari, sambært norskum reglum hevur Skráseting Føroya tikið avgerð við niðanfyristandandi grundgevingum:

Javnmeting

**Noreg**
1. Fyri at fáa útbúgving sum stat- sautoriseraður grannskoðari í Noreg krevst, at onki próvtal í nakrari lærugrein á „Høyere revisorstudium“ (HRS) er minni enn C. Hetta er galdandi fyri bæði „revisorutdanningen”(bachelorgraden) og „høyere revisorstudium“ (mastergraden).

Sambært ECTS próvtalsstiganum er eitt próvtal C at javnmeta við próvtalið 8 (median) 9 í danska 13-skalanum. (Sum fylgiskjal 3 er hjálagt upplýsingar um hetta.)

2. Sambært norsku revisorlógini krevst „*det 3 års variert praksis i revisjon av årsregnskap eller tilsvarende oppgjør. Godkjenning av praksis er skjønnsmessig, men vil normalt være oppfylt ved ca. 4.800 timer revisjon og kursing. Antallet kurstimer kan likevel ikke overstige 300. Annen relevant praksis kan i enkelte tilfeller redusere kravet til revisjonspraksisen* “

3. Umframt krav nr. 1 og 2 er eisini „krav om avlagt praktiskprøve“, „Prøvetiden er normert til 4 timer. Prøven skal dokumentere at kandidaten er egnet til å påta seg revisjonsoppdrag. Den skal i første rekke teste om kandidaten

kjenner de relevante lovbestemmelser og reguleringer i ulike praktiske situasjoner. Kandidaten må redegjøre for eventuelle forutsetninger som er funnet nødvendige for besvarelse av oppgavene. Det skal i størst mulig utstrekning vises til relevante lover, forskrifter og aktuelle rundskriv, standarder, uttalelser og lignende "

Prøven arrangeres av Høgskolen i Agder

**Tínir førleikar**
1. Tygum hava eina danska cand. merc. aud revisorkandidat útbúgving, men tygum hava ikki øll próvtøl, sum eru í minsta lagi 8.

Skráseting Føroya metir tískil ikki, at danska cand. merc. aud útbúgving tygara kann javnmetast við eina norska „Høyere revisorstudium" útbúgving við próvtølum ikki minni enn C í nakrari lærugrein.

Tygum upplýsa tó í umsókn tygara dagfest 15. apríl 2005, at tygum hava kanna, hvat skal til fyri at gerast cand. merc. aud. í Noregi og at boðini vóru, at tygum kunnu fáa allar lærugreinar í donsku cand. merc. aud útbúgving tygara góðskrivaðar í Noreg, uttan vinnulívs- og skattarætt, sum neyðugt er at taka umaftur.

2. Umframt onnur skeið hava tygum skjalprógvað, at tygum hava luttikið í øllum „praktisk del forløbet" (Pl-P8), sum danska „Foreningen for Statsautoriserede Revisorer" (FSR) fyriskipar. Tygum upplýsa at talan er um eina tilgongd uppá 3 ár. Skráseting Føroya metir, at tygara virkisroyndir við skeiðum vm. kunnu javnmetast við krav nr. 2 í norsku reglunum.

3. Tygum vísa ikki á, at tygum hava staðið tvær royndar-próvtøkur, ávíkavist 1999 og 2001. Skráseting Føroya hevur

fingið í hendi rúgvismikið skjalatilfar kring royndarpróvtøku sum var hildin í Aarhus í døgunum 12., 13. og 14. apríl 1999

Skráseting Føroya hevur í skrivi heitt á tygum um, frá antin FSR og /ella … & … sum vóru uppgávurættarar, váttan (við undirskrift), ið skjalprógva ymisk viðurskifti kring royndarpróvtøkurnar.

Í skrivi dagfest 1. mai 2007 upplýsa tygum kring hesi viðurskifti, men ongin váttan fyri skjalprógv fyriliggja frá FSR og/… & …

Skráseting Føroya hevur sett seg í samband við …, men hesin metir m.a. at tað er „betænkeligt at lægge en prøveeksamen som grundlag under en autorisation“ (Fylgiskjal 4 tlf. notat …)

Samlað sæð er Skráseting Føroya komið til tað niðurstøðu, at royndarpróvtøkur tygara frá apr. 1999 og 2001 ikki kunnu javnmetast við próvtøku, sum verður fyriskipa á góðkendum útbúgvingarstovni og undir viðurskiftum undir eftirlitið og sum verður váttað av viðkomandi útbúgvingarstovni har próvtøkan verður hildin.

Grundað á omanfyristandi er niðurstøðan hjá Skráseting Føroya tískil, at tygum ikki kunnu vísa á, at tygum, uttanfyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við tað útbúgving, ið er nevnd í føroysku grannskoðaralógini § 1, stk. 2 og Skráseting Føroya gongur tískil ikki umsókn tygara á møti um løggilding.
…“

Tann 10. mai 2007 hevur stjórin á Skráseting Føroya skrivað soljóðandi notat eftir telefonsamrøðu við landsstýrismannin í vinnumálum:

**„10/5-2007 K, landstýrismaður, eftir arbeiðstíð.**
Hann sigur tað er nakað sum eitur rættartrygd. Umsøkjararnir hava bíðað leingi og hava krav uppá eina løggilding.

Segði við hann at teir vóru ikki líka sum A, (høvdu ikki autorisatión frá øðrum stati)

Hann segði at teir vóru minst líka væl kvalificeraðir sum A.

Eg segði at vit manglaðu eina reglugerð um próvtøku og máttu tí tulka.

Tjakaðust um ymsar munir á umsøkjarunum. Og um hesir blivu løggildaðir so vóru aðrir, sum luku somu kriteriir og sum sostatt eisini høvdu krav uppá løggilding og varð samlaða talið sum tá hava krav uppá løggilding uml 19 (tá er Cand Merc Aud + praksis nøktandi til tess at fáa tilnevnt løggilding).

Hann nevndi, at um løggilding ikki bleiv avgreidd so kom tað at kosta dýrt í stemmum.

Eg segði, at um landstýrismaðurin vildi at Skrásetingin skuldi løggilda hesar so undirgrevur tað teir sum hava statsautirsatión aðrastaðni frá og harvið eisini lógina.“

Tann 12. mai 2007 hevur stjórin á Skráseting Føroya skrivað soljóðandi notat frá telefonsamrøðu við ein deildarstjóra í Vinnumálaráðnum:

**„12/5-2007 Æ uml. kl. 17.00**
Hon greiddi frá at VMR ikki hevði forstáðilsi fyri avgerðini hjá Skrásetingini um at nokta løggilding og at vit áttu at tilnevnt øllum ella nøkrum løggilding. Málið hevur verið viðgjørt á fleiri mánadagsfundum í VMR.

Hon undrast á um tað yvurhøvur er heimild at nýta karakterkravið sum kriterium.“

Tann 16. mai 2007 hevur stjórin á Skráseting Føroya skrivað soljóðandi notat eftir telefonsamrøðu við landsstýrismannin í vinnumálum:

> **„16/5-2007 K, landstýrismaður**
> Sigur at málið er um at gerast politiskt og at sambandsflokkurin krevur málið flutt frá Skrásetingini.“

Tann 18. mai 2007 sendi advokaturin hjá kærarunum Innlendismálaráðnum eina kæru um uppskotið til avgerð hjá Skráseting Føroya, dagfest 8. mai 2007. Kæran var soljóðandi:

> **„Viðv. Løggilding – kæra av avgerð tikin av Skráseting Føroya tann 8. mai 2007**
>
> Eg havi aftur fingið svar frá Skráseting Føroya, sum enn einaferð noktar mínum klientum løggilding.
>
> Einki endamál er at kæra ætlanarskrivið til Skráseting Føroya. Tískil er kæran stílað beinleiðis til Innlendismálaráðið. Í skrivi sent til Skráseting Føroya, verður boðað frá hesum.
>
> Tað er langt síðani at seinasti steinurin varð vendur í hesum málinum. Eingir nýggir upplýsingar eru tískil í málinum. Ósakliga viðgerðin av klientum mínum heldur fram og tykist ongan enda fáa. Tískil hesar fáu viðmerkingar:
>
> *§1 og §2 . Øll eru tilnevnd eftir § 1. At nakar er tilnevndur eftr §2 er ósatt.*
>
> Í endaligu avgerðini, dagfest 12. mars 2007, skrivar L, aðalstjóri í IMR:
>
> „Uppá fyrispurning hevur Skráseting Føroya upplýst Innlendismálaráðnum, at síðani lógin um løggildar grannskoðarar varð sett í gildi í 1993, eru 6 løggildingar veittar. Allar seks løggildingar eru veittar sambært § 1 í lógini.“

Tí er tað ósatt tá Skráseting Føroya nú sigur, at allar løggildingar eru veittar sambært § 2 í lógini um løggildar grannskoðarar. Hetta kann einfalt prógvast við t.d. tilnevningini av … og A. Teirra tilnevningarskjal eru hjáløgd sum prógv. Veruleikin kann ikki verða broyttur afturvirkandi við tí endamáli at geva klientum mínum eitt noktandi svar.

Í endaligu avgerðini ásannar Innlendismálaráðið, at føroyska lógin um løggildar grannskoðarar er meinlík donsku lógini um „statsautoriserede revisorer". Somuleiðis ásannar Innlendismálaráðið, at krøvini um serliga próvtøku eru ítøkiliggjørd í kunngerðini í Danmark, meðan ongar kunngerðir eru lýstar í Føroyum.

Skráseting Føroya hevur tí víðar ræsur, tá ið gerast skal av hvørja praksis, stovnurin velur at fylgja á hesum øki.

Praksis hevur tó verið at løggilda føroyingar, ið hava staðið serligu próvtøkuna í Danmark. Men í sambandi við at A varð tilnevndur løggildur grannskoðari slepti Skráseting Føroya kravinum um serliga próvtøku. Henda broyting í praksis hendi aftaná drúgva viðgerð og í samráð við landsstýrismannin í Vinnumálum. Umsóknirnar hjá mínum klientum lógu til viðgerðar um somu tíð, sum henda praksisbroyting fór fram, Allíkavæl verður noktandi svarið framvegis m.a., grundað á at klientum mínum vanta serligu royndina – sum A, sum kunnugt ei heldur hevur tikið.

Fyri at sleppa upp til serliga próvtøku krevja danir, at persónar skulu hava starvast hjá løggildum grannskoðara aftaná lokna cand.merc.aud. útbúgving (2 ár).

A hevur sum kunnugt bert starvast hjá løggildum grannskoðara áðrenn hesin stóð cand.merc.aud. útbúgving. Lýkur sostatt ikki kompetansukrøvini fyri at fara upp til serliga próvtøku í Danmark. Royndirnar hjá A eru í tíðarskeiðnum frá 1980 til 1987, meðan royndirnar hjá mínum klientum eru fram til dagin

í dag. Mínir klientar lúka krøvini fyri at sleppa upp til serliga próvtøku í Danmark. Mínir klientar hava sostatt betri og longri royndir hjá løggildum grannskoðara (upptil 15 ár).

*Norskur skatta- og vinnulívsrættur við próvtalinum „C“*

Skráseting Føroya ger nógv burturúr at samanbera mínar klientar við ein føroyskan umsøkjara, sum er tilnevndur „statsautorisert revisor“ í Noreg.

Hetta er beinleiðis í stríð við endaligu niðurstøðuna hjá Innlendismálaráðnum um:

„IMR metir tí, at avgerðin hjá Skráseting Føroya, um at nokta kærarunum góðkenning sum løggildir grannskoðarar við tí grundgeving, at teir ikki hava staðið serliga roynd smb. § 1 stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar“, og at teir ikki kunnu ávísa uttanfyri Føroyar at hava eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. § 2, stk. 1 er ósaklig,“

Skráseting Føroya ger eisini nógv burtur úr, at A hevur staðið norskan skatta- og vinnulívsrætt við próvstigunum „C“. Sum kunnugt er talan um løggilding av føroyskum umsøkjarum. Tískil kann tað ikki takast í álvara, at Skráseting Føroya nú er farin at leggja dent á at umsøkjari kann vísa á serligan førleika til norskan skatta- og vinnulívsrætt.

Somuleiðis skal eg gera vart við, at hetta er beinleiðis í stríð við endaligu niðurstøðuna hjá Innlendismálaráðnuin um:

„IMR metir tí, at Skráseting Føroya, við at geva tí eina grannskoðaranum løggilding í september 2005, uttan sakliga orsøk ger mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgvíng úr Danmark ella Noreg.“

Tað er ósakligt at Skráseting Føroya nú herðir lógina og sigur, at

tað ikki er nóg mikið at hava staðið cand.merc.aud. útbúgvingina. Nú skalt tú hava próvstigið „C“, tí tað hevur A fingið í norskum skatta- og vinnulívsrætti.

A er tilnevndur løggildur grannskoðari, aleina við støði við norskum skatta- og vinnulívsrætti -og ongum øðrum. Ongin serlig útbúgving, ella serlig roynd, er løgd til grund í hesum sambandi. Tí er tað óviðkomandi, ósakligt og ógrundað, at vísa á norskar skiftisreglur, sum gjørdu, at A ikki var til serliga roynd, fyri síðani at krevja serliga roynd frá klientum mínum.

Tað er eisini sera ósakligt og ógrundað, at samanbera karakterir viðvíkjandi kandidatútbúgvingum og enntá í tilvildarliga útvaldum hjálærugreinum. Antin ert tú kandidatur ella ikki. At seta spurnartekin við fakligu førleikarnar hjá klientum mínum er fullkomiliga burturvið.

*Objektiv kriteriur*
Í endaligu avgerðini hjá Innlendismálaráðnum sæst, at Skráseting Føroya í málsviðgerðini m.a. má gera eina ítøkuliga meting sambært objektivum kriterium í hvørjum einstøkum føri, hvørt umsøkjari lýkur treytirnar fyri at verða løggildur.

Í endaligu niðurstøðuni hjá Innlendismálaráðnum verður staðfest at mínir klientar í 2 ár eru ósakliga viðgjørdir av Skráseting Føroya.

Síðani endaligu niðurstøðuna hjá Innlendismálaráðnum hevur Skráseting Føroya í hoyringsskrivi tann 8. mai 2007 enn einaferð noktað mínum klientum løggilding. Grundgevingar fyri at nokta mínum klientum løggilding eru tær somu, sum sambært endaligu avgerðini hjá Innlendismálaráðnum eru ósakligar.

Eg eri sannførdur um, at mínir klientar ikki fáa eina objektiva viðgerð av Skráseting Føroya. Serliga tí at Skrásetingin subjektivt velur út ósaklig kriteriur, sum síðani verða brúkt til at nokta mínum klientum løggildum. Sostatt sær Skráseting Føroya

fullkomiliga burtur frá, at mínir klientar hava betri royndir og meira viðkomandi fakligar útbúgvingar (øll tey kvalifiserandi KSR skeiðini) enn A.

Sum eitt annað kurriosum, sum lýsir støði á viðgerðini hjá Skráseting Føroya í síni heild er, at leiðarin fyri stovnin m.a. vísir til, at A hevur verið til „privata" samrøðu í skattarætti. Endamálið við samrøðuni var, at umsøkjarin skuldi vísa sín kunnleika til føroyskan skattarætt.

Undirritaði er ikki vitandi um, at viðkomandi stovnsleiðari hevur serkunnleika innan skattaøkið og hetta sjálvt-uppfunnað kriteriið, sum hvørki er nevnt í lóg ella viðmerkingum, tangerar til tað beinleiðis komiska.

Annars kann eg til samanbering stutt vísa á, at klientar mínir hava starvast við føroyskum skattarætti í upp til 15 ár, hava í hópin av førum ráðgivið almennu Føroyum í skattaspurningum, verið við til at skriva/kommentera eitt nú kapitalvinningsskattalógina og oljuskattalógina, hava hildið hópin av fyrilestrum um skattalógir og staðið kandidatútbúgving í skattarætti. Men eftir øllum at døma stendur hetta ikki mát við at hava verið til „privata" roynd hjá leiðaranum fyri Skráseting Føroya.

Eisini eri eg kunnaður um, at týsdagin 8. mai 2007, áðrenn eg og mínir klientar vistu um niðurstøðuna hjá Skráseting Føroya, hevði leiðarin fyri Skráseting Føroya, M tosað við G – formann í Felagnum fyri Løggildar Grannskoðarar (FLG) – og greitt honum frá avgerðini.

Hetta er sami framferðarháttur sum seinast, tá M svaraði mær og mínum klientum. Tá hevði M eisini sent avrit av avgerðini til Ø – táverandi formann í FLG – áðrenn eg og mínir klientar hoyrdu um avgerðina.

Formaðurin í FLG, G, spurdi um avgerðina. M hevði greitt honum frá, at Skráseting Føroya avgjørt ikki fór at geva mínum

klientum nakra løggilding uttan so, at hann fekk beinleiðis boð um hetta frá hægri stað. M greiddi eisini frá, at hann metti tað vera óheppið um mínir klientar fingu løggilding, við tað at hetta óivað kom at skaða góðu viðurskiftini við FLG.

Eitt hoyringsskriv við tí innihaldi sum Skráseting Føroya hevur valt at geva tí, er bert enn ein roynd at draga málið út.

Rættargrundsetningurin um líkheit hevur sum fyritreyt krav um konsekvens í avgerðunum hjá fyrisitingarmyndugleikanum. Henda grundsetning hevur Skráseting Føroyar á ongan hátt fylgt. Tað er einum og hvørjum greitt, at stjórin í Skráseting Føroya tilætlað og ósakliga hevur drigið málið hjá mínum klientum út.

Av hesum orsøkum havi eg eisini kært stjóran fyri Skráseting Føroya fyri embætismisbrúk, men eg havi einki hoyrt aftur um hetta mál.

Ásannandi at tað ikki ber til af fáa eina sakliga viðgerð frá Skráseting Føroya, verður hervið enn einaferð heitt á Innlendismálaráðtð um at realitetsviðgera umsóknina hjá mínum klientum og fáa hetta mál endaliga avgreitt samsvarandi teirra rættarkravi.

Sum kunnugt er tað átroðkandi hjá mínum klientum at fáa umsóknina um løggilding endaliga avgreidda.

Vísandi til longu viðgerðartíðina (yvir 2 ár), og at einki nýtt er í málinum, vil eg heita á Innlendismálaráðíð at avgreiða umsóknirnar skjótast tilber."

Tann 30. mai 2007 hevur stjórin á Skráseting Føroya skrivað soljóðandi notat eftir telefonsamrøðu við aðalstjóran í Innlendismálaráðnum:

„Spurdi um IMR ætlar at realitetsviðgera kæru av ætlanarskrivi frá 18. mai 2007.
IMR ætlar ikki at viðgera ætlanarskrivið.

L greiðir frá, at kærararnir hava verið í IMR saman við advokati, har teir hava boðað frá, at teir undir øllum umstøðum fara at kæra avgerðina frá Skráseting Føroya. L hevur boðað teimum frá, at IMR ikki viðgerð kæru av ætlanarskrivi. Hann metir tað best, at Skrásetingin tekur avgerð skjótt, og hann er byrjaður at fyrireika seg til eina kærumálsviðgerð. Hann hevur „lisið uppá" og hevur funnið okkurt fram frá umboðsmanninum (Folketingets) um, hvussu man hevur umsitið uttan at hava havt reglur.

L sigur, at landsstýrismaðurin í Innlendismálum sum so onga meining hevur um, hvussu málið skal avgreiðast, men at hann er vitandi um, at Vinnumálaráðið ynskir at liberalisera marknaðin fyri grannskoðan og at innføra EU-reglur, og at Vinnumálaráðið ynskir, at umsøkjararnir uttan „serliga roynd" smb. grannskoðaralógini fáa løggilding.

Eg nevndi, at eg eisini kendi holdningin hjá VMR, men um hetta er ætlanin, so eigur hetta at verða gjørt við eini lógarbroyting (egin hugsan – og ikki við umsitingarliga at undirgrava lógina).
…"

Tann 30. mai 2007 hevur stjórin á Skráseting Føroya skrivað soljóðandi notat eftir telefonsamrøðu við landsstýrismannin í vinnumálum:

**„Telefonnotat**
**30. mai 2007 kl. 22.40 K landstýrismaður ringir heim til mín í Nólsoy á tlf. … (…** (kona stjóran, *mín viðm.*) **tók telefonina)**

Hann sigur hetta er ein óformlig samrøða, sum ongantíð hevur funnið stað. Ringir viðvíkjandi grannskoðaramálinum, hann sum landstýrismaður og eg (M) sum stjóri kann fáa trupuleikar, um málið ikki verður avgreitt, tí umsøkjararnir leggja press á landstýrismannin og tað stundar til val tí kann hann sum landstýrismaður ikki livað við, at málið ikki verður avgreitt og umsøkjarirnir fáa løggilding.

Nakrir av umsøkjarunum skulu gerast meðeigarar av … (helst er talan um F, sonur aðalstjóran Y og B …) og teir hótta landstýrismannin við at seta fram endurgjaldskrav og fara í rættin við málinum um teir ikki fáa løggilding. Teir hótta eisini við umboðsmanninum og hann sum landstýrismaður og eg sum stjóri á stovninum kunnu fáa trupuleikar, um málið fer til umboðsmannin.

Biður meg avgreiða málið sum skjótast, so at teir fáa løggilding tí málið kann av løgmanni verða tikið frá stovninum og so havi eg stórar trupulleikar sum stjóri.

Spurdi, um hann kundi geva eini tænastuboð um, at avgreiða málið, segði hann, at eg hevði tilvísing til IMR í hesum málinum og at IMR er mín yvirornaði í hesum málinum. Nevndi fyri honum, at um U, landstýrismaður, gav mær eini tænastuboð, avgreiddi eg málið beinanvegin, men hetta metti hann ikki varð ein møguleiki.

Greiddi honum frá, at eg hevði verið til óformligan fund við L, aðalstjóra fríggjadagin fyri páskir (30/3-2007), umframt seinni samskifti í samb. við klagu, og at L hevði vegleitt meg, hvussu málið skuldi avgreiðast, og at eg fylgdi teimum anvísningum, sum L hevði givið, m.a. at lata O gjøgnumganga avgerðina fyrst og síðan senda hana til IMR, áðrenn hon bleiv send til umsøkjararnar.

Greiddi honum frá, at málið sjáldan hevði ligið leingi hjá okkum, vit (Skráseting Føroya) avgreiddu eina noktan av løggilding um ársskiftið 2005/2006, hendan bleiv kærd til IMR, sum sendi okkum hoyringsskriv um várið 2006, sum gav okkum fult viðhald. Síðan hendi ikki nógv í málinum, fyrr enn 22. desember 2006 tá vit fingu eitt hoyringsskriv, sum legði upp til, at málið varð víst til nýggja viðgerð og at avgerðin um noktan varð ósaklig. Greiddi honum frá viðgerðini í 2007 og at málið ikki hevði bíðað leingi hjá Skrásetingini, men hevið ligið meira enn 1 ár í IMR áðrenn ein niðurstøða fyrilá.

Greiddi honum frá, at eg ongar trupuleikar hevið við at málið fór til umboðsmannin, tí vit høvdu arbeitt miðvíst við málinum tað tíð, vit høvdu málið.

Greiddi honum frá, at tað er ein stór ábyrgd at tilnevna eina løggilding av einum grannskoðara, hann er umboð fyri almenningin, sum váttar, at roknskapir og aðrir fíggjarligir upplýsingar um virkir eru álítandi, harímillum eisini bankar og tryggingarfeløg, og at tað verður ein sera óheppin støða, um t.d. fíggjareftirlitið undirkennur grannskoðanina, tí at løggilding av grannskoðarum hevur verið tilvildarlig, og at tað ætli eg ikki at taka ábyrgd av, serstakliga eftirsum O, fyrrverandi dómari og løgfrøðiligur ráðgevi hjá Skrásetingini metti, at avgerðin hjá IMR var skeiv, og at vit høvdu eina góða sak um málið fór í rættin.

Greiddi honum frá at vit manglaðu eina greiða delegatión frá VMR, at vit umsótu løgtingslóg um løggildar grannskoðarar. Hann bað meg ringja til Æ. Eg bað hann eisini skunda undir Æ, Z og Ý, tí eg kundi ikki avgreiða málið fyrenn hendan delegatiónin fyrilá klárum skrivligum formi.

Kunnaði hann víðari um notatið frá O. Hann spurdi hví vit høvdu leita okkum ráðgeving frá O, tað er óneyðugt at vevja ein fyrrverandi dómara uppí hetta málið, tað snýr seg ikki bara um at fáa rætt, men tað snýr seg um at avgreiða málið, so umsøkjararnir fáa løggilding.

Vónar at vit avgreiða málið skjótt."

Tann 31. mai 2007 sendi Skráseting Føroya umsøkjarunum avgerðir um at sýta teimum løggilding sum grannskoðarar. Avgerðirnar og uppskotið til avgerð, dagfest 8. mai 2007, eru einsljóðandi, og tí verður avgerðin ikki endurgivin her. Víst verður uppskotið til avgerð frammanfyri.

Avgerðirnar hjá Skráseting Føroya vóru 1. juni 2007 kærdar til Innlendismálaráðið, sum tann 14. juni 2007 tók avgerð í málunum

hjá E, F og B. Av tí at avgerðirnar eru nærum einsljóðandi, verður bert tann eina avgerðin endurgivin her (tilvildarliga vald):

**„Avgerð í kærumáli, har Skráseting Føroya hevur sýtt B løggilding sum grannskoðari.**
Í skrivi, dagfest tann 12. mars 2007, tók Innlendismálaráðið avgerð í einum kærumáli, har Skráseting Føroya hevði noktað tygara klientum: B, H, D, I, F, J, og E løggilding sum grannskoðarar.

Niðurstøðan hjá Innlendismálráðnum var, at avgerðin hjá Skráseting Føroya um at nokta kærarunum góðkenning sum løggildir grannskoðarar við tí grundgeving at teir ikki hava staðið serliga roynd smb. grein 1, stk. 2, nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, og at teir ikki kunnu ávísa uttanfyri Føroyar at hava eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. grein 2. stk. 1, er ósaklig.

Skráseting Føroya varð tí, vísandi til tað, ið er ført fram, biðið um at viðgera málið av nýggjum.

Í skrivi, dagf. tann 3. apríl 2007, hevur Skráseting Føroya biðið B um fleiri upplýsingar í málinum. Í skrivinum boðar Skráseting Føroya frá, at: „Áðrenn umsókn tygara verður nærri viðgjørd og vísandi til rættargrundsetningin um líkheit vil Skráseting Føroya geva tygum høvi at vísa á um tygum umframt danska cand. merc. aud. útbúgving og praktiskar royndir vm. hava staðið aðra útbúgving ella kunnu vísa á onnur prógv, sum møguliga kunnu javnmetast við krøv, ið verða sett til at fáa góðkenning sum norskur statsautoriseraður revisor.“

B lat í skrivi, dagf. tann 30. apríl 2007, Skráseting Føroya fleiri upplýsingar í málinum.

Eftir at Skráseting Føroya í avgerð, dagfest tann 8. mai 2007, hevur boðað frá, at gjørt er av at halda fast við upprunaligu avgerðina um ikki at ganga umsóknini um løggilding á møti,

hava tygum vegna klient tygara í skrivi, dagf. tann 18. mai 2007, kært hesa avgerð til Innlendismálaráðið.

Skráseting Føroya er í avgerðini viðvíkjandi B komin fram til niðurstøðuna við at javnmeta førleikarnar hjá B við teir førleikar, ið krevjast í Noregi fyri at gerast løggildur grannskoðari.

Eingir nýggir veruligir upplýsingar eru komnir til málið, sum gevur Innlendismálaráðnum orsøk til at fremja nýggja partshoyring í málinum.

Í málinum er komið fram, at Skráseting Føroya í málinum um løggilding av grannskoðarunum við norskari løggilding hevur tikið viðkomandi inn til samrøðu um føroyskan skattarætt, uttan at hava ásett og kunngjørt reglur á hesum øki.

Innlendismálaráðið metir, at hesin framferðarháttir er skeivur. Rættarskapandi reglur, ið viðvíkja viðurskiftum hjá borgarum, skulu kunngerast alment, áðrenn tær verða nýttar av umsitingini.

Lógin um løggildar grannskoðarar er frá 1993. Sambært grein 4 í lógini skal Skráseting Føroya gera reglur um próvtøku, um treytirnar fyri at sleppa til slíka próvtøku, um próvtøkukrøvini, um hvussu próvtøkan fer fram, og um próvtøkuúrslitið.

Reglurnar um próvtøku o.a. eru kunngjørdar í Dimmalætting tann 1. mai 2007.

Innlendismálaráðið metir, at umsóknirnar frá B, H, D, I, F, J og E eiga at verða viðgjørd sambært teirri siðvenju, ið var galdandi um tað mundið, tá ið grannskoðarin við norskari løggilding varð tilnevndur sum grannskoðari í Føroyum.

Skráseting Føroya hevur løggilt grannskoðaran við norskari løggilding uttan at hesin hevur verið til serliga próvtøku. Grundgevingin fyri hesum er, at kravið um próvtøku var ikki galdandi í Noregi, tá ið hesin varð løggildur har.

Harafturímóti vil Skráseting Føroya ikki løggilda B, tí hann hevur ikki staðið serligu royndina, sum verður kravd fyri at gerast løggildur grannskoðari í Danmark.

Í javnmetingini av førleikunum hjá B og krøvunum fyri at fáa løggilding í Noreg er niðurstøðan hjá Skráseting Føroya, at ein donsk cand. merc. aud. útbúgving við próvtølum, ið eru minni enn 8, ikki kann javnmetast við Højere revisorstudium í Noreg, har einki próvtal í nakrari lærugrein er minni enn C, sum svarar til 8-9 í danska próvtalsstiganum.

Innlendismálaráðið metir ikki at omanfyri nevnda javnmeting er saklig.

Avgerandi fyri hvørt B kann fáa løggilding í Føroyum skal metast út frá, um hann við teimum kvalifikatiónum hann nú hevur, kann sigast at hava eina útbúgving, ið kann javnmetast við tað í grein 1, stk. 2, nr 4 og 5, nevndu útbúgvingina.

Innlendismálaráðið metir tí heldur ikki, at Skráseting Føroya kann nokta B at verða løggildur sum grannskoðari, bert tí hann ikki hevur staðið eina serliga roynd smb. grein 1, stk. 2, nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar.

Í javnmetingini av førleikanum hjá B staðfestir Skráseting Føroya, at kravið fyri at verða løggildur grannskoðari í Noreg et at viðkomandi hevur staðið eina praktiska roynd í viðkomandi lóggávu, fyriskipanum og rundskrivum.

Víst verður á, at B hevur verið til tvær royndarpróvtøkur, tó uttan at kunna vátta ymisk viðurskifti hesum viðvíkjandi, og at ein slík royndarpróvtøka ikki kann javnmetast við próvtøku, sum verður fyriskipað av góðkendum útbúgvingarstovni.

Hesum er Innlendismálaráðið sum so samt í.

Hinvegin, so er endamálið við norsku royndini, sum er ein praktisk roynd: „at dokumentere at kandidaten er egnet til å påtage seg revisionsoppdrag.“

Av skjalatilfarinum sæst, at B m.a. hevur starvast hjá løggildum grannskoðara í 13 ár aftaná at hann hevur staðið cand. merc. aud. útbúgvingina. Hann hevur sostatt drúgvar praktiskar royndir í grannskoðarayrkinum.

Innlendismálaráðið er tí ikki samt við Skráseting Føroya í nevndu grundgevingum fyri at nokta B at verða løggildur sum grannskoðari.

Skráseting Føroya verður tí við atliti at tí, sum her er ført fram, biðin um at viðgera málið av nýggjum.

Sum kunnugt hevur avgreiðslan av hesum máli tikið drúgva tíð. Heitt verður tí á Skráseting Føroya um at avgreiða málið sum skjótast.“

Tann 15. juni heitti aðalstjórin í teldubrævi á Skráseting Føroya um at senda fleiri upplýsingar viðvíkjandi starvsroyndum, prógvum, eftirútbúgvingum v.m. viðvíkjandi 4 av kærarunum. Tann 27. juni 2007 tók Innlendismálaráðið avgerð í málinum hjá D og H, tann 22. august 2007 í málinum hjá J og tann 5. september 2007 í málinum hjá I.

Skráseting Føroya viðgjørdi og avgreiddi málini so hvørt, sum stovnurin móttók kæruavgerðirnar hjá Innlendismálaráðnum. Løggildingarskjølini, sum vóru einsljóðandi, vóru soljóðandi:

„***Skráseting Føroya***
Tilnevnir við hesum

…
Føddur …
Sum

*LØGGILDAN GRANNSKOÐARA*
Sambært avgerð frá Innlendismálaráðnum dagfest …

Sum løggildur grannskoðari hava tygum skyldu at ganga undir tær til eina og hvørja tíð galdandi ásetingar viðvíkjandi virkseminum sum løggildur grannskoðari.

Tilnevningin verður tikin aftur, um treytirnar fyri at vera tilnevndur sum løggildur grannskoðari ikki longur eru loknar.

Um tilnevningin verður tikin aftur ella verður frádømd, skal tilnevningarskjalið beinanvegin latast føroyska skrásetingarmyndugleikanum."

# III. partur

## Frágreiðingar frá myndugleikunum v.m.

***Frágreiðingar frá Innlendismálaráðnum***
Tann 27. februar 2009 boðaði umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum frá, at umboðsmaðurin, eftir at hava lisið skjølini í málinum, umhugsaði at taka málið um løggilding av grannskoðarum upp av sínum eintingum, jbr. 6, stk. 5 í umboðsmanslógini.

Vísandi til fyrra uppskotið um kæruavgerð 20. juni 2006 og kæruavgerðina 12. mars 2007 heitti umboðsmaðurin á Innlendismálaráðið um at greiða frá orsøkini til, at Innlendismálaráðið broytti støðu í málinum, herundir hví Innlendismálaráðið helt at síggjast kundi burtur frá lógarkravinum um eina serliga próvtøku.

Vísandi til skriv frá kærarunum til Innlendismálaráðið, dagfest 19. november 2006, spurdi umboðsmaðurin, um Vinnumálaráðið samskifti við Innlendismálaráðið undir viðgerðini av málinum, og hvat hetta samskiftið snúi seg um. Umboðsmaðurin bað somuleiðis

um eina frágreiðing um seinnu kæruavgerðirnar hjá Innlendismálaráðnum.

Tann 11. mars 2009 sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> **„Viðv.: Avgerð Innlendismálaráðsins í málinum um løggildar grannskoðarar**
> Í skrivi, dagfest tann 27. februar 2009, hevur umboðsmaðurin biðið Innlendismálaráðið um at svara nøkrum spurningum í málinum um løggildar grannskoðarar.
>
> Spurt verður um, hvør orsøkin er til, at ráðið broytti støðu í málinum við avgerð, dagfest tann 12. mars 2007, í mun til ætlanarskrivið, ið er dagfest tann 20. juni 2006.
>
> Svarið til hendan spurning er partshoyringssvarini, skrivið frá R, dagfest tann 22. august 2006, og skrivið frá Skráseting Føroya, dagfest tann 30. november 2006, har tað kemur fram, at tann løggildi grannskoðarin, ið varð løggildur sambært § 1 í løgtingslógini um løggildar grannskoðarar, ikki hevði verið til nakra formliga próvtøku, tí eingin próvtøka kravdist í Noregi um hetta mundið.
>
> Innlendismálaráðið metir ikki, at síggjast kann burtur frá kravinum um próvtøku sambært lógini um løggildar grannskoðarar § 1.
>
> Hinvegin, sum eisini verður sagt í avgerðini, so hevur Skráseting Føroya víðar ræsur, tá ið gerast skal av, hvørja praksis stovnurin skal velja at fylgja á hesum øki, tí sambært § 2 stk. 1 kann Skráseting Føroya tilnevna persónar, sum uttan fyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javntmetast við ta í § 1, stk. 2 nr. 4 og 5 í løgtingslóg um løggildar grannskoðarar, og sum annars lúka treytitnar í § 1, 2 stk, jvb. 3 stk.
>
> Innlendsmálaráðið vísti málið aftur til Skráseting Føroya, og

> tók fyri givið at Skráseting Føroya hevði lagt eina praksis eftir objektivum kriterium fyri góðkenning av próvtøku, sjálvt um próvtøkureglugerðin tá ikki var almannakunngjørd.
>
> Viðvíkjandi skrivinum 2099-016/06, dagfest tann 19. november 2006, frá B og E er at siga, at Innlendismálaráðið er ikki vitandi um, at annað samskifti hevur verið um innihaldið í skrivinum.
>
> Viðvíkjandi málunum, ið Skráseting Føroya tekur upp aftur, er at siga, at Innlendismálaráðið metir, at grundgevingarnar hjá Skráseting Føroya at nokta umsøkjarunum løggilding, eru ósakligar, tí norska royndin er ein roynd í „praktisk revisionsopdrag" f.v.s. at fáa eina hilling av um viðkomandi dugir at arbeiða sum grannskoðari í praksis. Allir hinir umsøkjarnir hava drúgvar royndir í grannskoðaraarbeiði í praksis. Víst verður t.d. til avgerðina viðv. E, dagfest tann 14. mars 2007.
>
> Innlendismálaráðið er altíð sinnað at koma við fleiri viðmerkingum, um umboðsmaðurin metir hetta neyðugt."

Tann 11. mai 2009 boðaði umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum frá, at umboðsmaðurin við heimild í § 6, stk. 5 hevði gjørt av at taka viðgerðina av málunum til viðgerðar.

Tann 4. januar 2010 boðaði umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum frá, at umboðsmaðurin var farin undir viðgerðina av málinum. Vísandi til skriv ráðsins 11. mars 2009 spurdi umboðsmaðurin, um Innlendismálaráðið váttaði, at Vinnumálaráðið hevði vent sær til Innlendismálaráðið. Umboðsmaðurin sendi samstundis Innlendismálaráðnum til viðmerkingar 3 notat, dagfest ávikavist 30. mars 2007, 3. mai 2007 og 30. mai 2007, ið stjórin á Skráseting Føroya hevði skrivað eftir samrøður við aðalstjóran í Innlendismálaráðnum, og teldubræv frá 7. og 31. mai 2007 við samskifti millum somu persónar.

Tann 15. januar 2010 sendi Innlendismálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„Víst verður til skriv Umboðsmansins, dagfest tann 4. januar 2010, um løggilding av grannskoðarum.

Innlendismálaráðið skal boða frá, at ráðið ikki hevur samskift um innihaldið í ítøkuliga málinum, um løggilding av grannskoðarum, við Vinnumálaráðið.

Harafturímóti hevur Innlendismálaráðið kunnað seg um støðuna hjá Vinnumálaráðnum til at gera reglur á økinum, og endurgevingin í meylinum frá M, dagfestur tann 31. mai 2007, er tí røtt.

Viðvíkjandi skrivinum frá 19. november 2006 frá B og E, so er tað samskifti við Innlendismálaráðið, ið hugsað verður um.

At enda skal vera sagt frá, at fundarfrágreiðingarnar samsvara í stóran mun við tað, sum kom fram undir samrøðunum. Tó legði Innlendismálaráðið alla tíðina dent á, at ráðið ikki kundi vegleiða Skráseting Føroya í hesum máli, tí ráðið var kærumyndugleiki í málinum."

***Frágreiðingar frá Vinnumálaráðnum***

Tann 27. februar 2009 boðaði umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum frá, at umboðsmaðurin, eftir at hava lisið skjølini í málinum hjá Innlendismálaráðnum, umhugsaði at taka málið um løggilding av grannskoðarum upp av sínum eintingum, jbr. 6, stk. 5 í umboðsmanslógini, og at umboðsmaðurin hevði biðið Innlendismálaráðið um eina frágreiðing um málið.

Vísandi til skriv frá kærarunum til Innlendismálaráðið, dagfest 19. november 2006, og at viðgerðin av málinum vegna ógegni var flutt í Innlendismálaráðið, varð Vinnumálaráðið biðið um at greiða frá orsøkini til, at Vinnumálaráðið luttók á fundi við kærarunum. Umboðsmaðurin bað somuleiðis um eina frágreiðing um tey viðurskifti, sum komu fram í umrødda skrivinum frá tveimum av kærarunum, herundir at Vinnumálaráðið skuldi hava samskift við Innlendismálaráðið um málið og boðað Innlendismálaráðnum

frá, at umsóknirnar um løggilding áttu at verið gingnar á møti. Umboðsmaðurin bað somuleiðis um eina frágreiðing um orsøkina til, at Vinnumálaráðið skuldi havt givið Skráseting Føroya boð um at steðga arbeiðinum við próvtøkukunngerðini. Umboðsmaðurin bað samstundis Vinnumálaráðið lata sær skjølini í kærumálinum og málinum um arbeiðið við próvtøkukunngerðini.

Tann 23. mars 2009 sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> „**Viðvíkjandi málinum um løggilding av grannskoðarum, tykkara j. nr. …, Vmr. J. nr. …**
> Víst verður til skriv, dagfest 27. februar 2009, frá Løgtingsins Umboðsmanni, og til tlf. samr. 20. mars 2009 …
>
> Umboðsmaðurin hevur biðið um skjølini í kærumálinum, sum varð latið Innlendismálaráðnum til avgerðar, og er skjalamappan við hesum við skjølunum 20. mars 2009 útflýggjað (til láns) Umboðsmanninum. Skjølini viðvíkjandi kunngerðini verða send í morgin.
>
> Í skrivinum frá Umboðmanninum, verður víst til skriv frá kærarunum, sum var viðlagt skrivinum frá Umboðsmanninum. Í nevnda skrivi frá kærarunum verður greitt frá einum fundi, sum táverandi landssstýrismaðurin í Vinnumálum, og ein frv. fulltrúi í ráðnum skulu hava havt við kærarnar meðan kærumálið var til viðgerðar í Løgmálaráðnum. Á hesum fundi skal m.a. vera sagt,
>
> at Vinnumálaráðið fór at boða Løgmálaráðnum frá, at kæran átti at komast á møti, og at Vinnumálaráðið fór at boða Skráseting Føroya frá at steðga at gera kunngerð um próvtøku at gerast løggildur grannskoðari.
>
> Umboðsmaðurin hevur biðið um frágreiðing um hetta, og skal viðmerkjast:

> Eingin fundarfrágreiðing ella onnur skjøl finnast í Vinnumálaráðnum um nevnda fund, og tað sæst heldur ikki av skjølum Vinnumálaráðsins, at Vinnumálaráðið hevur mælt Løgmálaráðnum til at koma kæruni á møti, ella at Vinnumálaráðið skal hava biðið Skráseting Føroya steðga við kunngerðini."

Tann 11. mai 2009 boðaði umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum frá, at umboðsmaðurin við heimild í § 6, stk. 5 hevði gjørt av at taka málið til viðgerðar.

Tann 4. januar 2010 boðaði umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum frá, at umboðsmaðurin var farin undir viðgerðina av málinum, og at umboðsmaðurin eisini viðgjørdi viðurskifti viðvíkjandi Vinnumálaráðnum undir viðgerðini av kærumálunum. Vísandi til at Vinnumálaráðið upplýsti ikki at hava skjøl viðv. fundinum í Vinnumálaráðnum tann 16. november 2006, ella at Vinnumálaráðið skuldi havt biðið Skráseting Føroya um at steðga arbeiðnum við próvtøkukunngerðini, upplýsti umboðsmaðurin Vinnumálaráðnum, at millum skjølini hjá Skráseting Føroya vóru fleiri skjøl, sum ikki sóust vera skrásett í málunum, sum umboðsmaðurin hevði fingið til láns frá Vinnumálaráðnum. Hetta vóru m.a. ein fundarfrásøgn, skrivað av einum fulltrúa í ráðnum, ið var send Skráseting Føroya við teldubrævi, har tað m.a. stóð: „Avtalað var: … Skrásetingin steðgar við arbeiðinum við próvtøkukunngerðini, sum liggur á borðinum í løtuni." umframt teldubrøv frá einum deildarstjóra í ráðnum til stjóran á Skráseting Føroya. Umboðsmaðurin bað Vinnumálaráðið um viðmerkingar til vantandi skrásetingina í Vinnumálaráðnum, og spurdi, um Vinnumálaráðð hevði onnur skjøl málinum viðvíkjandi.

Umboðsmaðurin vísti somuleiðis á, at millum skjølini hjá Skráseting Føroya var eitt telefonnotat, sum endurgav eina telefonsamrøðu millum stjóran á Skráseting Føroya og ein deildarstjóra í Vinnumálaráðnum og spurdi, um telefonnotatið samsvaraði við tað, sum var sagt í telefonsamrøðuni.

Hjálagt skrivi umboðsmansins til Vinnumálaráðið var:

- teldubræv 14. november 2006 til Skráseting Føroya frá Vinnumálaráðnum við fundarfrásøgn,
- telefonnotat, dagfest 12. mai 2007, ið stjórin á Skráseting Føroya hevði skrivað eftir samrøðu við deildarstjóra í Vinnumálaráðnum, og
- teldubrævasamskifti millum stjóran á Skráseting Føroya og ein annan deildarstjóra í Vinnumálaráðnum frá 15. 16. og 22. mars 2007 og 4. 9. og 10. apríl 2007.

Í skrivi, dagfest 21. januar 2010, sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

„**Viðv.: Løggilding av grannskoðarum**

Víst verður til skriv, dagfest 4. januar 2010, frá Løgtingsins Umboðsmanni til Vinnumálaráðið viðvíkjandi nevnda málið.

Umboðsmaðurin spyr um/biður um viðmerkingar til:

1. Vantandi skráseting í Vinnumálaráðnum av skjølum, og um tað eru onnur skjøl í málinum, sum Vinnumálaráðið ikki hevur latið Umboðsmanninum.
2. Um ávíst telefonnotat eftir telefonsamrøðu við Æ, deildarstjóra, er í samsvari við tað, sum varð sagt í telefonsamrøðuni.
3. Hvat verður viðgjørt á mánadagsfundum í Vinnumálaráðnum, og hvør luttekur á hesum fundum.

Ad 1.
Fundarfrásøgnin hjá P er skrásett undir j. nr. …, sum snýr seg um dagføring av m.a. vinnufelagalógarøkinum. Skjøl viðvíkjandi kærumálinum um løggildingina av grannskoðarunum, sum var flutt Innlendismálaráðnum, eru skrásett undir j. nr. …, herundir allir teldupostarnir frá Z, undantikin ein (telduposturin frá Z til

M, dagfestur 15. mars 2007), og Umboðsmaðurin hevur fingið øll skjøl, sum eru skrásett í tí málinum.

Ad 2.
Æ, deildarstjóri, viðmerkir, at hon minnist seg ikki hava sagt nakað av tí, sum endurgivið er í notatinum.

Ad 3.
Mánadagsfundir eru leiðslufundir, har landsstýrismaðurin, aðalstjórin og deildarstjórar vanliga luttaka. Ymisk mál av yvirskipaðum slag verða viðgjørd, eitt nú lógarlistar, uppskot um broytingar í lóggávu og skipanum o.a. Vanlig avgerðarmál, (fyrisitingarligar avgerðir), t.d. kærumál, verða sum meginregla ikki viðgjørd á hesum fundum.

Viðmerkingar annars:
Orsakað av, at ein av teimum kærandi var sonur aðalstjóran í Vinnumálaráðnum, varð mett, at tað var betur, at Vinnumálráðið ikki viðgjørdi kæruna, men at hetta málið varð flutt til annað aðalráð at viðgera. Vinnumálaráðið heitti tí á Løgmansskrivstovuna at flyta kærumálið til annað aðalráð, og tann 13.03.2006 flutti Løgmansskrivstovan málið til Innlendismálaráðið.

Innlendismálaráðið tók avgerð í málinum fyrst í mars mánað 2007, og varð málið víst aftur til Skráseting Føroya. Skráseting Føroya vildi ikki, sum kærarnir vildu tað, beinanvegin eftir at avgerð Innledismálaráðsins fyrilá, taka avgerð um at útskriva løggilding til teir kærandi, og hildu teir, at her var talan um óneyðugt drál. Tá kært varð um hetta til Vinnumálaráðið, varð spurningurin um viðgerðartíðina hjá Skráseting Føroya eftir at Innlendismálaráðið hevði tikið avgerð, í fyrstu atløgu tikin upp í Vinnumálaráðnum. Vinnumálaráðið tók tó ikki nakra avgerð viðvíkjandi hesum spurninginum, tí tann 27.03.07 varð heitt á Løgmansskrivstovuna um eisini at flyta spurningin um viðgerðartíðina til Innlendismálaráðið at avgreiða.

Leggjast skal aftrat, at nevnda kærumál hvørki áðrenn ella eftir,

at avgerð Innlendismálráðsins fyrilá, varð viðgjørt á omanfyri nevndu leiðslufundum, hvørki viðvíkjandi substansinum í málinum ella viðvíkjandi viðgerðartíðini."

Eftir at 9 persónar klagaðu til umboðsmanninum í juni 2008 um avgerðirnar hjá Vinnumálaráðnum at sýta teimum løggilding sum grannskoðarar, sendi Vinnumálaráðið 28. august 2008 umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

„**Viðvíkjandi klagu frá N, adv.**

1. Skriv frá Løgtingsins Umboðsmanni

Víst verður til skriv, dagfest 25. juni 2008, frá Løgtingsins Umboðsmanni til Vinnumálaráðið.

Í nevnda skrivi biður Umboðsmaðurin um eina frágreiðing frá Vinnumálaráðnum um:
1. Niðurstøðuna í málinum viðvíkjandi kæru til Vinnumálaráðið um avgerð hjá Skráseting Føroya viðvíkjandi umsókn um at gerast løggildur grannskoðari.
2. Heimildirnar og krøvini til løggilding av grannskoðarum, herundir serliga:
- hvør rættarstøðan og siðvenjan var undan kunngerð nr. 1 frá 2. mai 2007 frá Skráseting Føroya um próvtøku til at gerast løggildur grannskoðari,
- hvør rættarstøðan var aftaná nevndu kunngerð, og
- hvør rættarstøðan var, tá ráðið tók avgerð sína tann 17. januar 2008.

**2. Frágreiðing**

**2.1. Niðurstøðan í málinum viðvíkjandi kæru til Vinnumálaráðið um avgerð hjá Skráseting Føroya viðvíkjandi umsókn um at gerast løggildur grannskoðari**

Í skrivi, dagfest 13. november 2007, kærdi N, adv., vegna klientar

sínar avgerð hjá Skráseting Føroya viðvíkjandi umsókn um at gerast løggildur grannskoðari.

Kæran fevndi um 9 persónar, sum høvdu søkt Skráseting Føroya um at verða skrásettir sum løggildir grannskoðarar. Allir umsøkjararnir høvdu lokið prógv sum cand. merc. aud, og allir høvdu neyðugu arbeiðsroyndirnar við grannskoðaraarbeiði á grannskoðaravirki.

Skáseting Føroya sýtti at skráseta umsøkjararnar við teirri grundgeving, at teir ikki høvdu lokið próvtøku sbrt. kunngerð nr. 1 frá 2. mai 2007 um próvtøku til at gerast løggildur grannskoðari (próvtøkukunngerðin). Umsóknirnar vórðu latnar Skráseting Føroya í juli, august og oktober 2007.

Vinnumálaráðið staðfesti avgerðina hjá Skráseting Føroya, og varð avgerðin hjá ráðnum í skrivi, dagfest 17. januar 2008, fráboðað N, adv. Í skrivinum til N, adv., varð grundgivið soleiðis:

*„Áðrenn próvtøkukunngerðin kom í gildi, var tað galdandi, at tann, sum. t. d, hevði staðið prógv sum cand. merc. aud. kundi verða skrásettur sum løggildur grannskoðari uttan aðra serliga próvtøku. Hetta broyttist við próvtøkukunngerðini soleiðis, at nú krevst serlig grannskoðarapróvtøka. Heimildin fyri kunngerðini er § 4, stk. 1 í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar. Kunngerðin var á nøktandi hátt lýst í Dimmalætting, sum er alment lýsingarblað. Umsóknirnar hjá teimum kærandi vórðu latnar Skráseting Føroya, eftir at próvtøkukunngerðin varð lýst, og vóru tí fevndar av reglunum í kunngerðini um serliga próvtøku. At nakrir persónar við somu útbúgving sum teir kærandi, hava fingið løggilding uttan onnur serlig útbúgvingarkrøv, verður ikki mett at hava týdning í málinum, tí teirra umsóknir vórðu latnar Skráseting Føroya, áðrenn kunngerðin kom í gildi, og rættargrundarlagið við tí varð broytt“.*

N, adv. metir, at hansara klientar ikki eiga at vera fevndir

av ásetingunum í próvtøkukunngerðini, men av tí rættargrundarlagi, sum var, áðrenn kunngerðin kom í gildi. Eins og í kæruni til Vinnumálaráðið eru í klaguni til Umboðsmannin høvuðsgrundgevingarnar hesar:

a) At við einans at nýta próvtøkukunngerðina, sum grundarlag fyri avgerðini, varð tað tilvildarliga gjørdur munur á umsøkjarum, sum lótu sínar umsóknir inn áðrenn kunngerðin kom í gildi, og teimum, sum lótu umsóknirnar inn eftir, at kunngerðin kom í gildi, og
b) at kunngerðin ikki var lýst á nøktandi hátt, og tí íkki var galdandi.

Ad a

Við kunngerðini varð tann ivi avkláraður, sum hevði verið frammanundan, um kravið um eina serliga próvtøku kundi setast, uttan at Skráseting Føroya hevði gjørt og kunngjørt reglur um tað, og varð við kunngerðini fyri øll mál í framtíðini (eftir at kunngerðin varð kunngjørd í Dimmalætting 3. mai 2008 (2007, *mín viðm.*) útvegað tann heimild, sum eftir kæruavgerðini hjá Innlendismálaráðnum, dagfest 12. mars 2007, manglaði. Tað er tí ikki talan um tilvildarliga praksisbroyting í einstøkum málum, men í øllum málum í framtíðini, og broytingin varð kunngjørd alment í Dimmalætting 3. mai 2008, áðrenn klientarnir hjá N lótu Skrásetingini umsókn.

Kravið um eina serliga próvtøku hevur greiða heimild í § 1, stk. 2, nr. 4, og er sakliga væl grundað, og hetta kravið verður sett við heimild í tilsvarandi donsku lógini, sum varð nýtt sum fyrimynd fyri grannskoðaralógina (sí niðanfyri undir pkt, 2.2).

Eisini áðrenn próvtøkukunngerðin var kunngjørd kundu klientarnar hjá N ikki vera í iva um, at kravið um eina serliga próvtøku kundi setast eftir § 1, stk. 2, nr. 4, smbr. § 4, stk. 1 í lógini. Tað, at tað so vísti seg eftir kæruavgerð, at nakrir persónar, orsakað av ófullfíggjaðum rættargrundarlagi, tá teir lótu inn umsóknir teirra (manglandi kunngerð) og orsakað av eini løggilding í 2006 (2005, *mín viðm.*) hóast greiðu heimildina í lógini at seta

krav um eina serliga próvtøku, sum ta í próvtøkukunngerðini ásettu, eftir kæruavgerð vórðu tilnevndir løggildir grannskoðarar, uttan at hava staðið eina tílíka serliga próvtøku, kann ikki geva øðrum persónum sum søktu, eftir at kunngerðin varð kunngjørd, krav upp á somu fyrimunarligu støðu, vísandi til, at rættarstøðan áðrenn kunngerðina var ógreið.
…

**2.2. Rættarstøða og siðvenjan undan próvtøkukunngerðini**
Heimildin at tilnevna løggildar grannskoðarar er ásetingin í § 1, stk. 1 í grannskoðaralógini, sum er soljóðandi: „*Tann føroyski skrásetingarmyndugleikin tilnevnir løggildar grannskoðarar*“. Eftir § 1, stk. 1 í grannskoðaralógini tilnevnir føroyski skrásetingarmyndugleikin (Skráseting Føroya) løggildar grannskoðarar. Fyri at tilnevna løggildar grannskoðarar skal m.a. eftir § 1, stk. 2, nr. 4 og nr. 5 í lógini setast sum treyt, at viðkomandi hevur staðið eina serliga próvtøku og í minsta lagi í 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í øllum vanligum grannskoðanararbeiðum á skrivstovu hjá einum løggildum grannskoðara. Eftir § 4, stk. 1 skal Skráseting Føroya áseta nærri reglur fyri ta í § 1, stk. 2, nr. 4 umrøddu próvtøku, herundir teytirnar fyri at fara upp til próvtøku, próvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming. Áðrenn próvtøku-kunngerðina vórðu ongar reglur settar smbrt. § 4, stk. 1 í lógini.

Eftir § 2, stk. 1 í lógini kann tann føroyski skrásetingarmyndugleikin tilnevna persónar, sum kunnu ávísa, at teir uttan fyri Føroyar hava fingið eina útbúgving, sum kann javnmetast við ta útbúgving, ið nevnd er í § 1,2. stk., nr. 4 og 5, og sum annars lúka treytirnar í § 1,2. stk. jvb. 3. stk.

Av viðmerkingunum til løgtingslógina sæst, at lógin, sum er frá 1993, byggir á (og er meinlík) tágaldandi donsku lógina um statsautoriseraðar grannskoðarar (løgtingstíðindi 1992, s. 829), og eins og eftir løgtingslógini var í donsku lógini krav um eina serliga roynd. Danska lógin er fleiri ferðir broytt síðani, men kravið um eina serliga roynd er framvegis galdandi, smbr. bek.

nr. 660 frá 26.06.2008. Treytin fyri at sleppa upp til royndina eftir nevndu bek. er, at viðkomandi hevur ástøðiliga útbúgving sum cand. merc. aud. og í § 6 í bek er m.a. ásett „*Den skriftlige prøve til henholdsvis revisoreksamen og kvalifikationseksamen består af en eller flere skriftlige opgaver efter Revisorkommissionen bestemmelse. Den skriftlige og mundtlige prøve skal godtgøre kandidaternes praktiske duelighed indenfor de områder, som henhører under statsautoriserede revisorers henholdsvis registrerede revisorers virkefelt*“.

Síðani løgtingslógin um løggildar grannskoðarar kom í gildi, og til kunngerðin um próvtøku til at gerast løggildur grannskoðari kom í gildi 4. mai vóru givnar 6 løggildingar. Av teimum hava 5 fingið løggilding vísandi til, at teir hava fingið løggilding í Danmark (statsautoriseraðir), meðan ein hevur fingið løggilding vísandi til, at viðkomandi hevði løggilding í Noregi. Til 2006 vóru tað bert persónar, sum høvdu danska løggilding (statsautoriasatión), sum vórðu løggildir eftir løgtingslógini. Í 2006 var ein persónur løggildur, sum hevði norska løggilding. Eftir norsku lóggávuni var kravið at verða løggildur at viðkomandi hevði staðið højere revisorstudium (HRS), men tá viðkomandi fekk sína løggilding har, var umframt kravið um HRS einki tilsvarandi krav sum í Danmark um eina serliga roynd.

Í skrivi, dagfest 27. januar 2006 avgjørdi Skráseting Føroya, at sýta at tilnevna nakrar persónar løggildar grannskoðarar. Hesir høvdu allir útbúgving sum cand. merc. aud í Danmark, men høvdu onga løggilding haðani ella frá øðrum landi. Avgerðin varð grundgivin við, at umsøkjararnir ikki høvdu staðið serliga próvtøku smbrt. § 1 stk. 2 nr. 4, í løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar, og at teir ikki kundu vísa á, at teir uttan fyri Føroyar høvdu eina útbúgving, sum gevur rætt til løggilding smb. § 2. stk. 1.

Avgerðin hjá Skráseting Føroya varð kærd. Innlendismálaráðið (nú Løgmálaráðið) viðgjørdi kæruna.

Sum nevnt skuldi tað eftir lógini verið ásettar reglur um próvtøku, herundir treytirnar fyri at fara upp til próvtøku, próvtøkukrøv, próvtøkuhald og próvtøkudøming soleiðis sum tað er ásett í 4, stk. 1, og soleiðis sum hesar reglur nú eru ásettar í próvtøkukunngerðini. Eftir kæruavgerðini hjá Innlendismálaráðnum var rættarstøðan tann, at av tí at hesar reglur ikki vóru ásettar, og við tað, at tað við avgerð hjá Skrásetingini í 2006, varð givin ein løggilding til grannskoðara við norskari løggilding, sum ikki hevði staðið eina serliga próvtøku svarandi til tað, sum í Danmark krevst at vera løggildur har, kundi kravið um eina serliga útbúgving umframt cand. merc. aud frá Danmark ikki setast persónum við cand. merc. aud útbúgving frá Danmark, og sum høvdu søkt um løggilding um somu tíð, sum umsóknin hjá persóninum við norsku løggildingini var til viðgerar. Skrásetingin kundi broyta praksis, men hetta kundi ikki gerast afturvirkandi.

**Rættarstøðan aftaná próvtøkukunngerðina**
Víst verður til kunngerð nr. 1 frá 2. mai 2007 um próvtøku til at gerast løggildur grannskoðari, sum verður løgd við.

Ásetingarnar í kunngerðini galda eftir at kunngerðin kom í gildi 4. mai 2007, og fyri at ásetingarnar (ikki, *mín viðm.)* skuldu hava afturvirkandi virkna, fevna ásetingarnar í kunngerðini ikki um umsóknir, sum vóru latnar skrásetingini áðrenn kunngerðin kom í gildi.

**Rættarstøðan, tá Vinnumálaráðið tók avgerð 17. januar 2007**
(2008, *mín viðm.)*
Løgtingslóg nr. 116 frá 11. desember 2007 um løggildar og skrásettar grannskoðarar, sum kom í gildi 1. januar 2008, avloysti løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993 um løggildar grannskoðarar. Í nýggju lógini er ásett sama krav um eina serliga próvtøku, og sama heimild at áseta reglur um nevndu próvtøku. Til nýggj próvtøkukunngerð er kunngjørd verður próvtøkukungerðin frá mai 2008 (2007, *mín viðm.*) framvegis nýtt."

Tann 8. oktober 2008 sendi Vinnumálaráðið í sama máli umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> „**Viðvíkjandi klagu frá N, adv.**
> Víst verður til skriv, dagfest 28. august 2008, frá Vinnumálaráðnum til Løgtingsins Umboðsmann, viðvíkjandi nevndu klagu og til skriv, dagfest 29. september 2008, frá Løgtingsins Umboðsmanni til ráðið viðvíkjandi viðmerkingum, sum N, adv. hevur latið Løgtingsins Umboðsmanni til nevnda skriv frá Vinnumálaráðnum.
> …
> At tað ikki hevur verið ætlanin við nýggju lógini at broyta rættarstøðuna viðvíkjandi kravinum um eina serliga praktiska royndi, gongur fram av nýggju lógini, har tað, sum nevnt í skrivinum frá Vinnumálaráðnum frá 28. august 2008, er ásett sama krav um eina serliga próvtøku, og sama heimild at áseta reglur um próvtøku, og hetta gongur eisini fram av viðmerkingunum til lógaruppskotið.“

***Viðmerkingar frá fyrrverandi landsstýrismanninum í vinnumálum v.m.***
Tann 4. januar 2010 kunnaði umboðsmaðurin K, fyrrverandi landsstýrismann í vinnumálum um umboðsmansviðgerðina og spurdi, um hann ynskti at gera viðmerkingar til skriv, dagfest 19. november 2006, frá kærarunum til Innlendismálaráðið og 3 telefonnotat, dagfest 10. mai, 16. mai og 30. mai 2007, sum stjórin á Skráseting Føroya hevði skrivað.

Umboðsmaðurin hevur móttikið soljóðandi viðmerkingar frá fyrrverandi landsstýrismanninum í skrivi, dagfest 14. januar 2010:

> „Vísandi til skriv umboðsmansins, dagfest 4. januar 2010, hevur undirritaði hesar viðmerkingar:
>
> Málið viðvíkjandi løggildingini av grannskoðarum var flutt av løgmanni úr Vinnumálaráðnum (VMR) í Innlendismálaráðið (IMR) í mars 2006. Hetta var orsakað av gegnistrupulleika.

Um hetta mundið var skipanin í eini skiftistíð, har Skráseting Føroya (SF) bygdi upp regluverk viðvíkjandi grannskoðaraøkinum. Av somu orsøk var leypandi samskifti millum SF og VMR.

Í skrivinum frá umboðsmanninum verður víst til skriv til IMR, j.nr. …, har fundur er umrøddur millum ónevndar persónar og undirritaða saman við P, fulltrúa, um kæru send IMR.
Undirritaði hevur fingið fingið soljóðandi frágreiðing frá P mánadagin 11. januar 2010, sum hon hevði úr notatbók síni:

*„Dagur: 16. nov. 2006. Stað: Vinnumálaráðið*
*Møtt á fundi vóru K, landsstýrismaður og P, fulltrúi fyri Vinnumálaráðið. B, E og F fyri grannskoðarar.*
*Grannskoðararnir høvdu biðið um fundin fyri at kunna landsstýrismannin um eina kæru, sum teir høvdu sent Vinnumálaráðnum og fyri at kunna um útbúgving av grannskoðarum í øðrum londum (londum rundan um okkum).*
*Viðvíkjandi kæruni kunnaði landsstýrismaðurin um, at orsakað av ógegni var kæran flutt úr Vinnumálaráðnum yvir í Innlendismálaráðið. Soleiðis hevði Vinnumálaráðið einki við kæruna at gera.*
*Restina av fundinum kunnaðu grannskoðararnir um útbúgving av grannskoðarum í Danmark kontra øðrum londum. Landsstýrismaðurin kunnaði um hvat Vinnumálaráðið ætlaði at gera á lóggávuøkinum*“

Undirritaði minnist fundin soleiðis sum endurgivið er í fundarfrásøgnini. Tosað var generelt og annars lurtað eftir sjónarmiðunum.

So vítt undirritaði minnist, so var málið hjá kærarunum avgreitt í IMR um miðjan mars 2007.

Soleiðis, sum undirritaði minnist málsgongdina, so var hon sera drúgv, og var hon ikki í samljóði við tíðarásetingarnar, sum galdandi eru millum almennan myndugleika og borgararnar.

Partarnir í málinum høvdu ilt við at góðtaka støðutakanina hjá SF, og gjørdu galdandi, at teir ikki fingu somu viðgerð, sum annar umsøkjari í somu støðu. Eisini høvdu partarnir ilt við at góðtaka, at VMR ikki kundi gera sína ávirkan galdandi tá umráddi løggildingina av grannskoðarum.

Viðvíkjandi telefonnotatunum hjá M, stjóra, skal vera upplýst, at undirritaði ikki minnist nakað til telefonsamrøðurnar 10., 16. og 30. mai 2007. Undirritaði er heldur ikki kunnaður um hesi telefonnotat, og hevur ongantíð fingið tey sendandi til góðkenningar. Skal tó viðmerkja, at undirritaði er rættuliga vísur í ikki at hava málborðið seg soleiðis, sum ført verður fram í hesum notatum.

Annars skal vera upplýst, at undirritaði gjøgnum fleiri ár hevur havt óteljandi telefon- samrøður við M um mong ymisk mál, bæði málum sum viðvíkja arbeiðinum hjá M, men eisini øðrum málum, sum høvdu/hava okkara felags áhuga, eitt nú málið um nýggja ferju til Nólsoyar, dýpingin av havnini og orkuprojektið, sum skuldi umskipa alla orkunýtsluna í oynni til varandi orku. M var eisini partvís við í hesum verkætlanum.

Eisini skal vera upplýst, at undirritaði og M kennast sera væl, og vit hava altíð havt eitt opið orðaval í øllum handa viðurskiftum. Orðaval, sum eyðkennir samskifti millum kenningar.

Vísandi til omanfyristandandi, so minnist undirritaði ikki serstakt umrøddu telefonsamrøður, hóast undirritaði minnist at hava tosað við M og spurt eftir málinum um løggildingina. Soleiðis, sum undirritaði minnist málið um løggildingina, var M rættuliga aktivur í síni málsviðgerð, og hevði undirritaði greiða kenslu av, at M persónliga gekk høgt uppí málið.

Undirritaði hevði hinvegin eingi persónlig áhugamál í nevndu viðgerð, og hevur samskiftið okkara millum eisini avspeglað henda veruleika.

> Eisini skal vera upplýst, at málið um løggildingina fleiri ferðir varð umrøtt óformliga millum landsstýriskollegarnar, møguliga tí, at umsøkjararnir vendu sær persónliga til landsstýrisfólk.“

Í skrivi, dagfest 4. januar 2010, kunnaði umboðsmaðurin P, fyrrverandi fulltrúa í Vinnumálaráðnum um umboðsmansviðgerðina og sendi skrivið frá kærarunum til Innlendismálaráðið, dagfest 19. november 2006, um fundin í Vinnumálaráðnum 16. november 2006 til viðmerkingar. Vísandi til, at fyrrverandi landsstýrismaðurin upplýsti at hava fingið endurgevingina av umrødda fundinum frá einum fyrrverandi fulltrúa í ráðnum, spurdi umboðsmaðurin fulltrúan, um tað var møguligt at lata umboðsmanninum eitt avrit av umrøddu fundarfrásøgnini. Í telefonsamrøðu 15. juni 2010 við umboðsmannin boðaði fyrrverandi fulltrúin umboðsmanninum frá, at hon ikki hevði viðmerkingar til skrivið frá kærarunum. Tann 21. juni 2010 móttók umboðsmaðurin í teldubrævi eina einsljóðandi endurgeving av fundinum.

## *Frágreiðing frá Skráseting Føroya*

Umboðsmaðurin kunnadi tann 20. mars 2009 Skráseting Føroya um, at umboðsmaðurin umhugsaði at taka málið upp av sínum eintingum og bað um frágreiðingar um viðgerðina av málinum, herundir samskiftið ímillum Skráseting Føroya og ávikavist Innlendismálaráðið og Vinnumálaráðið, undir viðgerðini av málinum. Umboðsmaðurin bað somuleiðis um eina frágreiðing um arbeiðið viðvíkjandi próvtøkukunngerðini og samskiftið við Vinnu- og Innlendismálaráðið í hesum sambandi.

Tann 11. mai 2009 boðaði umboðsmaðurin Innlendismálaráðnum frá, at umboðsmaðurin við heimild í § 6, stk. 5 hevði gjørt av at taka viðgerðina av málunum til viðgerðar.

Tann 3. apríl 2009 sendi M, stjóri á Skráseting Føroya umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> „**Frágreiðing um málið um løggilding av grannskoðarum**
> …

**Frágreiðing um málið, herundir samskifti við ávíkavist Innlendismálaráðið (IMR) og Vinnumálaráðið (VMR)**

**Bakgrundin**

Undirritaði verður partur av málinum, tá SF tann 15. august 2005 umsitingarliga verður flutt frá VMR til FSE. Frammanundan, í mars 2005, hevði SF góðkent umsøkjara við norskari statsautorisation, vísandi til tágaldandi lóg um løggildar grannskoðarar(Løgtingslóg nr. 120 frá 21. mai 1993). Tó vantaðu nøkur formkrøv, soleiðis at viðkomandi ikki endaliga fekk føroyska løggilding fyrr enn í september 2005. Hetta var fyrsta tilnevning sambært § 2, stk. 1 í grannskoðaralógini av persóni, ið hevði norska statsautorisation at vísa á. Allir løggildir grannskoðarar áðrenn hetta, høvdu fingið løggilding sambært § 2, stk.1 vísandi til danska statsautorisation.

Tann 15. apríl 2005 søktu teir 7 umsøkjararnir, ið hetta málið snýr seg um, um føroyska løggilding. (Hetta broyttist til 6 persónar, av tí at tann eini umsøkjari, stendur danska „revisoreksamen" og fær danska statsautorisatión. Síðan fær viðkomandi løggilding sambært grannskoðaralógini § 2, stk. 1 vísandi til eina danska stasautorisatión). Umsóknirnar frá teimum 7 eru stórt sæð orðaðar eins. Tey vísa til at SF hevði veitt løggilding til ein persón við norskari statsautorisatión, men at áðrenn hetta høvdu bert persónar við danskari statsautorisatión fingið løggilding og hava annars ta fatan av norsku reglunum/krøvunum um statsautorisatión, at tey kunnu samanberast við teirra egnu útbúgving, teirra egnu útbúgving og førleikar, og meta seg sambært umsóknini at uppfylla krøvini í grannskoðaralógini § 2, stk. 1 um løggilding.

SF fráboðar í juni 2005 umsøkjarunum at støða verður tikin til umsóknina eftir summarfrítíðina. Í oktober 2005 sendir SF uppskot til avgerð til umsøkjararnar til hoyringar. Sí avrit av skrivi dagfest 28. oktober 2005. Niðurstøða er at SF ikki gongur umsóknunum á møti, serliga vísandi til at viðkomandi ikki kann

vísa á útbúgving, sambært § 2, stk. 1, sum er viðurkend í øðrum landi at virka sum løggildur grannskoðari.

Í november 2005 móttekur SF skriv frá R, ið hereftir umboðar teir 7 umsøkjararnar í málinum. Víst verður til skriv frá R, dagfest 14. november 2005. R kemur við sínum grundgevingum og við tí niðurstøðu at teir 7 umsøkjarirnir hava rættarkrav uppá at fáa løggilding.

SF viðger síðan málið og leitar sær ymiska serkøna hjálp, m.a, frá advokati. Sí avrit av skjølum november 2005 – januar 2006.

Tann 27. januar 2006 sendir SF teimum 7 umsøkjarunum endaliga avgerð í málinum.

Í februar 2006 kærir R avgerðina hjá SF til VMR. Orsakað av at VMR er innhabilt verður kærumyndugleikin latin til IMR ístaðin. VMR er innhabilt orsakað av, at tann eini umsøkjarin er sonur aðalstjóran í VMR.

Aftaná fyrispurningar frá IMR og aftursvar í apríl-mai 2006, móttekur SF tann 20. juni 2006 uppskot til avgerð í kærumálinum til hoyringar. Avsendari er deildarstjóri á IMR. LUM hevur fingið avrit av hesi avgerð. Niðurstøðan er, at IMR ætlar at staðfesta avgerðina hjá SF um at sýta umsøkjarunum løggilding sum grannskoðarar. Av tí at IMR ætlar at staðfesta avgerðina hjá SF ger SF ikki viðmerkingar til uppskoti til avgerð.

SF frættir ikki aftur frá IMR, fyrr enn november 2006, tá SF móttekur avrit av skrivi frá august 2006 frá R til IMR og sum SF verður biðið um at gera viðmerkingar til. SF sendir sínar viðmerkingar til IMR tann 30. november 2006. Sí avrit.

Tann 21. desember 2006 móttekur SF nýtt uppskot til avgerð frá IMR. Avsendari er nú aðalstjórin í IMR.

**Gongdin frá tí at SF móttekur nýtt uppskot til avgerð til juni 2007 tá løggilding verður veitt**
IMR hevur nú broytt niðurstøðu í kærumálinum, og vísir málið til nýggja viðgerð á SF. SF er sjálvsagt ørkymlað av hesum, serliga tí at viðgerðin í 4 síðu longu avgerðini er nágreiniliga eins sum tað uppskot til avgerð, ið fyrilá frá tann 20. juni 2006. Tað eru einans 3 tey síðstu reglubrotini á síðu 4, ið eru broytt og niðurstøðan er øvugt, við at IMR nú metir at SF við at geva tí eina umsøkjarunum løggilding í september 2005, tá „tilvitað, ógrundað og uttan sakliga orsøk hevur gjørt av at broyta siðvenjuna og gera mun á umsøkjarum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg".

SF skilir ikki, hvat liggur í setninginum „..*tilvitað, ógrundað og uttan sakliga orsøk hevur gjørt ov at broyta siðvenjuna og gera mun á umsøkjarunum, alt eftir um teir hava útbúgving úr Danmark ella Noreg*".

Í hoyringssvari dagfest 31. januar 2007 greiðir SF, eftir egnu meting, nágreiniliga frá innihaldinum í málinum, bæði grund-gevingar fyri hví umsøkjari ið hevði norska statsautorisatión hevði fingið løggilding, vísandi til grannskoðararlógina § 2, stk. 1 og hví hesir umrøddu 7 umsøkjari, ið ikki hava nakra statsautorisatión úr øðrum landi at vísa á, ikki kunnu fáa løggilding sambært § 2, stk. 1. Sí avrit av hoyringssvari frá SF, har m.a. verður víst á, at talan ikki er um at broyta síðvenju og munurin ikki er gjørdur vegna útbúgving úr ávíkavist Noreg og Danmark, men munurin er at A eisini hevði eina statsautorisatión at vísa á, meðan teir 7 onga statsautorisatión hava at vísa á. Fyri SF sýnist tað sum ymiskar misskiljingar eru hjá IMR og heitir á IMR um at greina hesar misskiljingar, soleiðis at tryggjað verður at IMR ikki tekur avgerð á skeivum grundarlagi.

Tann 1. februar 2007 tosar undirritaði við aðalstjóran í IMR og sendir týðandi skjøl í málinum umvegis t-post, herundir tíðarlinju og greining av m.a. norsku reglunum, ið vóru galdandi

tá A fekk norska statsautorisatión og krøvini galdandi februar 2007.

Uttan at hoyra aftur frá IMR, hvørki við nærri spuringum til okkara hoyringssvar ella við svari uppá okkara áheitan um fund og at málið átti at verðið lýst neyvari, soleiðis at tryggjað var at avgerð ikki var tikin á skeivum grundarlagi, tekur IMR endaliga avgerð í málinum tann 12. mars 2007. So vítt sæst er talan um júst sama skriv sum uppskoti til avgerð frá 21. desember 2006.

Tann 15. mars 2007 móttekur undirritaði teldupost frá deildarstjóra á VMR, ið annars hevur víst málið frá sær vegna inhabilitet, at SF skal taka nýggja avgerð í málinum uttan drál. Í teldupostinum verður eisini víst til telefonsamrøðu um tað sama dagin fyrr, tvs. 14. mars 2007.

Í døgunum aftaná 12. mars 2007 umhugsar SF neyvt støðuna og leitar m.a. ráðgeving frá advokati.

Av tí at SF í veruleikanum ikki skilir innihaldið í niðurstøðuni hjá IMR, sendur SF tann 20. mars 2007 útdýpandi fyrispurningar til aðalstjóran í IMR um avgerðina 12. mars 2007. LUM hevur avrit av hesum skrivi. Tann 26. mars 2007 svarar IMR í skrivi, at „*mett verður at avgerðin í kærumálinum sum er endalig, er nøktandi grundgivin, og at tað sum meginregla er skeivt at gera skrivligar útgreiningar av niðurstøðuni í kærumálunum sum ráðið hevur tikið avgerð í tí hetta ofta vísir seg at føra til fleiri misskiljingar í málinum*“. Heldur ikki grundgevingina fyri hesum aftursvari skilir SF, men velur síðani, m.a. eftir ráðgeving frá advokati, at fara at viðgera umsóknirnar av nýggjum og gera ítøkiliga javnmeting av umsøkjarunum í mun til førleikar og krøv, ið vóru sett til at fáa góðkenning sum norskur statsautoriseraður revisor.

Í skrivi dagfest 3. apríl 2007 heitir SF tískil á umsøkjararnar at senda inn týðandi skjalatilfar í samband við útbúgving, førleikar vm.

Í skrivi dagfest 10. apríl 2007 sendir advokaturin hjá teimum 7, R, kæru til IMR, har hann m.a. klagar undirritaða fyri at misbrúka sítt starv og vald til tess at forða fyri, at málið verður avgreitt samsvarandi greiðari avgerð hjá hægri fyrisitingarligum myndugleika og heitir á IMR at taka neyðugu stigini til at løggilda hansara klientar skjótast gjørligt. IMR svarar tó í skrivi dagfest 13. apríl 2007, at IMR ikki tekur málið úr hondunum á SF, men heitir samstundis á SF um at seta seg í samband við IMR, áðrenn avgerð verður tikin í málinum.

Tað verður ikki nærri grundgivið av IMR, hví SF skal seta seg í samband við IMR áðrenn avgerð verður tikin.

SF móttekur síðan í apríl 2007 ymiskt tilfar frá umsøkjarunum, m.a. avrit av skrivligum royndarpróvtøkum til danska revisoreksamen, skeið, ið umsøkjararnir hava staðið, viðmælir frá arbeiðsgevarum vm. SF kannar eisini krøvini fyri at fáa norska statsautorisatión neyvt og leitar ráðgeving frá ymiskum fakfólki í serliga Noreg og Danmark innan grannskoðarayrki og lærustovn.

Tann 3. mai 2007 tosar undirritaði við aðalstjóran í IMR, har fráboðað verður at SF hevur uppskot til nýggjar avgerðir klárar og spurt verður um IMR skal hava hesi uppskot til viðmerkingar áðrenn tey verða send til umsøkjararnar. Aðalstjórin svarar at skrivið frá 26. mars 2007 skuldi skiljast soleiðis, at SF skuldi senda eitt ætlanarskriv til umsøkjararnar. Tlf. notat og e-post samskifti liggja hesum viðvíkjandi.

Tann 8. mai 2007 verður ætlanarskriv til nýggja avgerð sent til 2 av teimum 7 umsøkjarunum. Í ætlanarskrivinum hevur SF eina ítøkuliga javnmeting millum tey krøv, ið vóru sett til at fáa góðkenning sum norskur statsautoriseraður revisor, sambært norskum reglum og teir førleikar hesir umsøkjarar kundu vísa á. Niðurstøðan var, at hesir umsøkjarar ikki kundu vísa á, at teir uttanfyri Føroyar høvdu fingið eina útbúgving, sum kundi javnmetast við tað útbúgving, ið er nevnd í føroysku

grannskoðaralógini § 1, stk. 2 og SF gekk tískil ikki teirra umsóknum á møti um løggilding.

SF móttekur ikki nakrar viðmerkingar til ætlanarskrivini, men tann 15. mai 2007 móttekur SF avrit av kæru frá advokatinum R til IMR, um ætlanarskrivi dagfest 8. mai 2007.

Tann 30. mai 2007 fyriliggur telefonnotat av samrøðu millum undirritaða og aðalstjóran í IMR. M.a. verður upplýst at IMR ikki fer at viðgera kæruna av ætlanarskrivinum. Aðalstjórin metir tó, at best er um SF tekur endaliga avgerð, tí hann er byrjaður at fyrireika seg til eina kærumálsviðgerð.

Endaligar avgerðir verða sendar til umsøkjararnar tann 31. mai 2007.

Tann 14. juni 2007 tekur IMR nýggja avgerð í kærumálinum hjá tveimum av umsøkjarunum. Niðurstøðan er at IMR ikki er samt við SF at nokta umsøkjarunum at verða løggildar sum grannskoðarar, og enn einaferð verður SF biðið um at viðgera málið av nýggjum.

Uttan ítøkuligt at gera meira við tað, umrøddi SF spuringin, hví IMR, sum yvirordnaður kæru myndugleiki ikki broytti avgerðina hjá SF og gav boð um at veita hesar løggildingar. Í staðin fyri at vísa málið aftur til nýggja viðgerð fyri aðru ferð. Spurningurin var havdur á lofti, hvørt endamálið var at tvinga SF at taka avgerðina, so IMR harvið kundi sleppa undan sjálvt at leggja navn til avgerðirnar!

SF umhugsaði enn einaferð at viðgera umsóknirnar og aftur geva noktandi svar til umsøkjararar, tí SF var og er framvegis sannført um, at avgerðirnar hjá SF í málinum um teir 7 umsøkjararnar vóru rættar. Hinvegin hevði málið koyrt leingi, og mett var at tað neyvan tænti nøkrum endamáli at halda áfram. SF valdi at avgreiða umsóknirnar og veita umsøkjarunum løggilding vísandi

til kæruavgerðirnar hjá IMR, so hvørt sum nýggjar endaligar avgerðir fyrilógu frá IMR í hvørjum einstøkum máli.
…

**Yvirordnað um samskifti við VMR og IMR**
LUM hevur móttikið avrit av øllum týðandi skjølum í málinum. Og sum tað sæst, er fitt av sambandi millum VMR og SF, teldupostar og telefonsamrøður, í tíðarskeiðnum eftir at endaliga avgerðin frá IMR fyriliggur og í apríl og mai 2007. Hetta samskiftið er í ávísan mun samantvinnað við samskiftið, ið snúði seg um arbeiði at tilevna próvtøkureglugerð til at gerast løggildur grannskoðari. Eisini fyriliggja telefonnotatir har landsstýrismaðurin í vinnumálum ringir til undirritaða um kærumálið. Uttan at gera stórvegis viðmerkingar til hetta kann tó nevnast, at tað undir samlaðu viðgerðin av málinum var ørkymlandi at landsstýrismaðurin og VMR yvirhøvur blandaði seg í kærumálið og tess viðgerð, tá VMR áður hevði mett seg innhabilan at viðgera málið.

IMR var kærumyndugleiki og samskifti millum IMR og SF var í stóran mun við formellum skrivum. Tó var ávíst samskifti beinleiðis millum undirritaða og aðalstjóran í IMR, her fyriliggja telefonnotatir og onkur fundarfrásøgn.

Sum tað annars sæst av avritum av skjølum í málinum, hevði SF fitt av samskifti við serliga 2 av umsøkjarunum; serliga í tíðarskeiðnum aftaná 12. mars 2007. Hesir vísa í hvør sínum lagi til teirra samskifti við ávíkavist VMR og IMR, bæði táverandi landsstýrismenn og embætisfólk.

Sjálvt um uppíblandingin frá áðurnevndu aðalráðum, advokatinum R, umsøkjarunum vm. var órógvandi skal tó nevnast, at SF í síni viðgerð av málinum innihaldsliga ikki lat seg ávirkað av hesi uppíblanding, men viðgjørdi og tók avgerð í málinum eftir bestu sannføring, við støði í grannskoðararlógini.

**Viðvíkjandi tilevnan av kunngerð um at gerast løggildur grannskoðari**
Arbeiðið við at tilevna uppskot til kunngerð helt í stóran mun fram síðuleypandi við at kærumálið var til viðgerðar. Hóast talan var um ymisk mál, var tað ørkymlandi, at VMR var yvirornaður myndugleiki í at tilevna kunngerðina, meðan IMR var yvirordnaður myndugleiki í kærumálinum.

Tágaldandi lóg um løggildar grannskoðarar var frá 1993. Grein 4 í lógini ásetti at føroyski skrásetingarmyndugleikin skuldi áseta nærri reglur um ta í § 1, stk, 2, nr. 4 nevndu próvtøku. Hóast hesa áseting í § 4 vóru framvegis í 2005 ongar reglur um próvtøku ásettar og undirritaði saman við mínum starvsfólki metti tað alneyðugt at henda reglugerð var tilevnað, og SF fór tískil eftir, at SF varð flutt undir umsiting hjá FSE, undir arbeiðið at tilevna reglugerðina.

Uppskot var tilevnað, ið tók støði í teirri tágaldandi donsku kunngerðini um „revisoreksamen", men vísandi til kravið um grannskoðarakandidatútbúgving skeyt SF upp í fylgiskali at vísa til útbúgvingarnar frá ávíkavist Danmark, Noreg og Islandi, umframt øðrum londum eftir serligari umsókn um góðkenning.

Uppskotini til reglugerð vóru tillagaði nakrar ferðir, serliga við støði í viðmerkingum frá hoyringspørtum. M.a. var endaliga uppskotið til pensumlista neyvt tað sama sum í ES-direktivinum um grannskoðararprótøku.

Meðan arbeiðið var í gongd var fundur millum SF og embætisfólk í VMR tann 14. november 2006. Niðurstøðan á fundinum var, at SF skuldi stegða arbeiðinum um tilevnan av verandi kunngerð, tí at nýggj grannskoðaralóg skuldi leggjast fyri løgtingið saman við vinnulóggávuni og at reglur um grannskoðaraprótøku skuldi gerast sambært altjóða reglum á økinum og at VMR skuldi gera avtalu um góðsku eftirlit av føroyskum grannskoðarum.

Hóast fráboðanina um at steðga arbeiðið við tilevnan at kunngerðini, var nýggj grannskoðaralóg ikki løgd fyri løgtingið.

Tann 18. januar 2007 var aftur fundur millum annað embætisfólk frá VMR og SF. Niðurstøða frá tí fundinum var, at SF skuldi kanna um tað er heimild til at seta kunngerð um løggilding av grannskoðarum í verk í tráð við nýggju ES-reglurnar, men við heimild í verandi lóg, og at SF skuldi svara VMR skrivliga uppá fyrispurningin.

Tað sum VMR ynskti var, at mann í Føroyum ikki skuldi innføra eina próvtøku í Føroyum, ið var líka sum tann danska, tí mett var at tann danska var alt ov torfør, tí so fá stóðu royndina. Fatanin var at próvtøkan eisini hevði til endamáls at regulera tilgongdina av grannskoðararum. Tvs. at støðið fyri próvdøming varð lagt alt eftir, hvussu stórur tørvurin á statsautoriseraðum grannskoðarum var. Tann 20. februar 2007 svarar SF til VMR. Avrit av hesum skrivi er viðlagt.

Arbeiðið við at tilevna reglugerð heldur síðan fram. Uppskotið arbeitt verður við, er tað sama sum áðrenn november 2006. SF leggur nógva orku í at fáa formligu viðurskiftini uppá pláss, t.d. seta próvtøkunevnd, gera avtalu við Fróðskaparsetur Føroya, um at skipa fyri próvtøkum vm.

Reglugerðin verður sett í gildi í mai og lýst í Dimmalætting tann 3. mai 2007.

Grannskoðaralógin frá 1993 var sett úr gildi 1. januar 2008, tá núgaldandi grannskoðaralóg (Løgtinglóg nr. 116 frá 11. desember 2007) um løggildar og skrásettar grannskoðarar var sett í gildi. Hóast hetta er „próvtøkureglugerðin“ frá 2007, sambært VMR, framvegis galdandi, inntil nýggj reglugerð sambært galdandi lóg verður sett í gildi.

Um tørvur er á nærri útgreining ella upplýsingum er undirritaði sjálvsagt til taks.“

# *VI. Skjøl*

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**
**Umboðsmaðurin og Løgtingið**

**§ 1.** Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.

*2. stk.* Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.

*3. stk.* Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2.** Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3.** Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**
**Heimildir**

**§ 4.** Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu).

*2. stk.* Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um almennar skráir.

*3. stk.* Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.

*4.stk.* Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.

*5. stk.* Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5.** Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur
## Kærumál og egin mál

**§ 6.** Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.

*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.

*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.

*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.

*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.

## 4. Partur
## Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina kæru til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í kæruni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.

*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

**5. Partur**
**Niðurstøður**

**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.

*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.

*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.

*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

**6. Partur**
**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**

**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.

*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur
## Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.

*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur
## Ígildisreglur

**§ 18.** Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.

*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingarmyndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndugleikarnir, sum t.d. løgreglan hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**

Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, **hvønn** og **hvat** tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um málsviðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndugleikunum osv.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**

Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð.

Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møguleikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

**Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu**

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

1. Klagan verður kannað nærri.
2. Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

*1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

*2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

„*Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum…*“ (§ 6, stk. 3)

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

„…Klagan skal vera umboðsmann-

inum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað." (§ 6, stk. 2)

Orðingin „viðurskifti" fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.v. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

*3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.*

Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um."* (§ 6, stk. 4)

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**

Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**

Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann.

Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00 ella venda tygum til skrivstovuna í Traðagøtu 43, Argir, um tygum hava spurningar.